# Kommunur, eindir og uppgávur 2009

1. kapittul. Inngangur ... 6
1. Inngangur ... 6
2. Arbeiðssetningur ... 7
3. Tulking av arbeiðssetningi ... 9
3.1. Um kommunueindir ... 10
3.2. Um millumkommunala javningarskipan ... 11
3.3. Um raðfesting av greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti ... 12
3.4. Um blokkstuðul ... 14
3.5. Um eftirmeting ... 14
4. Samandráttur, tilmæli og tíðarætlan ... 15
4.1 Tilmæli um eindir ... 16
4.2 Tilmæli um umskipanartilgongd ... 19
4.3 Tilmæli um fígging ... 20
4.4 Tilmæli um eldrarøkt ... 25
4.5 Tilmæli um fólkaskúlan ... 26
4.6 Tilmæli um onnur øki ... 27
4.7 Tilmæli um vegir ... 29
4.8 Tíðarætlan ... 30
2. kapittul. Um kommunur, eindir og fólkaræði ... 35
1. Kommunustødd og uppgávu- og ábyrgdarbýti ... 35
1.2. Býtið av almenna geiranum ... 36
1.3. Miðfirringarfyrimunir ... 38
2. Fólkaræði í stórum og smáum eindum – hvat vinna vit og hvat missa vit? ... 40
2.1. Stødd á eindum og umboðan ... 40
2.2. Kommunustødd, virkisføri og sjálvræði ... 42
2.3. Samspælið millum umsitingarorku og ávirkan ... 43
2.4. Samanumtikið ... 49
3. Um atlit og endamál ... 50
3.1. Hví kommunalt sjálvræði og hvussu? ... 50
3.2. Endamál við útlegging/broyting ... 52
3.3. Meginreglur ... 52
3.4. Greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti ... 53
3.5. Ein greiðan og effektivan almennan geira ... 53
3.6. Størri lokala ávirkan ... 54
3.7. Rættartrygd ... 55
3. kapittul. Einstøku málsøkini ... 56
1. Lýsing og viðgerð av uppgávu- og ábyrgdarbýtinum ... 56
2. Meting og tilmæli viðvíkjandi eldrarøktarøkinum ... 57
2.1. Lýsing viðv. eldrarøktarøkinum ... 57
2.2. Skipan av eldrarøktini í dag ... 58
2.3. Verandi økisbýti innan eldrarøktina ... 58
2.4. Verandi uppgávu- og ábyrgdarbýti á eldraøkinum ... 59
2.5. Fígging av eldrarøktini ... 61
2.6. Ellis- og røktarheim ... 63
2.7. Eldrasambýli ... 64
2.8. Játtanarbýti ímillum økini ... 64
2.9. Trupulleikar í samband við verandi uppgávu- og ábyrgdarbýti ... 65
2.10. Vantandi lógarverk og regulering ... 66
2.11. Vantandi og eintáttaði tilboð ... 67

2.12. Røktarheimsfyribyrgjandi tænastur ... 69
2.13. Vantandi samskipan á eldrarøktarøkinum ... 70
2.14. Endurskoðan og útfylling av lógarverkinum ... 71
2.15. Fleiri og alternativar tænastur – ein tilboðsvifta ... 71
2.16. Samskipa eldrarøktina ... 73
2.17. Útvegan av starvsfólki ... 74
2.18. Umskipan av økisbýtinum í mun til nýggju kommunalu eindirnar ... 74
2.19. Løgfrøðiligar broytingar ... 76
2.20. Markamót ... 77
2.21. Samskipa eldrarøktina í teimum kommunalu eindunum ... 79
2.22. Starvsfólkalig viðurskifti ... 80
2.23. Fíggjarlig viðurskifti ... 80
2.24. Tilmæli um tíðarætlan fyri útlegging ... 81
3. Meting og tilmæli viðvíkjandi fólkaskúlaøkinum ... 83
3.1. Fólkaskúlin ... 83
3.1.2. Fyrisitingin av fólkaskúlanum ... 83
3.1.2.1 Kommunustýrið ... 84
3.1.2.2 Skúlastýrið ... 87
3.1.2.3 Landsstýrismaðurin ... 90
3.1.2.4 Skúlaleiðarin, ábyrgd og arbeiðsøki ... 91
3.1.2.5. Námsfrøðiligt ráð og næmingaráð ... 93
3.1.3 Innihald og skipan ... 93
3.1.3.1 Uppgáva fólkaskúlans ... 93
3.1.3.2 Skipan ... 94
3.1.3.3. Vikutímatalið ... 94
3.1.3.4. Innihald ... 95
3.1.4 Eftirmeting ... 95
3.1.5 Skúlar ... 97
3.1.6 Sernámsfrøði ... 100
3.1.7 Lærarar í fólkaskúlanum ... 101
3.1.8 Fíggjarliga býtið millum land og kommunur ... 103
3.1.9 Fólkaskúlaøkið – kostnaður ... 104
3.1.10 Ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti ... 105
3.1.11 At leggja fólkaskúlan út til kommunurnar ... 106
3.1.12 Tørvur á lógarbroytingum ... 106
3.1.13 Niðurstøður og tilmæli ... 108
3.1.14 Arbeiðsbólkur ... 111
3.1.15 Tíðarætlan ... 112
4. Onnur øki ... 113
4.1. Bókasøvn ... 113
4.1.1. Fólkabókasøvn ... 113
4.1.2. Skúlabókasøvn ... 115
4.2. Musikkskúlaundirvísing ... 116
4.3. Frítíðarundirvísing ... 119
4.4. Dagstovnar og dagrøkt ... 124
4.5. Yrkisskúlar ... 127
4.6. Samanumtikið um barnaansingar-, skúla- og mentanarøkið ... 128
4.7. Kirkjugarðar ... 128
4.8. Fólkayvirlit ... 129
4.9. Brunaviðurskifti ... 131

4.10. Hýruvognslóggáva ........ 132
4.11. Býarskipanarviðurskifti ........ 133
4.12. Barnavernd ........ 135
5. Vegir ........ 139
4. kapittul. Kommunur og eindir ........ 142
1. Lýsing av kommunubygnaðinum ........ 142
1.1. Kommunueindirnar ........ 142
1.2. Bakstøði fyri verandi eindum ........ 142
1.2.1. Kommunulógin frá 1872 ........ 143
1.2.2. Ávegis kommunureformurin í 1972 ........ 146
1.2.3. Ávegis at umskipa kommunalu viðurskiftini ........ 147
1.2.4. Kommunustýrislógin frá 2000 ........ 149
1.3. Komandi kommunalar eindir ........ 151
1.3.1. Fyrilit – serliga í mun til kommunalar eindir ........ 153
1.3.2. Tilmæli nevndarinnar viðvíkjandi eindum ........ 155
1.3.3. Tær einstøku eindirnar ........ 157
1.3.4. Verður neyðugt at broyta kommunustýrislógina ella kommunuvallógina? ........ 166
1.4 Skipan av nýggju kommunalu eindunum ........ 167
1.4.1. Lóg um kommunusamanleggingar ........ 170
1.5. Kommunusamstarv ........ 171
1.5.1. Felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði ........ 171
1.5.2. Felagskommunalt samstarv uttan fyriskipanarligan bygnað ........ 172
5. kapittul. Umskipanartilgongdin ........ 174
1. Um avkláringarstigið ........ 176
1.1. Neyðugt er við politiskari avtalu í landsstýrinum um eina kommunala umskipan ........ 176
1.2. Javnbjóðis viðgerð og samskifti er neyðugt ........ 177
2. Ráðlegging og avgerðir ........ 177
2.1. Fyrisitingarlig og fíggjarlig orka má setast av ........ 178
2.2. Skipan av umskipanini ........ 178
2.3. Fyriskipan og leiðsla í nýggju kommununi ........ 179
2.4. At taka avgerðir og seta í verk ........ 180
2.5. Mannagongd tá kommunur verða niðurlagdar ........ 181
6. kapittul. Fígging ........ 184
1. Lýsing av fíggjarliga partinum ........ 184
1.1. Um ymisku fíggjarligu støðurnar hjá verandi kommunum ........ 184
1.2. Kommunala skuldarbyrðan ........ 189
1.3. Um skattaskipanina og týdningin fyri lands- og kommunuskattin ........ 190
1.4. Fígging um landsskatt ella kommunuskatt ........ 193
1.5. Um javningarskipanir, millumkommunala javning og landsjavning ........ 194
1.5.1. Meginregla ........ 194
1.5.2. Javning ........ 194
1.5.2.1. Javning eftir inntøkugrundarlagi ........ 195
1.5.2.2. Javning eftir útreiðslutørvi ........ 196
1.5.3. Millumkommunal javning ........ 197
1.5.4. Afturbering ........ 197
1.5.5. Blokkstuðulsskipan ........ 199
1.6. Skipanir til serlig endamál (útoyggjar, serliga smáar/illa stillaðar kommunur) 200
1.6.1. Útoyggjar ........ 200

1.6.2. Stuðul til útoyggjar ..... 202
1.6.3. Onnur øki/kommunur ..... 203
1.6.4. Serskipanir ..... 204
2. Meting og tilmæli viðvíkjandi fígging ..... 205
2.1. Fíggjarliga burðardyggar kommunalar eindir ..... 206
2.2. Javningarskipanir ..... 208
2.2.1. Inntøkujavning ..... 208
2.2.2. Útreiðslujavning ..... 211
2.2.3. Hvørjar inntøkur skulu javnast? ..... 213
2.2.4 Uppskot um afturbering frá landinum saman við millumkommunalari javning ..... 215
2.4. Tilmæli viðvíkjandi fígging ..... 218
2.5. Tilmæli um serskipanir ..... 220
2.5.1. Serskipanir fyri Sandoynna ..... 221
7. kapittul. Starvsfólkaviðurskifti ..... 223
1. Starvsfólkaviðurskifti í sambandi við at øki verða flutt frá landinum til kommunurnar ..... 223
1.2. Um at flyta tænastumenn ..... 224
1.3. Um at flyta sáttmálasett ..... 231
8. kapittul. Eftirmetingar ..... 234
1. Inngangur ..... 234
2. Ein generellur leistur fyri eftirmetingar ..... 234
2.1. Eftirmetingarleistur ..... 234
2.2. Hvørjir eru partarnir? ..... 235
2.2.1. Hvat skal mátast og nær? ..... 235
2.2.2. Hagtalsgrundarlag ..... 235
2.2.3. Hvat er endamálið við at leggja økið til kommunurnar at umsita (successkriterier) ..... 236
2.2.4. Hvussu var støðan, áðrenn økið varð lagt til kommunurnar at umsita, t.e. støðiskanning (“base-line study”) ..... 236
2.2.5. Hvussu er støðan, eftir at økið er lagt til kommunurnar at umsita? Niðurstøður ..... 237
2.2.6. Tilgongdin ..... 237
3. Eftirmeting av økjum, sum kunnu flytast til kommunurnar ..... 238
3.1. Fólkaskúlin ..... 238
3.2. Eldrarøkt ..... 239
3.4. Vegakervið ..... 239
4. Um eftirmeting av dagstovna- og barnaforsorgarøkjunum ..... 240
6.1. Hvussu hevur tað eydnast at leggja dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita? ..... 240
4.1.1. Bakgrund fyri at leggja økið til kommunurnar ..... 240
4.2. Eftirmetingarleistur og eftirmeting ..... 242
4.2.1. Eydnast væl ella minni væl? ..... 242
4.3. Eftirmeting av tilgongdini ..... 244
4.4. Keldulisti ..... 248
Fylgiskjøl ..... 249
Keldulisti ..... 278

# 1. kapittul. Inngangur

## *1. Inngangur*

Kommunala umskipanarnevndin varð sett í januar 2009 og hevði sín fyrsta fund 16. januar 2009.

Hesi umboð hava verið í nevndini:

Eyðbjørn Larsen, løgfrøðingur, formaður
Ingibjørg Berg, stjórnmálafrøðingur
Jóan Petur Hentze, aðalskrivari, Kommunusamskipan Føroya
Eyðun Christiansen, ráðgevi, Føroya Kommunufelag
Doris Bjarkhamar, fulltrúi, Almannamálaráðið
Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari, Mentamálaráðið
Sofus Debes Johannesen, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið
Poula Árnadóttir Lervig, fulltrúi, Innlendismálaráðið
Hilmar Høgenni, deildarstjóri, Innlendismálaráðið

Innlendismálaráðið hevur veitt nevndini skrivstovuhjálp og Poula Árnadóttir Lervig, fulltrúi, hevur verið skrivari hjá nevndini.

Arbeiðið í nevndini hevur í høvuðsheitum verið skipað á tann hátt, at umboðini fyri einstøku aðalráðini hava staðið fyri tí partinum av nevndararbeiðinum, ið viðkomandi aðalráð onkursvegna varðar av, herundir at útvega upplýsingar, frágreiðingar, hagtøl o.a. Hinir nevndarlimirnir hava hvør í sínum lagi staðið fyri ávísum pørtum av arbeiðinum og síðan er ymiska tilfarið samlað og viðgjørt í nevndini.

Parturin av frágreiðingini, ið snýr seg um eftirmeting, er ikki gjørdur av nevndini. Tað er Granskingardepilin fyri Økismenning, ið hevur staðið fyri hesum partinum.

Nevndin hevur havt eina røð av arbeiðsfundum í tíðini frá 16. januar til 30. september 2009.

Sum part av lýsingini av arbeiðinum viðvíkjandi samanlegging av kommunum hevur nevndin hitt umboð fyri kommunur, sum hava lagt saman seinastu árini. Fundir vóru við Sørvágs, Vága, Sunda, Eystur, Klaksvíkar og Tórshavnar kommunur.

## *2. Arbeiðssetningur*

6. november 2008 boðaði Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, í tíðindabrævi frá, at farið varð undir at umskipa kommunala geiran.

Broytingarnar í kommunubygnaðinum skulu geva øllum økjum í landinum møguleika fyri at mennast í javnvág.

Ætlanin við at umskipa kommunala geiran er, at henda tilgongd skal skunda undir at stovnseta burðardyggar kommunueindir, ið kunnu ganga á odda at tryggja eina framhaldandi menning úti um landið og tryggja, at menningin er kjølfest á staðnum heldur enn at verða stýrd úr erva av landsmyndugleikunum.

Ætlanin við umskipanini er at flyta tey økir, sum kunnu flytast til kommunurnar, og soleiðis fáa eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Hetta greiða uppgávu- og ábyrgdarbýti skal byggja á tríggjar meginreglur:

1. Fíggjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum
2. Uppgávurnar verða loystar, so tær eru fullgóðar samfelagsbúskaparliga, men so nær borgarunum, sum til ber
3. Uppgávur, ið verða lagdar til kommunurnar, skulu kommunurnar vera førar fyri at røkja sjálvstøðugt, og tað skal bera til at laga uppgávurnar til tann staðbundna tørvin

Fyri at hetta verður framt undir skipaðum viðurskiftum, er neyðugt at skipa tær kommunalu eindirnar soleiðis, at tær eru burðardyggar eindir, ið eru førar fyri at átaka sær uppgávur og umsita tær sjálvstøðugt. Gerast skal eisini ein ítøkilig raðfesting viðvíkjandi uppgávu- og ábyrgdarbýtinum. Neyðugt er eisini at hava eina kommunala fíggjarskipan, ið tryggjar, at kommunali geirin er gjøgnumskygdur. Samstundis skal fíggjarskipanin vera grundarlag undir einari kommunalari javningarskipan.

Ætlan er, at kommunala umskipanin skal vera ein samlaður pakki, hvørs endamál er at skipa eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, har kommunurnar skulu umsita tað, sum kommunalu eindirnar sjálvstøðugt eru førar fyri at umsita.

Nevndin, sum verður sett at gera uppskot, verður mannað við fólkum úr viðkomandi stjórnarráðum, umboðum fyri kommunurnar og serfrøðingum. Nevndin skal skjótast til ber og í seinasta lagi á ólavsøku 2009 gera uppskot um:

- ***Kommunueindir***

Við støði í Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur, skal nevndin koma við tilmæli um, hvørjar tær kommununalu eindirnar skulu verða, og hvussu hesar skulu skipast.

- ***Millumkommunal javningarskipan***

Allar kommunur verða javnsettar mótvegis lóggávuni, t.e. at tær allar skulu loysa tær somu uppgávurnar. Við hesi javningarskipan skal miðast eftir, at allar kommunur eru fíggjarliga førar fyri at loysa tær kommunalu uppgávurnar, sjálvt um umstøðurnar hjá teimum ikki eru tær somu. Javningarskipanin skal tí fevna um javning av muni í inntøkugrundarlagi pr. borgara og í útreiðslutørvi pr. borgara.

- ***Raðfesting av greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur***

Allýsing verður gjørd av ábyrgdarøkjum, so sum eldraøki, fólkaskúla, vegakervi og aðrar uppgávur, sum kunnu flytast kommunum at umsita. Gerast skal ein ítøkilig raðfesting, ið ásetur hvørji økir, í hvørjari raðfylgju og nær hesi verða løgd til kommunurnar. Fyrsta stóra økið verður lagt til kommunurnar 1. januar 2011.

- ***Blokkstuðul***

Ætlanin er ikki at broyta skattaskipanina, og skal nevndin gera uppskot um, hvussu ein møgulig blokkstuðulsskipan skal skipast, sum tryggjar, at fígging er til tær uppgávur, sum verða fluttar til kommunurnar at umsita, tá tað ikki er gjørligt longur at broyta í býtinum millum lands- og kommunuskatt uttan at broyta skattaskipanina.

- ***Eftirmeting***

Gjørd verður ein eftirmeting av, hvussu tað hevur eydnast at lagt dagstovnaøkið og barnaforsorgarøkið til kommunurnar. Harumframt skal gerast ein fastur eftirmetingarleistur til tey øki, sum verða løgd til kommunurnar at umsita.

## 3. Tulking av arbeiðssetningi

Arbeiðssetningurin og tær 5 uppgávurnar, ið har eru lagdar til kommunalu umskipanarnevndina, hava tørv á nærri viðgerð, har nevndin greinar setningin og serliga setur orð á, hvat nevndin leggur dent á í arbeiðinum og hvørjar fyritreytirnar hjá nevndini eru ella hava verið. Nevndin hevur tí á fyrstu fundunum umrøtt arbeiðssetningin og hvussu nevndin hevur valt at tulka hann.[1]

Grundað á almennu, skrivligu fráboðanina frá landsstýriskvinnuni í innlendismálum í sambandi við, at kommunala umskipanarnevndin varð sett í januar 2009[2], leggur nevndin til grund, at yvirskipaða endamálið við umskipanini av kommunala geiranum er at:

- Flyta eldrarøktarøkið, fólkaskúlaøkið, vegakervið og aðrar uppgávur til kommunurnar, og soleiðis fáa eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.
- Fíggjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum.
- Uppgávurnar verða loystar, so tær eru í greiðari javnvág ímillum at vera fullgóðar samfelagsbúskaparliga og eru so nær borgarunum, sum til ber.
- Kommunurnar skulu vera burðardyggar eindir, ið eru førar fyri at átaka sær tær uppgávur, ið verða lagdar til kommunurnar, og at røkja og umsita hesar uppgávur sjálvstøðugt.
- Uppgávur, ið verða lagdar til kommunurnar, skulu kunna lagast til tann staðbundna tørvin.

[1] Nevndin hevur í álitinum brúkt orðið "umsita" í sambandi við, at øki verða løgd út til kommunurnar. Rætta orðið er, at øki verða løgd út til kommunurnar at "fyrisita". Kortini hevur nevndin konsekvent valt at nýta orðið "umsita" grundað á orðing í arbeiðssetningi, og at orðið "umsita" vanliga hevur verið nýtt, tá talan hevur verið um at leggja øki til kommunurnar.
[2] Hetta eru arbeiðssetningurin frá 12. januar 2009 og tíðindabrævið um umskipan av kommunala geiranum frá 6. november 2008.

Hetta yvirskipaða endamálið er sostatt lagt sum grund undir útgreining og tulking av arbeiðssetninginum, umframt víðari viðgerðini í nevndini.

Av teim 5 evnunum, ið nevndin skal koma við uppskoti um (kommunalu eindirnar, javning, raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti, blokkstuðul og eftirmeting), eru tey 4 fyrstnevndu evnini í stóran mun knýtt at hvørjum øðrum. Nevndin er tí samd um, at hóast hesi evnini kunnu fyrireikast og viðgerast hvør sær, er rættast kortini aftur at viðgera tey undir einum, tá ið komið er nakað ávegis.

Orsøkin er m.a., at alt eftir, hvørja javningarskipan ella blokkskipan mælt verður til, kunnu krøvini ella treytirnar til eindirnar verða tillagaðar. Á sama hátt er við teimum uppgávum, ið verða at leggja til kommunurnar, tí eins og uppgávurnar staðfesta eindirnar, kunnu eindirnar staðfesta ella treyta uppgávurnar.

Ein javningarskipan og blokkskipan eigur at taka atlit til, at kommunurnar eiga at verða eggjaðar til at skapa búskaparligan vøkstur, eins og skipanirnar eiga at verða so gjøgnumskygdar sum gjørligt soleiðis at borgarin greitt skal kenna kostnaðin av kommunala virkseminum. Á sama hátt má leggjast upp fyri, at valda skipanin ikki elvir til ella gevur rúm fyri ótilætlaðum avleiðingum.

Yvirskipað er nevndin samd um at leggja dent á, at tær broytingar og loysnir, ið mælt verður til, í størst møguligan mun stremba eftir at vera so einfaldar og ódýrar at umsita sum gjørligt.

## 3.1. Um kommunueindir

Hvørjar kommunurnar kunnu vera skal sambært arbeiðssetninginum verða viðgjørt við støði í galdandi samanleggingarlóg. Hóast leisturin harvið er givin, metir nevndin seg tó ikki meira bundna av hesi lógini, enn at rúm er fyri at koma við øðrum uppskotum til eindir.

Tørvur er á at umrøða fólkaræðislig viðurskifti, eitt nú í sambandi við tal og stødd á kommunum, innanhýsis javnvág millum kommunur, staðbundna umboðan o.tíl. Hvørji

krøv eiga ella kunnu verða sett einstøku kommununum, eigur eisini at verða umrøtt, eins og grundgevingarnar fyri krøvunum. Síðan er tørvur á at viðgera, hvørji ítøkilig atlit (landafrøði, fólkatal, fíggjarviðurskifti o.a.) dentur eigur at verða lagdur á, tá stødd o.a. á einstøku kommununum skal ásetast. Í mun til fíggjarviðurskifti og stødd á kommunum eigur at verða umrøtt, at hetta ikki bara snýr seg um orkuna at veita tænastur, men eisini øvut at skapa karmar fyri virksemi og størri kommunalum inntøkum.

Galdandi lóg um kommunusamanlegging ásetur einki ítøkiligt um leistin fyri samanlegging av kommunum. Nevndin heldur, at tørvur er á at viðgera hetta evnið og seta orð á, eftir hvørjum leisti samanleggingar eiga at verða fyrireikaðar og framdar fyri at tryggja, at tilgongdin bæði er væl fyriskipað og annars framd á tryggan hátt, har atlit til fólkaræði, fíggjarviðurskifti, lokal áhugamál, tørv o.a. eru havd í huga. Somuleiðis eigur at verða viðgjørt, um samanleggingar einans kunnu verða framdar í sambandi við eitt nýtt valskeið, og um ella á hvønn hátt samanlegging kann verða framd t.d. mitt í einum valskeiði.

### 3.2. Um millumkommunala javningarskipan

At kommunurnar skulu loysa tær somu uppgávurnar og skulu verða fíggjarliga førar fyri at loysa tær uppgávur, ið verða lagdar til tær, metir nevndin ikki merkir tað sama sum, at kommunur verða fult og heilt javnsettar fíggjarliga og at javningin tí neyðturviliga skal vera so høg sum gjørligt. Tó er tørvur m.a. á at lýsa tørvin á javning, í hvønn mun tørvur er á at útjavna útreiðslur og inntøkur, og hvørjir fyrimunir og vansar eru við størri ella minni javning.

Javning er ein táttur í kommunalu fíggingarskipanini, afturbering er annar og blokkur ein triði. Nevndin metir tørv vera á at umrøða, hvussu tann samlaða fíggingarskipanin eigur at síggja út – eitt nú býtið av partafelagsskatti millum land og kommunur, skattainntøkum frá persónum undir t.d. FAS, sjómannafrádrátti og tey alsamt vaksandi gjøldini frá landinum á t.d. umhvørvisøkinum.

Hvussu javningarskipanin skal ella kann samvirka við eina blokkskipan er neyðugt at taka støðu til. Nevndin tulkar hinvegin pkt. 2, samanhildið við pkt. 4 í

arbeiðssetninginum soleiðis, at ein blokkskipan sum so er óheft av sjálvari javningini og tí ikki skal vera partur av javningarskipanini ella nýtt til at javna við.

Havandi aðalmál nevndarinnar um einfaldni og skynsemi í huga er umráðandi, at valdu loysnirnar byggja á so einføld og objektiv atlit sum gjørligt, tá ið avgerð m.a. skal takast um, hvørjar inntøkur og útreiðslur o.a. skulu tæna sum grundarlag undir javning, og hvusssu hesar verða uppgjørdar. Hetta er fyri at avmarka møguleikan fyri ósemjum um uppgerðina, fyri at tryggja, at uppgerðin leypandi er rættvísandi, og fyri at tryggja, at umsitingin av skipanini verður hildin á so einføldum støði sum gjørligt.

Tað hagtalsgrundarlag, ið kann stuðla uppundir ymsu tættirnar í einari javningarskipan, er avmarkað, og talar hetta eisini fyri at halda skipanina á einføldum støði. Hetta er eisini galdandi, hóast avleiðingin kann verða, at ávísir ójavnar ikki síggjast aftur og at allir munir ikki neyðturviliga verða javnaðir. Einfaldni og skynsemi eru tí aðalmál í framhaldandi nevndarviðgerðini, og er hetta serliga grundað á, at tilfeingið skal koma brúkarunum ella borgarunum til góðar heldur enn at verða nýtt til umsiting.

### 3.3. Um raðfesting av greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti

Í sambandi við greiningina av, hvørji uppgávuøki møguliga skulu leggjast til kommunurnar og nær, er natúrligt at taka støði í tí arbeiði, ið higartil er gjørt av kommununevndini í álitinum frá 1998 um ”Nýggja kommunuskipan”, og í álitinum hjá arbeiðsbólkinum ”Staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur” frá 2001.

Nevndin er samd um, at tørvur er á at dagføra lýsingarnar av uppgávu- og ábyrgdarbýtinum í álitinum frá 2001 við atliti at seinni lógar- og kunngerðarbroytingum. Síðani kunnu dagførdu upplýsingarnar verða støði undir framhaldandi viðgerð og støðutakan til, hvørjar broytingar mælt verður til. Hetta eigur at verða gjørt í sambandi við ítøkiligu fyrireikingarnar av útleggingunum av teimum ymsu málsøkjunum.

Fyri at kunna gera eina raðfesting av, hvørji øki skulu leggjast til kommunurnar og nær hesi øki eiga at verða løgd út, er nevndin samd um, at umráðandi er, at tey ítøkiligu atlit, ið skulu ella kunnu grundað útleggingina og broytta ábyrgdarbýtið, fyrst mugu nágreinast.

Eftir hetta verða ymisku økini viðgjørd, har fyrimunir og vansar við útleggingini verða lýstir.

Hóast arbeiðssetningurin ikki leggur upp til tað, so má støða eisini takast til, hvussu økið, ið verða løgd út, yvirskipað skulu regulerast. Her verður m.a. hugsað um, at atlit m.a. má verða tikið til framhaldandi virðing fyri kommununum sum sjálvstøðugum staðbundnum valdum myndugleikum, sum undir eftirliti hava ábyrgd av egnum øki, rættartrygd hjá borgaranum og førleikakrøv fyri at loysa uppgávuna.

Tørvur verður á at viðgera og yvirskipað at meta um, hvussu neyv reguleringin skal vera og hvussu hugsanin er at skipa eftirlit o.a. Hetta er tí, at tað hevur prinsipiellan týdning fyri kommunurnar, um tær skulu umsita eitt málsøki eftir meir ella minni neyvari rammulóg ella um talan verður um detailstýring av rættarkrøvum hjá borgarum, ið ikki geva lokala myndugleikanum serliga stórt rásarúm til at definera tænastuna.

Serliga innan eldraøkið metir nevndin tørv vera á at nágreina tað markamót, ið framyvir verður millum eitt kommunalt eldraøki og eitt heilsuøki og almannaøki annars, ið eru landsuppgávur. Eisini eru onnur markamót, ið eiga at verða staðfest og viðgjørd, t.d. innan forsorgarøkið og barnaverndar- og barnaansingarøkið, har verandi lóggáva ikki er nóg greið.

Nevndin er samd um, at í hvussu so er hesi atlit skulu verða tikin við í viðgerð og avgerð, tá ið broytingar verða fyrireikaðar í ábyrgdarbýtinum:

1. Hvørjar eru orsøkirnar til broytingina – politiskt, fyrisitingarliga og fíggjarliga
2. Verður lættari ella skynsamari hjá myndugleikanum at loysa uppgávuna í mun til brúkaran
3. Hvørjir samfelagsbúskaparligir fyrimunir og vansar eru sum heild knýttir at broytingini
4. Hvørjar lógarbroytingar eru neyðugar fyri at leggja økið til kommunurnar
5. Hvørjar eru fíggjarligu avleiðingarnar – fyri land og kommunur
6. Hvørjar fyrimunir og vansar gevur broytingin annars – fyri land, kommunur og brúkara

7. Verður markamótið greitt í mun til aðrar uppgávur, ið framhaldandi eru landsuppgávur

### 3.4. Um blokkstuðul

Nevndin skilir arbeiðssetningin viðvíkjandi blokkskipan soleiðis, at fyritreytin greitt er, at skattaskipanin ikki skal broytast og kommunuskatturin tí framhaldandi skal vera proportionalur.

Í framhaldi av umrøðuni undir pkt. 2 í arbeiðssetninginum metir nevndin, at støða má takast til, um blokkskipanin møguliga skal verða partur av einari javningarskipan.

Um ein blokkstuðulin, ið landið krevur upp umvegis landsskattin, framhaldandi skal vera rættvísandi fyri útreiðslurnar á viðkomandi øki verður neyðugt, at nevndin umrøðir og mælir til eina skipan, ið á einfaldan hátt er egnað til at leggja upp fyri broytingum í útreiðslustøðinum og ymiskleikanum millum kommunurnar.

Á sama hátt sum við javningarskipanini skulu aðalmál nevndarinnar um einfaldni og skynsemi annars havast í huga her, soleiðis at valdar loysnir byggja á so einføld og objektiv atlit sum gjørligt og við so lítlari umsiting sum gjørligt sum fylgju.

Hóast skattaskipanin sostatt í útgangsstøðinum ikki skal broytast, hevur nevndin valt at kanna, um aðrir møguleikar eru at fíggja kommunalu uppgávurnar við, heldur enn at skipa blokkstuðul úr landskassanum. Í hesum sambandi hevur nevndin serstakliga hugt eftir ymsum frádráttum í skattaskipanini, sum landið hevur tikið stig til, men sum kosta kommununum beinleiðis skattainntøkur og sum harumframt raka kommunurnar sera ójavnt. Nevndin hevur tí viðgjørt møguleikan, at landskassin ber kommununum hesar mistu kommunuskattainntøkur aftur, bæði sum alternativ til blokkstuðul og sum ískoyti til millumkommunala javningarskipan.

### 3.5. Um eftirmeting

Viðvíkjandi eftirmeting av dagstovnaøkinum og barnaforsorgarøkinum er nevndin komin eftir, at ein nøktandi eftirmeting av slíkum slag hevði verið sera trupul at fingið tíð til at

gjørt á nøktandi hátt innan fyri tíðarrammuna, sum nevndin hevur havt at arbeitt í. Slíkt er eisini arbeiðskrevjandi og hevði kostað fitt av peningi, um tað varð umbiðið frá onkrum tænastuveita.

Haraftrat er ivasamt, hvat úrslitið av eftirmetingunum ítøkiliga kann nýtast til. Hetta er m.a., tí at einki greitt felags endamál við útleggingunum varð orðað av pørtunum. Eisini ber til at eftirmeta úr nógvum ymiskum vinklum (frá kommunusíðu, frá landssíðu, frá brúkarasíðu, í mun til endamál, tænastustøði, kostnað ella í mun til tal av plássum o.ø.). Er ikki semja millum partarnar um hesi viðurskifti frammanundan, kann verða trupult at fáa semju um niðurstøðurnar, ið ymsu partarnir tá kunnu tulka ymiskt.

Nevndin hevur tí valt at greiða henda partin av arbeiðssetninginum við at fáa ein generellan eftirmetingarleist fyrireikaðan, ið kann verða til hjálpar, tá einstøku broytingarnar skulu fyrireikast og fremjast. Eftirmetingarnar eru av somu orsøk avmarkaðar til bara at snúgva seg um eftirmeting av tilgongdini í sambandi við, at dagstovnaøkið varð lagt til kommunurnar 1. juli 2000.

## *4. Samandráttur, tilmæli og tíðarætlan*

Við støði í arbeiðssetninginum hjá nevndini skal nevndin koma við tilmæli um:

- hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu vera, og hvussu hesar eindir skulu skipast,
- javningarskipan,
- raðfesting av greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur,
- hvussu ein møgulig blokkstuðulsskipan skal skipast og
- eftirmetingarleist

Tilmælini hjá nevndini taka støði í ávísum fatanum av, hvat endamálið er við kommunalum sjálvræði, og hvønn týdning hetta hevur í mun til t.d. virkisføri, hvussu stórar og hvussu sjálvstøðugar kommunalu eindirnar eiga at vera, og hvussu teirra myndugleiki skal avmarkast mótvegis landsmyndugleikunum.

Yvirskipað er nevndin samd um at leggja dent á, at tær broytingar og loysnir, ið mælt verður til, í størst møguligan mun stremba eftir at vera so einfaldar og ódýrar at umsita sum gjørligt.

Nevndin hevur í arbeiði sínum lagt til grund, at yvirskipaða endamálið við umskipanini av kommunala geiranum er at:

1. Flyta tey øki, sum við fyrimuni kunnu flytast til kommunurnar, og fáa eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur
2. Fíggjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum
3. Uppgávurnar verða loystar, so tær eru í greiðari javnvág millum at verða fullgóðar samfelagsbúskaparliga og so nær borgarunum, sum til ber
4. Kommunurnar skulu vera burðardyggar eindir, ið eru førar fyri at átaka sær tær uppgávur, ið verða lagdar til kommunurnar, og at røkja og umsita hesar uppgávur sjálvstøðugt
5. Uppgávur, ið verða lagdar til kommunurnar, skulu kunna lagast til tann staðbundna tørvin

### 4.1 Tilmæli um eindir

Í tilgongdini til tilmæli um eindir hevur nevndin tikið fyrilit fyri m.a. møguleikanum fyri einum greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti, ein greiðan og effektivan almennan geira og møguleikanum fyri størri staðbundnari ávirkan og rættartrygd. Dentur hevur eisini verið lagdur á landafrøðilig og samferðslulig viðurskifti og fólkagrundarlagi og at kommunueindin eigur at vera ein natúrlig landafrøðilig og samferðslulig eind, so at kommunuráðleggingin og tænastuveitingin til borgaran fylgjast væl. Víddin á kommunueindini eigur heldur ikki at verða størri, enn at íbúgvarnir í kommununi hava rímiliga atgongd til kommunumiðdepilin. Nevndin hevur í arbeiði sínum – á jøvnum føti við onnur fyrilit – eisini tikið fyrilit fyri staðbundna samleikanum. Nevndin hevur ikki tikið við møguleikan at býta sundur verandi kommunur. Grundgevingin fyri hesum er, at tilgongdin til samanlegging er skipað og góðkend eftir galdandi lóggávu, og partarnir hava lagað seg til broyttu viðurskiftini.

**Tilmæli um tær einstøku eindirnar**

Nevndin mælir til at kommunurnar verða skipaðar í hesar eindir:

1. *Suðuroy*
2. *Sandoy*
3. *Tórshavn*
4. *Vágar-Streymoy ella*
    - *Vágar*
    - *Vestmanna-Kvívík*
5. *Eysturoy ella*
    - *Eystur*
    - *Skálafjørður*
6. *Sundalagið*
7. *Norðuroyggjar*

**Viðmerkingar til einstøku eindirnar**

**Suðuroy**

Suðuroy hevði kunnað verið býtt í tvær eindir, sum báðar hvør í sínum lag høvdu lokið tey atlit, ið nevndin nýtir, men talan er um eina oyggj, sum við síni frástøðu frá meginøkinum er útjaðari í landinum og hevur verið fyri stórari afturgongd. Fyri at stuðla sum mest undir eina tilgongd, sum kann virka ímóti gongdini, sum hevur verið, er neyðugt, at Suðuroy verður skipað sum ein staðbundin eind. Tí mælir nevndin til, at Suðuroy verður løgd saman í eina kommunu.

**Sandoy**

Sjálvt um Sandoyggin verður tann minsta eindin í hesum tilmælinum, mælir nevndin frá at leggja Sandoy saman við Suðurstreymoy, tí tá verður tann eindin størri, enn ynskiligt er eftir nevndarinnar tykki. Tilmælið um Sandoy sum sjálvstøðuga eind er treytað av, at ein serskipan verður sett í verk, sum stuðlar og styrkir eindina, soleiðis at Sandoy, hóast fólkatalið ikki er so stórt, verður ein burðardygg eind, sum verður eitt frávik, heldur enn at gerast tann minsta eindin, ið treytar, hvat verður gjørligt at leggja til kommunurnar.

**Tórshavn**

Nevndin mælir frá, at Tórshavnar kommuna verður partur í fleiri samanleggingum, tí nevndin metir tað ikki verða ynskiligt at økja enn meira um støddarmunin, sum longu er millum kommunurnar.

**Vágar-Streymoy**

Her eru tveir møguleikar. Ein møguleiki er, at Vestmanna og Kvívíkar kommunur verða lagdar saman við Vágum. Hetta kann styrkja eindina Vágar, so at hon verður hetta størri, men eindin er kanska ikki so samfeld, serliga sæð frá Streymoy. Hin møguleikin er, at Vestmanna og Kvívíkar kommunur verða lagdar í eina kommunu. Hetta er ein lítil kommuna, sum tó hevur fyrimun av at liggja væl fyri bæði landafrøðiliga og fíggjarliga, og tí hevur góðar vakstrarmøguleikar.

**Sundalagið**

Sundalagið verður ein av teimum minnu kommunalu eindunum, men eindin liggur væl fyri mitt í landinum. Tí mælir nevndin til, at Eiðis og Sunda kommunur verða lagdar saman í eina kommunu.

**Eysturoy**

Nevndin metir, at tað eru tvinnir møguleikar í hesum økinum. Annaðhvørt kann Eysturoy, t.e. Fuglafjarðar, Eystur, Nes, Runavíkar og Sjóvar kommunur, verða lagdear saman í eina kommunu, ella kunnu Fuglafjarðar og Eysturkommuna gerast ein eind, og Nes, Runavíkar og Sjóvar kommunur gerast ein eind.

Av tí at báðir møguleikar lúka tær treytir, ið nevndin hevur arbeitt eftir, verður ikki mælt til ávísa eind heldur enn aðra.

**Norðuroyggjar**

Nevndin mælir til, at Norðuroyggjar, t.e. Fugloyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar og Húsa kommunur, verða lagdar saman í eina kommunu. Skuldi talan verið um at økt hesa eindina, hevði verið neyðugt at farið yvir um Leirvíksfjørð, t.e. at lagt bæði Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu aftur at Norðuroyggjum. Nevndin metir tó, at eindin Norðuroyggjar hevur hóskandi stødd og førleika, og at tørvur tí ikki er á at økja um eindina.

**Tilmæli um samanlegging**

So skjótt sum semja er um, hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu verða, mælir nevndin til, at uppskot til lóg um kommunusamanlegging verður lagt fram. Uppskotið skal áseta kommunueindirnar, dagfesting fyri kommunusamanleggingunum, treytir fyri samanlegging og heimildir til landsstýrið at áseta nærri reglur um tilgongd og samanleggingarleist.

**Tilmæli um kommunuval**

Nevndin mælir til, at kommunuvallógin verður broytt, so at val kann verða til allar kommunur so skjótt sum til ber, tað vil siga tá 2 ár eru liðin av verandi valskeiði. Við øðrum orðum verður mælt til, at kommunuval verður 9. november 2010.

Fortreyt fyri tilmælinum er, at hetta er ein einfaldur háttur at koma víðari, umframt at tá ber til at seta í verk samanleggingarnar og útleggingina av málsøkjum so tætt at tí tíðarætlan, ið landsstýrið higartil hevur meldað út um í arbeiðssetninginum, har mælt verður til, at fólkaskúlin sum tað fyrsta málsøkið skal leggjast til kommunurnar. Afturat hesum kemur, at tá verða allar kommunur javnsettar og fáa sett somu krøv, og valskeiðið verður verandi líka í øllum kommunum, hóast stytt.

Ein onnur grundgeving er, at sambært tilmæli nevndarinnar skal hitt stóra málsøkið, eldrarøktarøkið, leggjast til kommunurnar 1. januar 2013. Um so verður, metir nevndin, at tað er óheppið at hava kommunuval stutt undan eini so stórari broyting.

## 4.2 Tilmæli um umskipanartilgongd

Nevndin mælir til, at allar broytingarnar verða skipaðar sum felags verkætlanir við luttøku frá landi og kommunum. Land og kommunur mugu harumframt eisini hvør í sínum lagi fyrireika broytingarnar, har øll individuell viðurskifti sum t.d. tilrættislegging og fremjingin av politisku og praktisku tilgongdini, handfaringin av teimum avbjóðingum, ið leypandi fara at vera, herundir at tryggja at ráðgeving, vegleiðing og upplýsing, eru nøktandi undir allari tilgongdini.

Mælt verður til, at ein útgreinað mannagongd verður gjørd til kommunurnar og til landsmyndugleikarnar, har báðir partar kunnu fylgja við og tryggja, at viðkomandi

avgerðirnar verða tiknar av røttum myndugleika til rætta tíð. Í einari tílíkari samskipaðari mannagongd eigur eisini at vera ein tíðarætlan ella kalendari, har evstamark er sett fyri, nær ymisku avgerðirnar ella tiltøkini skulu vera framd.

## 4.3 Tilmæli um fígging

**Tilmæli um javning**

Hóast eindirnar, ið nevndin hevur mælt til, gerast størri og í størri mun kunnu átaka sær uppgávur, so kann staðfestast, at kommunurnar eru sera ymiskar í mun til stødd og fíggjarligt grundarlag.

Fyri at viga upp ímóti hesum ójavnum, sum kommunurnar í stóran mun ikki ráða yvir, mælir nevndin til eina javningarskipan, sum tryggjar, at kommunurnar gerast burðardyggari og betur førar fyri at veita sínum borgarum nøktandi tænastur á eitt nú skúla- og eldrarøktarøkinum.

Við javning verða ójavnar í inntøkugrundarlag og útreiðslutørvi kommunanna millum javnaðir. Endamálið er, at allar kommunur eru betri førar fyri at røkja lógarbundnar uppgávur á nøktandi tænastustigi.

Mælt verður til at skipa eina einfalda millumkommunala javningarskipan, sum fevnir bæði um inntøkujavning og útreiðslujavning.

Javningarskipanin eigur at vera sett soleiðis saman, at hon eggjar øllum kommunum til at skapa mest møguligan framburð og samfelagsmenning.

Javningarupphæddin eigur at muna serliga hjá teimum kommunum, sum út frá objektivum krøvum eru ringast fyri, og tí hava truplast við at veita lógarbundnar tænastur á nøktandi tænastustigi.

Mælt verður til at skipa javningarskipanina við lóg. Mælt verður til, at javningarstigið og javningarkrøvini – og harvið útrokningargrundarlagið – verða ásett beinleiðis í lógini.

Javningarskipanin má vera farin at virka í seinasta lagi samstundis sum útleggingin av uppgávu ella uppgávum verður framd.

Nevndin hevur ikki nakað tilmæli um, hvussu høgt javningarstigið skal vera. Javningartørvurin er tætt knýttur at uppgávunum, ið verða lagdar til kommunurnar, og hvussu javningarskipanin ítøkiliga verður skrúvað saman í mun til, hvørjar inntøkur og útreiðslur skulu javnast og hvussu nógv. Tí ber illa til at koma við einum ítøkiligum tilmæli um javningarstig fyrr enn í sambandi við ítøkiliga lógararbeiðið. Tað er ein politiskur spurningur, hvussu høgt javningarprosentið skal verða, harumframt hevur ein afturberingarskipan, sum nevndin mælir til, stóra ávirkan á ójavnan millum kommunurnar, um hon eisini verður sett í verk.

Mælt verður til, at inntøkujavningin fevnir um skattskylduga inntøkugrundarlagið, t.e. persónsskattin. Tá ið útreiðslutørvurin, sum javnast skal millum kommunurnar, skal finnast, er neyðugt at taka atlit til, hvussu útreiðslurnar eru íkomnar. Tær útreiðslur, sum stava frá tilvaldum tænastustøði, ella muninum, sum er íkomin vegna virkisføri hjá kommunum, skulu ikki roknast við, tá útreiðslutørvurin verður javnaður.

**Tilmæli um millumkommunala javning**

Nevndin metir, at kommunala virksemi framhaldandi skal verða fíggjað við kommunuskatti, og tí mælir nevndin til, at javningarskipanin verður millumkommunalt fíggjað.

**Tilmæli um tillagan av býtinum millum lands- og kommunuskatt**

Mælt verður til at hækka kommunuskattin og lækka landsskattin samsvarandi, tá ið málsøki verða løgd til kommunurnar.

Hvørt skattastig, ið verður flutt frá landi til kommunur, hevur eitt virði upp á umleið 65 mió. kr., og tá lægsta skattastigið í landsskattinum í dag er 7%, ber til á hendan hátt at flyta um leið 455 mió. kr. frá landi til kommunurnar, uttan at avlaga skattaskipanina, sum er tann avmarking, ið arbeiðssetningurin ásetur.

**Tilmæli um afturbering til kommunurnar**

Tá ið skattskylduga inntøkan hjá borgarunum verður uppgjørd, verða ymiskir frádráttir drignir frá, áðrenn skatturin verður roknaður.

Fyrst og fremst er talan um sokallaða botnfrádráttin, t.e. at tær fyrstu 30.000 kr. av inntøkuni ikki verða roknaðar upp í skattskyldugu inntøkuna, tá ið m.a. kommunuskatturin verður roknaður. Harumframt er talan eitt nú um frádrátt fyri eftirlønartryggingar, frádrátt til fiskimenn, frádrátt til sjómenn, ið sigla við útlendskum farmaskipum og frádrátt til fólk, ið arbeiða uttanlands.

Burtursæð frá frádráttinum fyri eftirlønartryggingar, so er tað felags, at hesir frádráttir kosta kommununum stóran skattainntøkumiss.

Nevndu frádráttir, eftirlønartryggingar undantiknar, kosta kommununum uml. 250 mió. kr. í mistum skattainntøkum. Til ber eisini at staðfesta, at frádráttirnir raka kommunurnar ójavnt og gera skattainntøkugrundarlagið, ið javningin annars verður roknað út frá, ójavnari.

Nevndin heldur, at kommunurnar eiga at fáa skattavirðið av hesum frádráttunum endurgoldið frá landskassanum, tí talan er um frádráttir, sum løgtingið hevur samtykt, har talan er um umfordeiling, og tí eigur landið at bera kostnaðin av hesum. Kostnaðurin av hesum frádráttum fellur eisini ymiskt og er við til at økja um ójavnan millum kommunurnar.

Mælt verður til seta í verk afturberingarskipan, har landið endurrindar kommununum fyri tann inntøkumiss, sum er avleiðingin av ymsum skattafrádráttarskipanum. Hetta gevur uml. 250 mió. kr. og er tilmælið hjá nevndini, at ein tílík afturberingarskipan verður sett í verk at fíggja útlegging av økjum til kommunurnar at umsita.

Hesi bæði tilmælini til samans, tillaging av skattastiga og afturbering, hava við sær, at bæði fólkaskúlin og eldrarøktin kunnu leggjast til kommunurnar at umsita uttan at tørvur er á at seta í verk blokkstuðulsskipan.

Verður hugt at inntøkugrundarlagnum hjá teimum 30 kommununum í dag, liggur kommunan við lægsta inntøkugrundarlagnum á index 77, meðan tann hægsta liggur á index 120. Verða kommunurnar skipaðar í størri eindir t.d. 9, minkar munurin og tann lægst liggur á index 83, meðan tann hægsta liggur á 110.
Verður ein skipan við afturbering sett í verk, í fullum líki, minkar munurin uppaftur meira. Lægsta kommunan liggur tá á index 88 og hægsta á index 107.

Verður ein millumkommuna javning skipað við 30 % inntøkujavning, verða indexini 92-105. Við 50% inntøkujavning verða indexini 95-103, og við 70 % inntøkujavning verða indexini 98–101.

**Tilmæli um býtið av partafelagsskattinum og kapitalvinningsskattinum**

Mælt verður til, at býtið millum land og kommunur av partafelagsskattinum og kapitalvinningsskattinum verður broytt til fyrimunar fyri kommunurnar, og at tað í framtíðini fylgir tí býti, sum er millum land og kommunur, tá ið tað kemur til persónsskattin[3]. Hetta hevði givið 90 mió. kr. í 2008

**Tilmæli um blokkstuðul**

Mælt verður til, at blokkstuðul bert verður skipaður, tá tørvur er á tí. Nevndin er komin við alternativum uppskoti til fígging, ið ger, at blokkstuðulsskipan er ikki neyðug fyribils.

**Tilmæli um endurgjaldsskipanir**

Mælt verður til at skipa endurgjaldsskipanir fyri ymsar tænastuveitingar, sum annaðhvørt landið ella kommunan loysir vegna hin partin.

**Tilmæli um serskipanir**

Nevndin mælir til, at serskipanir verða gjørdar fyri útoyggjar og Sandoyar kommunu.

*Tilmæli um serskipan fyri útoyggjar*

Nevndin mælir til at skilmarka Fugloy, Svínoy, Mykines, Hest, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun sum útoyggjar. Um serlig átøk skulu tryggja hesum oyggjum framhaldandi

[3] Umboðið hjá Føroya Kommunufelag mælir til, at allur partafelagsskatturin verður javnaður samsvarandi persónsskattinum

búseting, vælferðartænastur og menningarmøguleikar er í stóran mun ein landspolitiskur spurningur.

Skulu hesar oyggjar hava vælferðartænastur á eitt nú skúlaøkinum og eldraøkinum, kunnu útreiðslurnar hjá kommununum gerast órímiliga stórar. Tí mælir nevndin til, at serligar útreiðslur, sum kommunurnar við útoyggjum hava, verða partvíst endurgoldnar eftir serligari stuðulsskipan, ið landið játtar.

Eisini mælir nevndin til, at tað eins og í dag verða serligar stuðulsjáttanir á fíggjarlógini, ið kunnu nýtast til serligar og oyramerktar verkætlanir ella átøk í útoyggjum.

Nevndin mælir tó til, at tað verða kommunur sum myndugleiki, ið hava møguleika at søkja og umsita serliga stuðulin, ið latin kann verða útoyggjum.

*Tilmæli um serskipan fyri Sandoynna*

Nevndin mælir til, at Sandoyarøkið kemur undir eina serskipan. Orsøkin er, at Sandoyggin, umframt at vera eitt veikt øki við lutfalsliga lítlum inntøkugrundarlag og stórari minking í fólkatalinum seinastu 25 árini, serliga víkur frá hinum eindunum í mun til stødd.

Í Sandoyarøkinum verða bert góð 1400 fólk. Nevndin metir, at hetta grundarlag ikki gevur økinum somu møguleikar fyri stórrakstrarfyrimununum, ið hini økini fáa í sambandi við samanleggingina.

Nevndin metir, at ein eind við bert 1400 íbúgvum fer at hava lutfalsliga størri fyrisitingarligar kostnaðir, og at eindarkostnaðir í mun til bæði eldrarøktarøkið og fólkaskúlaøkið fara at verða størri.

Tí mælir nevndin til, at Sandoyarøkið eftir serligum lykli fær eitt ískoyti, ið skal javnstilla økið við eina kommunu upp á umleið 2000 fólk, sum landið fíggjar.

## 4.4 Tilmæli um eldrarøkt

Eldrarøktin verður løgd til kommunurnar at umsita 1. januar 2013. Eldraøkið fevnir bæði um eldrarøkt og um peningarligar veitingar til eldri (t.d. fólkapensjón). Bólkurin hevur viðgjørt tann partin av eldraøkinum, sum fevnir um eldrarøktina, tí tað ætlandi verður hesin parturin av eldraøkinum, sum verður lagdur til kommunurnar.

Eldrarøktin fevnir um hesi øki:

- Ellis - og røktarheim
- Eldrasambýli
- Heimarøkt (heimahjálp, heimasjúkrarøkt og økisterapi)
- Aðrar vælferðartænastur til eldri (umsorganarbeiði og ansingarsamsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum).

**Tilmæli um eldrarammulóg**

Mælt verður til, at ein rammulóg verður gjørd fyri alt eldraøkið ella teir partar av eldraøkinum, sum verða lagdir til kommunurnar at umsita. Í lógini skal tað greitt ásetast, hvør hevur ábyrgdina av eldrarøktini, og harumframt skulu rættindi borgaranna tryggjast. Lógin eigur at tryggja, at borgarar í teimum ymsu kommunum fáa nøktandi tilboð við at áseta minstamarkið fyri, hvørjar tænastur borgarin hevur rætt til. Samstundis skal lógin tó ikki virka forðandi fyri kommunala sjálvræðinum. Tískil skal ein rammulóg ikki hava ov nágreiniligar ásetingar, men harafturímóti geva einstøku kommununi møguleika fyri at raðfesta og sjálv avgera, hvørji tilboð og hvussu støðið á tilboðnum skal vera. Tó skal tað altíð gerast við atliti at minstukrøvunum. Lógin eigur at staðfesta, at tað framhaldandi verður landsstýrismaðurin í almannamálum, sum hevur eftirlitsmyndugleika við kommunalu umsitingini av eldrarøktini.

**Tilmæli um umsorganararbeiði**

Mælt verður til, at umsorganararbeiðið, ið m.a. fevnir um mattænastu og koyritænastu, verður ein samskipaður partur av teirri kommunalu eldrarøktini.

**Tilmæli um pensjónir**

Nevndin mælir til, at tað framhaldandi verður landið, sum umsitur pensjónsøkið, men fyri at greidleiki skal verða millum land og kommunur á hesum øki, er umráðandi, at fólk sum hava og fáa búpláss á ellis- og røktarheimum í framtíðini, varðveita sína pensjón og síðani rinda fyri uppihaldið eins og skipanin er á sambýlunum. Til hetta krevst lógarbroyting í løgtingslóg um uppihald á stovni.

**Tilmæli um eldri við serligum tørvi**

Nevndin mælir til, at tað framhaldandi verður landið, sum veitir tænastu til borgarar við serligum tørvi, hóast teir eru 67 ár ella eldri.

**Tilmæli um yngri, ið fáa heimahjálp**

Mælt verður til, at heimasjúkrarøktin, sum Heimatænastan veitir fólki undir 67 ár, verður løgd til kommunurnar, sum so hava ábyrgd av at veita tænastuna til allar borgarar, sama hvørjum aldri tey eru í. Í sambandi við viðgerð av markamóti, eigur støða at verða tikin til møguligar endurgjaldsskipanir, har landið t.d. rindar kommunum fyri tænastur til borgarar undir 67 ár, og kommunur rinda landinum fyri tænastur til borgarar yvir 67 ár.

**Tilmæli um, hvussu eldrarøktin verður skipað**

Mælt verður til, at eldrarøktin verður samskipað í øllum kommunalu eindunum samsvarandi leistinum í Sandoynni.

## 4.5 Tilmæli um fólkaskúlan

Nevndin mælir til, at allur fólkaskúlin verður lagdur til kommunurnar at umsita 1. januar 2012. Fólkaskúlalógin verður endurskoðað ella gjørd av nýggjum við atliti at útlegging. Fíggjarviðurskifti verða avgreidd, og greiða verður fingin á starvsfólkaviðurskiftum.

Mælt verður til at skipa skúlaøki, sum eru tey somu sum kommunalu eindirnar, ið nevndin mælir til. Samstundis eiga allar lógarbindingar í fólkaskúlalógini, ið forða fyri hesum, at verða broyttar og lagaðar til nýggja kommunubygnaðin.

Nevndin mælir til, at yvirumsjón, próvtøkur, lesiætlanir, landsroyndir, støðuroyndir, yvirskipaði menningarátøk, eftir- og framhaldsútbúgving hjá lærarum og altjóða kanningar framvegis verða ábyrgdarøki hjá Mentamálaráðnum.

**Tilmæli um Sernámsdepilin og NSR-tænastunar**

Mælt verður til, at Sernámsdepilin framhaldandi verður ein landsstovnur, ið umsitur serundirvísing/serligan tørv, meðan mælt verður til at útbyggja NSR-tænasturnar, so at í hvørjari kommunu verður ein NSR-tænasta, sum verður bindilið millum skúla og Sernámsdepilin.

## 4.6 Tilmæli um onnur øki

**Tilmæli um fólka- og skúlabókasøvn**

Í sambandi við útlegging av fólkaskúlanum er sjálvsagt, at skúlabókasøvnini fylgja við. Skúlabókasøvnini eru samskipaður partur av øllum virksemi skúlans. Við tí í huga, at kommunalu fólka- og skúlabókasøvnini kunnu samskipast bæði rakstrarliga og bygnaðarliga, verður mælt til, at fólka- og skúlabókasavnsøkið samlað verður lagt til kommunurnar sum partur av útleggingini av skúlaøkinum annars.

**Tilmæli um frítíðarundirvísing**

Frítíðarundirvísingin er ein stuðulsskipan, men við einum broyttum kommunalum bygnaði verður mælt til, at lóggávan verður broytt, so frítíðarundirvísingin ikki verður ein studningsskipan, men verður løgd til kommunurnar sum sjálvstøðugt málsøki.

**Tilmæli um musikkskúla**

Nevndin mælir til, at nýggj lóg verður fingin til vegar, har bygnaðurin og ábyrgdin í musikkskúlunum verður greidd. Tá kommunueindirnar eru skipaðar og fólkaskúlaøkið og frítíðarundirvísing er lagt til kommunurnar, verður støða tikin til, um og hvussu musikkskúlin kann verða lagdur til kommunurnar.

**Tilmæli um barnaansing**

Nevndin mælir til, at barnaansingarøkið verður eftirhugt og at lógargrundarlagið verður gjøgnumgingið. Land og kommunur eiga í felag at fáa loyst trupulleikarnar viðvíkjandi markamótinum ímillum forsorg og barnaansing.

**Tilmæli um barnavernd**

Tað eru ymisk markamót, sum gera, at tørvur er á at endurskoða barnaverndarøkið. Trupulleikar vísa seg serliga at vera við grásonu millum barnavernd og brek (forsorgarlógina) og fólkaskúla, og tá og um børn eru fevnd av bæði barnaverndarlógini og forsorgarlógini. Eisini eru trupulleikar ímillum landsstovnarnar og lokalu barnaverndartænasturnar. Hesar trupulleikar hevur landsstýriskvinnan í almannamálum sett ein arbeiðsbólk at greina. Tá arbeiðið hjá nevnda arbeiðsbólki er liðugt, eigur støða at verða tikin til, um núverandi býtið millum land og kommunur skal broytast á barnaverndarøkinum.

Í sambandi við, at barnaverndarlógin skal endurskoðast, eigur ásetingin um tvungin kommunal samstørv um barnaverndartænastur at verða tillagað nýggja kommunala bygnaðinum.

**Tilmæli um yrkisútbúgvingar**

Nevndin mælir til, at landið einsamalt eigur at fíggja hesa uppgávu.

**Tilmæli um kirkjugarðar**

Tað er ein fyrimunur við verandi skipan, at tað ikki er eitt ávíst trúarsamfelag, men ein verðsligur myndugleiki, ið eigur kirkjugarðin – so alt talar fyri at formalisera galdandi skipan soleiðis, at greidleiki verður bæði formliga og í roynd og veru á økinum.

**Tilmæli um fólkayvirlit**

Í mun til eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti metir nevndin ikki, at orsøk er til at gera nakra broyting á fólkayvirlitsøkinum, við tað at ábyrgdarbýtið má metast at vera formliga greitt við nýggju fólkayvirlitslógini.

Hinvegin skal verða víst á, at so leingi nýggja tøkniliga skipanin ikki er fingin til vegar, so fáa hvørki kommunur ella landsfólkayvirlit røkt sínar skyldur sambært lógini, og fyrr enn nýggja skipanin er fingin til vegar, ber heldur ikki til at fremja tað greiða uppgávu- og ábyrgdarbýtið, ið skal vera millum land og kommunur, tá um fólkayvirlit ræður. Tí hevur tað átrokandi skund at fáa nýggju skipanina menta og setta í verk, soleiðis at lógin og allar ásetingarnar har kunnu verða settar í gildi og fáast at virka.

**Tilmæli um brunaviðurskiftir**

Nevndin mælir til, at brunalógin/brunakunngerðin verður eftirhugd, har markamót millum málsræðið hjá kommununum og málsræðið hjá Brunaumsjón Landsins verður nágreinað, soleiðis at sum minst ivi er um, hvør av myndugleikunum eigur ábyrgdina í teimum ymisku førunum. Í tí sambandinum kann metast um, hvørt neyðugt er at broyta sjálva lógina, ella um nøktandi greiða kann fáast á hetta við at nágreina brunakunngerðina.

**Tilmæli um hýruvognslóggávu**

Hóast lógarbroyting ikki er neyðug fyri at umsitingin av hýruvognsøkinum framhaldandi skal verða hjá kommununum, so verður mælt til, at hýruvognslógin við tilhoyrandi kunngerð verður dagførd.

**Tilmæli um býarskipanarviðurskiftir**

Nevndin mælir til, at nýggj lóg verður samtykt at koma í staðin fyri býarskipanarlógina.

Nýggja lógin, ið annaðhvørt eigur at vera í tveimum pørtum – einum planlógarparti og einum byggilógarparti – ella framd sum tvær ymiskar lógir – ein planlóg og ein byggilóg, eigur yvirskipað at leggja dent á, at samlaða lendisnýtslan og ætlanirnar fyri lendið verða samskipað millum allar viðkomandi myndugleikar. Nýggja lógin eigur eisini at skipa soleiðis fyri, at vitan og førleiki um lóggávuna, ráðlegging o.a. støðugt er savnað og dagført á einum stað, og at vitan og upplýsingar um lendi annars verða atkomuligar fyri allar viðkomandi partar.

## 4.7 Tilmæli um vegir

Í mun til at flyta teir vegir, sum í dag eru landsvegir, til kommunurnar at umsita, metir nevndin avgjørt ikki, at grundarlag er fyri hesum. Tí verður mælt frá at leggja landsvegakervið til kommunurnar at umsita.

Hóast nevndin ikki mælir til broytingar í málsøkjabýtinum millum land og kommunur, tá um vegir ræður, so vil nevndin tó gera vart við, at verandi lóggáva greitt hevur tørv á dagføring.

## 4.8 Tíðarætlan

Nevndin vil leggja dent á, at einstøku tilmælini eru partar av einum samlaðum tilmæli um at umskipa bygnað, fígging, uppgávur og ábyrgdir hjá kommunala geiranum í Føroyum, stutt sagt, uppskot til kommunala umskipan.

Fyrsta stigið, at leggja kommunurnar saman í størri eindir, er bæði treytin fyri og treytað av, at farið verður undir næsta stigið, sum er millumkommunal javning, afturbering til kommunurnar og at laga til býtið millum lands- og kommunuskatt, sum samstundis eru treytin fyri og treytað av, at størru málsøkini nevnd í arbeiðssetninginum verða løgd til kommunurnar at umsita.

Verður talan ikki um eina heildarætlan, mælir nevndin frá, at eitt so týðandi inntriv sum at skipa fyri kommunuvali í ótíð, verður sett í verk mótvegis sitandi kommunustýrum. Nevndin metir eisini, at tað ikki tænir nøkrum endamáli at leggja kommunur saman við lóg í størri eindir uttan so, at kommunurnar fáa fleiri uppgávur og ábyrgdir.

Viðmerkjast skal, at tíðarætlanin er gjørd við støði í arbeiðssetninginum, tó so, at har ásett er, at fyrsta stóra økið verður lagt út 1. januar 2011, mælir nevndin til, at samlaða kommunala umskipanin verður skipað í tíðarskeiðinum frá nú og fram til 1. januar 2013.

- 1. januar 2011 verður nýggi kommunali bygnaðurin skipaður, og nýggja kommunala fíggingin við millumkommunalari javning, afturberingarskipan og tillaging í býtinum millum lands- og kommunuskatt verður lógarásett.
- 1. januar 2012 verður fólkaskúlin sum fyrsta stóra økið, lagt til kommunurnar.
- 1. januar 2013 verður eldrarøktin løgd til kommunurnar at umsita.

**Tíðarætlan fyri skipan av nýggju kommunalu eindunum**

Hildið verður fast um verandi skipan at leggja kommunur saman. Nevndin mælir til, at kommunuvallógin verður broytt, so at val kann verða til allar kommunur, tá 2 ár eru liðin av hesum valskeiðnum, t.e. 9. november 2010. Nýggju kommunurnar kunnu tá formliga verða lagdar saman. Nýggju kommunustýrini taka við 1. januar 2011, og er tað tí

samanlagda kommunan, sum fyrireikar og tekur ímóti tí fyrsta stóra  málsøkinum, sum verður lagt til kommunurnar.

**Tíðarætlan fyri fíggjarskipan**

Í seinasta lagið sum fyrsta stóra útleggingin verður framd, skal øll javningarlóggávan eisini verða fingin upp á pláss, soleiðis at javningarskipanin kann virka, tá ið uppgávubýtið verður broytt og framt, og at afturbering til kommunurnar og tillaging í býtinum millum lands- og kommunuskatt kann setast í verk, so hvørt tað er neyðugt fyri at fíggja uppgávurnar, sum verða lagdar til kommunurnar.

**Tíðarætlan fyri fólkaskúlan**

Mælt verður til, at ein tíðarætlan, sum verður løgd fyri arbeiðið at leggja fólkaskúlan til kommunurnar, í høvuðsheitum verður:

1. So skjótt sum politisk avgerð er tikin um, at fólkaskúlaøkið skal flytast til nýggju kommunalu eindirnar, verður arbeiðsbólkur/bólkar settir at fyrireika útleggingina við atliti at endurskoða ella gera nýggja fólkaskúlalóg
2. Fíggjarviðurskifti verða avgreidd
3. Greiða verður fingin á starvsfólkaviðurskiftum
4. Lógaruppskot verður lagt fram í tingsetuni 2010
5. Fólkaskúlin verður lagdur til kommunurnar 1. januar 2012

Í sambandi við útlegging av fólkaskúlanum er sjálvsagt, at skúlabókasøvnini fylgja við. Skúlabókasøvnini eru samskipaður partur av øllum virksemi skúlans.

**Tíðarætlan fyri eldrarøktina**

1. So skjótt politisk avgerð er tikin um, at eldrarøktin skal flytast til nýggju kommunalu eindirnar, verður arbeiðsbólkur/bólkar settir at gera uppskot til rammulóg fyri eldraøkið - støða takast til markamót og dagføring av tilboðum
2. Fíggjarviðurskiftini verða avgreidd
3. Samskipanin av eldrarøktini í kommunalu eindunum byrjar, tá ið avgerðin er tikin
4. Greiða fáast á, hvussu kommunala umsitingin av eldrarøktina skal skipast
    - Hvat skal broytast á Nærverkinum? Hvat skal uppbyggjast í kommunalu umsitingum

5. Greiða verður fingin á starvsfólkaviðurskiftum
6. Rammulóg og aðrar lógarbroytingar leggjast fyri tingið og samtykkjast í tingsetuni 2011
7. Útfylling av rammulógini gerast á sumri/heysti 2012
8. Eldrarøktarøkið verður lagt út til kommunurnar 1. januar 2013

Nevndin skal gera vart við, at hóast mælt verður til at leggja fólkaskúlaøkið til kommunurnar fyrst, so má fyrireikingin av útleggingini av eldrarøktini byrja, samstundis sum fyrireikingarnar til fólkaskúlaøkið byrja. Hetta er, tí at talan er um stórt og samansett málsøki, har lóggáva og annað skal fáast í rættlag, og skal seinna málsøkið ikki verða lagt til kommunurnar alt ov langa tíð eftir tað fyrra, verður mælt til, at byrjað verður samstundis við báðum økjum. Annars er vandi fyri, at tann bygnaður, ið miðað verður eftir, ikki fæst í lag, fyrr enn long tíð er fráliðin. Hetta er óheppið, tí tá verður drúgt, áðrenn umleggingin og tilgongdin endar.

**Tíðarætlan fyri onnur øki**

Øll onnur málsøki, har kommunur og land onkursvegna býtast um uppgávuna, eiga at verða eftirkannað og nýskipað, soleiðis at ógreiða viðvíkjandi uppgávu- og ábyrgdarbýti er fingin av vegnum. Hesi smærru málsøki hava sum so ikki nakran innanhýsis samanhang, men nevndin mælir til, at fyri at kommunubygnaðurin skal kunna fremjast innan ávíst tíðarbil, eiga eisini hesi smærru málsøkini at verða avgreidd í seinasta lagi samstundis sum útleggingin av eldrarøktarøkinum fer fram. Á henda hátt hava vit fingið samlaða nýggja kommunubygnaðin skipaðan og framdan í seinasta lagi 1. januar 2013.

**Tíðarætlan fyri leist**

Nevndin heldur, at neyðugt er sum tað fyrsta ítøkiliga politiskt at viðgera og avtala, í hvønn mun broytingar skulu gerast. Síðan eigur í somu politisku avtalu støða at verða tikin til, hvørjar broytingar skulu fremjast, eftir hvørjum leisti og innan hvønn tíðarkarm. Slík avtala er neyðug fyri at hava eitt felags grundarlag fyri kommunalu umskipanini, sum allir partar eru samdir um.

Fremjingin av kommunalu umskipanini kann síðani býtast upp í trý stig:

*Fyrsta stig* – avkláringarstigið – gongur frá tí, at politisk semja er funnin/politisk avgerð er tikin um samanlegging og uppgávureform og til formlig avgerð er tikin/lóg er samtykt um samanleggingarnar og uppgávubroytingar. Henda viðgerð/stig eigur at byrja, so skjótt frágreiðingin frá nevndini er latin landsstýrismanninum.

*Annað stig* – ráðleggingar- og avgerðarstigið – gongur frá tíðini, eftir at avgerð formliga er tikin um, hvørjar kommunur skulu leggjast saman, til samanleggingin er vorðin veruleiki og val hevur verið til nýggju kommunurnar.

*Triðja stig* – íverksetanarstigið – gongur frá tí degi, at nývaldu kommunustýrini í samanløgdu kommununum hava tikið við 1. januar árið eftir, at valið hevur verið.

Fyrst verður fingið greiða á, hvørjar kommunur skulu leggjast saman. Samstundis eigur ætlan at verða løgd fyri ítøkiligu tilgongdina, herundir hvussu og hvør skipar hana. Tíðar- og íverksetanarætlan verður gjørd, eins og avtala verður gjørd um samskifti og mannagongdir.

Skal leggjast saman í sjey til nýggju kommunum at taka við 1. januar 2011, er neyðugt at áseta við lóg, hvørjar kommunur skulu verða. So skjótt sum semja er um, hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu verða, verður uppskot til lóg um kommunusamanlegging lagt fram. Uppskotið skal áseta kommunueindirnar, dagfesting fyri kommunusamanleggingunum, treytir fyri samanlegging og heimildir til landsstýrið at áseta nærri reglur um tilgongd og samanleggingarleist.

Í góðari tíð, áðrenn kommunustýrini í nýggju, samanløgdu kommununum taka við, eiga landsmyndugleikarnir í samráð við kommunufeløgini at stuðla kommununum í at gera eina ítøkiliga ætlan, herundir eina útgreinaða tíðarætlan fyri, nær ymisku avgerðirnar hjá kommunum í seinasta lagi skulu verða tiknar. Hetta er alneyðugt fyri at hava eina væl skipaða tilgongd og fyri at tryggja, at tær avgerðir, ið skulu takast, verða tiknar rættstundis.

Nevndin mælir til, at ein útgreinað mannagongd verður gjørd til kommunurnar og til landsmyndugleikarnar, har báðir partar kunnu fylgja við og tryggja, at viðkomandi avgerðirnar verða tiknar av røttum myndugleika til rætta tíð. Í einari tílíkari samskipaðari

mannagongd eigur eisini at vera ein tíðarætlan ella kalendari, har evstamark er sett fyri, nær ymisku avgerðirnar ella tiltøkini skulu vera framd.

# 2. kapittul. Um kommunur, eindir og fólkaræði

## *1. Kommunustødd og uppgávu- og ábyrgdarbýti*

Í einum marknaðarbúskapi er høvuðsreglan tann, at tað er privati geirin, sum tekur sær av at veita vørur og tænastur. Tað merkir, at tað almenna bert veitir vørur og tænastur, sum privati geirin ikki kann bjóða ella tá tað, sum privati geirin bjóðar, ikki er tað ynskiliga. Fyri vørur og tænastur, sum privati geirin bjóðar, verður prísurin ásettur av útboði og eftirspurningi, sum tryggja eina fullgóða (efficienta) loysn. Fyri almennar vørur og tænastur er tað politiska tilgongdin, sum avloysir marknaðin, har borgarin vísir, hvat hann ynskir, við at atkvøða.

Uppgávurnar hjá tí almenna kunnu býtast í trý: tillutan (allokering), býting og stabilisering. Við stabiliseringsuppgávuni roynir tað almenna at tryggja búskaparligan vøkstur og at javna sveiggini í búskapinum. Endamálið við útbýtingaruppgávuni er at umfordeila brúksmøguleikarnar millum bólkar í samfelagnum. Hetta verður framt við skatt- og avgjaldspolitikki, inntøkuveitingum og prísáseting fyri almennar vørur og tænastur. Tillutanaruppgávan er á fullgóðan hátt (efficient) at tilluta tilfeingið, sum skal til fyri at framleiða vørur og tænastur, sum eru álagdar tí almenna at framleiða.

Skap og vavið av tí partinum av samlaðu framleiðsluni, sum tað almenna hevur ábyrgd av, er ymiskt frá landi til land. Tað virksemi, sum verður lagt hjá tí almenna, kann eyðmerkjast eftir ymsum eyðkennum. At parturin hjá tí almenna er ymiskur frá landi til land er orsakað av, at præferencurnar til ymsu eyðkennini eru ymiskar frá staði til stað.

Reinar almennar vørur og tænastur eru tílíkar, har ongin kapping er um nýtsluna, og har útilokan ikki ber til. Hesar vørur og tænastur liggja allastaðni hjá tí almenna. Dømi um hetta eru: rættarskipan, løgregla og sjóverja. Natúrlig monopol liggja eisini ofta hjá tí almenna; dømi um hetta eru samskifti, orka og samferðsla. Harumframt eru almennar uppgávur, sum eins væl kundu ligið hjá tí privata, men ynski um partvíst ella heilt at seta prísmekanismuna til viks er orsøkin til, at hesar uppgávur liggja hjá tí almenna. Ynskið er grundað á, at hesar uppgávur hava jalig hjáárin, sum ynskiligt er at tryggja ella at økja

um ella at tryggja eitt ávíst býti av. Dømi um tílíkar uppgávur eru undirvísing, heilsuverk og eldrarøkt.

## 1.2. Býtið av almenna geiranum

Hjá okkum er tað almenna tvíbýtt: land og kommunur. Býtið av tí almenna geiranum millum land og kommunur er knýtt m.a. at præferencuni til at miðfirra veitingina av almennum vørum og tænastum. Av teimum almennu uppgávunum egna umbýtingar- og stabiliseringsuppgávurnar seg best at liggja hjá landinum. Landið hevur betri møguleikar at fremja stabiliserandi átøk eins væl og umbýtingaruppgávan í høvuðsheitum eisini liggur betur hjá landinum. Er umbýtingin ymisk frá kommunu til kommunu, er vandi fyri, at teir borgarar, sum fáa skert sínar nýtslumøguleikar, fara at flyta til kommunur við lægri umbýting, meðan borgarar, sum fáa økt sínar nýtslumøguleikar, vilja flyta hagar, sum umbýtingin er hægst.

Bestu møguleikarnir at miðfirra eru á økjum, sum falla undir tillutanaruppgávurnar (allokering). Tað sum er avgerandi er, um vørurnar og tænasturnar, sum liggja hjá tí almenna, hava staðbundna avmarking ella ikki og um henda avmarking er minni ella lík teimum kommunalu eindum sum eru. Sjóverja og rættarskipan hava ikki staðbundna avmarking, meðan gøtuljós og ruskinnsavnan hava. Tá ið hesi seinast nevndu verða veitt, hevur fjarstøðan týdning fyri nyttuna, sum tann einstaki borgarin fær.

Tað eru bæði fyrimunir og vansar við miðfirring. Umbýtingarpolitikkur og stabiliseringspolitikkur tala ímóti. Eisini kunnu nevnast aðrir vansar, t.d. minni/veikari fyrisitingar og at talan verður um 7-9 ymiskar fyrisitingar heldur enn ein.

Eisini kunnu nevnast hjáárin, t.d. dálking, har tann førdi politikkurin í einari kommunu hevur ávirkan út um kommunumark.

Til fyrimuns fyri miðfirring talar møguleikin fyri størri fyrisitingarligum effektiviteti við minni umsiting og størri fíggjarligari ábyrgd. Nærdemokrati er eisini ein fyrimunur, tí styttri vegur verður millum tann valda og veljaran. Tað politiska valdið verður eisini spjatt. Við at miðfirra framleiðslu og veiting av almennum vørum og tænastum, sum

hava staðbundna avmarking, er gjørligt at tillaga framleiðslu og veiting til tann staðbundna tørvin. Hetta er ikki eins væl gjørligt, tá ið framleiðsla og veiting er sentral.

Tær flestu almennu vørurnar og tænasturnar hava eina ella aðra staðbundna avmarking, t.d. vatnveiting; tað ber so til at tillaga veitingarøkini hjá teimum einstøku vørunum og tænastunum til staðbundnu avmarkingina hjá teimum somu. Hetta førir við sær, at vit fáa veitingarøki av ymiskari støðd. Til ber eisini at velja veitingarøkir, sum eru tey somu fyri fleiri vørur og tænastur, t.d. sjúkrahúsverkið, tí veitingarøkið er størri enn kommunuøkið.

Tann politiska tilgongdin kann skiljast sundur, soleiðis at avgerðir fyri almennar vørur og tænastur, sum koma øllum landinum til góða, verða tiknar sentralt, meðan avgerðir viðvíkjandi vørum og tænastum, sum hava rúmliga avmarking í útbreiðslu, verða tiknar í tí avmarkaða økinum. Tað hevði ikki verið fullgott (inefficient) at stovnsett skipanir til politisku tilgongdina, sum vóru knýttar at teirri rúmligu avmarkingini hjá teimum einstøku almennu vørunum og tænastunum, men um vit velja samanfallandi veitingarøkir, kunnu stovnsetast ymisk løg í teirri politisku tilgongdini. Í einum landi er tað hægsta innlendis lagið givið við landinum. Markið fyri landinum er upprunaliga ikki ásett við støði í ynskinum um eina optimala støðd, grundað á fíggjarligar fortreytir, men er søguliga grundað.

Tá ið støddin á hinum løgunum (kommunurnar) skal ásetast, er ongin eintýdd, endalig loysn, men valda støddin er avgerandi fyri, hvussu stórur partur av almennu vørunum og tænastunum kunnu miðfirrast. Tað merkir, at tað er samband millum støddina á teimum ymsu løgunum og teirra part av tí almenna geiranum. Tá støddin á teimum ymsu løgunum verður ásett, verður uppgávu- og ábyrgdarbýti millum løgini samstundis avgjørt, alt eftir førleika og støðd á teimum einstøku løgunum.

Talvan niðanfyri lýsir samband millum kommunustødd og uppgávu- og ábyrgdarbýti.




Verða almennar vørur og tænastur skipaðar í rað eftir støddini á neyðugum veitingarøki (sum omanfyri), kann myndin omanfyri lesast sum ein einfaldur háttur av vísa sambandið millum kommunustødd og uppgávu- og ábyrgdarbýti. Verður kommunustøddin sett at vera samsvarandi veitingarøkisstødd 50, verða allar tær vørur og tænastur, sum tørva eitt veitingarøki á 50 ella minni, kommunalar, meðan tær, sum tørva eitt størri veitingarøki, lands.

## 1.3. Miðfirringarfyrimunir[4]

Trý viðurskifti eru avgerandi fyri, hvussu umfatandi miðfirringin í landinum er. Í fyrsta lagi, hvat alment lag (land ella kommunur) hevur ábyrgdina, fyri tað næsta støddin á fyrisitingareindini og fyri tað triðja, hvussu neyv yvirskipaða stýringin er.

Miðfirringin kann økjast við, at fyrisitingareindirnar gerast minni við sama uppgávu- og ábyrgdarbýti, ella við at leggja uppgávur til lægri fyrisitingarstig og ella at minka um yvirskipaðu stýringina. Nevndu viðurskifti kunnu, hvør í sínum lagi, flyta vavið av miðfirring hvønn sín veg. Sum dømi kann nevnast, at við samanlegging fáa vit størri staðbundnar eindir, sum í sjálvum sær kunnu sigast at minka um miðfirringina, men um hesar størru eindirnar fáa ábyrgd av uppgávum, sum áður hava ligið miðsavnaðar, og samstundis fáa størri frælsi at loysa og umsita miðfirraðu uppgávurnar, økir hetta um miðfirringina.

[4] Strukturkommissionens betænkning nr. 1434, bind I, Hovedbetænkningen, januar 2004

Til ber eisini at skyna millum miðfirring og miðspjaðing. Við miðfirring verða ábyrgd og raðfesting flutt frá hægri til lægri lag. Dømi um hetta er barnaansingin, sum var flutt fult og heilt til kommunurnar at umsita. Við miðspjaðing verður loysnin av uppgávuni løgd út staðbundið hjá sama miðsavnaða myndugleika, uttan at heimildin til at raðfesta fylgir við. Dømi um hetta eru deildirnar hjá TAKS úti um landið.

Nærri tænastan er borgaranum, erligari er hann um síni ynski um tænastustøði, og hvussu nógv hann vil gjalda, tí færri eru at gjalda, samstundis ber betri til at tillaga tænastuveitingina til staðbundna tørvin. Er munur í staðbundna útboðnum, kann borgarin búseta seg har, tað almenna tilboðið hóskar honum best. Hetta skapar kapping millum staðbundnu eindirnar og samstundis størri virkisføri.

Staðbundni politikarin er nærri borgaranum á staðnum, samstundis sum valdið verður spjatt millum fleiri løg.

## *2. Fólkaræði í stórum og smáum eindum – hvat vinna vit og hvat missa vit?*

### 2.1. Stødd á eindum og umboðan

Ymiskt lutfall er millum talið á veljarum og talið á valdum í føroysku kommununum.[5]

**Lutfallið millum veljarar, uppstillað og vald í bý- og bygdaráð[6]**

| Talið á umboðum í bygdaráðnum /býráðnum | Fólk við atkvøðu-rætti í 2004 | Talið á atkvøðum 2004 | Talið á valdum | | Miðaltal av atkvøðum í mun til vald umboð |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | 2000 | 2004 | 2004 |
| 13 (*Tórshavn*) | 13517 | 10562 | 13 | 13 | **813** |
| 11 (*3 kommunur*) | 7213 | 6105 | 11 | 33 | 185 |
| 9 (*2 kommunur*) | 2203 | 1906 | 27 | 18 | 106 |
| 7 (*13 kommunur*) | 9173 | 7838 | 98 | 91 | 86 |
| 5[7] (*10 kommunur*) | 1711 | 1516 | 90 | 50 | 30 |
| 3[8] (*5 kommunur*) | 554 | 478 | 33 | 15 | 32 |
| Til samans | 34.371 | 28.405 | 272 | 220 | **129** |

Í meðal vóru 129 veljarar fyri hvønn bý- og bygdaráðslim í føroysku kommununum í 2004. Tórshavnar kommuna er í serstøðu, tí har eru 813 veljarar fyri hvønn býráðslim. Víst verður á, at talið á býráðslimum ikki er hækkað, so hvørt sum Tórshavnar kommuna er vaksin í vavi, og at umboðanin hjá bygdunum í býráðnum er nærum eingin.

Í greinini "Staðbundnar nevndir"[9] verður mett, at møguleikin at skipa staðbundar nevndir fer at verða meira gagnnýttur, so hvørt kommunusamanleggingarnar verða fleiri. Víst verður í greinini á, at talið á umboðum í staðbundnum nevndum síðani 2005 er vaksið úr

[5] Beinta í Jákupsstovu "Val til býráð og bygdaráð" í Jákupsstovu, Beinta í, red: *Kommunupolitikkur,* Fróðskapur - Faroe University Press, 2008, s 131-132.

[6] Kelda: Dátugrunnur yvir uppstillað og vald. Her endurgivið úr omanfyrinevndu grein hjá Beintu í Jákupsstovu. Viðmerkjast skal, at talvan ikki er dagførd.

[7] Kommunur við 3 og 5 kommunustýrislimum eru ikki nevndarstýrdar og virka ikki fult og heilt eftir vanligu reglunum í kommunustýrislógini, smbr. § 57 í Kommunustýrislógini

[8] Víst verður til notu 4

[9] Bjørg Jacobsen "Staðbundnar nevndir" í Jákupsstovu, Beinta í, red: *Kommunupolitikkur,* Fróðskapur - Faroe University Press, 2008, s 122-127.

12 upp í 39, men at hetta hendir, samstundis sum talið á kommunustýrisumboðum úr útjaðaraøkjum er fallið. Í greinini verður víst á, at staðbundnu nevndirnar sum er ikki hava serliga sterka luttakandi støðu í demokratisku skipanini, tí leikluturin hjá nevndunum er avmarkaður til at hava hoyringarrætt uttan sjálvstøðugan politiskan avgerðarrætt. Mett verður tí, at skipanin við staðbundnum nevndum ikki í sjálvari sær hevur serliga stóra ávirkan á staðbundna fólkaræðið, soleiðis sum skipanin er í dag.

Í samanløgdu kommununum er sera ymiskt, um og hvussu møguleikin við staðbundnum nevndum er nýttur. Tórshavnar kommuna og Runavíkar kommuna hava fleiri staðbundar nevndir, meðan Sunda kommuna ikki hevur staðbundnar nevndir. Í Sunda kommunu er umboðanin í kommunustýrinum hinvegin sera jøvn, við tað at øll øki í kommununi eru umboðað.

Kommunustýrislógin ásetur, at í einum kommunustýri skulu vera í minsta lagi 7 og í mesta lagi 17 kommunustýrislimir. Verða t.d. 7 kommunur í Føroyum, verða í mesta lagi 119 kommunustýrislimir í landinum tilsamans. Til samanberingar kann nevnast, at vit í dag tilsamans hava 208 kommunustýrislimir.

Í greinini "Høvuðsbroytingar í sambandi við nýggju føroysku kommunustýrislógina"[10] verður víst á, at spurningurin um fólkaræðislig virði, atlit til umboðan og møguleikar fyri kjaki (deliberatión) ikki var til umrøðu, tá ið uppskotið til kommunustýrislógina frá 2000 varð gjørt.

Víst verður í greinini á vandan, at kommunusamanleggingar – uttan tillagandi broytingar í kommunustýrislógini – bera við sær, at væl færri kommunupolitikarar verða fyri hvønn borgara. Hetta skulu vit síggja í lýsinum av, at talið á kommunustýrislimum hevur fólkaræðisligan týdning, tí at jú fleiri veljarar eru fyri hvørt valda umboðið, jú verri er umboðanin, og færri sjónarmið verða harvið umboðað.

Hóast útlit eru til, at spurningurin um umboðan sum frá líður mest fer at verða viðkomandi í størri kommunum, verður í greinini víst á, at orsøk eisini er til at viðgera umboðanina og samansetingina av kommunustýrunum í smáu kommununum. Tað er sera

[10] Bárður Larsen "Høvuðsbroytingar í sambandi við nýggju føroysku kommunustýrislógina" í Jákupsstovu, Beinta í, red: *Kommunupolitikkur,* Fróðskapur - Faroe University Press, 2008, s 86-88.

týðandi, at so ymisk áhugamál og politisk sjónarmið sum møguligt eru umboðað í nevndum ella stýrum.

Boðskapurin í greinini er tvítáttaður. Ein vegin er tað hart hjá limum í smáum nevndum við t.d. 3 limum at fara í minniluta, tí hetta “kostar” ov nógv í viðurskiftunum til starvsfelagarnar. Tí “noyðist” minnilutin mangan at vera samdur við meirilutanum. Hinvegin: hóast tað er ringt at vera í minniluta, kann ein minniluti í sjálvt heilt smáum nevndum og stýrum ávirka meirilutan, so at hann mýkir sína støðu.

Ein spurnakanning frá 2008 stuðlar í ávísan mun hesi fatan, at talið 3 ikki er nøktandi, tí uml 60 % av teimum spurdu frá heilt smáu kommunustýrunum við 3 limum meintu, at hesi kommunustýri hava verið ov smá.[11]

## 2.2. Kommunustødd, virkisføri og sjálvræði

Fyri at kunna taka spurningin um fólkaræðisligu atlitini, sum omanfyrinevnda grein vísir á ikki vóru við í sambandi við 2000-lógina, inn í viðgerðina nú, er neyðugt ikki einans at hugsa um kvantitativ fyribrigdi sum stødd, virkismegi og umboðan, men eisini um meira kvalitativ týðandi fyribrigdi sum sjálvræði og ávirkan[12].

Kommunala sjálvræðið er avgerandi, tá ið vit viðgera spurningin um virkismegina hjá kommunum í mun til kommunustødd. Kommunalt sjálvræði er bæði ein spurningur um *førleikan*, ið kommunan sum umsitingarligur myndugleiki hevur at virka, og *frælsið* kommunan hevur at virka; men tað er eisini ein spurningur um *fólkaræðisligu luttøkuna* og ta *ávirkan,* borgarin hevur á avgerðirnar, ið tiknar verða.

Tað hevur týdning, at kunnleikin á staðnum um viðurskiftini verður brúktur – at kommunan kann laga vavið av tænastum til tørvin á staðnum, so at tilfeingið verður betur gagnnýtt í mun til tørvin á staðnum. Men skal hetta virka eftir ætlan, hevur tað minst líka stóran týdning, at kommunali myndugleikin saman við borgarunum í

---

[11] Sí Jákupstovu og Kjersem 2008, s. 76. Kortini er áhugavert, at hóast meira prinsipiellar fólkaræðisligar ivar, ið kunnu verða førdir fram móti ov lítlari umboðan í kommunustýrunum, vísir kanningin, at politikararnir í øðrum enn heilt smáu kommununum sum heild hava verið nøgdir við støddina á kommunustýrinum.

[12] Granskingarúrslit úr Noregi vísa, at hetta at norsku kommunurnar so at siga eru neyvt reglubundnar á øllum økjum, ger af fólk flest hava eina hugmynd um at kommunupolitikkur er embætisførðsla, heldur enn politikkur, og av tí  sama er alt meira trupult at finna valevni til kommunuvalini.

kommununi hevur *møguleika* at raðfesta og gera av, *hvørjar* uppgávur skulu loysast, *hvussu* tær skulu loysast, og harumframt at fíggjarlig rúmd er til at geva hesum frælsi innihald. Um málsøkini verða so reglubundin, tá ið tey verða løgd út til kommunurnar, at uppgávan hjá kommununum einans verður at seta frammanundan givnar staklutaloysnir í verk, verður leiklutur kommununnar innantómur, samstundis sum demokratiska ábyrgdin fyri økjunum forfjónast, tí tá liggur hon hvørki hjá landinum ella kommununum.

## 2.3. Samspælið millum umsitingarorku og ávirkan

Eitt týdningarmikið samspæl er sostatt millum støddina á fólkaræðisligum eindum og møguleikarnar fyri, at ein fólkaræðislig eind kann virka demokratiskt í verki. Um vit hyggja eftir møguleikunum hjá borgarum at fáa vitan um og ávirka avgerðir í lokalsamfelagnum og halda hetta upp ímóti førleikanum og orkuni ella umsitingarorkuni hjá myndugleikanum, kunnu vit fáa eina rættiliga greiða mynd av hesum samspæli[13].

Í mynd 1 eru fyribrigdini umsitingarorka og møguleikar at ávirka sett inn í eina k-skipan, so at vit kunnu fáa eina mynd av, hvussu størri og smærri eindir virka í mun til hesi fyribrigdi.

---

[13] Dahl, R.A. og Tufte, E.R. vóru fyrstir at lýsa hetta samspælið í slóðbrótandi verkinum *Size and Democracy,* Standford Univeristy Press, Stanford, Calif.,1973. Grundgevingarnar, ið eru nýttar her, eru betur lýstar í greinini “Kommunala sjálvræðið í eini broytingartíð” hjá Ingibjørg Berg í Jákupsstovu, Beinta í, red: *Kommunupolitikkur,* Faroe University Press, 2008, s 49-71.

**Mynd 1**

*Møguleikin at ávirka og umsitingarorka hjá fólkaræðisligum eindum*




Vit kunnu til dømis ímynda okkum, at A er eitt idealsamfelag, B er Føroyar, C er ein stór kommuna og D er ein heilt lítil kommuna. – Vit kunnu ikki siga nakað um, hvør eind virkar betur enn onnur, tað veldst bæði um virðini hjá borgarunum og um málsøkini, sum eindin hevur ræði á.

Tá ið vit skipa størri kommunur fyri at skapa sterkari og virkisførari eindir, er hetta bert ein háttur at tryggja, at eindin, sum skal taka ímóti einum málsøki, er passaliga stór og umsitingarsterk. Fyri at kunnu avgera, um kommunan nú eisini fer at umsita málsøkið betur og hóskiligari enn landið, er neyðugt, at vit eisini taka støðu til, *hvussu* málsøki verða løgd til kommunurnar. Vit mugu við øðrum orðum hyggja eftir, hvørji onnur viðurskifti samstundis hava ávirkan á møguleikarnar hjá lokalu, fólkaræðisligu skipanini at ávirka málsøkini, ið hon umsitur. Eitt nú er sera avgerandi at vita, í hvussu stóran mun landið velur at regluseta málsøki, tá ið tey verða løgd til kommunurnar. Eru vit ikki umhugsin, kann úrslitið lætt fara at verða, at virkisførið verður minni, samstundis sum møguleikin fyri fólkaræðisligari ávirkan verður minni.

Valið ímillum eina skipan við stórari umsitingarorku at loysa uppgávur og eina skipan, har borgarar hava sum mest av ávirkan á lokalpolitikkin, kann vera ymiskt. At lýsa nærri, hvussu hin einstaki (ella allir borgarar í meðal) kunnu hugsast at velja hetta sambandið millum *umsitingarorku* og *ávirkan*, hava vit í mynd 2 lænt hugtakið indifferenskurvar[14] úr búskaparfrøðini.

**Mynd 2**

*Hvussu borgarar kunnu hugsast at velja millum ávirkan og umsitingarorku í ymiskum málum*




Tað, sum indifferenskurvarnar lýsa, er: Hin einstaki (ella tey flestu í meðal í samfelagnum) eru eins væl foreint við, hvørji skipan málsøki a verður viðgjørt í, bara hon liggur onkrastaðni á indifferenskurvu A. Og sama er fyri øki b: bara skipanin gevur onkra av ímyndaðu samansetingunum á indifferenskurvu B. Tað vil siga: í ávísan mun verður ein skipan, ið er effektiv og álítandi, men lítið gjøgnumskygd og ring at ávirka,

[14] Indifferenskurvur verða vanliga nýttar at vísa nøgdarsamanseting av tveimum vørum ella tænastum, sum geva einum húsarhaldi somu nyttu ella nøgdsemi. Kurvan er fallandi, tí minni nøgd av eini vøru/tænastu má kompenserast við eini størri nøgd av hinari vøruni, um húsarhaldið skal varðveita eitt sambæriligt nyttustig.

mett at vera “líka góð” sum ein skipan, ið er heldur minni sterk og støðug, men afturfyri er meira gjøgnumskygd og lættari at ávirka.

Harafturímóti hevði ónøgd verið, um a varð viðgjørt í eini skipan, har samansetingin millum ávirkan og umsitingarorku er sum í A1, ella b varð viðgjørt í B1, tí allastaðni á indifferenskurvuni A kunnu bæði ávirkan borgaranna og umsitingarorkan í senn vera hægri í mun til málsøkið a, enn í A1, og sama er við b í mun til B og B1.

Sum vit síggja, er hallið á indifferenskurvunum A og B eitt sindur ymiskt. Í veruleikanum man hallið á indifferenskurvunum helst vera rættiliga ymiskt, alt eftir hvørja politiska sannføring tú hevur, bæði um fólkaræði yvirhøvur og um einstaka málið ella málsøkið.

Vit kunnu til dømis ímynda okkum, at indifferenskurvurnar fyri tvey málsøki kunnu vera sum í mynd 3.

**Mynd 3**

*Ávirkan og umsitingarorka í sambandi við ymisk málsøki*




A kundi her t.d. ímyndað eitt málsøki a við týðandi stórrakstrarfyrimunum, eitt nú løgregla, meðan B ímyndar eitt málsøki b, har onnur atlit viga meira enn stórrakstrarfyrimunir, t.d. at umstøðurnar á staðnum telja við. Eitt dømi kundi verið býarskipan sum reguleringsøki. Her kundu indifferenskurvarnar bent á, at málsøki, sum líkjast b, eru betur egnað at liggja hjá eini kommunu, har sum lætt er hjá borgaranum at gera sína ávirkan galdandi, meðan málsøki sum líkjast a liggja betur hjá landsmyndugleikunum, ið hava lutfalsliga størri umsitingarorku.

Í mynd 4 ímyndar A indifferenskurvuna fyri eitt øki, sum liggur hjá landinum. Økið er lítið reglusett, og tí er lutfalsliga lætt hjá borgarunum at ávirka gongdina á økinum, samstundis sum umsitingarorkan hjá landinum – um alt annað er óbroytt – altíð er størri.

Nú ímynda vit okkum, at sama øki verður lagt kommununum at umsita. Kommunurnar hava minni umsitingarorku enn landið. Í staðin hava kommunurnar ta styrki, at tær kunnu "stinga fingurin í jørðina" og laga tilboðini til serliga tørvin á staðnum. Men um nú landið setur sær fyri við lóg at rættartryggja krav borgarans um eins tænastur, sama hvar í landinum borgarin býr, verður hetta, sum skuldi verið styrkin við kommunalu skipanini, ikki fullnýtt. Eftir stendur tí bert, at fíggjarliga og fyrisitingarliga orkan hjá kommunum sum heild er minni enn hjá landinum.

**Mynd 4**

*Borgaranna virkisføri og umsitingarorka í sambandi*
*við at málsøki verður flutt og neyvt reglusett*




At økið er neyvari reglusett enn áður ger eisini, at tað er truplari hjá borgaranum at ávirka tænastuútboðið. Samstundis er minni áhugavert hjá landspolitikarum at arbeiða við økinum, tí tað er kommunalt.

Úrslitið av, at øki verða løgd kommununum at umsita *og samstundis verða neyvt reglusett*, er tí ikki, at økið verður flutt eitt petti í landsynning eftir somu

indifferenskurvu í K-skipanini (sum t.d. úr a1 í a2, men at indifferenskurvan øll sum hon er verður flutt í ein útsynning, tí umsitingarorkan minkar, *samstundis sum* fólkaræðisliga virkisføri borgaranna minkar. Myndugleikin orkar verri at gera tilboðini, soleiðis sum borgarin ynskir, *samstundis sum* tyngri verður hjá borgarunum at ávirka skipanina, hóast hon nú liggur hjá kommununum at umsita.

## 2.4. Samanumtikið

Kommunusamanleggingar – uttan tillagandi broytingar í kommunustýrislógini – bera við sær, at væl færri kommunupolitikarar verða fyri hvønn borgara. Hetta skal síggjast saman við, at tal á kommunustýrislimum hevur fólkaræðisligan týdning, tí at jú fleiri veljarar eru fyri hvørt valda umboðið, jú verri er umboðanin, og færri sjónarmið verða harvið umboðað. Hetta hevur víst seg at vera galdandi fyri allar framdar samanleggingar seinastu árini, undantikið Sunda kommunu, har allar fyrrverandi kommunur eru umboðaðar í kommunustýrinum.

Skipanin við staðbundnum nevndum er ein roynd at fáa ymisku staðbundnu sjónarmiðini at vera verandi í skipanini, men nevndirnar hava ikki víst seg at hava serliga stóra ávirkan á lokaldemokratiið, soleiðis sum tær virka í dag.

Spurningurin er, hvat ein kommuna skal vera før fyri. Í grundregluni er hetta eitt val um javnvigan ímillum eina skipan við stórari umsitingarorku at loysa uppgávur og eina skipan, har borgarar hava sum mest av ávirkan á lokalpolitikkin. Vit kunnu droyma um eina skipan, har hesi fyribrigdi kunnu sameinast, men í veruleikanum er hetta altíð eitt val, sum er ymiskt fyri ymisk málsøki, tí hesi málsøki hava ymiskan tørv á bæði umsitingarorku og lokaldemokratiskari viðgerð. Tí er neyðugt at hava hetta valið við, tá ið gjørt verður av, hvørji málsøki liggja best hjá kommununum og hvørji hjá landinum.

Tað hevur týdning, at kunnleikin á staðnum um viðurskiftini verður brúktur – at kommunan kann laga útboðið av tænastum til lokala tørvin, so at tilfeingið verður betur gagnnýtt. Men skal hetta virka eftir ætlan, ræður minst líka nógv um, at kommunali myndugleikin saman við borgarunum á staðnum hevur *møguleika* at raðfesta og gera av, hvørjar uppgávur skulu loysast, hvussu tær skulu loysast, og harumframt at fíggjarlig rúmd er til at geva hesum frælsi at raðfesta og gera av innihald.

Tí um málsøkini verða neyvt reglubundin, tá ið tey verða løgd kommununum, verður leiklutur kommununnar innantómur, samstundis sum demokratiska ábyrgdin fyri økjunum forfjónast, tí tá liggur tað hvørki hjá landinum ella kommununum.

Tí er ávísur vandi fyri, at vit við útlegging í veruleikanum fara at spæla okkum stórrakstrarfyrimunin við at økini verða verandi lands av hendi uttan at fáa nakað afturfyri, tí neyv stýring við lógarreglum ger, at tað, sum skuldi verið sjálv aðalstyrkin við lokala fólkaræðinum – hetta at finna staðbundnar grundaðar og tillagaðar loysnir saman við borgarunum – ikki letur seg gera.

Spurningarnir um, hvat slag av lokalum fólkaræði vit vilja hava, hvussu politiski viljin er til at leggja út avgerðarmyndugleika til lokaløkini, og hvussu reglusett málsøkini, ið verða løgd til kommunurnar, skulu vera, eru týðandi spurningar í eini tilgongd at umskipa kommunubygnaðin. Hetta eru spurningar, sum eiga at verða viðgjørdir saman við øðrum atlitum av meira økispolitiskum og búskaparligum slag - og áðrenn, ella í øllum førum samstundis sum, spurningarnir um hvørji málsøki skulu flytast, og hvørjar eindirnar skulu vera.

## *3. Um atlit og endamál*

### 3.1. Hví kommunalt sjálvræði og hvussu?

Staðbundna fólkaræðið er ein hornasteinur í statsligum (og statslíknandi) fólkaræðisligum skipanum. Kommunur tryggja eitt fólkaræðisligt fjølbroytni, sum eitt eintýtt miðstýri ikki kann bjóða. Lokal politisk umboð hava bæði meira hjarta fyri lokalum politiskum spurningum og kenna eisini hesar spurningar betur. Í Føroyum sum í øðrum londum er tískil neyvan annað enn undirtøka fyri, at samfelagið skal skipast í lokalar fólkaræðisligar stovnar, í kommunur.

At upprunaliga størru føroysku kommunurnar um aldaskiftið 1900 fóru sundur í so stóran mun, at kommunurnar seinni í høvuðsheitum skipaðu seg um bygdina, hevur helst sína frágreiðing í, at lokali bygdarsamleikin gav kommununi eina undirtøku, sum størra

eindin ikki kundi geva. Grundarlagið man hava verið ein sjálvstýrishugsan, ið metti lokalpolitisku eindina vera tann natúrliga felagsskapin, sum bygdin var.

Hetta upprunaliga grundarlag undir føroysku kommununum kemur undir trýst, so hvørt sum tað almenna tekur á seg alt fleiri uppgávur og so hvørt sum eisini kommunurnar umsita størri part av vaksandi almennu tænastunum. Smáu bygdarkommunurnar vóru helst rímiliga stórar til at taka sær av klassisku kommunalu forsýningaruppgávunum, men heldur veikar til vaksandi vælferðarfyrisitingina.

Tvístøðan tykist tí vera at velja ímillum antin at halda fram uttan stórvegis broytingar og við – samanborið við landið – ótýðandi kommunalum uppgávum ella at kommunurnar verða umskipaðar í størri eindir, ið umsitingarliga kunnu taka á seg størri part. Tað tykist rímiliga greitt, at almennu Føroyar seinastu árini hava valt seinnu loysnina.

Tá ið nýggju føroysku kommunurnar tí eftir øllum at døma fara yvir um mørkini fyri higartil kendum bygdarsamfeløgum, so er spurningurin, um grundarlagið undir kommununum heilt skal fara frá lokalum samleika og yvir móti øðrum sjónarmiðum. Skal landið nú mest skipa nýggju kommunurnar í hóskandi eindir, sum – sama hvar borgararnir kenna ein samleika – út frá einum sjónarmiði um betri tillaging eru effektivar at umsita vælferðarsamfelagið?

Nevndin metir, at slík loysn er ónøktandi, tí tá verða ov lítlir munir á einum kommunalum fólkaræði og einari lokalari landsfyrisiting. Sjónarmiðið um tað frammanundan givna – tann lokala samleikan – má framvegis eisini hava týdning fyri, hvussu formligi karmurin (kommunan) um lokalsamfelagið verður tillagaður. Báðar loysnir mugu raðfestast. Nýggju kommunurnar mugu verða skipaðar í eini javnvág millum atlit til eina dygdargóða umsiting av vælferðaruppgávum nær við borgaran og einum atliti til undirtøku – legitimitet – so kommunurnar ikki einans verða umsiting, men eisini eitt livandi lokalpolitiskt, fólkaræðisligt forum.

### 3.2. Endamál við útlegging/broyting

Við støði í arbeiðssetninginum hjá nevndini skal nevndin koma við tilmæli um, hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu vera og hvussu hesar eindir skulu skipast, koma við tilmæli um javningarskipan, koma við tilmæli til raðfesting av greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur og tilmæli um, hvussu ein møgulig blokkstuðulsskipan skal skipast.

Tilmælini hjá nevndini taka støði í ávísum fatanum av, hvat endamálið er við kommunalum sjálvræði og hvønn týdning hetta hevur í mun til t.d. effektivitet, hvussu stórar og hvussu sjálvstøðugar kommunalu eindirnar eiga at vera og hvussu teirra myndugleiki skal avmarkast mótvegis landsmyndugleikunum.

Yvirskipað er nevndin samd um at leggja dent á, at tær broytingar og loysnir, ið mælt verður til, í størst møguligan mun stremba eftir at vera so einfaldar og ódýrar at umsita sum gjørligt.

### 3.3. Meginreglur

Nevndin hevur í arbeiði sínum lagt til grund, at yvirskipaða endamálið við umskipanini av kommunala geiranum er at:

6. Flyta tey øki, sum við fyrimuni kunnu flytast til kommunurnar, og fáa eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur
7. Fíggjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum
8. Uppgávurnar verða loystar, so tær eru í greiðari javnvág millum at verða fullgóðar samfelagsbúskaparliga og so nær borgarunum, sum til ber
9. Kommunurnar skulu vera burðardyggar eindir, ið eru førar fyri at átaka sær tær uppgávur, ið verða lagdar til kommunurnar, og at røkja og umsita hesar uppgávur sjálvstøðugt
10. Uppgávur, ið verða lagdar til kommunurnar, skulu kunna lagast til tann staðbundna tørvin

Niðanfyri eru útgreinað nøkur virði aftan fyri kommunala sjálvræðið, ið fyri ein part taka støði í omanfyri nevndu meginreglum, og hartil nakrar tvístøður, ið nevndin hevur umrøtt í sambandi við viðgerðina.

### 3.4. Greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti

Eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti er týdningarmikið í einum umboðandi fólkaræði sum okkara. Landspolitikarar og kommunupolitikarar eru ofta í kapping um at taka sær æruna av teimum framstigum, ið henda, og somu politikarar eru skjótir at lasta hvønn annan fyri tað, sum virkar minni væl. Veljarin eigur í einum fólkaræði at kunna krevja politikararnar til ábyrgd fyri førda politikkin. Men í eini skipan við ógreiðum og umskarandi heimildum veit veljarin ikki, hvør politisk og umsitingarlig eind – land ella kommuna – ið er rætti myndugleiki at rætta mistøk. Lokalpolitikarin og landspolitikarin turka av upp á hvønn annan, og borgarin er á berum.

Ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti er eisini tvørrandi og uppslítandi fyri samstarvið millum land og kommunur. Sum dømi um øki, sum av formligum ella politiskum orsøkum hava havt við sær ógreiðu í mun til býtið av uppgávu- og ábyrgd, kann verða víst til eldraøkið, børn við serligum tørvi og fólkaskúlaøkið.

Tí ivast fáur í, at tað er skilagott at seta sær sum mál at gera greiðari skilnað millum land og kommunur í mun til ábyrgd og heimildir. Men hinvegin er greitt, at tað krevur tung tøk og stórar politiskar avgerðir at rætta í ógreiða býtinum.

### 3.5. Ein greiðan og effektivan almennan geira

Í samsvari við meginregluna um at umsita á fullgóðan hátt samfelagsliga, er umráðandi, at tann geirin, sum umsitur økið, verður skipaður greiðari og effektivari. Føroyar eru minni og orkufátækari samfelag enn okkara grannalond. Samstundis er okkara almenni geiri bygnaðarliga skipaður um leið sum tann í okkara grannalondum við fólkatali faldað við um leið 100. At føroyingar í mun til at skipa almenna geiran í so stóran mun hava elt,

sum fyri er slóðað, er ein bygnaðarligur trupulleiki, ið tað verður avbjóðandi at fáa bøtt um.

Í mun til effektivitet, so kann verða tosað um annaðhvørt at umsita búskaparlig virði effektivt ella at duga væl at skilja lokala tørvin og tillaga kommunalu tænastuna eftir hesum. Fyritreytirnar eru betri hjá eini kommunu at kenna og røkja tørvin í lokalsamfelagnum, men hesin effektivitetur fer helst at versna, so hvørt sum kommunalu eindirnar verða størri og myndugleikin verður longri burtur frá borgarunum. Hinvegin kann búskaparligi og fíggjarpolitiski effektiviteturin væntast at økjast við størri kommunum, bæði tí hesar eindir fara at hava tørv á fleiri førleikakrevjandi størvum og lokalpolitikarin verður tað longri frá borgaranum til ikki at lata seg trýsta so nógv av persónligum viðurskiftum heldur enn av politiskt yvirskipaðum meira sakligum og objektivum virðum.

### 3.6. Størri lokala ávirkan

Jú minni ein politisk eind er, jú størri møguleikar hava borgararnir fyri at fáa ávirkan á avgerðirnar hjá sínum politiska stýri. Men samstundis verður politiska eindin bert at takast við samfelagsmál av minni týdningi, og tí verður politiska ávirkanin hjá borgaranum í innihaldsliga lítlu eindini lítil.

Hetta tykist vera tvístøðan, har ið veljast skal: øðrumegin stórar kommunueindir, har eindin hevur týdningarmikil málsøki at umsita, men borgararnir hava lítla ávirkan, og hinumegin at hava smáar kommunueindir, ið ikki hava týðandi politisk málsøki at umsita, men har borgararnir hava størri ávirkan á hesi smærri økini. Sum nevnt í innganginum er greitt, at rákið í seinastuni í føroyskum kommunupolitikki hevur verið at raðfesta tað fyrra, so at kommunalu eindirnar skulu hava eina hóskandi stødd, ið ger tað møguligt, at meira týðandi samfelagsuppgávur kunnu verða lagdar út í økini.

Nevndin metir tørv verða á at vísa á hesi mótstríðandi viðurskifti og at tað hevur týdning, at hesi viðurskifti verða havd í huga, tá ið avgerðir verða tiknar ella broytingar gjørdar.

## 3.7. Rættartrygd

Rættartrygd er eitt virði, ið ein kann leggja nógv ymiskt í. Grundleggjandi er tó semja um nakrar kjarnutýdningar av hesum virði, serliga kravið um somu viðferð av øllum borgarum. Síðan kann dentur aftur verða lagdur á somu viðferð og rættindi í mun til vælferðartænastur og harnæst somu viðferð í mun til fyrisitingarrættarligu tilgongdina – meira klassisku rættartrygdarfatanina. Verður hugsað um slíka fatan, at allir borgarar í einum landi í mestan mun skulu hava somu vælferðartænastur og rættindi, so kann ein kommunal skipan við høgum stigi av lokalum sjálvræði fatast sum ein hóttan ímóti rættartrygdini. Ymiskleiki í lokalsamfeløgunum, ymisk fíggjarlig og politisk styrki og ymiskar raðfestingar fara at forða fyri, at øll fáa so eins tilboð sum møguligt. Amboð at forða fyri slíkum ójavna millum kommunur finnast sjálvsagt, serliga ymiskar javningarskipanir, men tær merkja sjálvsagt samstundis, at kommunala sjálvræði júst verður skert.

Verður hinvegin hugsað um klassisku rættartrygdarfatanina við fyrisitingarlógum og grundreglum, ið skulu tryggja øllum borgarum somu formligu viðferð frá almennum myndugleikum, so er eitt styrkt kommunalt sjálvræði ikki endiliga ein hóttan. Kommunur hava skyldu til at tulka somu lógir og fyrisitingarrættarligu grundreglur á sama hátt sum aðrar kommunur og landið, og landið kann gera sítt til at skipa effektivt eftirlit og kærumøguleikar. Kortini vilja kommunur undir ávísa stødd gerast ein trupulleiki, tí tær hava neyvan neyðuga orku til eina fyrisitingarrættarliga nøktandi umsiting. Eisini er vert at hugsa um, at avgerðin, ið fellur í fyrsta instansi, ella har kommunan er endaligur myndugleiki, sjálvandi hevur týdning fyri rættartrygdina, m.a. tí nógvar avgerðir ongantíð verða klagaðar ella kærdar. Tí eigur eitt minstamark út frá atlitum til klassiska rættartrygd at verða sett fyri kommunustødd.

# 3. kapittul. Einstøku málsøkini

## *1. Lýsing og viðgerð av uppgávu- og ábyrgdarbýtinum*

Kommunala umskipanarnevndin skilur politiska ynskið um broytingar soleiðis, at tað ikki bara snýr seg um at fáa eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti, men at ynskið samstundis fevnir um miðfirring av uppgávum, soleiðis at uppgávur, sum landið í dag hevur ábyrgdina av, skulu flytast til kommunurnar, ber hetta til og kunnu kommunurnar loysa uppgávuna á skynsaman og burðadyggan hátt. Við øðrum orðum er miðfirring eitt endamál ella ynski í sær sjálvum.

Politiskt og fyrisitingarliga er sostatt tørvur á at gera eina meting av, hvussu tann politiska ávirkanin skal býtast millum tær ymisku kommunalu eindirnar og landið.

Spurningurin um býtið av teimum almennu uppgávunum millum ymisk støði innan sama myndugleika ella millum ymiskar myndugleikar er ikki nakað støðufest, ið skal staðfestast eina ferð med alla. Í grannalondum okkara eru støðugt metingar um tørvandi broytingar í viðurskiftunum millum land og kommunur. Hesar metingarnar eru grundaðar á m.a. politiskar hugsanir um spurningar sum miðsavnan í mun til miðfirring, líkskap í mun til ólíkskap – bæði viðvíkjandi íbúgvatali og landafrøði, tað at halda fast við søguligar traditiónir, fíggingarhættir av almennum veitingum umframt ymiskar fatanir av, hvat ið skal til fyri at røkka munadyggum og burðadyggum veitaraviðurskiftum hjá tí almenna. Av tí at politiska valdið er skiftandi, fara tað eisini at vera skiftandi politiskar fatanir av tí, sum omanfyri er nevnt.

Í grannalondunum síggja vit eisini, at broytingar verða gjørdar í uppgávubýtinum millum tey ymisku stigini hjá landi og kommunum. Men hesar broytingar ganga ikki altíð sama veg, og ein stórur partur av frágreiðingini viðvíkjandi skipan av tí miðfirraða partinum hjá tí almenna liggur tí helst í søguliga og mentanarliga arvinum.

Politiskt og fíggjarliga hava vit í Føroyum ávísa miðfirring, soleiðis at skilja, at kommunurnar og fólkavaldu umboðini har umsita fleiri av teimum vælferðartænastum, ið borgarar okkara hava rætt til ella hava í boði, umframt at kommunurnar eru við til at fíggja enn fleiri av hesum tænastum. Kommunurnar standa sostatt fyri umleið 1/4 - 1/3

av almennu útreiðslunum. Hetta hevur sum meginreglu við sær, at góðir møguleikar áttu m.a. at verið fyri fólkaræðisligum eftirliti, einfaldni fyri brúkaran, høgari góðsku, stýring og samskipan, umframt rationellum loysnum. Hetta eru atlit ella umstøður, ið flestu kunnu taka undir við og viðmæla.

Nevndin er av teirri fatan, at ein framtíðar bygnaður, har uppgávurnar verða loystar so nær borgaranum sum gjørligt, gevur møguleika fyri at tillaga loysnirnar til staðbundin viðurskifti og skapa eitt vælgrundað fólkaræðisligt støði fyri valdu loysnunum. Nevndin metir tí, at tað hevur týdning, at miðfirringar í framtíðini eisini hava í huga og leggja dent á hesi viðurskifti í sambandi við broytingar í uppgávubýtinum.

Samstundis skal kjarnin í tí kommunala sjálvstýrinum eisini havast í huga, nevniliga at kommunurnar sjálvar kunnu raðfesta tær kommunalu uppgávurnar og skipa fyri, hvussu tær skulu loysast. Kommunurnar skulu harumframt sjálvar gera av, hvørjar uppgávur - umframt tær lógarbundnu – tær vilja røkja.

Niðanfyri verður komið nærri inn á omanfyri nevndu viðurskifti og atlit og endamál í sambandi við  útlegging av uppgávum til kommunurnar.

## *2. Meting og tilmæli viðvíkjandi eldrarøktarøkinum*

### 2.1. Lýsing viðv. eldrarøktarøkinum

Arbeiðssetningurin áleggur bólkinum at gera eina allýsing av eldraøkinum, sum kann leggjast út til kommunurnar at umsita. Eldraøkið fevnir bæði um eldrarøkt og um peningarligar veitingar til eldri (t.d. fólkapensjón). Bólkurin viðger tann partin av eldraøkinum, sum fevnir um eldrarøktina, tí tað ætlandi verður hesin parturin av eldraøkinum, sum verður lagdur út til kommunurnar.[15]
Eldrarøktin fevnir um hesi øki:

[15] Í álitinum hevur nevndin valt at brúka orðið eldrarøkt sum felagsheitið, eisini tá talan kann verða um peningaligar veitingar til eldri.

- Ellis - og røktarheim
- Eldrasambýli
- Heimarøkt (heimahjálp, heimasjúkrarøkt og økisterapi)
- Aðrar vælferðartænastur til eldri (umsorganarbeiði og ansingarsamsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum).

## 2.2. Skipan av eldrarøktini í dag

Tað er Nærverk, sum stovnur undir almannamálaráðnum, sum umsitur eldrarøktartænasturnar og skipanina sum heild. Meginskrivstovan á Nærverki hevur yvirskipaðu leiðsluna av Heimatænastuni [16], Trivnaðartænastuni og Stuðulsfólkaskipanini.[17] Meginskrivstovan hevur yvirskipaðu umsitingina av játtanum og roknskaparhaldi um hendi. Harumframt verða lønar- og starvsfólkamál fyri alla skipanina umsitin har. Eisini verða tvørgangandi fyrisitingarligar uppgávur, journalleiðsla og KT umsitin av Meginskrivstovuni. Leiðarin fyri Heimatænastuna og ein málsviðgeri taka sær burturav av Heimatænastuni. Lønaravgreiðsla, fíggjar/roknskaparhald, KT, journal, móttøka og skrivari eru felags við hini økini á Meginskrivstovuni. Sambært Nærverk eru uml. 6 ½ ársverk knýtt at yvirskipaðu fyrisitingini av eldrarøktini.

## 2.3. Verandi økisbýti innan eldrarøktina

Heimarøktin er eins og alt eldraøkið skipað í 6 sjálvstøðug øki, sum fevna um heimarøkt til heimabúgvandi brúkarar og brúkarar, ið búgva á eldrasambýlum. Harumframt eru røktarheim og aðrir bústovnar, sum meir og minni eru samskipaðir partar av økinum. Í hvørjum av teimum 6 økjunum er settur ein økisleiðari.

- **Øki 1:** Suðurstreymoy: Tórshavn kommuna
- **Øki 2:** Vágar /Norðstreymoy
    - Sørvágs, Vága,

[16] Heimatænastan veitir eldrarøktartænastur.
[17] Trivnaðartænastan veitir bú- og virkistilboð til fólk við serligum tørvi. Stuðulsfólkaskipanin veitir stuðul til heimabúgvandi fólk við serligum tørvi.

    - Vestmanna, Kvívíkar,
    - Sunda og Eiðis[18] kommunur.
- **Øki 3:** Eysturoy:
    - undantikið Sunda og Eiðis kommunur
- **Øki 4:** Norðuroyggjar
- **Øki 5:** Suðuroy
- **Øki 6:** Sandoy

## 2.4. Verandi uppgávu- og ábyrgdarbýti á eldraøkinum

Niðanfyri verður lýst verandi uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, tá ið tað snýr seg um eldrarøkt.

- **Ellis- og røktarheim:** Sambært § 32 stk. 1 og 4 í "Lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. mars om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 99 frá 1. novembur 2007" – (hereftir nevnd forsorgarlógin), er tað landið, sum kann stovna ellis- og røktarheim, og landið hevur sambært § 40 skyldu til at gjalda allar útreiðslur, sum standast av lógini. Búfólk gjalda tó 10 % av inntøku, ið tey hava, umframt pensjónina.

- **Eldrasambýli:** Sambært kunngerð nr. 67 frá 18. mai 2006 um eldrasambýli kunnu kommunur og sjálvsognarstovnar stovnseta eldrasambýli, men landsstýrismaðurin skal góðkenna tey. Landið rindar raksturin av eldrasambýlunum t.e. starvsfólkaorkuna burtursæð frá náttarvakt, sum kommunurnar endurrinda landinum. Kommunurnar taka sær av dagliga rakstrinum av sambýlunum í sambandi við leiguinntøkur, innkeyp, olju o.a. Búfólk gjalda fyri uppihald og inntøkutreytað egingjald fyri heimarøkt í 30 tímar um mánaðin.

- **Íløgur:** Í 2009 hevur løgtingið samtykt, at skipanin við at landið kann lata kommunum og sjálvsognarstovnum stuðulslán til bygging av ellis- og

[18] Tá talan er um upptøku á eldrasambýli og heimarøkt, er Eiðis kommuna partur av øki 2 og tá talan er um upptøku á ellis- og røktarheimi og heimi fyri minnisveik er Eiðis kommuna partur av øki 3.

røktarheimum og eldrasambýlum skal halda fram. Stuðulsupphæddirnar eru broyttar úr ávikavist 500.000 kr. til 700.000 kr. og úr 50.000 kr. til 80.000 kr. sambært løgtingslóg nr. 48 frá 11. mai 2009 um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli. Viðmerkjast skal, at ikki fyrr enn 1. januar 2006 varð ásett við nýggjari § 2, at "Umsóknir um studningslán verða viðgjørdar við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum, innan ta landafrøðiligu eindina, sum kommunan liggur í. Í lógunum galdandi frá 2001 og fram til 2006 var eingin áseting um, at studningslán skuldu viðgerast við grundarlagi í tørvinum.

- **Heimarøkt** (heimahjálp, heimasjúkrarøkt og økisterapi): Sambært § 32 a í forsorgarlógini kann landið veita heimahjálp í økjunum undir Heimarøktarskipanini. Sambært § 40 í forsorgarlógini rindar landið útreiðslurnar av heimarøktini – tó áleggur § 40 stk. 3 kommunum at útvega hølir til heimarøktina. Harumframt er inntøkutreytað egingjald fyri heimarøkt.

  Sambært løgtingslóg nr. 88 frá 6. juni 1997 um Heimasjúkrasystraskipanin, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 17. mai 2000, er heimasjúkrasystraskipanin partur av Heimarøktini. Tað er landið, sum tekur sær av heimasjúkrasystraskipanini, og landið rindar útreiðslurnar av lógini.

- **Eldrarøkt í Sandoynni:** Eldrarøktin á Sandoynni er regulera í serstakari løgtingslóg um eldrarøkt á Sandoynni. Upprunaliga varð farið undir eina royndarskipan við samrakstri millum røktarheimsrakstur og heimarøkt í Sandoynni. Nú er talan um eina fasta skipan. Samraksturin av eldrarøktini merkir, at tað er ein leiðsla, ein upptøkunevnd og starvsfólkini eru sett í eldrarøktini. Harumframt er skipanin á Sandoynni serstøk tí búfólkini á ellisheiminum varðveita sína pensjón og rinda ístaðin fyri uppihaldið. Skipanin verður annars rikin sum ein landsstovnur og fyriskipað undir Nærverkinum.

- **Aðrar tænastur:** Mattænasta, koyritænasta og vitjanartænasta kunnu fyriskipast av kommununum við stuðli frá landinum. Tað er Almannastovan, sum umsitur hesa skipan. Kommunur veita eisini tænastur til eldri uttan at fáa stuðul frá landinum, serliga eftir at sparingar vórðu framdar í hesum fíggjarárinum er

kommununurnar partur vorðin størri. Tað eru eisini áhugafeløg kring landið, sum hava virksemi fyri eldri, bæði við stuðli og uttan at fáa stuðul frá landinum. Harumframt letur landið eisini ansingarsamsýning til avvarandi, sum átaka sær at ansa óhjálpnum yvir 67 ár heima.

**Tænasturnar í teimum 6 økjunum**

| *Tænastur/øki* | *Øki 1* | *Øki 2* | *Øki 3* | *Øki 4* | *Øki 5* | *Øki 6* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| ***Ellis- og røktarheimsbúpláss*** | 82 | 68 | 70 | 46 | 28 | 12 |
| ***Eldrasambýli*** | 41 | 22 | 73 | 26 | 26 | 12 |
| ***Heimarøkt***[19] | | | | | | |
| ***Tal av fólkum*** | 228 | 83 | 136 | 112 | 131 | 27 |
| ***Tal av tímum í miðal pr. brúkara*** | 6 | 5 | 4 | 5 | 3 | 3 |
| ***Vard dagtilboð*** | 20, harav 16 pláss til dement | 9 | 6 | 12 | - | - |
| ***Økisterapi*** | Ja | Ja | Seinni í ár | Ja | Ja | Ja |
| ***Náttarvakt*** | Koyrandi | Ja | Tilkallivakt | Eingin | Koyrandi | Eingin |
| ***Venjingartilboð*** | Ja | Ja | Eingi | Eingi | Eingi | Eingi |
| ***Mattænasta*** | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| ***Dagtilhald*** | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |

## 2.5. Fígging av eldrarøktini

Í forsorgarlógini er staðfest, at landið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av eldrarøktini og skal gjalda fyri eldrarøktartænastur, ið verða veittar sambært forsorgarlógini. Aðrar lógir gera tó, at gjaldsskyldan og harvið eisini uppgávu- og ábyrgdarskyldan verða meira ógreið.

[19] Tølini eru frá 2008 og eru fingin til vegar frá Hagstovu Føroya.

## Fígging av eldrarøktartænastum

| *Tænasta/gjaldsskylda* | *Býti millum land og kommunur* | *Egingjald* |
|---|---|---|
| ***Íløgur til ellis- og røktarheimsbúpláss*** | Land/kommunur ella land/ sjálvsognarstovnar | |
| ***Íløgur eldrasambýli*** | Land/kommunur ella land/sjálvsognarstovnar | |
| ***Rakstur til ellis- og røktarheimspláss*** | Landið | Búfólk rinda 10 % av inntøku, sum ikki er pensjón og samhaldsfasti |
| ***Rakstur til eldrasambýli*** | Landið rindar fyri starvsfólk – kommunan náttarvakt | Búfólk rinda fyri uppihaldið – búfólkið rindar inntøkutreytað egingjald fyri heimarøkt (í mesta lagi 30 t/mð.) |
| ***Heimarøkt*** | Landið rindar heimarøkt | Brúkarin rindar inntøkutreytað egingjald |
| ***Heimasjúkrarøkt*** | Landið rindar heimarøkt | Tænastan er ókeypis |
| ***Mattænasta/koyritænasta*** | Land/kommunur | Brúkarin rindar fyri mat og koyring |
| ***Venjingartilboð*** | Land/kommunur | Brúkarin rindar fyri koyring/venjing |

Samlaða játtanin á fíggjarlógini til eldrarøktina er um leið 343 mió. kr. til omanfyrinevndu tænastur (parturin hjá kommununum ikki við).

Av hesum fara í 2009 slakar 320 mió. kr. til røktarheim og heimarøktarøkið.

Umframt hetta verða 2,8 mió. kr. játtaðar til umsorgararbeiði og 15,2 mió. kr. til ansingarsamsýning.

Slakar 317 mió. kr. eru býttar ímillum tey 6 økini, og 2,8 mió. kr. eru felagsútreiðslur. Tað er ikki útgreinað, hvussu játtanin av ávíkavist umsorganararbeiði og ansingarsamsýningini verður býtt ímillum tey 6 økini.

**Yvirlit yvir fígging á eldraøkinum**

| Játtan/tús. | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 | Øki 5 | Øki 6 | Felags | SAMANL |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heimarøktin** | 25.274 | 8.270 | 10.179 | 9.542 | 10.979 | 3.527 | | **67.771** |
| **Økisterapi** | 430 | 430 | 470 | 430 | 430 | 430 | 78 | **2.698** |
| **Sambýli Dagtilhald** | 9.985 | 7.227 | 18.725 | 7.884 | 8.213 | 4.271 | | **56.303** |
| **Røktarheim** | 69.156 | 33.519 | 41.290 | 22.662 | 14.202 | 4.734 | | **185.564** |
| **Serligir brúkarar** | 1.200 | 760 | 1.600 | 600 | 200 | | | **4.370** |
| **Felags** | | | | | | | **2.800** | **2.800** |
| **Samanlagt** | **106.045** | **50.207** | **72.263** | **41.119** | **34.023** | **12.962** | **2.800** | **319.419** |

Í talvuni omanfyri sæst, at nógv tann størsti parturin av játtanini fer til eldrabústaðir. Góð 75 % av játtanini til eldraøkið fara til eldrabústovnarnar, meðan sløk 25 % fara til heimarøktina og økisterapiina.

## 2.6. Ellis- og røktarheim

Á fíggjarlógini er ikki útgreinað, hvør játtan verður tillutað til hvørt einstakt ellis- og røktarheim. Talan er um eina samlaða játtan, sum í 2009 er netto 185,5 mió. kr.

Játtanin til ellis- og røktarheimini verður býtt út til hvørt einstakt heim við einum dagsprísi, sum verður tillutaður í mun til játtanina á fíggjarlógini. Munur er á dagsprísinum, um talan er um vanligt pláss, ella um talan er um eitt dementpláss, og um avvarðandi heim hevur eitt dagtilhald. Við øðrum orðum verður játtanin býtt út alt eftir hvørjir íbúgvarnir eru, og um heimið hevur eitt dagtilboð fyri heimabúgvandi pensjónistar. Gjaldið fyri eitt vanligt pláss er í 2009 1.297 kr. og 1.511 kr. fyri eitt dementspláss um samdøgrið.

Fólk, sum búgva á ellis- og røktarheimi, fáa ikki pensjón men eitt útgjald á 952 kr. (í 2009) um mánaðin til persónligan tørv. Tey fáa so at siga allar tænastur frá bústovninum, t.e. fótarøkt, hárrøkt, men tað er ymiskt frá heimi til heim, tí tað finnast ikki greiðar reglur á økinum. Hava búfólkini aðra inntøku enn pensjón, skulu tey sambært.

løgtingslóg um uppihald á stovni rinda fyri uppihaldið, og verða hesar inntøkur tillutaðar einstaka heiminum.

Landskassin ber annars allar útreiðslurnar av rakstrinum av ellis- og røktarheimum.

## 2.7. Eldrasambýli

Játtanin til raksturin á eldrasambýlunum er at finna á undirkonto nevnd Heimatænastan. Játtanin til eldrasambýlini og heimahjálp er ikki býtt sundur. Tó sæst á fíggjarlógini, at játtanin til heimatænastuna er góðar 124 mió. kr. í 2009, av hesum kosta eldrasambýlini góðar 56 mió. kr.

Fólk, sum búgva á eldrasambýli, fáa pensjón og rinda fyri uppihaldið. Tey gjalda sjálv fyri fótarøkt, hárrøkt og líknandi tænastur.

Gjaldið er í 2009 ásett til 3.454 kr. fyri støk og 2.339 kr. fyri hjún um mánaðin. Tað eru kommunurnar og heimið, sum fáa hesar inntøkur. Harafturat verður kravt eitt egingjald fyri heimahjálp í mun til inntøku. Goldið verður í mesta lagi fyri 30 tímar um mánaðin. Gjaldið fellur til Heimatænastuna.

Landið ber allar útreiðslur av heimatænastuni, tó undantikið rakstrarútreiðslunar til náttarvakt á eldrasambýlunum. Kommunurnar rinda hesa útreiðslu. Kostnaðurin hesum viðvíkjandi er einar 700.000 kr. árliga fyri hvørt sambýli.

## 2.8. Játtanarbýti ímillum økini

Játtanin til tey 6 heimarøktarøkini er ikki javnt býtt ímillum økini, men er treytað av tørvinum í økinum og av hvussu nógv eldrabúpláss eru í teimum einstøku økjunum.

Á talvuni niðanfyri sæst kostnaðurin býttur á tey 6 økini. Kostnaðurin er gjørdur upp eftir fólki yvir 67 ár. Lutfalsliga størsta játtanin fer til øki 3: Eysturoyarøkið, 60.522 kr. fyri hvønn borgara yvir 67 ár. Lufalsliga minsta játtanin fer til øki 5: Suðuroyarøkið, 47.585 kr. fyri hvønn borgara yvir 67 ár.

Um játtanin varð býtt javnt eftir eldri borgarum yvir 67 ár, so hevði játtanin til økið 3 og 6 minkað, meðan øll hini økini høvdu fingið størri játtan.

| Øki/Játtan | Játtan 2009/tús. | Fólk > 67 | Kostnaður pr. íbúgva | Javnt býti/tús. | Munur |
|---|---|---|---|---|---|
| **Øki 1** | 106.045 | 2.098 | 50.546 | 111.933 | **5.887** |
| **Øki 2** | 50.207 | 955 | 52.572 | 50.951 | **745** |
| **Øki 3** | 72.263 | 1.194 | 60.522 | 63.702 | **-8.561** |
| **Øki 4** | 41.119 | 786 | 52.314 | 41.935 | **816** |
| **Øki 5** | 34.023 | 715 | 47.585 | 38.147 | **4.123** |
| **Øki 6** | 12.962 | 239 | 54.234 | 12.751 | **-211** |
| **Felags** | 2.800 | | | **2.800** | |
| **Tilsamans** | **319.419** | **5.987** | **53.352** | **319.419** | |

Orsøkin til, at játtanin til øki 3 er hægri samanborið við hini økini, er, at nógv fleiri búpláss eru í økinum. Í øki 3 eru harumframt nógvar smáar sambýliseindir, sum eru lutfalsliga dýrar at reka. Í øki 1 eru fá búpláss, og av somu orsøk er játtanin lutfalsliga lág. Í øki 5 eru eisini lutfalsliga fá røktarheimspláss, og hevur hetta við sær, at játtanin fyri hetta økið eisini er lág.

Tá ið eldrarøktarøkið verður lagt út til kommunurnar, er neyðugt at umrøða, hvørjar avleiðingar ójavna býtið, sum nú er, fer at hava fyri økini í framtíðini.

## 2.9. Trupulleikar í samband við verandi uppgávu- og ábyrgdarbýti

Landið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av eldraøkinum, men skipanin við sjálvognarstovnum og stuðulsskipanin í sambandi við útbygging av bútilboðum eru við til at skapa eitt ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur og millum sjálvsognarstovnar og land.

Stuðulsskipanin leggur upp til, at íløguútreiðslurnar í sambandi við útbygging av bútilboðum verða býttar millum land og kommunur. Við stuðulsskipanini hevur landið latið kommununum initiativrættin til bygging og útvegan av eldrabústøðum, meðan landið ber nærum allar rakstrarútreiðslurnar. Skipanin hevur havt við sær, at útbyggingin

av bútilboðum ikki er framd eftir einari yvirskipaðari ætlan, sum hevur tikið atlit til tørvin kring landið. Tí eru eldri borgarar í teimum ymsu økjunum sera ymiskt settir í mun til tænastur á eldrarøktarøkinum. Ávís øki í landinum eru væl útbygd við nógvum røktar- og sambýlisplássum, meðan onnur øki hava stóran bráðfeingistørv á búplássum. Hetta hevur við sær, at avmarkaða tilfeingið ikki er javnt býtt ímillum økini, og at borgarar í ávísum pørtum av landinum fáa eina góða tænastu, meðan borgarar í øðrum økjum fáa eina verri tænastu.

At tænastustøðið er so ymiskt á einum málsøki, sum landið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av, er ein trupulleiki. Kommunurnar, ið hava gjørt íløgur á eldraøkinum, hava hinvegin í samráð við landið tryggjað sær, at borgarar í kommununi hava framíhjárætt, tá ið tað snýr seg um upptøku til bútilboðið.

Landið rindar raksturin og hevur ikki beinleiðis ávirkan á, at íløgurnar verða framdar skynsamt út frá einum samfelagsbúskaparligum sjónarmiði, hóast tað í síðsta enda er landið, sum avger, hvør kommuna skal hava stuðul til eldrabúpláss.

Royndirnar við m.a. dagtilhaldunum vísa, at tá tað eru fleiri myndugleikar, sum skulu býta útreiðslurnar, er tað lætt hjá einum myndugleika at taka játtanina burtur á einum øki, tí man væntar, at annar/aðrir myndugleikar taka um endan.

Tað tykist eisini at vera eitt sindur tilvildarligt, hvussu útreiðslurnar verða býttar millum myndugleikar sum t.d. at landið rindar fyri starvsfólk á eldrasambýlum, men kommunurnar rinda fyri náttarvaktina.

## 2.10. Vantandi lógarverk og regulering

Lógarverkið á eldrarøktarøkinum er sum heild ikki nøktandi, hvørki í mun til ábyrgdarbýtið, rættartrygdina hjá borgarunum ella í mun til raksturin av eldrarøktini.

Eitt nú er tænastustøðið ikki regulerað í lógarverkinum, og tískil hevur borgarin ikki trygd fyri, at viðkomandi fær tær tænastur viðkomandi hevur tørv á Tað eru somuleiðis nógvar kunngerðir, formellar vegleiðingar og formellar mannagongdir, sum enn vanta í fyri, at núverandi lógarkarmur í forsorgarlógini er útfyltur. Eitt nú er ongin kunngerð,

sum regulerar viðurskiftini millum búfólk á ellis- og røktarheimum og myndugleikan, ongar yvirskipaðar visitatiónsreglur og mannagongdir. Harumframt eru ongar formligar vegleiðingar og mannagongdir í sambandi við umsiting av lummapeningi ella reglur fyri, hvørjar tænastur fólk, sum búgva á stovni, hava rætt til og hvat tey skulu gjalda fyri sjálv. Vantandi lógarkarmurin hevur við sær, at eldrarøktarøkið í stóran mun verður regulerað eftir siðvenju. Vandi er tískil fyri, at borgarar verða viðgjørdir ymiskt alt eftir hvar í landinum teir búgva og á hvørjum stovni teir búgva.

## 2.11. Vantandi og eintáttaði tilboð

Í Eldraálitinum frá 2002 varð mælt til at útbyggja eldrarøktina við fleiri og ymiskum fyribyrgjandi viðlíkahaldandi og viðgerandi tænastum. Staðfestast kann, at enn er langt eftir á mál.

Eldrarøktin er í ávísan mun útbygd, men í flestum førum er bara talan um nýggj røktarheimspláss og sambýlispláss. Talvan niðanfyri vísir, at stórur munur er ímillum økini, tá ið talan er um útboð av búplássum til eldri. Í øki 1 eru 23 búpláss til hvørji 100 fólk yvir 80 ár. Samsvarandi eru 37 búpláss til hvørji fólk 100 yvir 80 ár í øki 3. Tølini eru gjørd í mun til fólk yvir 80 ár, tí at flestu persónar, ið hava búpláss á røktarheimum og sambýlum, eru yvir 80 ár.

Sambært Nærverki er bráfeingis tørvurin á búplássum 132. Harumframt hava 184 fólk tørv, ið svarar til, at tey áttu at fingið innivist á eldrabústovni. Til samans er sostatt tørvur á 316 nýggjum búplássum. Hetta hevði svarað til, at í miðal 44 av hvørjum 100 fólkum eldri enn 80 ár í Føroyum skuldu havt eitt búpláss.

**Yvirlit yvir tal av búplássum og tørv**

| Øki | Búpláss | Vantandi búpláss | Harav bráfeingis búpláss | Búpláss pr. 100 > 80 | Búpláss og vantandi búpláss pr. 100 > 80 |
|---|---|---|---|---|---|
| **1** | 149 | 145 | 71 | 23 | 45 |
| **2** | 90 | 29 | 11 | 27 | 35 |
| **3** | 143 | 12 | 5 | 37 | 40 |
| **4** | 73 | 66 | 25 | 29 | 55 |
| **5** | 55 | 43 | 17 | 24 | 42 |
| **6** | 23 | 21 | 3 | 27 | 52 |
| **Tils./miðal** | **533** | **316** | **132** | **27** | **44** |

Verður samanborið við okkara grannalond, tykist tørvurin á búplássum ógvuliga høgur í Føroyum. Orsøkin er uttan iva, at í Føroyum er einki annað val enn røktarheim ella sambýli.

Til dømis er verandi tal á búplássum til eldri í Føroyum 533; tað svarar til, at 8,8 % av teimum yvir 67 hava eitt búpláss. Gongst sum ætlað verða 150 nýggj pláss bygd innan stutta tíð. Sostatt verða uml. 683 búpláss. Hetta svarar til, at dekningurin verður omanfyri 11 % samanborið við t.d. 7,0 % í Noregi.[20] Munurin kemst fyrst og fremst av at grannalond okkara hava onnur alternativ enn røktarbúpláss til eldri.

Trupulleikin við vantandi búplássum hevur negativt árin á alla skipanina. Trýsti á heimarøktina gerst stórt, av tí at tungir brúkarar búgva í egnum heimi, hóast teir hava tørv á stovnsplássi. Avleiðingin er, at tey eldru, sum framvegis klára seg í egnum heimi, ikki fáa nøktandi ella als onga tænastu fáa frá heimatænastuni. Harafturat eru nógvir tungir røktarkrevjandi brúkarar á eldrasambýlunum, sum í grundini ikki eru roknað til at hýsa teimum.

Tískil er sera umráðandi, at neyðugu búplássini verða útvegað sum skjótast. Gongst sum ætlað verða uml. 150 fleiri búpláss innan 2 ár, um land og kommunur gera brúk av karminum, sum nýggja studningslógin leggur upp til.

[20] (Kelda: Eldreomsorgen i Norge: Helt utilstrekkelig-eller best i verden, KS raport mai 2009).

Men tað er eisini sera týdningarmikið, at farið verður burtur frá eintáttaða eldrabústaðarpolitikkinum og til at hugsa um aðrar og alternativar bústaðarmøguleikar til eldri fólk. Staðfestast kann, at tá ið talan er um aðrar alternativar og bíligari bústaðarmøguleikar, er lítið og einki hent í Føroyum. Galdandi oyramerkta stuðulsskipan kundi verið broytt soleiðis, at stuðul kundi verið við til at ment ein meira fjøltáttaðan bústaðarmarknað - eisini til eldri fólk.

At fólk í ávísum økjum ikki fáa búpláss og heldur ikki fáa nøktandi heimarøkt hevur við sær, at røktarheimsfyribyrgjandi tænastur yvirhøvur eru vánaligar, og avleiðingin er, at lýsti tørvurin á eldrabústøðum helst er óneyðuga stórur. Tí hevur tað stóran týdning, at aðrar tænastur í eldrarøktini verða styrktar og mentar.

## 2.12. Røktarheimsfyribyrgjandi tænastur

Tá ið tað kemur til tænastur, ið eru røktarheimsfyribyrgjandi, t.e. tænastur, sum gera tað møguligt hjá fólki at búgva heima hjá sær sjálvum sum longst, kann staðfestast, at tað sum heild er hent ov lítið. Skipanin við umsorganararbeiðinum leggur upp til, at kommunurnar fíggja mattænastu og koyritænastu við stuðli frá landinum. Tað er einki rættarkrav hjá borgarum at fáa hesar tænastur, og at tað eru fleiri myndugleikar, sum eru við í skipanini, ger, at skipanin er serliga viðkvom, tá fíggjarstøðan í landinum broytist. Skipanin hevur verið fyri støðugum broytingum seinastu árini og broytingarnar vísa, at skipanin er viðkvom og í ov stóran mun bundin at fíggjarstøðuni hjá landinum/kommununum.

Støðan er sum heild heldur ikki nøktandi, tá ið tað snýr seg um venjingartilboð til heimabúgvandi. Tænastustøðið er rættiliga ymiskt í teimum ymisku økjunum. Í øki 1 er gongd komin á eitt samstarv millum Nærverkið og Tórshavnar kommunu, sum ger tað møguligt hjá bæði frískum eldri borgarum og røktarkrevjandi borgarum at koma inn á bústovnarnar í økinum at fáa venjingartilboð. Í øki 2 er somuleiðis ein roynd gjørd at nýta starvsfólkaorkuna í økinum, t.e. á Mørkini, og økisterapeutin til at standa fyri venjingum, bæði fyri tey, sum búgva á stovnunum í øki 2, og tey, sum eru heimabúgvandi í økinum. Í hinum økjunum eru ikki líknandi tilboð, og tískil eru borgarar eisini her ymiskt stillaðir, tá ið tað kemur til tænastur frá landi og kommunum.

## 2.13. Vantandi samskipan á eldrarøktarøkinum

Í Eldraálitinum frá 2002 varð mælt til, at eldrarøktin kring landið verður samskipað eins og eldrarøktin í Sandoynni. Munurin á skipanini í Sandoynni og restini av landinum var og er tað partvíst enn, at í Sandoynni er bert ein leiðsla og ein upptøkunevnd/tilluting av tænastum fyri bæði røktarheimið, sambýlini og heimarøktina. Í hinum økjunum er ein leiðsla og ein upptøkunevnd fyri hvørt ellis- og røktarheim, onnur leiðsla og upptøkunevnd fyri sambýlini og fyri tilluting av tænastum frá heimarøktini.

Ógreiða uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur hevur verið forðandi fyri, at samskipan av eldraøkinum er framd í verki og harumframt hevur skipanin við sjálvsognarstovnum eisini verið ein forðing. Sum er, eru 6 sjálvsognarstovnar, sum reka ellis- og røktarheim. Eitt stýrið hevur ovastu leiðsluna á stovnunum, sum í flestum førum er samansett av limum úr teimum ymisku kommunum í økinum. Stýrið hevur fulla ábyrgd av øllum virkseminum á stovninum. Stýrið setur ein leiðara fyri stovnin, sum hevur dagligu leiðsluna við ábyrgd mótvegis stýrinum. Stjórin í Nærverkinum hevur tó ræðisrættin á økinum. Hann hevur fíggjarliga, fyrisitingarliga og fakliga eftirlits- og ráðgevingarskyldu mótvegis røktarheimunum. Tað er ymiskt, hvussu sjálvsognarstovnarnir virka í praksis. Í onkrum økjum verða ellis- og røktarheimini samrikin við restini av eldrarøktini, meðan onnur øki hava greiðan skilnað millum Heimatænastuna og ellis- og røktarheimini.

Skipanin við sjálvsognarstovnum og fleiri ymiskum visitiatiónsnevndum ger, at tað er trupult at fáa eitt greitt yvirlit yvir samlaða tørvin kring landið. Vandi er eisini fyri, at fólk kring landið verða visiterað eftir ymiskum kriterium. Møguleikin hjá heimatænastuni í teimum einstøku økjunum til at brúka ymisku tænasturnar fleksibult er eisini minni, tá ið tað eru fleiri upptøkunevndir í hvørjum øki. Tað kann somuleiðis vera óheppið, at setanarmyndugleikin av starvsfólkum ikki er samlaður eitt stað. Hetta ger tað truplari at gagnnýta starvsfólkaorkuna til fulnar. Møguleikin at skipa økið á rationellan hátt, m.a. við at flyta starvsfólk ímillum stovnar og ímillum stovnar og heimarøkt, er ikki til staðar. Tað er eisini trupult at gagnnýta serligan fakligan førleika til fulnar og at skipa størri faklig umhvørvi.

Verandi skipan, har kommunurnar taka stig til útbyggingar á eldraøkinum, men síðani ikki hava ábyrgd av framhaldandi rakstri á økinum, eigur ikki at halda fram.

Skal størri samanhangur verða í eldrarøktini og skal borgarin uppliva størri gjøgnumskygni í tænastunum, má uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunu verða greitt og skipanin á eldrarøktarøkinum tillagast samsvarandi.

Arbeiðssetningurin leggur upp til, at kommunurnar skulu hava umsitingarligu ábyrgdina av eldrarøktini.

Skipanin við sjálvsognarstovnum hevur nakrar løgfrøðiligar avmarkingar við sær samanborið við vanligu heimildirnar hjá myndugleikanum, ið umsitur økið. Tí er umráðandi, at kommunurnar ikki verða avmarkaðar í at skipa eldrarøktina á skynsamasta hátt við t.d. at skula yvirtaka ella varðveita sjálvsognarstovnar.

## 2.14. Endurskoðan og útfylling av lógarverkinum

Tað er eisini av stórum týdningi, at lógarverkið kring eldrarøktina verður endurskoðað og meira fullfíggjað. Tørvur er á rammulóg, sum ásetur rættindini hjá einstaka eldri borgaranum og heimildir og skyldur hjá myndugleikanum. Tað hevur somuleiðis stóran týdning, at gjørdar verða kunngerðir, sum regulera viðurskiftini millum borgara og myndugleika. Eisini skulu vegleiðingar og mannagongdir viðv. visitering, bíðilistum, umsiting av lummapeningi, gjald fyri tænastur o.s.fr. gerast soleiðis, at kommunurnar, sum umsita og reka eldrarøktartænasturnar, fáa neyðugu stýringaramboðini at arbeiða við, samstundis sum størri gjøgnumskygni verður í skipanini mótvegis borgaranum.

## 2.15. Fleiri og alternativar tænastur – ein tilboðsvifta

Sum longu nevnt verður bráðfeingistørvurin á eldrabúplássum væntandi loystur við fíggjarkarminum í studningslógini í næstu framtíð. Tað er somuleiðis av alstórum týdningi, at kommunurnar, tá ið tær hava fingið ábyrgdina av eldrarøktini, eisini hava møguleika og frælsi at skipa økið eftir tørvi. Millum annað má verða møguligt at samskipa siðbundar loysnir sum røktarheim og sambýli við aðrar alternativar loysnir sum eitt nú eldraíbúðir. Hetta kundi m.a. verið gjørt við at víðkað heimildina hjá

landsstýrismanninum viðvíkjandi studningslógini til eisini at fevna um íløgur í onnur búpláss/tiltøk enn ellis– og røktarheim og sambýli.

Tað er ein sannroynd, at tað vera fleiri og fleiri eldri borgarar, og at trýstið á skipanina fer at vaksa komandi árini. Tískil er sera umráðandi, at okkurt longu nú verður gjørt, serliga í tí partinum, sum snýr seg um fyribyrgjandi átøk, sum kann gera tað møguligt, at fólk eru sum longst heima.

Í okkara grannalondum verður fokuserað upp á átøk, ið kunnu virka við til, at fólk kunnu vera heima hjá sær sjálvum í longri tíð. Hesi fólk fáa í staðin tilboð um aðrar tænastur, sum í størri mun eru fyribyrgjandi og eru við til at skapa eitt innihaldsríkt lív fyri einstaka borgaran. Eitt nú eru fleiri sonevnd eldrasentur í okkara grannalondum, sum bjóða teimum eldru heimabúgvandi borgarunum inn at fáa ymiskar tænastur so sum mat, persónliga reingerð, ítriv, venjing o.s.fr. Eldrasentur hava eisini fleiri bústaðarmøguleikar. Umframt røktarheimseindir og demenseindir eru eisini leiguíbúðir ella lutaíbúðir knýttar at sentrinum, og tí verða íbúgvarnir tætt knýttir at øllum teimum tænastum, ið sentrið veitir. Hetta er avgjørt ein gongd leið á eldrarøktarøkinum í Føroyum, og her eigur at verða hugsað um, hvussu vit fáa gagnnýtt verandi fysisku karmar og starvsfólkaorku – at blanda kortini av nýggjum á ein ella annan hátt. Hesar tænastur eiga at vera partur av eldrarøktini annars, og liggja undir sama myndugleika, ið hevur ábyrgdina av øllum eldrarøktarøkinum, soleiðis at eldrarøktin verður ein meira samanhangandi eind, ið veitir fleiri og ymiskar tænastur. Tað er sannlíkt at ein loysn við røktarheimsplássum og sambýlisplássum er nógv dýrari enn møguligar alternativar loysnir við til dømis eldraíbúðum og styrktari heimarøkt til heimabúgvandi.

Støða skal somuleiðis takast til, um møguligar tænastur (reingerð, húsarbeiðið o.a.), sum Nærverkið í dag veitir eldri, skulu útveitast ella um gjaldið fyri slíkar tænastur samsvarar við marknaðin annars. Á henda hátt ber til at skapa privat vinnuvirksemi uttan fyri skipanina. Men tað týdningarmesta er, at til ber at leysgeva orku til meira røktarfakligt arbeiði, tá ið starvsfólkini, sum hava røktarfakliga útbúgving, ikki longur skulu taka á seg arbeiði, sum ikki beinleiðis hevur við røkt at gera.

## 2.16. Samskipa eldrarøktina

Í Føroyum hava vit eina skipan við bygnaðarligum trupulleikum. Ymisk ognar- og visitatiónsviðurskiftini gera, at búplássini ikki verða gagnnýtt á skynsamasta hátt. Í skipanini er ein íbygdur vandi fyri, at tað ikki eru eldri við tí størsta tørvinum, sum hava sjálvsagdan rætt til upptøku, men at upptøkan eisini er knýtt at øðrum viðurskiftum sum eitt nú bústaðarkommunu. Vandi er somuleiðis fyri, at upptøka á eldrabústovni ikki er fakliga grundað, tí at stýri fyri sjálvsognarstovnar eru virkandi upptøkunevndir. Tað hevur verið arbeitt leingi við at skipa eldrarøktina soleiðis, at ein upptøkunevnd verður í hvørjum øki í Heimatænastuni. Gongst sum ætlað, verða í næstum settar í gildi tvær kunngerðir, sum áseta eina upptøkunevnd fyri hvørt av verandi økjum.

Niðurstøðan av eini eftirmeting, sum varð gjørd av skipanini í Sandoynni, vísir, at fyrimunirnir við at samskipa eldrarøktina í teimum einstøku økjunum eru:

- At røktartyngdin í samlaða økinum verður meira sjónlig og týðilig
- At leiðsla, tilluting av røktartilboðum og búplássum í økinum eru á einum staði, sum ger, at størri fleksibilitetur fæst í tænastuna og tilboðini til brúkaran
- At brúkarin bert skal venda sær til eitt stað, tá ið hann hevur brúk fyri hjálp/tænastu
- At starvsfólkaorkan og fakligi førleikin hjá starvsfólkunum kunnu brúkast fleksibult og tí rationellari, av tí at setanin av starvsfólkunum umfatar alt økið og ikki bert setan á røktarheimi ella í heimarøktini
- At starvsfólkini arbeiða í einum toymi við starvsfeløgum við ymiskum fakligum førleika, og har høvi býðst til fakliga og persónliga menning

Avgerandi er, at eldrarøktarøkið verður samansett av eini viftu av samanhangandi tilboðum, og at hesi verða samskipað eftir sama skipanarliga leisti sum eldrarøktin í Sandoynni.

## 2.17. Útvegan av starvsfólki

Tað er ein sannroynd, at tað gerast fleiri og fleiri eldri fólk í Føroyum, samstundis sum tað eisini er ein sannroynd, at aldurin á teimum, sum starvast innan eldrarøktina í dag, er høgur. Sambært eini kanning, sum Nærverk hevur gjørt, verður tørvurin á nýggjum starvsfólki í minsta lagi 465 fólk (ikki at blanda við ársverk) fram til 2015. Hetta kemst av, at tað verður stór frágongd vegna aldur, samstundis sum nýggja studningslógin væntandi hevur við sær uml. 150 nýggj búpláss til eldri, sum eisini skulu hava starvsfólk. Samstundis má leggjast upp fyri, at tað í ávísum økjum í landinum eru lutfalsliga fleiri eldri fólk, og tí verður tørvurin á nýggjum starvsfólki hægri enn aðrastaðni. Í løtuni eru uml. 744 ársverk í eldrarøktini.

## 2.18. Umskipan av økisbýtinum í mun til nýggju kommunalu eindirnar

Verandi økisbýtið av eldrarøktini skal umskipast, so tað fylgir kommunalu eindunum. Serliga viðurskifti eru, ið dentur eigur at verða lagdur á, tá ið støða skal takast til hóskandi kommunueindir í sambandi við umsiting av eldrarøktarøkinum.

Tað er greitt, at tá ið kommunurnar yvirtaka eldraøkið og skulu bjóða eina viftu av tilboðum til eldri, so krevst eitt ávíst fólkagrundarlag í teimum eindum, sum hava ábyrgd og skulu fyrisita økið. Skal ein eind sum minstamark bjóða búpláss til eldri við umfatandi røktartørvi, aðrar alternativar búmøguleikar til eldri eins og heimarøkt og aðrar týðandi røktar- og heilsufremjandi tænastur, mugu ávís krøv setast til fíggjarliga og fakliga og fyrisitingarliga førleikan hjá eindini.

Á verandi eldraøki er Sandoyarøkið minsta økið við umleið 1.500 íbúgvum. Sambært Eldraálitinum og sambært tilráðingum frá Nærverkið, so eiga eindirnar ikki at vera minni enn hetta økið, men at miðast eigur eftir størri eindum enn Sandoyggin.

Ein vansi er, at tørvurin á ymiskum tænastum ikki er støðugur, um so er, at fólkagrundarlagið er ov lítið. Hetta kann hava við sær, at tilfeingið ikki verður gagnnýtt sum best, og at vit fáa fløskuhálsar í skipanini. Stundum kann útboðið verða ov stórt ímun til tørvin, t.e. at tilfeingið ikki er gagnnýtt til fulnar, t.d. at búpláss standa tóm. Aðrar tíðir kann eftirspurningurin verða størri enn útboðið og borgarin fær ikki ta tænstu, hann hevur tørv á.

Ein meginregla er, at jú størri ein kommuna er, størri er breiddin av teimum tænastum, sum ein kommuna kann bjóða, ella jú størri kommunan er, jú fleiri sertilboð/funktiónir kann hon bjóða. Er eindin ov lítil, kann hon hava trupult við bjóða út tænastur, t.d. ergoterapi, fysioterapi o.a. Kanningar vísa eisini, at fakbólkar yvirhøvur trívast betur í størri fakligum umhvørvi. Ein vandi í smáum eindum er trupulleikin at skapa grundarlag fyri serligum fakbólkum. Um virkisgrundarlag t.d. bara er fyri at seta ein fysioterapeut í hálvt starv, kann starvið verða trupult at seta. Virkisførið í skipanini kann eisini gerast sera viðkvæmt og í ov stóran mun verða knýtt at einstøkum persónum. Gerast einstakir persónar sjúkir ella fara í annað starv, kann skipanin leggjast lamin.

Eisini demografisku viðurskiftini skulu havast í huga, tá ið metast skal um eindirnar, ið skulu yvirtaka eldraøkið. Eitt øki við lutfalsliga nógvum eldri og t.d. spjaddari búseting kann gerast trupult og fíggjarliga tungt at reka.

Niðanfyri er yvirlit yvir, hvussu býtið verður av búplássum, um so er, at 9 kommunur verða í framtíðini. Verða tað 7 eindir broytist yvirlitið nakað.

| ***Kommunur*** | ***Røktarheimpláss*** | ***Sambýlispláss*** | ***Samanlagt*** | ***Íbúgvar yvir 80 ár*** | ***Pláss pr 100 íbúgvar yvir 80 ár*** |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Norðoyggjar*** | 47 | 26 | 73 | 253 | **29** |
| ***Eystur Eysturoy*** | 0 | 41 | 41 | 125 | **33** |
| ***Skálafjørður*** | 78 | 24 | 102 | 259 | **39** |
| ***Sundalagið*** | 32 | 15 | 47 | 80 | **59** |
| ***Tórshavn*** | 124 | 25 | 149 | 650 | **23** |
| ***Vestmanna/Kvívík*** | 0 | 7 | 7 | 87 | **8** |
| ***Vágar*** | 36 | 0 | 36 | 172 | **21** |
| ***Sandoy*** | 10 | 13 | 23 | 84 | **27** |
| ***Suðuroy*** | 29 | 26 | 55 | 232 | **24** |
| **Tilsamans/miðal** | **356** | **177** | **533** | **1942** | **27** |

Í talvuni sæst, at økini verða sera ymiskt fyri í mun til búpláss. Við støði í tølunum í talvuni á s. 68, so sæst, at nøkur øki koma at hava ov nógv búpláss, meðan onnur koma at hava alt ov fá búpláss.

Í sambandi við útlegging av økinum er umráðandi, at støða verður tikin til, hvussu tørvurin á búplássum verður javnaður millum komandi kommunalu eindirnar áðrenn økið verður lagt út til kommunurnar at umsita. Hetta er tí at verandi búpláss eru bygd við stuðuli frá landinum, og eru búplássini ikki javnt býtt hvørki millum verandi kommunur ella komandi kommunur.

## 2.19. Løgfrøðiligar broytingar

Í sambandi við at eldraøkið verður flutt kommununum, er neyðugt at gera broytingar í eini røð av lógum, sum í dag regulera eldraøkið, sí fylgiskjal 1. Mælt verður til, at ein rammulóg verður gjørd fyri alt eldraøkið ella teir partar av eldraøkinum sum verða lagdir til kommunurnar at umsita. Í lógini skal tað greitt standa, hvør hevur ábyrgdina av eldrarøktini, og harumframt skulu rættindi borgaranna tryggjast. Lógin eigur at tryggja, at borgarar í teimum ymsu kommunum fáa nøktandi tilboð við at áseta minstamarkið fyri, hvørjar tænastur borgarin hevur rætt til. Samstundis skal lógin tó ikki virka forðandi fyri kommunala sjálvræðinum. Tískil skal ein rammulóg ikki hava ov nágreiniligar ásetingar, men harafturímóti geva einstøku kommununi møguleika fyri at raðfesta og sjálv avgera, hvørji tilboð og hvussu støðið á tilboðnum skal vera. Tó skal tað altíð gerast við atliti at minstukrøvunum. Harumframt eigur at vera ásett í lógini, hvørji krøv skulu setast til støðið á bygningum og innrætting av ellis- og røktarheimum og til eldrasambýlispláss. Lógin eigur at staðfesta, at tað framhaldandi verður landsstýrismaðurin í almannamálum, sum hevur eftirlitsmyndugleika við kommunalu umsitingini av eldrarøktini. Kærumyndugleiki eigur at verða lagdur til annan myndugleika enn eftirlitsmyndugleikan.

Tað er somuleiðis av týdningi, at farið verður til verka beinanvegin við at útfylla rammulógina, soleiðis at løgfrøðiliga grundarlagið er klárt, tá ið økið verður flutt. Eisini hevur tað týdning, at greið viðurskifti eru rundan um eftirlitsfunktiónina, hvat hon hevur við sær og hvussu hon skal skipast.

Verður ásett í lóg, at kommununar skulu útvega búpláss og røkt, má støða takast til um núverandi skipanin við ansingarsamsýning skal niðurleggjast og um rammulógin skal geva kommunum heimild at gera líknandi skipanir.

Núverandi skipan við umsorganararbeiði, ið m.a. fevnir um mattænastu og koyritænastu, skal somuleiðis avtakast við lóg. Mælt verður til, at umsorganararbeiðið verður ein samskipaður partur av teirri kommunalu eldrarøktini.

Sum áður lýst fáa tey, sum í dag búgva á ellis- og røktarheimum, niðursetta pensjón, og at tey beinleiðis rinda fyri uppihaldið á henda hátt. Nevndin mælir til, at tað framhaldandi verður landið, sum umsitur pensjónsøkið. Fyri at greidleiki skal verða millum land og kommunur á hesum øki, er umráðandi, at fólk sum hava og fáa búpláss á ellis- og røktarheimum í framtíðini, varðveita sína pensjón og síðani rinda fyri uppihaldið eins og skipanin er á sambýlunum. Til hetta krevst lógarbroyting í løgtingslóg um uppihald á stovni.

## 2.20. Markamót

Tað eru eisini ávís markamót, sum greiða skal fáast á, tá ið eldrarøktin verður løgd út til kommunurnar. Yvirskipað má støða takast til, um tað skal verða aldurin á fólki (t.d. 67 ár) ella tørvurin á tænastuni, sum skal verða avgerandi fyri, hvørt tað er land ella kommunur, sum hava ábyrgdina av tænastuveitingini.

Støða skal m.a. takast til, um tænastur til fólk eldri enn 67 ár við serligum tørvi eisini skulu gerast kommunalar. Eldri fólk við skerdum fysiskum og sálarligum førleika hava ein serligan tørv, sum í dag verður nøktaður á bústovnum og sambýlum undir Trivnaðartænastuni og Deildini fyri sinnisveik og við stuðulshjálp frá Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin. Tað er neyvan ráðiligt, at einstøku kommunueindirnar hava møguleika fyri at hava serstovnar úti í teimum ymsu økjunum, tá ið talið á brúkarum við serligum tørvi er so avmarkað. Tí verður mælt til, at tað framhaldandi verður landið, sum veitir tænastu til borgarar við serligum tørvi, hóast teir eru 67 ár ella eldri.

Nærverkið hevur somuleiðis víst á, at tað eru brúkarar undir 67 ár, sum fáa tænastu frá Heimatænastuni. Tað er ávíst samarbeiði millum Heimarøktina og Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin, sum veitir heimabúgvandi fólkum við umfatandi sálarligum ella likamligum trupulleikum hjálp. Sambært Nærverkinum eru tað um leið 20 persónar undir 67 ár, sum fáa heimahjálp. Tað eru somuleiðis fólk undir 67 ár, sum fáa heimasjúkrarøkt frá Heimatænastuni. Tískil skal støða takast til, hvussu heimasjúkrarøktin skal skipast, um so er, at tað verður lagt út til kommunurnar. Tað er ikki skynsamt, at Heimatænastan verður býtt í tvey, soleiðis at landið hevur eina tænastu til fólk undir 67 ár og kommunurnar eina tænastu fyri fólk yvir 67 ár. Tí verður mælt til, at tænastan verður løgd út til kommunurnar sum so hava ábyrgd av at veita tænastuna til allar borgarar, sama hvørjum aldri tey eru í.

Í sambandi við umrøddu markamót eigur støða at verða tikin til møguligar endurgjalsskipanir, har landið t.d. rindar kommunum fyri tænastur til borgarar undir 67 ár og kommunur rinda landinum fyri tænastur til borgarar yvir 67 ár.

Annað markamót er ímillum Heilsuverkið og eldrarøktina. Í dag er ikki óvanligt, at eldri fólk verða liggjandi á sjúkrahúsi longur enn neyðugt ella eftir, at viðgerðin er liðug. Hetta kemst m.a. av, at einki røktarheimspláss er tøkt. Í framtíðini er neyðugt, at land og kommunur ikki kunnu áleggja hvørjum øðrum óbeinleiðis útreiðslur. Um so er, at ein røktarkrevjandi sjúklingur verður liggjandi á sjúkrahúsi, eftir at viðgerðin er liðug, tí at kommunan ikki kann veita eitt tilboð, eigur rokningin at verða send kommununi. Við teimum alsamt vaksandi ambulantu tænastunum, sum sjúkrahúsini veita, er eisini vandi fyri, at sjúklingar verða útskrivaðir til heimarøktina ella eldrabúpláss, áðrenn teir eru liðugt viðgjørdir. Í slíkum førum eigur kommunan at kunna krevja landið eftir gjaldi.

Ætlanir hava leingi verið um at fáa skipa eina almenna endurvenjing. Í sambandi við fyrireiking av útlegging eigur greiða at fáast á, hvussu markamót millum venjing á sjúkrahúsi og meira almenna venjing skal handfarast.

Tað er somuleiðis umráðandi at greiða fæst á, hvussu markamótstrupulleikar viðvíkjandi skipanini við hjálpartólum/hjálparráðum skal virka, tá eldrarøktin verður løgd út. Í løtuni arbeiðir ein bólkur við at fáa greið viðurskifti. Niðurstøðurnar frá hesum arbeiði eiga

eisini at verða umrøddar og viðgjørdar í mun til ábyrgdarbýtið millum land og kommunur í samband við útleggingartilgongdina.

Arbeiðsbólkurin ið skal fyrireika útleggingina av eldraøkinum eigur at viðgera markamóti ímilum heilsuverk og eldrarøkt, eins og bólkuri eisini eigur at viðgerða hvussu møgulig trætumál millum land og kommunur skulu avgreiðast.

Verður eldrarøktarøkið lagt út til kommunurnar skuldi tænastan komið tættari til borgaran. Kommunurnar eru tættari uppá borgaran og áttu tí at verið betri førar fyri tillaga tænastuna til tann staðbundna tørvin.

Fyritreytin fyri útlegging av eldrarøktini, er at eindirnar verða størri. Hetta kann hava við sær at tænastan hjá summum borgarum kemur at kennast verri.  Borgarar í kommunum sum hava gjørt íløgur í t.d. eldrasambýli hava í dag framíhjárætt til bútilboð. Verður kommunan nú løgd saman við øðrum kommunum kemur tað at viðføra at allir borgarar verða javntstillaðir í mun til tænasturnar. Fyri onkrar borgarar kann samanleggingin og útleggingin tískil kennast sum eitt afturstig í mun til tænastustøði.

## 2.21. Samskipa eldrarøktina í teimum kommunalu eindunum

So skjótt tann politiska avgerðin er tikin um kommunalu eindirnar, eigur eldrarøktin at verða samskipað innan eindirnar. Mælt verður til, at eldrarøktin í øllum kommunalu eindunum verður skipað eftir tí leisti, sum eldrarøktin í Sandoynni í dag er skipað eftir. Tí er umráðandi, at farið verður undir at kanna, hvørjar løgfrøðiligar forðingar skipanin við sjálvsognarstovnum hevur í mun til samskipanina.

Upptøkan á sambýlum og røktarheimum í einari kommunu eigur at samskipast soleiðis, at tað verður ein felags faklig upptøkunevnd, sum skipar fyri upptøkuni. Á henda hátt verður upptøkan óivað smidligari, bæði hvat viðvíkur raðfesting av umsóknum, boðum til brúkaran og tá tað snýr seg um at finna pláss til búfólkini eftir teirra røktartørvi

## 2.22. Starvsfólkalig viðurskifti

Tað eru sum sagt 744 ársverk í eldrarøktini. Verður eldrarøktin flutt til kommunurnar, skulu øll starvsfólk skifta arbeiðsgevara, soleiðis, at tað verða kommunurnar, sum vera setanarmyndugleiki. Verða arbeiðsuppgávurnar óbroyttar, eru væntandi ongar starvsfólkarættarligar avleiðingar. Alt eftir, hvussu kommunali geirin fer at síggja út, má spurningurin um starvsfólkarættarligar avleiðingar viðgerast í hvørjum einstøkum føri. Víst verður annars til kap. 7, har starvsfólkaviðurskifti verða viðgjørd.

Umframt at yvirtaka núverandi starvsfólkaorku, so skulu nýggju kommunalu eindirnar eisini hava starvsfólkaorku til umsitingarliga partin av eldrarøktini, sum í dag verður rikin av Meginskrivstovuni í Nærverkinum. Kommunurnar mugu tí seta starvsfólkaorku av til at taka sær av yvirskipaðu leiðsluni av eldrarøktini umframt umsitingarliga partinum sum eitt nú journalskipanum og lønarútgjaldingum. Ilt er at meta um, hvussu nógv fleiri starvsfólkum tørvur verður á, men sum er, eru tað samanlagt uml. 6 ½ ársverk á Meginskrivstovuni í Nærverkinum, sum taka sær av hesum. Tørvurin verður neyvan minni úti í kommununum. Fyrisitingin í Nærverkinum verður broytt nakað, tí at kommunurnar yvirtakað eldrarøktina, men Nærverkið eigur tó vegna landsstýrismannin í almannamálum at hava eftirlit við tænastuveitingunum hjá kommununum. Tí er umráðandi, at nøkur ársverk framvegis verða til taks á Meginskrivstovuni.

## 2.23. Fíggjarlig viðurskifti

Kommunurnar yvirtaka fíggjarligu ábyrgdina av eldrarøktini. Sum er eru játtaðar uml. 340 mió. kr. til eldrarøktina.  Afturat hesum verður tørvur á at hækka játtanina, um tey 150 búplássini koma afturat, svarandi til uml. 38 mió. kr. í rakstri.

Lagt er upp til, at fólk, sum búgva á ellis- og røktarheimum, í framtíðini fáa fulla pensjón og í staðin rinda fyri uppihaldið eins og búfólk á eldrasambýlum. Tískil má landið vænta eina ávísa meirútreiðslu á pensjónsøkinum í sambandi við, at eldrarøktarøkið verður lagt út. Hinvegin skuldu rakstrarútreiðslurnar á ellis- og røktarheimunum verið minni, tá ið búfólkið skal rinda fyri uppihaldið. Hesi viðurskifti mugu útgreinast nærri, tá ið arbeiðið við fíggingarleistinum verður sett í verk.

## 2.24. Tilmæli um tíðarætlan fyri útlegging

Sjálvt um eldraøkið skal leggjast út til kommunurnar 1. januar 2013, er tað av alstórum týdningi, at lógararbeiðið fer í gongd sum skjótast og at skipað verður soleiðis fyri, at ein rammulóg verður løgd fyri løgtingið í tingsetuni 2011.

Verður rammulógin ikki samtykt í tingsetuni 2011, er trupult at ímynda sær, at lógarkarmurin kann verða útfyltur við kunngerðum, rundskrivum og vegleiðingum, áðrenn økið er lagt út. Harumframt skal núverandi lógarverk eisini broytast soleiðis, at galdandi ásetingar verða settar úr gildi, sí fylgiskjal 1. Nevndin mælir til, at lógarkarmurin er so greiður sum gjørligt, tá ið kommunurnar yvirtaka eldraøkið.

Tað er tí sera umráðandi, at landsstýrið og kommunurnar seta neyðuga fyrisitingarliga orku av til hetta arbeiðið, sum er rættiliga umfatandi í vavi og tíðarkrevjandi. Skotið verður tí upp, at ein embætismannabólkur við umboðum fyri land og kommunur verður settur beinanvegin at fyrireika útleggingina. Samstundis eigur politiska viðgerðin, sum í síðsta enda skal áseta tænastustøðið, at byrja so skjótt sum avgerðin um at flyta økið er tikin.

Harumframt skal fyrisitingarlig orka frá bæði landsfyrisitinginí, Nærverkinum og kommunalu umsitingunum nýtast til at samskipa eldrarøktina, at skipa ein fíggingarleist og at flyta starvsfólk[21].

**Tíðarætlan**

9. So skjótt politisk avgerð er tikin um, at eldrarøktin skal flytast til nýggju kommunalu eindirnar, verður arbeiðsbólkur/bólkar settir at gera uppskot til rammulóg fyri eldraøkið - støða takast til markamót og dagføring av tilboðum
10. Fíggjarviðurskiftini verða avgreidd
11. Samskipanin av eldrarøktini í kommunalu eindunum byrjar, tá ið avgerðin er tikin
12. Greiða fáast á, hvussu kommunala umsitingin av eldrarøktina skal skipast
    - Hvat skal broytast á Nærverkinum? Hvat skal uppbyggjast í kommunalu umsitingum
13. Greiða verður fingin á starvsfólkaviðurskiftum

[21] Viðvíkjandi starvsfólkaviðurskiftum verður víst til kap. 7, har hesi viðurskifti verða viðgjørd.

14. Rammulóg og aðrar lógarbroytingar leggjast fyri tingið og samtykkjast í tingsetuni 2011
15. Útfylling av rammulógini gerast á sumri/heysti 2012
16. Eldrarøktarøkið verður lagt út til kommunurnar 1. januar 2013

## *3. Meting og tilmæli viðvíkjandi fólkaskúlaøkinum*

### 3.1. Fólkaskúlin

Sambært arbeiðssetninginum hjá kommunalu umskipanarnevndini er eitt av økjunum raðfesting av greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, har ein allýsing skal verða gjørd av ábyrgdarøkjum, sum kunnu flytast kommunum at umsita, m.a. fólkaskúlanum.

Fólkaskúlin er tann almenni skúlin, sum er skipaður sambært Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við Ll. nr. 34 frá 28. apríl 2009. Øll børn og ung hava undirvísingarskyldu í 9 ár og hava skyldu til at ganga í fólkaskúla, um tey ikki á annan hátt fáa undirvísing, sum samsvarar við undirvísing fólkaskúlans. Undirvísingarskyldan byrjar 1. august í tí álmanakkaári, barnið fyllir 7 ár. Sama er galdandi fyri børn, sum skulu vera her í landinum í minsta lagi 6 mánaðir.

Fólkaskúlin er ábyrgdarøki bæði hjá landi og kommunum. Landið rindar virksemið í skúlanum, hevur yvirumsjón, royndarhald, menningarátøk og ásetur lógir og reglur á økinum, meðan kommunurnar hava um hendi bygningar, innbúgv, amboð og undirvísingarmiðlar og bera fíggjarliga raksturin av skúlanum. Sostatt rindar landið leiðslu- og undirvísingarliga virksemið í skúlanum, lønir, niðurskurðir o.a., meðan kommunurnar rinda fyri høli, útgerð og rakstur.

#### 3.1.2. Fyrisitingin av fólkaskúlanum

Fyristingin í fólkaskúlanum verður framd bæði av landi og kommunum og er býtt millum hesar myndugleikapersónar/partar:

1. Kommunustýrið

Skúlastýrið

2. Landsstýrismaðurin

Skúlaleiðarin

Skúlamyndugleikin á staðnum er kommunustýrið og skúlastýrið, har høvuðsábyrgdin hjá kommunustýrinum er at skipa og fíggja karmarnar kring undirvísingina, meðan skúlastýrið hevur tann námsfrøðiliga partin.

### *3.1.2.1 Kommunustýrið*

Kommunustýrið hevur reglur og mannagongd at halda seg til í arbeiðinum at fyrisita og skipa skúlaøkið á staðnum, bæði viðvíkjandi reglugerð um fyrisitingina av kommununnar skúlaverki, mannagongd at skipa skúlabygnaðin, um skúlasambond og tá ið avgerð verður tikin um at leggja skúla niður.

**Reglugerð um, hvussu skúlin í kommununi verður fyrisitin**

Kommunustýrið ásetur, eftir at hava útvegað sær ummæli frá skúlastýrinum, reglugerð um fyrisitingina av skúlanum í kommununi. Í reglugerðini skal standa:

1. Talið á foreldraumboðum í skúlastýrinum.
2. Tilnevning av kommunustýrislimum ella umboðum fyri kommunustýrið til skúlastýrið.
3. Mannagongd viðvíkjandi vali av umboðum í skúlastýrið.
4. Samanseting av møguligum ráðgevingargøgnum fyri kommununnar skúlaverk.

Í einum fylgiskjali til reglugerðina skulu standa tær samtyktir, kommunustýrið hevur gjørt viðvíkjandi skúlabygnaði skúlans o.ø.

**Skúlabygnaður**

Ein skúlabygnaður verður gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi. Skúlabygnaðurin skal hava hesar ásetingar:

1. Navnið á einstaka skúlanum. Um so er, at kommunan hevur býtt sítt øki upp í skúladømi, so skulu nøvnini á umdømunum vera tilskilað.
2. Vavið av undirvísingini í hvørjum einstøkum skúla, t.e. hvørjir flokkar skulu verða í einstaka skúlanum. Kommunur, ið hava fleiri skúlar, hava møguleika at raðfesta, hvørjir flokkar ella hvat undirvísingarvirksemi skal vera í hvørjum skúla.
3. Tilvísing til undirvísing í øðrum skúlum sambært sáttmála.
4. Undirvísing á stovnum í økinum.

**Skúlasambond**

Skúlamyndugleikin býtir vanliga sítt øki upp í skúlaumdømi, ið kunnu vera størri fyri skúlans eldru floksstig enn fyri tey yngru. Landsstýrismaðurin kann góðkenna, at eitt skúlaumdømi er felags fyri fleiri skúlar. Tveir ella fleiri skúlamyndugleikar kunnu ganga saman í eitt skúlasamband eftir § 31 í fólkaskúla1ógini. Áðrenn avgerð verður tikin um hetta, skulu íbúgvarnir í teimum økjum, skúlasambandið fatar um, hava havt høvi at sagt sína hugsan á einum fundi, sum teir einstøku skúlamyndugleikarnir skipa fyri. Sáttmálar um skúlasambond skulu verða góðkendir av landsstýrismanninum. Eftir sáttmála millum kommunurnar kann verða víst næmingum á undirvísing í skúla hjá aðrari kommunu.

**Mannagongd, tá ið skúli verður lagdur niður**

Um eitt kommunustýri hevur gjørt av at leggja ein skúla niður, so skal tað verða kunngjørt í teimum føroysku bløðunum. Um í minsta lagi 30% av íbúgvunum í viðkomandi skúlaumdømi, ið hava valrætt til kommunustýrið, innan ein mánað eftir kunngerðina seta fram skrivliga áheitan um tað, so skal kommunustýrið halda atkvøðugreiðslu um at leggja skúlan niður. Atkvøðurætt hava teir íbúgvar í skúlaumdøminum, ið hava atkvøðurætt til kommunustýrið. Landsstýrismaðurin ásetur nágreiniligari reglur um tílíkar atkvøðugreiðslur. Verður úrslitið av atkvøðugreiðsluni, at í minsta lagi 50% av teimum, ið hava atkvøtt, ynskja at varðveita skúlan, verður hann varðveittur.

**Kommunustýrið, ábyrgd og arbeiðsøki**

Kommunustýrið hevur skyldu til at skipa so fyri, at øll børn, sum búgva í kommununi, fáa undirvísing í hesum øki 7 tey fyrstu skúlaárini. Eisini skal kommunustýrið tryggja møguleika fyri undirvísing í 8., 9. og 10. flokki og fyri sernámsfrøðiligari hjálp til øll børn og ung undir 18 ár. Kommunustýrið hevur somuleiðis ábyrgd av, at fígging er tøk til undirvísingina, og hevur eftirlit við, at øll børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri verða skrivað inn í fólkaskúlan, ella at tey fáa eina undirvísing, sum samsvarar við undirvísingina í fólkaskúlanum. Kommunustýri kunnu tó gera avtalu við aðra kommunu um undirvísing, men er hetta vanliga bara galdandi fyri næmingar, ið eru í 4. skúlaári og eldri.

Kommunustýrið hevur ábyrgd bæði av hølum, innbúgvi, amboðum, tilfari og raktri í skúlanum. Hølisviðurskiftini skulu vera góðkend av avvarandi myndugleikum á økinum og ikki minst skulu hølini vera nøktandi í mun til ta undirvísing, sum fer fram í skúlanum, bæði við atliti at næminga- og flokkatali, aldri á næmingum og teimum serstovum, sum tørvur er á fyri at fremja undirvísingina.

Skúlin skal hava teir undirvísingarmiðlar og tey amboð, sum eru neyðug í undirvísingini, og kommunan skal lata næmingunum bøkur og tilfar ókeypis, tó ikki tól og útbúnað, ið verða nýtt til undirvísing í frítíðini og sum næmingarnir taka heim til egna nýtslu.

Kommunan skal eisini útvega hvørjum sjálvstøðugum skúla, sum í minsta lagi hevur trý samanhangandi floksstig, eitt skúlabókasavn, sum verður skipað sum námsfrøðiligur tænastudepil. Skúlabókasavnið er partur av virksemi skúlans og galdandi bókasavnsskipan. Í skúlabókasavninum skulu vera til taks undirvísingarmiðlar til undirvísingina í skúlanum, herímillum eisini frílestrarbøkur. Skúlabókasavnið skal stýðja alla læring og er ein krumtappur í lesimenningini.

Harumframt fatar ábyrgdarøkið hjá kommununum í høvuðsheitum um hesi viðurskifti:

Kommunustýrið

- hevur ábyrgd av, at hóskandi høli eru tøk til ta í § 26 kravdu undirvísingina, ella at avtala er gjørd við aðra kommunu um felags undirvísing eftir § 27, stk. 1 í fólkaskúlalógini.
- hevur ábyrgdina av rakstrinum av skúlunum og ásetur fíggjarkarmin fyri tann einstaka skúlan.
- kann hava heimild at seta forskúlaflokk/ar á stovn eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur.
- ger uppskot um skúlabygging og umbygging av verandi skúlum og viðger uppskotið saman við skúlastýrinum.
- ásetur reglur um nýtslu av skúlanum til annað endamál enn undirvísing eftir at hava fingið ummæli frá skúlastýrinum og námsfrøðiliga ráðnum.
- gevur ummæli um sín skúlaskap í øllum málum, sum landsstýrismaðurin biður um.

**Skúlabarnaflutningur**
Kommunustýrið skal skipa fyri flutningi millum skúla og heim ella í nánd av heiminum. av næmingum, sum ganga í skúla uttan fyri teirra egnu bústaðarkommunu. Henda skylda kann verða lokin við at vísa næmingunum til almennar ferðslumiðlar ella við at samsýna teimum útreiðslur til egnan flutning.

Kommunustýrið kann harumframt skipa fyri flutningi millum skúla og heim í niðanfyri nevndu førum fyri næmingar, sum ganga í skúla í síni egnu bústaðarkommunu. Tað kann gerast fyri

1. næmingar upp í 3. skúlaár, ið hava longri skúlaveg enn 2,5 km, og eldri næmingar, ið hava longri skúlaveg enn 3,5 km
2. næmingar, ið hava styttri skúlaveg, um so er, at tað er serliga neyðugt fyri tryggleikan hjá næmingunum í ferðsluni ella um skúlavegurin er ov torførur.

Kommunustýrið skal eisini eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur, skipa fyri flutningi í og úr skúla av næmingum, ið eru sjúkir ella avlamnir.

**Undirvísing á sjúkrahúsi, stovni ella heima**
Tað er skylda at veita næmingum, ið ikki kunnu fáa undirvísing í skúlanum vegna smittuvanda ella fyri heilsu og vælferð, undirvísing heima ella á tí stovni, har teir eru staddir. Landskassin rindar læraralønir í hesum sambandi, meðan kommunustýrið ber aðrar útreiðslur.

Skúlamyndugleikin hevur eisini skyldu til at skipa fyri undirvísing á sjúkrahúsum og øðrum stovnum, ið taka ímóti børnum og ungum í aldrinum 6-18 ár, um hesir stovnar eru í øki skúlamyndugleikans. Landskassin rindar læraralønir og útreiðslur til undirvísingarmiðlar í tann mun, stovnurin ikki letur tilfarið.

### *3.1.2.2 Skúlastýrið*

Skúlastýrið er saman við kommunustýrinum skúlamyndugleikin á staðnum og hevur ta undirvísingarligu myndugleikauppgávuna. Skúlastýrið hevur eftirlit við virkseminum í skúlanum og tekur avgerð um øll viðurskifti viðvíkjandi skúlanum, sum ikki eru løgd undir kommunustýrið, leiðara skúlans ella aðrar myndugleikar.

**Skipan**

Í hvørjum sjálvstøðugum skúla í kommununi, t.e. skúla, sum vanliga í minsta lagi fatar um trý samanhangandi floksstig, verður eitt skúlastýrið valt, og talið á umboðum er í mun til skúlastødd:

- Í skúlum, sum í minsta lagi hava 20 næmingar og 2 lærarar, eru limirnir 3 foreldraumboð, 2 kommunustýrisumboð, 1 umboð fyri lærararnar og skúlaleiðarin, sum er skrivari í skúlastýrinum
- Í skúlum, sum hava færri enn 20 næmingar og bara 1 lærara, eru limirnir 2 foreldraumboð, 1 kommunustýrisumboð og skúlaleiðarin, sum er skrivari í skúlastýrinum
- Valskeiðið hjá foreldraumboðunum og kommunustýrisumboðunum fylgir valskeiðnum hjá kommunustýrinum, meðan starvsfólkaumboðið verður valt á hvørjum ári.
- Formaðurin í skúlastýrinum verður valdur millum foreldraumboðini. Sama er galdandi fyri næstformannin, tí tað skal altíð vera eitt foreldraumboð, sum hevur leiðsluna í skúlastýrinum.

**Skúlastýrið, ábyrgd og arbeiðsøki**

Sum myndugleiki á undirvísingarliga økinum er skúlatýrið bæði við at mynda yvirskipaðu karmarnar um undirvísingina í skúlanum í tøttum samstarvi við skúlaleiðaran og tað tekur lut í arbeiðinum hjá bygdaráðanum at skipa fysisku karmarnar og undirvísingarligu fortreytirnar á staðnum viðvíkjandi m. a. amboðum og undirvísingarmiðlum.

Hølisumstøðurnar eru ein fortreyt fyri tí virksemi, sum kann fara fram í skúlanum og hava eisini stóra ávirkan á trivnaðin. Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygging og umbygging av verandi skúlum. Eisini ger skúlastýrið uppskot um skúlabygnaðin í kommununi, t.d. viðv. flokkatali, um skúlin skal hava 1. – 7. fl. ella 1.- 9. fl., og um fleiri skúlar eru í einari kommunu, hvussu kommunan best kann skipa næmingar og undirvísingaruppgávur millum skúlarnar.

Fíggjarligu umstøðurnar hava somuleiðis stóra ávirkan á námsfrøðiligu fortreytirnar, at skúlin kann fáa til vegar neyðuga útgerð. Skúlastýrið ummælir árligu fíggjarætlanina fyri skúlan og skal leggja fyri kommunustýrið øll mál, ið bera við sær fleiri útreiðslur, enn ásett er í fíggjarætlanini. Eisini ummælir skúlastýrið reglugerðina fyri fyrisitingina av komununnar skúlaverki.

Viðvíkjandi undirvísingarmiðlum er at siga, at skúlastýrið eftir tilmæli frá námsfrøðiliga ráðnum góðkennir teir undirvísingarmiðlar, skúlin skal brúka, íroknað teir, ið skulu vera í skúlabókasavninum.

Skúlastýrið ger við støði í ásettum reglum uppskot um atferðarreglur skúlans og umsjónina við næmingunum í skúlatíðini. Eisini ásetur skúlastýrið meginreglur um virksemi skúlans, m.a. undirvísingarætlan skúlans, samarbeiðið ímillum skúla og heim, fráboðan til heimini um úrtøku næminganna av undirvísingini, næmingafráverur, foreldrafundir og felagstiltøk fyri næmingarnar í skúlatíðini, eitt nú útferðir, seturskúla og vitjanir á stovnum/fyritøkum.

Skúlastýrið hevur ein virknan leiklut í sambandi við setanir. Umboð fyri skúlastýrið eru limir í setanarnevndum, ið gera tilmæli til landsstýrismannin um at seta skúlastjórar. Limirnir í setanarnevndunum eru umframt umboð fyri Mentamálaráðið, formaðurin í skúlastýrinum, eitt kommunustýrisumboð í skúlastýrinum og starvsfólkaumboðið í skúlastýrinum.

Eisini eru tað umboð fyri skúlastýrið, sum gera tilmæli til skúlastjóran um at seta lærarar. Limirnir í setanarnevndum at seta lærarar eru formaðurin í skúlastýrinum, eitt kommunustýrisumboð í skúlastýrinum, starvsfólkaumboðið ella álitisfólkið og skúlaleiðarin.

Harumframt hevur skúlastýrið rætt til at ummæla øll mál, ið viðvíkja viðkomandi skúla, og ummælir øll mál, sum kommunustýrið ella landsstýrismaðurin biðja um, umframt onnur viðurskifti um royndarvirksemi og frávik frá ásetingunum um at skipa undirvísingina.

### *3.1.2.3 Landsstýrismaðurin*

Landsstýrismaðurin hevur meginfyrisitingina og yvirumsjónina við fólkaskúlanum og ansar eftir, at galdandi reglur verða hildnar og at ásettar fyriskipanir verða settar í verk. Í hesum arbeiði at røkja lóggávu- og vegleiðarastarv sítt kann landsstýrismaðurin vitja allar fólkaskúlar og krevja at fáa allar upplýsingar frá skúlamyndugleikunum á staðnum.

Landsstýrismaðurin fyrisitur og mennir skipanina og innihaldið í fólkaskúlanum, sum løgtingið hevur samtykt sambært fólkaskúlalógini. Fólkaskúlalógin ásetur m.a. endamál fólkaskúlans, bygnað og innihald, skúlaskipanina, læraraførleika, undirvísingarskyldu, fyrisitingina av fólkaskúlanum og meginfyrisiting og umsjón.

Landsstýrismaðurin hevur víðar heimildir at fremja sítt eftirlit og seta í verk menningarátøk, at tryggja samanhang í skipanini og hava yvirlit yvir samlaðu støðuna.

Landsstýrismaðurin ásetur reglur, sum útgreina lógarásetingar bæði við atliti at innihaldi og hvussu farið verður fram. Eisini játtar hann undantak frá meginreglunum, kann veita serliga undirvísing, stuðul ella hjálp, skal góðkenna ymsar fyriskipanir, ið kommunan setur í verk, kann áleggja kommunum einstakar uppgávur og seta í verk arbeiði, ið kommunan ikki røkir til lítar, fyri kommununnar rokning.

Landsstýrismaðurin hevur ábyrgd av innihaldinum í lærugreinum og evnum, hann ger reglur um tíma- og lærugreinabýtið, ásetur endamálið og ger lesiætlanir í einstøku lærugreinunum og evnunum, hann avger í hvørjum lærugreinum próvtøka verður og setur tær skrivligu uppgávurnar til royndirnar, ásetur reglur um royndarkrøvini í einstøku lærugreinunum, um royndarhald, próvtalsgeving og hvussu próvskjølini skulu vera, og hann skipar fyri landsroyndunum í 4. og 6. floksstigi og ger reglur um støðuroyndir.

Landsstýrismaðurin skal skipa fyri menning í fólkaskúlanum, hann ger eina menningarætlan fyri allan fólkaskúlan og kann fyrireika royndar- og menningarátøk og í hesum sambandi veita tí einstaka skúlanum ráðgeving og fíggjarligan stuðul.

Landsstýrismanninum er heimilað at seta á stovn serligan skúla ella undirvísingartilboð fyri næmingar við atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikum, ið ikki á annan hátt kunnu fáa nøktandi undirvísing í fólkaskúlanum.

Landsstýrismaðurin tekur støðu til ymisk øki, ið kommunurnar fyrisita. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð vavið av undirvísingarmiðlum, sum kommunurnar ókeypis skulu lata næmingunum. Hann ásetur reglur um endamál og virki hjá skúlabókasavninum. Landsstýrismaðurin kann áleggja einum skúlamyndugleika at taka ímóti næmingum frá øðrum skúlamyndugleika, um so er, at pláss er í skúlanum. Tær útreiðslur, ið standast av hesi skipan, verða rindaðar eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur.

Landsstýrismaðurin góðkennir flutningsskipanir og ásetur reglur um landskassastudning til lutvísa rindan av flutningsútreiðslunum. Hann kann eisini loyva, at endurgjaldsútreiðslur, ið standast av læraraflutningi, kunnu verða viðgjørdar eftir somu reglum sum útreiðslur av næmingaflutningi. Landsstýrismaðurin skal góðkenna teir sáttmálar, sum kommunurnar gera um skúlasambond, eisini sáttmálar, sum kommunur gera um at vísa næmingum á undirvísing í skúla hjá aðrari kommunu. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um niðurlegging av skúlum.

Landsstýrismaðurin skal góðkenna øll byggimál og allar umbyggingar í fólkaskúlanum, ger reglur  um, hvussu ein skúli verður innrætaður og skal góðkenna skúlabygnaðin í kommunum.

Viðvíkjandi ráðgeving kann landsstýrismaðurin umframt fyrisitingina í ráðnum seta eitt fólkaskúlaráð, sum hevur til uppgávu at veita landsstýrismanninum ráð í øllum málum um fólkaskúlan. Eisini kann ráðið ráða landsstýrismanninum til at seta í verk royndar- og menningarvirksemi og granskingarætlanir. Landsstýrimaðurin tilnevnir bæði formann og ráðslimir.

### *3.1.2.4 Skúlaleiðarin, ábyrgd og arbeiðsøki*

Til hvønn sjálvstøðugan skúla, sum hevur fleiri lærarar í føstum starvi, verður settur leiðari, ið antin verður nevndur fyrstilærari ella skúlastjóri. Í skúlum, ið bara hava ein

lærara, er hesin lærari samstundis leiðari skúlans. Treytirnar fyri at røkja starv sum skúlaleiðari eru, at viðkomandi hevur fólkaskúlalæraraútbúgving og antin hevur nomið ella nemur sær góðkenda leiðsluútbúgving.

Skúlaleiðarin hevur ta fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna í skúlanum, og hann hevur ábyrgdina av virksemi skúlans mótvegis skúlamyndugleikunum á staðnum. Hann setur og loysir úr starvi øll starvsfólk í skúlanum, sum hava undirvísingarligar uppgávur: lærarar, varaskúlastjóra og tey starvsfólk, ið røkja aðrar námsfrøðiligar uppgávur. Hann stýrir og býtir arbeiðið millum teirra, sum starvast í skúlanum og setur flokslærara í hvørjum flokki. Skúlaleiðarin skal tryggja, at flokslærarin og aðrir lærarar floksins ráðleggja og fyrireika undirvísingina, so at allir næmingar kunnu fáa sínar avbjóðingar. Skúlaleiðarin fremur virksemi sítt í samarbeiði við tey, sum eru sett í starv í skúlanum

Skúlaleiðarin tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingum skúlans og hevur eftirlit við, at teir næmingar, sum eru innskrivaðir í skúlan, fylgja nóg væl við og taka lut í undirvísingini. Hann tekur avgerð um, at næmingar verða skrivaðir inn í 1. flokk í tí álmanakkaári, teir innan 1. august fylla 6 ár, um hildið verður, at teir kunnu fylgja undirvísingini í flokkinum. Hann góðkennir somuleiðis, at barn verður skrivað inn árið eftir, at undirvísingarskyldan er byrjað, um so er, at tað hevur sínar grundir í menning barnsins. Skúlaleiðarin kann eisini loyva, at næmingur eftir 7 ára skúlagongd heilt ella lutvíst lýkur undirvísingarskylduna við arbeiði, vinnuligari útbúgving ella undirvísingartilboði sambært § 9, stk. 2 í fólkaskúlalógini, um so er, at tað av serligum orsøkum verður hildið at vera best fyri næmingin.

Skúlaleiðarin skal seta tiltøk í verk, um so er, at næmingur ikki heldur skúlans reglur. Næmingar, ið hava atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikar, kunnu eftir avgerð skúlaleiðarans verða fluttir í aðrar skúlar í kommununi ella í annað undirvísingartilboð.

Skúlaleiðarin er skrivari í skúlastýrinum. Hann ger uppskot til skúlastýrið um meginreglurnar fyri virksemi skúlans. Hann ger uppskot til skúlastýrið um fíggjarætlan skúlans innan fyri teir fíggjarligu karmarnar, sum kommunustýrið hevur ásett.

### *3.1.2.5. Námsfrøðiligt ráð og næmingaráð*

Í øllum skúlum, sum í minsta lagi hava 20 næmingar og 2 lærarar, verður stovnað eitt námsfrøðiligt ráð, sum hevur til uppgávu at ráðgeva skúlaleiðaranum. Limirnir í ráðnum eru øll tey samstarvsfólk í skúlanum, sum hava undirvísingarligar og aðrar námsfrøðiligar uppgávur.

Eisini kunnu næmingarnir í skúlum, sum hava 5. flokk ella eldri floksstig, stovnað eitt næmingaráð, hvørs uppgáva er at styrkja demokratisku luttøkuna hjá næmingunum, geva og vísa teimum ábyrgd og rætt at viðgera og úttala seg í málum viðvíkjandi skúlagongdini, sum teir kunnu hava ávirkan á.

### 3.1.3 Innihald og skipan

Fólkaskúlalógin er karmur um bæði bygnað, innihald og fyristingina av fólkaskúlanum. Ásetingarnar kunnu t.d. skipast í hesar høvuðspartar:

1 Uppgáva fólkaskúlans
2 Skipan
3 Innihald
4 Onnur viðurskifti

### *3.1.3.1 Uppgáva fólkaskúlans*

Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at virka fyri, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu persónligu menningini.

Einstaki skúlin hevur innan fyri settar karmar ábyrgdina av undirvísingardygdini sambært endamáli fólkaskúlans. Innan fyri hesar karmar ger skúlin av, hvussu hann skipar og leggur sína undirvísing til rættis. Skúlin skal eisini samstarva við næmingar og foreldur um at megna tað, sum er ásett í endamálsgrein fólkaskúlans.

### *3.1.3.2 Skipan*

Fólkaskúlin er ein 9 ára grundskúli og ein eitt árs 10. flokkur. Harumframt kunnu kommunur fáa heimild til at seta á stovn forskúlaflokk/ar eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur. 9 ára undirvísingarskyldan heimilar ikki í sjálvum sær skúlamyndugleikunum á staðnum at broyta verandi skúlabygnað. Landsstýrismaðurin skal góðkenna hetta, um kommuna ætlar at broyta skúlabygnaðin á staðnum. Í skipanini eru eisini ásetingar um, hvussu skúlar verða flokkaðir í mun til næmingatal, hvussu nógvar undirvísingartímar næmingarnir í ymsum aldri í mesta lagi kunnu hava um dagin, og hvussu nógvar tímar, hvør flokkur skal hava um vikuna.

Einstaki skúlin verður býttur í flokkar í mun til næmingatalið. Skúli er ársbýttur, tá ið hann er 7 flokkaður. Hóast skúli er ársbýttur, kann undirvísing fara fram tvørtur um floksbýtið, m.a í sambandi við at skapa størri eindir og samskipa undirvísingina í byrjanarundirvísingini, og tá ið arbeitt verður í sjálvstýrandi toymum. Undirvísingin kann eisini verða skipað í bólkum í hvørjum flokki og millum flokkar og floksstig. Henda skipan kann verða sett í verk av praktiskum ella námsfrøðiligum orsøkum.

**Meginreglur fyri floksbýtinum**

| **Næmingatal** | **Flokkar** |
|---|---|
| 1-14 | 1- flokkaður skúli |
| 15 – 30 | 2- flokkaður skúli |
| 31 – 48 | 3- flokkaður skúli |
| 49 – 68 | 4- flokkaður skúli |
| 69 – 90 | 5- flokkaður skúli |
| 91 – 114 | 6- flokkaður skúli |
| 115 og fleiri | 7- flokkaður skúli |

### *3.1.3.3. Vikutímatalið*

Vikutímatalið í byrjanarundirvísingini, 1. – 3. flokki, er økt munandi seinastu tvey árini. Hetta er eitt av úrslitunum av eftirmetingunum, ið eru gjørdar í fólkaskúlanum, tí tað vísti seg, at føroysku næmingarnir høvdu nógv færri tímar í byrjanarundirvísingini enn næmingarnir í okkara grannalondum. Hinvegin er tímatalið í miðdeildini hægri, men hetta er uttan iva rætt, tí vit hava eina høvuðslærugrein meira enn í grannalondunum. Í

fylgiskjali 3 er lýst tímatalið, sum næmingarnir í minsta lagi skulu hava um vikuna, og hvussu nógvar tímar næmingarnir í mesta lagi skulu hava hvønn dagin.

#### *3.1.3.4. Innihald*

Fólkaskúlin skal veita næmingunum í 9 ára grundskúlanum undirvísing í eini røð av kravdum lærugreinum. Í fylgiskjali 4 eru vístar kravdu lærugreinirnar í hvørjum flokki í 1. til 9. árgangi. Handaverk og list er kravd lærugrein í 5 skúlaár í 1. – 7. flokki og fatar um lærugreinapartarnar, tónleik, tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleika. Skúlin avger sjálvur, í hvørjum árgangum undirvíst verður í einstøku lærugreinapørtunum í handaverki og list.

Í 8. og 9. skúlaári, sí fylgiskjal 5 skal skúlin umframt kravdu lærugreinirnar bjóða næmingunum undirvísing í týskum og alis-/evnafrøði. Eisini kann skúlin bjóða næmingunum undirvísing í eini røð av lærugreinum.

Í 10. flokki, sí fylgiskjal 5 eru ongar kravdar lærugreinur, men føroyskt, danskt, støddfrøði, kristnikunnleiki, ítróttur, samtíð og enskt skulu standa næmingunum í boði, og harumframt kann skúlin bjóða næmingunum undirvísing í somu tilboðslærugreinum sum í 8. og 9. flokki.

Í fylgiskjali 6 er samlað yvirlit yvir tíma- og lærugreinabýtið í 1. – 10. flokki.

### 3.1.4 Eftirmeting

Foreldur og næmingar skulu regluliga fáa at vita skúlans áskoðan um, hvat næmingarnir fáa burtur úr skúlagongdini. Úrtøkan hjá næmingunum verður javnan eftirmett, herímillum kunnleiki og fimi, sum næmingarnir hava ognað sær í lærugreinum og -evnum í mun til endalig og ávegis mál. Henda eftirmeting, ið er sameindur partur av undirvísingini, skal vera støðið undir teirri leiðbeiningini, ið tann einstaki næmingurin fær, og undir ráðleggingini av komandi undirvísing. Eftirmetingin skal eisini vera grundarlag undir kunningini til foreldrini um úrtøkuna hjá næminginum av skúlagongdini.

**Landsroyndir og støðuroyndir**

Endamálið við lands- og støðuroyndunum er at tryggja skúlum, foreldrum, næmingum, lærarum og myndugleikum innlit í fakliga støðið í fólkaskúlanum og at geva lærarum og skúlaleiðslu eitt amboð, sum umframt at meta um fakliga støðið hjá næmingunum eisini skal nýtast til at laga og málrætta undirvísingina til tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum. Eisini er málið við lands- og støðuroyndum at styrkja eftirmetingarskipanina í skúlunum. Harumframt eru landsroyndirnar ætlaðar sum amboð og ítøkiligt grundarlag hjá myndugleikum, skúlum og foreldrum at fylgja við og meta um fakliga støðið í teirra egna skúla, umframt at kunna viðgera úrslitið í mun til fakliga støðið í øðrum skúlum í landinum.

Skipað verður á hvørjum ári fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúrulærugreinunum í 4. og 6. floksstigi. Somuleiðis verður skipað fyri støðuroyndum í lesing og støddfrøði á 1. og 2. floksstigi og fyri støðuroyndum í ávísum lærugreinum í 3., 5. og 7. árgangi. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, í hvørjum lærugreinum støðuroyndir skulu vera, og hvussu tær skulu fremjast, reglur um støðuroyndir til næmingar við serligum tørvi og frítøku fyri næmingar vegna serligar umstøður.

**Próvtøka**

Tá ið undirvísingin í ávikavist 9. og 10. flokki endar, verður skipað fyri bæði skrivligari og munnligari próvtøku. Munnlig próvtøka er í 4 – 5 lærugreinum, sum landsstýrismaðurin tekur avgerð um á hvørjum ári, meðan ásett er í fólkaskúlalógini, í hvørjum lærugreinum næmingarnir fara til skrivliga próvtøku. Skrivlig próvtøka í 9. og 10. flokki er í føroyskum, donskum, enskum og støddfrøði.

**Forskúli**

Í forskúlanum skulu børnini verða kunnað um dagliga lívið í skúlanum, læra at vera í skúla og at vera trygg við undirvísingarstøðuna, har tað fer fram eitt samspæl millum læring og leik. Børnini skulu læra grundstøðið undir lesing, skriving og rokning, læra at nýta bókasøvn, handaligt virksemi, tónleik, rørslu, at lurta og vera virkin luttakari í undirvísingarstøðuni og tí sosiala samverupartinum.

Skipað samstarv skal vera millum lærarar og pedagogar í forskúla, byrjanarundirvísing og frítíðarskúla. Um forskúli er settur á stovn, skulu børnini eftir áheitan frá foreldrunum vera skrivað inn í forskúlan í tí álmanakkaári, barnið fyllir 6 ár, ella seinni.

### 3.1.5 Skúlar

Skúlaøkið er rættiliga spjatt og seinasta skúlaár, skúlaárið 2008/09, vóru 59 fólkaskúlar kring landið, sí talvu um skúlar, næmingar og flokkatal niðanfyri. So at siga hvør bygd hevur havt sín skúla, men tó eru nakrir skúlar lagdir niður í kommunum, sum fevna um fleiri bygdir, í t.d. Sjóvar kommunu er bara ein skúli, Runavíkar kommuna hevur fyri nøkrum árum síðani skipað sín skúlabygnað í eina eind, Runavíkar kommunuskúla, og undirvísingin er savnað í Runavík og á Glyvrum. Tær bygdir, sum hava lagt saman við Runavíkar kommunu, Skála, Oyndarfjørður og Funningur, hava tó ikki broytt sín skúlabygnað samsvarandi.

Fólkatalið í útjaðaranum er minkað, og tí er næmingatalið í nógvum bygdarskúlum rættiliga lítið. Vegakervið í Føroyum er væl útbygt, so tað er ikki frástøðan, sum er orsøk til, at skúlarnir ikki eru meira samskipaðir, men heldur at skúlin er ein partur av samleikanum í bygdini. Fólk ynskja at varðveita sín bygdarskúla, bæði tí tað er deydligt í einari bygd, har eingi børn eru, og tí at skúlin í nógvum bygdum er karmurin um ymisk mentanarlig og sosial tiltøk. Eitt annað, sum ger, at kommunur og foreldur aftra seg við at lata børnini fara í ein størri skúla í eini av grannabygdunum ella samskipa smærru skúlarnar, er, at farvegurin millum nakrar bygdir ikki er vandaleysur á vetrartíð bæði viðvíkjandi omanlopi og hálku.

Neyðugt er at hugsa um kjarnuna í hesum máli, hvat er best fyri barnið, hvussu eru lærumøguleikarnir og umstøðurnar fyri sosialari samveru og trivnaði í lítla bygdarskúlanum í mun til í einum størri skúla.

Samlaði lærarafø rleikin í einum størri skúla er fjølbroyttari og eigur betur at kunna nøkta fakliga førleikan enn lærarasamansetingin í einum lítlum skúla við einum ella bert fáum lærarum. Lærarar í dag ogna sær serligan førleika í ávísum lærugreinum, meðan gamla læraraútbúgvingin var býtt í tvær høvuðslinjur. Tí er við nýggju skipanini ofta neyðugt at hava fleiri lærarar fyri at tryggja fakliga lærarafø rleikan í øllum lærugreinum.

Neyðugt er eisini at hugsa um trivnaðin bæði hjá næmingunum og lærarum. Tað er týdningarmikið, at næmingar hava onkrar javnlíkar. Næmingar í smærru skúlunum kunnu vera rættiliga einsamallir, tí teir hava bara fáar floksfelagar, sum eru í sama aldri. Spjaðingin kann bæði vera viðvíkjandi áhuga, aldri og kyni. Eisini tey tilboð ella tað virksemi og spæl, sum er í fríløtunum, kunnu vera meira eintáttað.

Lærarar í smærru skúlunum hava ikki somu umstøður í gerandisdegnum at luttaka í fakligum orðaskifti um undirvísingarhættir, læring, tilfar og fakligar og undirvísingarligar royndir sum í einum størri skúla. Hetta orðaskiftið gevur bæði íblástur í arbeiðinum og er við til at menna læraran í einum fakligum og námsfrøðiligum umhvørvi.

Spurningurin um skúlastøddir er eisini ein fíggjarligur spurningur. Tað er bæði dýrari viðvíkjandi læraralønum og rakstri at hava fleiri skúlar í einari kommunu. Land og kommunur mugu tí taka henda spurning til endurskoðan, um tað yvirhøvur er rætt at hava nógvar smáar skúlaeindir, bæði við atliti at kostnaði, fakligum og námsfrøðiligum avbjóðingum og sosiala trivnaðinum. Eisini eigur í kommunalu viðgerðini støða at verða tikin til, um skúlabygnaðurin kann verða øðrvísi, soleiðis at sjálvt um næmingarnir eru savnaðir í størri eindum, at bygdaskúlin verður nýttur til serlig undirvísingarlig ella sosial tiltøk til næmingar, sum krevja serligar umstøður og fyrilit.

## Skúlar, næmingar og flokkatal

| Skúlar 2008/2009 | Næmingar | Flokkar | Skúlaslag |
|---|---|---|---|
| **Kommunuskúlin** | 509 | 26 | 1. – 10. flokk |
| **Eysturskúlin** | 499 | 24 | 1. – 10. flokk |
| **Venjingarskúlin** | 435 | 20 | 1. – 10. flokk |
| **Runavíkar skúli** | 425 | 23 | 1 - 10. flokk |
| **Skúlin á Ziskatrøð** | 394 | 21 | 1. – 10. flokk |
| **Hoyvíkar skúli** | 388 | 18 | 1. – 10. flokk |
| **Argja skúli** | 327 | 18 | 1. – 10. flokk |
| **Skúlin við Ósánna** | 324 | 17 | 1. – 10. flokk |
| **Tvøroyrar skúli** | 289 | 17 | 1. – 10. flokk |
| **Fuglafjarðar skúli** | 287 | 16 | 1. – 10. flokk |
| **Sankta Frans skúli** | 268 | 14 | 1. - 7. flokk |
| **Miðvágs/Sandavágs skúli** | 257 | 15 | 1. – 10. flokk |
| **Vágs skúli** | 223 | 12 | 1. – 10. flokk |
| **Tofta skúli** | 196 | 11 | 1. – 10. flokk |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Vestmanna skúli** | 194 | 12 | 1. – 10. flokk |
| **Stranda skúli** | 190 | 12 | 1. – 10. flokk |
| **Sørvágs skúli** | 143 | 10 | 1. – 10. flokk |
| **Kollafjarðar skúli** | 136 | 9 | 1. - 9. flokk |
| **Gøtu skúli** | 126 | 8 | 1. - 7. flokk |
| **Skúlin á Løgmannabreyt** | 111 | 5 | 1. - 3. flokk |
| **Sandoyar Meginskúli** | 106 | 7 | 6. – 10. flokk |
| **Hvalbiar skúli** | 95 | 9 | 1. - 9. flokk |
| **Felagsskúlin á Oyrarbakka** | 91 | 6 | 8. – 10. flokk |
| **Leirvíkar skúli** | 88 | 7 | 1. - 7. flokk |
| **Eiðis skúli** | 79 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Skála skúli** | 74 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Norðskála-/Oyra skúli** | 72 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Sands skúli** | 55 | 5 | 1. – 5. flokk |
| **Skúlin á Fossánesi** | 53 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Viðareiðis skúli** | 53 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Velbastaðar skúli** | 52 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Hvalvíkar skúli** | 44 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Hósvíkar skúli** | 42 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Kvívíkar skúli** | 42 | 7 | 1. - 7. flokk |
| **Kaldbaks skúli** | 30 | 6 | 1. – 7. flokk |
| **Porkeris skúli** | 28 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Skopunar skúli** | 27 | 5 | 1. – 5. flokk |
| **Nólsoyar skúli** | 24 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Haldórsvíkar skúli** | 17 | 5 | 1. - 7. flokk |
| **Sumbiar skúli** | 16 | 7 | 1. – 7. flokk |
| **Skálavíkar skúli** | 13 | 5 | 1. – 5. flokk |
| **Oyndarfjarðar skúli** | 12 | 5 | 1. – 7. flokk |
| **Húsar/Syðradals skúli** | 8 | 1 | 1. – 9. flokk |
| **Hovs skúli** | 7 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Kunoyar skúli** | 7 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Funningsfjarðar skúli** | 6 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Tjørnuvíkar skúli** | 6 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Mikladals/Trøllanes skúli** | 5 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Leyna/Vála-skúli** | 5 | 1 | 1. – 5. flokk |
| **Haraldssunds skúli** | 4 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Fámjins skúli** | 3 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Gjáar skúli** | 3 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Húsavíkar/Dals skúlar** | 3 | 1 | 1. – 5. flokk |
| **Sandvíkar skúli** | 3 | 1 | 1. – 5. flokk |
| **Funnings skúli** | 1 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Hests skúli** | 1 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Kirkju/Hattarvíkar skúli** | 1 | 1 | 1. – 9. flokk |
| **Mykines skúli** | 2 | 1 | 1. – 7. flokk |
| **Skúvoyar skúli** | 1 | 1 | 1. – 9. flokk |

### 3.1.6 Sernámsfrøði

Sernámsfrøðilig ráðgeving verður veitt skúlum, foreldrum og øðrum, ið varða av næmingum í fólkaskúlanum. Næmingar, ið hava tørv á serligum tiltøkum ella sum ikki fáa nøktandi úrslit í vanliga undirvísingartilboði skúlans, fáa serundirvísing og/ella sernámsfrøðiligan stuðul.

Landsstýrismaðurin kann veita børnum, ið enn ikki hava byrjað skúlagongdina, sernámsfrøðiligan stuðul og sernámsfrøðiliga hjálp. Somuleiðis verður sernámsfrøðilig ráðgeving veitt foreldrum og øðrum, ið varða av hesum børnum.

Serundirvísing og sernámsfrøðiligur stuðul, ið ikki eru fyribils, skulu verða grundað á eina námsfrøðiliga/sálarfrøðiliga kanning og skulu fara fram í samráð við næmingin og foreldrini. Um foreldrini nokta fyri hesum, skal skúlin kunna barnaverndina um avgerðina hjá foreldrunum.

Landsstýrismaðurin kann bjóða tvímæltum børnum, ið hava annað móðurmál enn føroyskt og sum enn ikki hava byrjað skúlagongdina, stuðul til frama fyri málsligu menningina í føroyskum máli.

Næmingar, ið hava føroyskt sum seinna málið, kunnu í hóskandi vavi fáa serstaka undirvísing í føroyskum. Landsstýrismaðurin kann harumframt áseta, at tvímæltir næmingar skulu hava tilboð um undirvísing í teirra móðurmáli.

Næmingar, sum eru deyvir og hava teknmál sum fyrsta mál, skulu hava holla undirvísing í teknmáli.

Sernámsdepilin, ið er ein landsstovnur, umsitur serundirvísing/serligan tørv. Skúlarnir fáa tillutað tímar til serligan tørv í mun til næmingar, ið hava tørv á sernámsfrøðiligum stuðli ella praktiskari hjálp. Mælt verður ikki til at broyta hesa skipan, men útbyggja NSR-tænasturnar, so at í hvørjari kommunu verður ein NSR-tænasta, sum er bindilið millum skúla og Sernámsdepilin.

Endamálið við NSR-tænastuni, sum er partur av Sernámsdeplinum, er at miðfirra og samskipa sernámsfrøðiligu ráðgevingina í økjum kring landið so nær borgaranum sum gjørligt. Kommunurnar eru við í arbeiðinum og luttaka í fíggingini av eindunum.

Í NSR-tænastuni virka samskipari, sálarfrøðingur, talilærarar o.o. Hesi fólk ráðgeva og samskipa tiltøk til børn við breki ella sernámsfrøðiligum trupulleikum. Arbeiðið verður gjørt í samráð við barnaverndarstovur, heilsusystrar og sosialar deildir. Tænastueindin skal vera "staðið", har øll foreldur venda sær, tá ið barnið hevur sernámsfrøðiligar trupulleikar.

Uppgávan hjá NSR-tænastuni er:

- at samskipa tiltøk til børn við serligum tørvi í økjunum
- at skráseta tilmeldingar, skipa fyri og gera kanningar
- at umsita tímarnar vegna serligan tørv í økinum
- samskipa samstarvið millum kommunalu, almanna- og heilsu- og skúlamyndugleikarnar á staðnum
- at gera eina undirvísingar- og heildarætlan fyri barnið
- at ráðgeva foreldrum, stovnum, skúlum o.ø.

### 3.1.7 Lærarar í fólkaskúlanum

Tilsamans eru 723 ársverk í fólkaskúlanum. Hetta eru lærarar, skúlaleiðarar og vikarar. Skrivstovufólk, húsavørðar og vaskifólk eru ikki íroknað, tí Mentamálaráðið hevur ikki yvirlit yvir kommunalu starvsfólkini, tí kommunan setur tey í starv og rindar lønina hjá hesum starvsfólkum skúlans. Tað eru 287 tænastumenn, og umroknað til ársverk eru tað 237 ársverk. Sáttmálasettu lærararnir eru 655 í tali, og umroknað til ársverk eru tað 486 ársverk, av teimum eru 93 vikarar uttan útbúgving, sum umroknað til ársverk eru 64 ársverk.

Størvini í skúlunum kring landið eru skipað soleiðis, sum lýst í talvuni niðanfyri. Eisini eru lønarútreiðslurnar tiknar við:

## Skúlar, læraratal og kostnaður

| Skúlar | Tænastumenn Árverk | Sáttmálasett Ársverk | Tilsamans ársverk | Lønarútreiðslur 2008 |
|---|---|---|---|---|
| **Kommunuskúlin** | 8,63 | 38,76 | 47,39 | 19.671.901 |
| **Eysturskúlin** | 17,42 | 29,69 | 47,11 | 18.834.625 |
| **Runavíkar skúli** | 18,56 | 23,84 | 42,4 | 15.810.088 |
| **Venjingarskúlin** | 11,2 | 24,08 | 35,28 | 14.895.322 |
| **Hoyvíkar skúli** | 10,61 | 23,91 | 34,52 | 13.951.159 |
| **Skúlin á Ziskat./Mikladals/Trøllanes skúli** | 17,54 | 23,83 | 41,37 | 13.671.432 |
| **Fuglafjarðar skúli** | 6 | 24,52 | 30,52 | 12.551.093 |
| **Argja skúli** | 10,85 | 19,73 | 30,58 | 12.096.053 |
| **Skúlin við Ósánna** | 11,74 | 16,48 | 28,22 | 11.150.669 |
| **Tvøroyrar skúli** | 16,15 | 10,7 | 26,85 | 10.729.790 |
| **Sankta Frans skúli** | 8,57 | 15,46 | 24,03 | 9.806.575 |
| **Miðvágs/Sandavágs skúli** | 9 | 16,16 | 25,16 | 9.758.523 |
| **Vágs skúli** | 12,26 | 9,91 | 22,17 | 9.359.907 |
| **Tofta skúli** | 7 | 16,02 | 23,02 | 8.266.809 |
| **Vestmanna skúli** | 7 | 14,62 | 21,62 | 8.011.834 |
| **Stranda skúli** | 7,56 | 12,64 | 20,2 | 7.979.883 |
| **Sørvágs skúli** | 5 | 11 | 16 | 6.417.832 |
| **Kollafjarðar skúli** | 5,81 | 9,13 | 14,94 | 6.100.487 |
| **Hvalbiar skúli** | 7 | 5,95 | 12,95 | 4.811.839 |
| **Gøtu skúli** | 4 | 8 | 12 | 4.734.313 |
| **Felagsskúlin á Oyrarbakka** | 1 | 9,84 | 10,84 | 4.521.927 |
| **Sandoyar Meginskúli** | 3 | 9,68 | 12,68 | 4.397.448 |
| **Leirvíkar skúli** | 4 | 6,64 | 10,64 | 3.951.428 |
| **Skála skúli** | 3 | 6,53 | 9,53 | 3.934.238 |
| **Norðskála-/Oyra skúli** | 2 | 7,04 | 9,04 | 3.297.912 |
| **Eiðis skúli** | 3 | 5,27 | 8,27 | 3.025.680 |
| **Viðareiðis skúli** | 0 | 7,48 | 7,48 | 2.303.375 |
| **Kvívíkar skúli** | 1 | 4,67 | 5,67 | 2.299.985 |
| **Velbastaðar skúli** | 0 | 5,65 | 5,65 | 2.248.343 |
| **Hvalvíkar skúli** | 1 | 5,48 | 6,48 | 2.196.882 |
| **Skúlin á Fossánesi** | 1 | 5,17 | 6,17 | 1.897.292 |
| **Sands skúli** | 1,28 | 4,26 | 5,54 | 1.884.629 |
| **Hósvíkar skúli** | 2 | 4,89 | 6,89 | 1.736.889 |
| **Skúlin við Løgmannabreyt** | 1 | 10,16 | 11,16 | 1.649.749 |
| **Nólsoyar skúli** | 0 | 3,85 | 3,85 | 1.563.273 |
| **Kaldbaks skúli** | 1 | 3,14 | 4,14 | 1.544.424 |
| **Þorkeris skúli** | 1 | 2,65 | 3,65 | 1.301.848 |
| **Skopunar skúli** | 1 | 2,07 | 3,07 | 1.165.048 |
| **Oyndarfjarðar skúli** | 1 | 3 | 4 | 1.120.198 |
| **Haldórsvíkar skúli** | 0 | 2,94 | 2,94 | 1.067.279 |
| **Sumbiar skúli** | 1 | 2,49 | 3,49 | 945.454 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Húsavíkar/Dals skúlar** | 1 | 1,13 | 2,13 | 799.537 |
| **Haraldssunds skúli** | 1 | 0,98 | 1,98 | 702.100 |
| **Húsar/Syðradals skúli** | 0 | 2,29 | 2,29 | 685.203 |
| **Skálavíkar skúli** | 1 | 0,54 | 1,54 | 638.855 |
| **Funningsfjarðar skúli** | 0 | 1,41 | 1,41 | 562.331 |
| **Leyna/Vála-skúli (2 skúlar)** | 0 | 1,26 | 1,26 | 534.277 |
| **Hovs skúli** | 0 | 1,27 | 1,27 | 487.483 |
| **Sandvíkar skúli** | 0 | 1 | 1 | 474.967 |
| **Kunoyar skúli** | 0 | 1 | 1 | 462.466 |
| **Gjáar skúli** | 0 | 1,11 | 1,11 | 457.192 |
| **Funnings skúli** | 1 | 0,29 | 1,29 | 430.417 |
| **Tjørnuvíkar skúli** | | 1 | 1 | 422.126 |
| **Skúvoyar skúli** | 1 | 0,16 | 1,16 | 412.561 |
| **Fámjins skúli** | 0 | 1 | 1 | 399.524 |
| **Hests skúli** | | 1 | 1 | 395.498 |
| **Svínoyar skúli** | | | 0 | 373.397 |
| **Mykinesar skúli** | | 1 | 1 | 214.365 |
| **Kirkju/Hattarvíkar skúli** | | 1 | 1 | 153.322 |
| **TIL SAMANS** | 235 | 485 | 719 | 275.269.056 |

### 3.1.8 Fíggjarliga býtið millum land og kommunur

Bæði land og kommunur hava ábyrgdina av fólkaskúlanum. Tað verður mangan tosað um tað ógreiða býtið millum land og kommunur, men í veruleikanum eru økini í høvuðsheitum rættiliga væl avmarkað. Frammanfyri er fyrisitingarligar býtið millum land og kommur lýst.

Viðvíkjandi fíggjarliga partinum, so rindar landið virksemið í skúlanum. Skúlarnir fáa tillutað ávíst tímatal til undirvísingina í mun til flokka- og nemingatalið í skúlanum. Landið rindar eisini tímar til serundirvísing og til allar serfunktiónir sum skúlabókavørð, savnsrøkt, skúlavegleiðing, telduvørð, og flokslæraraskipan.

Í mun til tímatillutan verður ávíst tal av størvum skipað í einstaka skúlanum og rindar landið løn, eftirløn og eftirútbúgving hjá leiðslu og starvsfólkum skúlans, sum røkja tímarnar sambært tímatillutanini til undirvísingarliga virksemið.

Kommunurnar útvega neyðug høli, innbúgv og amboð, sum skulu nýtast í undirvísingini. Eisini rinda kommunurnar allar undirvísingarmiðlar og tilfar, sum skúlin brúkar í sambandi við undirvísingina, umframt at kommunurnar rinda raksturin av skúlanum,

byggiútreiðslur, el, olju vasking og viðlíkahald. Harumframt bera kommunurnar kostnaðin av uttanduraøkinum og atkomu- og parkeringsumstøðunum við skúlan.

Landið hevur eisini yvirumsjón, royndarhald, eftirmetingar og skipar fyri menningarátøkum og ásetur lógir og reglur á økinum, meðan kommunurnar hava um hendi bygningar, innbúgv, amboð og undirvísingarmiðlar og bera fíggjarliga raksturin av skúlanum.

**Sernámsdepilin**

Sernámsdepilin umsitur vegna Mentamálaráðið játtanina til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum. Hetta fatar bæði um tímar til einstakar næmingar við serligum tørvi umframt lønir til talulærarar, serráðgevar o.o., sum virka í skúlunum og í NSR-tænastuni. Harumframt lønar Sernámsdepilin teimum fólkum, sum eru sett í starv sum sálarfrøðingar, ráðgevar, skrivstovufólk o.a. í Sernámsdeplinum. Sernámsdepilin hevur egna játtan á løgtingsins fíggjarlóg.

**Skúlin á Trøðni**

Landið rindar fyri alt virksemi í Skúlanum á Trøðni. Tó verður heimakommunan kravd eftir einum gjaldi á kr. 15.000 fyri hvønn næming í kommununi, sum er í Skúlanum á Trøðni.

**Sernámsfrøðiligar tænastueindir, NSR-tænastur**

Kommunurnar skulu útvega neyðug høli, innbúgv og amboð umframt at løna einum skrivara, meðan Sernámsdepilin setur í starv, loysir úr starvi og rindar lønina hjá øllum hinum starvsfólkunum í NSR-tænastuni.

**Stuðulslærarar**

Høvuðsreglan er, at Mentamálaráðið rindar fyri stuðul, sum verður veittur næmingunum í skúlatíðini, meðan Almannastovan rindar fyri stuðul eftir skúlatíð.

### 3.1.9 Fólkaskúlaøkið – kostnaður

Játtanin til fólkaskúlan er í 2009 271 mió. kr. Harumframt er samlaða játtanin til Sernámsdepilin og Skúlan á Trøðni 60 mió. kr. Í játtanini til Sernámsdepilin er umframt

skúlan á Trøðni, játtan til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum, sum er slakar 35 mió. kr. og játtan til Sernámsfrøðiligu tænastueindirnar, sum er 4. mió. kr.

Sambært kommunalu roknskapunum fyri árið 2007, var samlaði rakstrarkostnaðurin av fólkaskúlanum uml. 99 mió. kr. Harumframt vóru góðar 136 mió. kr. nýttar til íløgur, serliga til skúlabygging.

### 3.1.10 Ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti

Sum lýsingin omanfyri vísir, so eru fleiri ymiskir myndugleikapartar við ymiskum ábyrgdarøkjum á fólkaskúlaøkinum. Henda skipan kann hava við sær, at myndugleikabýtið fyri brúkaran kann tykjast ógreitt, umframt at skipanin setir stór krøv til samstarvið millum myndugleikapartarnar.

Tað kunnu vera øki ella funktiónir, har tvíbýtið millum land og kommunu ger, at trupulleikar stinga seg upp, tí at myndugleiki og ábyrgd ikki fylgjast. Skúlaleiðarin hevur ta fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna í skúlanum og ábyrgd av øllum virksemi skúlans mótvegis skúlamyndugleikunum á staðnum, sum eru kommunustýrið og skúlastýrið. Skúlaleiðarin stýrir og býtir eisini arbeiðið ímillum teirra, sum starvast í skúlanum, og hann setur lærarar, stuðlar og skúlastjórarnir seta eisini varaskúlastjórar, meðan kommunustýrið setur húsavørðir, vaskifólk og skrivstovufólk. Her kann skúlaleiðarin koma í eina tvístøðu, tí hann hevur ikki sama myndugleika yvir teimum starvsfólkum, sum kommunan setur, sum teimum, ið hann sjálvur setur í starv, hóast hann hevur ábyrgd av virkseminum í skúlanum mótvegis myndugleikunum á staðnum.

Trupulleikar kunnu eisini vera í fíggjarliga ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur, og hevur hetta víst seg í sambandi við t.d. eftirútbúgving, at rinda fyri lýsingar eftir lærarum og varaskúlastjórum, próvtøkuhald og í sambandi við savnsrøkt.

Slík mál kunnu ikki metast sum stórmál, og skuldi tað borið til í samstarvi millum partarnar at funnið eina loysn á teimum málum, ið enn eru óloyst. Hesi mál kunnu hava orsøk í staðbundnum siðvenjum, har kommunustýri hava serliga raðfesting. Í einari útleggingartilgongd er neyðugt, at greiða verður fingin á hesum viðurskiftum, sum í høvuðsheitum verða mál hjá kommununum.

### 3.1.11 At leggja fólkaskúlan út til kommunurnar

Ein høvuðsfortreytin fyri at leggja fólkaskúlan út til kommunurnar er, at landið verður skipað í færri og størri kommunur sambært tilmæli nevndarinnar um kommunalar eindir. Sum lýst í parti 1.5 um skúlar, eru tað fleiri viðurskifti, sum eru galdandi til tess at kunna skapa so góðar læruumstøður sum til ber. Dentur er lagdur á fjølbroytni, bæði við atlit at læraraførleikum, hølisumstøðum, trivnaði og fakliga og námsfrøðiliga umhvørvinum. Tað skal eitt ávíst fólkagrundarlag til fyri at skapa fíggjarligu fortreytirnar fyri góðum kørmum í fólkaskúlanum, bæði við atliti at skúlabygningum, innbúgvi, amboðum og undirvísingarmiðlum. Eisini skal næmingagrundarlagið verða til staðar fyri at kunna seta fleiri lærarar, sum nøkta fakliga og undirvísingarliga tørvin og tær serfunktiónir, sum eru neyðugar.

Tað verður eisini neyðugt hjá nýskipaðu kommununum at raðfesta, hvørjar skúlabygningar tær framhaldandi vilja nýta og hvussu tær skipa undirvísingina. Tørvur verður sostatt á einum nýggjum skúlabygnaði. Spurningurin um skúlabygnað er bæði ein fíggjarligur og námsfrøðiligur spurningur, tí tað kostar meira viðvíkjadi rakstri og læraralønum at hava fleiri skúlar í einari kommunu. Hinvegin má tann góða undirvísingin ikki víkja fyri rationaliseringum. Neyðugt er at hava í huga, at næmingar eru ymiskir og hava ymiskan tørv. Tí eigur í einari stórari kommunu eisini at vera pláss fyri teirri lítlu skúlaeindini til næmingar, ið krevja serlig fyrilit. Til ber eisini at skipa smærri skúlaeindir sum partar av einum stórum skúla.

### 3.1.12 Tørvur á lógarbroytingum

Tørvur er á umfatandi lógarbroytingum fyri at fáa greið viðurskifti á økinum, at skapa heimild fyri, at kommunurnar átaka sær ein part av myndugleikauppgávunum, sum nú eru hjá landinum og fyri at skipa fólkaskúlan í størri eindir og gera møguleikar fyri eini liðiligari skipan. Neyðugt verður, at kommunurnar kunnu samskipa skúlarnar og undirvísingina í kommununum, eisini við atliti at setanar- og leiðsluviðurskiftunum.

Sum er, ger skúlastýrið uppskot til skúlabygnað, kommunan góðkennir skúlabygnaðin og síðani landsstýrismaðurin. Henda mannagongd eigur at vera einfaldari, og eiga

kommununurnar í samráð við skúlastýrið at taka avgerð um, hvørjir skúlar í kommununi skulu verða nýttir í undirvísingini. Eitt nú at innskúling er í einum skúlabygningi, miðdeild og framhaldsdeild í einum øðrum, har ein skúli í kommununi ikki kann rúma øllum næmingunum ella undirvísingartilboðunum.

Her skulu ikki viðgerast allar tær broytingar, tørvur er á, men víst verður á nøkur dømi um broytingar, sum eru grundleggjandi fyri at fá eina liðiliga skipan. Ein fortreyt fyri hesum er m.a. at gera broytingar bæði í §§ 29, 30 og 32, sum snúgva seg um at leggja skúlar niður, meginreglur fyri einum sjálvstøðugum skúla og ásetingar um skúlabygnaðin í kommununi. Tað er umráðandi, at skúlabygnaðurin verður tillagaður umstøðunum á staðnum og at størri eindir verða grundarlagið fyri einum sjálvstøðugum skúla, t.d. við at áseta eitt næmingatal. Sum nú er, verður ein skúli roknaður sum sjálvstøðugur skúli, um hann fatar um í minsta lagi 3 samanhangandi floksstig, og tí kunnu smáu bygdaskúlarnir verða roknaðir sum sjálvstøðugir skúlar. Hetta kann tó ikki vera galdandi fyri skúlarnar á útoyggj, tí óhøgliga farleiðin er ein forðing fyri, at næmingar kunnu ganga í skúla í einum størri skúla í kommununi. Neyðugt verður tí at varðveita útoyggjaskúlarnar, men geva teimum umstøður fyri samstarvi við ein størri skúla.

Setanarviðurskiftini mugu eisini endurskoðast, bæði fyri at skapa fjølbroytni og eitt fakligt undirvísingarumhvørvi, soleiðis at lærarar framyvir ikki verða settir í einstaka skúlanum, men í kommununi ella økinum. Eisini er hetta neyðugt, fyri at skúlarnir í kommununi kunnu fáa mest møguligt gagn av ymiskleikanum og pedagogiska og fakliga førleikanum hjá lærarum. Í dag eru tað skúlaleiðararnir sum seta, og teir kunnu bara seta lærarar í egnum skúla. Frammanundan, tá ið Mentamálaráðið setti lærarar, hava verið fleiri skipanir, men tó tvær høvuðsskipanir. Onnur var, at lærarar vórðu settir í kommununi við fyribilstænstu í einstaka skúlanum, men av tí at kommunurnar hava verið so smáar, hevur í flestum førum bara verið talan um ein skúla. Hin var økissetan, sum varð sett í gildi, eftir at lærarar blivu sáttmálasettir. Landið varð býtt í økir, og lærarar vórðu so settir í ávísum øki við fyribilstænastu í einstaka skúlanum.

Tað eru nógv ógreið viðurskifti í setanarviðurskiftunum hjá skúlaleiðarum og lærarum í sambandi við ætlanina at leggja fólkaskúlin út til kommunurnar. Setanarmyndugleikin verður fluttur frá landi til kommunur. Tað er ein stór broyting í sjálvum sær. Harumframt

eru tveir setanarhættir, tænastumenn og sáttmálasett, har ymiskar reglur eru galdandi í sambandi við umskipan av starvinum. Eisini eru setanarviðurskiftini ymisk innan báðar bólkar, tí vit hava bæði sáttmálasettar lærarar og tænstumenn, sum eru settir við einstaka skúlan, eru settir í eini kommunu ella eru settir undir Mentamálaráðnum við fyribilstænastu í ávísum skúla. Eisini mugu leiðsluviðurskiftini endurskoðast, tí valla verður pláss fyri fleiri skúlaleiðarum í sama øki. Eitt annað, sum kann fara at gera seg galdandi, er, at tænastumenn kunnu krevja bíðiløn í trý ár, um grundarlagið undir starvinum er burtur.

Viðvíkjandi starvsfólkaviðurskiftum verður annars sum heild víst til kap. 7.

### 3.1.13 Niðurstøður og tilmæli

Tað eru nógv viðurskifti at taka støðu til og sum skulu vera fingin í rættlag og tikin við í tilgongdina ella sum greiðar reglur skulu vera fyri, áðrenn kommunurnar yvirtaka fólkaskúlan.

Skulu vit framhaldandi hava eina skúlaskipan, har næmingarnir fáa bestu undirvísing, samstundis sum játtanin til fólkaskúlan verður fullnýtt, eigur landið at skipast í skúlaøki, sum eru tey somu sum kommunalu eindirnar, ið nevndin mælir til. Samstundis mugu allar lógarbindingar í fólkaskúlalógini, ið forða fyri hesum, broytast og lagast til nýggja kommunubygnaðin.

Tá fólkaskúlin verður lagdur til kommuna at umsita, fáa kommunurnar møguleika at raðfesta undirvísing ymiskt. Tí verður neyðugt at tryggja fakliga undirvísingarstøðið, so at allir næmingar kring landið fáa nøktandi undirvísingartilboð. Í dag eru hølisligu umstøðurnar á ymiskum støði, og skúlarnir hava tí ikki somu møguleikar fyri fjølbroyttum undirvísingarvirksemi, tí karmarnir kunnu vera ein forðing fyri hesum.

Kommunurnar eiga tí sambært lóg ella ásettum reglum at hava meginreglur at halda seg til viðvíkjandi tímatilluting, sum t.d. eigur at vera á sama støði sum verandi tímajáttan. Hóast meginreglur um tímatilluting ikki eru beinleiðis ásettar í lóggávuni, so fáa skúlarnir tímar til at skipa ymisk undirvísingarlig átøk sum t.d. ávís tvílæraraskipan í

byrjanarundirvísingini, bólkaskipan í handaligu lærugreinum, ávísa tímatilluting til vikartímar og tímar til miðfirraða serundirvísing.

Lóggávan eigur at tryggja undirvísingardygdina og at yvirskipaða eftirlitið liggur hjá landinum, soleiðis at landsstýrismaðurin í mentamálum framvegis fer at hava yvirumsjón við skúlunum.

Tað verður uppgávan hjá einstaka kommunustýrinum at raðfesta játtina til undirvísing í samsvari við staðbundna tørvin. Hetta kann hava við sær, at ein kommuna raðfestir skúlan øðrvísi enn ein onnur kommuna, men hesin ymiskleiki nýtist ikki at vera ein vansi, men kann tvørturímóti vera ein avbjóðing hjá skúlanum, um undirvísingin samstundis lýkur ásettu krøvini í fólkaskúlalógini.

Kommunurnar fáa betri møguleika at gera eina heildarætlan fyri skúlaøkið, og hugsast kann, at skúlin í størri mun enn í dag verður útbygdur og skipaður eftir einum skynsomum búskaparligum leisti. Heldur ikki kunnu vit vænta, at borgararnir í kommununum fara at góðtaka, at tænastan er ov vánalig og heldur ikki, at skúlin er ov dýrur, men at hann verður skynsamiliga rikin.

Neyðugt verður somuleiðis at tryggja fakliga støðið við atliti at eftirútbúgvingartilboðum og menningarátøkum. Hetta kann fara at vera ymiskt frá kommunu til kommunu. Tað ber valla til at krevja, at kommunurnar skulu legga áherðslu á somu menningarátøk ella undirvísingarmeginreglur, tí hetta er eisini partur av kommunalu raðfestingunum, sum taka støði í lokala tørvinum og heildarætlanini. Í eini útleggingarskipan er neyðugt at tryggja javngóðar umstøður fyri fakligari menning og menningarátøkum.

Sum umrøtt frammanfyri verður neyðugt at gera lógarbroytingar fyri at fáa eina liðiligari skipan hjá kommununum at leggja skúla niður ella avgera, hvørjir skúlar í kommununi skulu verða nýttir. Hetta er bæði galdandi í sambandi við at leggja niður skúlar og at broyta skúlabygnaðin. Sum er, ger skúlastýrið uppskot til skúlabygnað, kommunan góðkennir fyrst skúlabygnaðin og síðani landsstýrismaðurin. Hetta markamót eigur at vera greiðari, og kommunurnar eiga at taka avgerð um, hvørjar skúlar í kommununi tær nýta og til hvønn undirvísingarpart, t.d innskúling í einum skúlabygningi og miðdeild í einum øðrum, har ein skúli í kommununi ikki kann rúma øllum næmingunum ella

undirvísingartilboðunum. Møguleiki er eisini at hava grundskúlan í einum bygningi og framhaldsskúlan í einum øðrum. Hetta má myndugleikin á staðnum hava heimild at taka støðu til.

Setanarviðurskiftini mugu endurskoðast, bæði við atliti at at fáa eina liðiligari skipan at seta lærarar, soleiðis at lærarar í framtíðini ikki verða settir í einstaka skúlanum, men í kommununi. Eisini er hetta neyðugt, fyri at skúlarnir í kommununi kunnu fáa mest møguligt gagn av ymiskleikanum og pedagogiska og fakliga førleikanum hjá lærarunum. Einstaka kommunan hevur setanarmyndugleikan.

Tá fólkaskúlin verður lagdur til kommunurnar at umsita, verður umsitingin ikki bíligari, men øðrvísi og skuldi verið nærri bæði skúlunum á staðnum og borgarunum. Kommunan fær møguleika at leggja egna skúlapolitiska heildarætlan fyri skúlan í kommununi og gera raðfestingar á økinum. Neyðugt verður at seta fleiri fólk at røkja hetta arbeiðið, og kann hetta verða til fyrimunar fyri samlaðu skúlaskipanina, tí at orka verður sett av til menning av skúlaskapinum á staðnum.

Mentamálaráðið hevur fyri trimum árum síðani sett í verk nýggja lønarskipan, har virksemisætlanirnar hjá lærarum/leiðslu eru grundarlagið undir lønarútgjaldingini. Partur av lønarstovuni í Mentamálaráðnum er fluttur í Gjaldstovuna, sum ávísir lønirnar. Frægasta loysn viðvíkjandi lønarútgjalding hevði verið, at allar kommunur vórðu knýttar at lønarskipanini á Gjaldstovuni, so sum nakrar kommunur longu eru.

Eisini er neyðugt hjá kommununum at uppbyggja eina vitan, sum nú er savnað á einum stað. Her er neyðugt at gera skipan um ráðgeving, at t.d. Mentamálaráðið framhaldandi verður bæði ráðgevandi og eftirlitsmyndugleiki. Eisini er ein møguleiki at stovna eina serstaka skúlaráðgeving og eina serliga kærunevnd í undirvísingarmálum.

Markamót eigur at verða gjørt um myndugleika, ábyrgdarøki hjá landsstýrismanninum og kommununum. Í galdandi lóggávu hevur landsstýrismaðurin í høvuðsheitum ræði og yvirumsjón á øllum viðurskiftum innan fólkaskúlan. Tí verður neyðugt at tillaga fólkaskúlalógina við atliti at broyttum myndugleikabýti. Hetta eigur at verða gjørt, áðrenn fólkaskúlin verður lagdur til kommunurnar og er neyðugt fyri at taka støðu til onnur viðurskifti enn tey, ið eru umrødd omanfyri.

Nevndin mælir til, at yvirumsjón, próvtøkur, lesiætlanir, landsroyndir, støðuroyndir, yvirskipaði menningarátøk, eftir- og framhaldsútbúgving hjá lærarum og altjóða kanningar framvegis verða ábyrgdarøki hjá Mentamálaráðnum.

Serundirvísing/serligur tørvur verður umsitin á Sernámsdeplinum, sum er ein landsstovnur. Skúlarnir fáa tillutað tímar til serligan tørv í mun til næmingar, ið hava tørv á sernámsfrøðiligum stuðli ella praktiskari hjálp. Mælt verður ikki til at broyta hesa skipan, men heldur at útbyggja NSR-tænasturnar, so at ein NSR tænasta verður í hvørjari kommunu og at hon verður bindilið millum skúla og Sernámsdepilin.

### 3.1.14 Arbeiðsbólkur

Tað er ógvuliga umráðandi, at allar fortreytir eru í lagi, og at málið er væl fyrireikað, tá fólkaskúlin verður lagdur út til kommunurnar. Bæði kommunur, næmingar og starvsfólk skúlans mugu verða fyrireikað til nýggju og broyttu umstøðurnar.

Útleggingin fer at ávirka bæði fólkið á staðnum, serliga í mun til í hvørjum bygdum skúli verður, og lærarar og leiðslur fólkaskúlans, tí talan er um grundleggjandi broytingar í setanarviðurskiftunum hjá bæði leiðslu og lærarum, umframt at munandi umleggingar og bygnaðarbroytingar uttan iva vera í smærru og miðalstóru bygdarskúlunum.

Mælt verður tí til, at ein arbeiðsbólkur verður settur beinanvegin, tá landsstýrið hevur góðkent nýggja kommunubygnaðin og støða verður tikin til, hvussu og nær fólkaskúlin skal verða lagdur út til kommunurnar.

Í arbeiðsbólkinum eiga at vera umboð fyri avvarandi aðalráð, feløg og áhugabólkar. Støða eigur eisini at verða tikin til, um tveir bólkar skulu verða settir, ein at fyrireika nýggja lóggávu um fólkaskúlan og ein at arbeiða við setanarviðurskiftunum hjá lærarum og nýggja skúlabygnaðinum.

### 3.1.15 Tíðarætlan

Mælt verður til, at ein tíðarætlan verður løgd fyri arbeiðið at leggja fólkaskúlan út til kommunurnar, og at hon í høvuðsheitum verður:

1. So skjótt sum politisk avgerð er tikin um, at fólkaskúlaøkið skal flytast til nýggju kommunalu eindirnar, verður arbeiðsbólkur/bólkar settir at fyrireika útleggingina við atliti at endurskoða ella gera nýggja fólkaskúlalóg
2. Fíggjarviðurskifti verða avgreidd
3. Greiða verður fingin á starvsfólkaviðurskiftum
4. Lógaruppskot verður lagt fram í tingsetuni 2010
5. Fólkaskúlin verður lagdur út til kommunurnar 1. januar 2012

## *4. Onnur øki*

Umframt fólkaskúlaøkið og eldrarøktarøkið er ein røð av uppgávuøkjum, ið so ella so eru býtt millum land og kommunur.

Nevndin hevur valt at taka nøkur av hesum málsøkjum við í frágreiðingina, har hugt verður at økjunum í mun til greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti, tørvi á dagføringum o.a. Hesi verða viðgjørd ella umrødd niðanfyri.

Á teimum økjum, har mælt verður til broytingar, er einki ítøkiligt tilmæli um tíðarætlan fyri hesar broytingar. Mælt verður í hesum sambandi til, at tilmæltu broytingarnar verða gjørdar, so hvørt sum bygnaðarbroytingar annars verða framdar.

### 4.1. Bókasøvn

**Løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005**

Á bókasavnsøkinum eru tvey sløg av bókasøvnum: Fólkabókasøvn og skúlabókasøvn.

#### 4.1.1. Fólkabókasøvn

Bókasøvn hava til endamáls at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi

Kommunurnar skipa fyri fólkabókasavnstænastu. Fólkabókasøvnini eru kommunal. Bý /bygdarráðini velja eina bókasavnsnevnd, sum hevur ábyrgdina av bókasavnsrakstrinum. Nevndin kann vera tann sama sum mentanarnevndin, um ein tílík frammanundan er vald á staðnum. Virkisøkið er avvarðandi kommuna ella, um avtala er millum fleiri kommunur um felags bókasavnsrakstur, hesar kommunur.

Tað stendur øllum íbúgvum landsins í boði frítt og ókeypis at nýta øll fólkabókasøvn í landinum. Fólkabókasøvnini skulu hava tilfar til bæði børn og vaksin. Í øllum fólkabókasøvnum skal leiðarin vera útbúgvin bókavørður, og bókavørðinum til hjálpar

verður sett annað neyðugt starvsfólk. Landsstýrismaðurin í mentamálum kann eftir tilmæli frá landsbókavørðinum og bókavarðafelagnum gera frávik. Fólkabókasøvnini skulu fáa í lag avtalu við barnagarðar, vøggustovur og aðrar stovnar í kommununi/kommununum um bókasavnstænastu. Fólkabókasøvnini skulu samstarva við stovnsbókasøvn og onnur sersøvn. Fólkabókasøvnini kunnu seta á stovn deildir og veita bókabilatænastu og aðra tænastu, har tørvur er á øktari bókasavnstænastu.

Kommunustýrið ger viðtøkur fyri hvørt fólkabókasavn, og um fólkabókasavnið er felags fyri fleiri kommunur, gera kommunustýrini viðtøkurnar í felag. Viðtøkurnar verða sendar Landsbókasavninum til góðkenningar.

Landið rindar fólkabókasøvnunum upp til 40% í studningi av góðkendari fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár, meðan bý-/bygdarráðið rindar restina. Umsókn um stuðul skal vera send Landsbókasavninum í seinasta lagi 15. mai árið fyri. Upp í rakstrarútreiðslurnar verður roknað: løn til starvsfólk, bókasavnstilfar, hiti, ljós og reingerð, telduútgerð, innbúgv og viðlíkahald.

Studningurin verður útgoldin í fíggjarárinum sum eitt forskotsgjald og avroknaður endaliga við fíggjarárslok. Landsbókasavnið skal í seinasta lagi 31. januar árið eftir hava roknskapin fyri undanfarna fíggjarár. Studningurin kann tó í mesta lagi vera 40% av góðkendu fíggjarætlanini fyri tað árið.

Fólkabókasøvn, ið hava meira enn 10.000 bøkur, skulu hava egin bókasavnshøli. Tá eitt kommunustýri ætlar at fara undir at byggja, umbyggja ella byggja uppí ella keypa høli til bókasavn, skal byggi- ella keypsætlanin við tilmæli frá Landsbókasavninum sendast landsstýrismanninum í mentamálum til góðkenningar.

Landið veitir 50% í studningi til bygging, um- ella uppíbygging ella keyp av bókasavnshølum**.** Studningurin verður rindaður**,** tá ið landsstýrismaðurin í mentamálum hevur góðkent byggi- ella keypsætlanina og tilmælið er komið frá Landsbókasavninum. Er veruligi kostnaðurin hægri enn ætlað, kann landið somuleiðis eftir tilmæli frá Landsbókasavninum rinda 50% av tí veruliga kostnaðinum, um serligar grundir eru fyri tí.

### 4.1.2. Skúlabókasøvn

Í hvørjum skúla innan fólkaskúlan við í minsta lagi 3 samanhangandi árgangum verður skipað eitt skúlabókasavn sum námsfrøðiligur tænastudepil, sum skal vera liður í skúlans virksemi og partur av bókasavnsskipanini. Landsstýrismaðurin í mentamálum og Landsbókasavnið áseta í felag reglur um fólka- og skúlabókasøvn, sum eru í felags høli. Landsstýrismaðurin í mentamálum ásetur reglur um virksemið hjá skúlabókasøvnunum. Skúlastýrið tekur avgerð um øll mál viðvíkjandi skúlabókasavninum, sum ikki eru løgd undir kommunustýrið ella aðrar myndugleikar eftir fólkaskúlalógini**.**

Eru fólka- og skúlabókasavnið í felags høli, skal skúlastýrið vera umboðað í bókasavnsnevndini.

Landið rindar skúlabókasøvnunum í studningi 60% av útreiðslunum til undirvísingartilfar og -amboð, meðan kommunustýrið rindar restina. Sambært góðkendari fíggjarætlan verður rakstrarstudningurin útgoldin við fíggjarársbyrjan og avroknað verður við fíggjarárslok.

Landsbókasavnið skal í seinasta lagi 31. januar árið eftir hava roknskapin fyri farna fíggjarár. Endaligi stuðulin verður avroknaður samsvarandi endaliga roknskapinum fyri undanfarna fíggjarár. Studningurin kann tó í mesta lagi vera 60% av góðkendu fíggjarætlanini fyri tað árið.

### Ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti

Í verandi lóggávu hava kommunur rættin at stovna fólkabókasavn við stuðli frá landinum bæði til rakstur og íløgur. Skúlabókasøvn skulu skipast eftir ávísum krøvum í fólkaskúlalógini, og í praksis eru fleiri fólka- og skúlabókasøvn, sum verða rikin saman rakstrarliga og hølisliga.

Stuðulsjáttanin til bókasøvn á løgtingsfíggjarlógini er savnað á einari kontu. At skúlabókasøvnini skulu hava 60% í stuðli, meðan fólkabókasøvnini kunnu fáa upp til 40% merkir, at stuðulin til fólkabókasøvn gerst alsamt minni. Bókasøvnini verða sostatt meira og meira kommunalt fíggjað. Harumframt eru fleiri bókasøvn, sum ikki verða góðkend at fáa stuðul, tí at játtanin á fíggjarlógini er so lítil frammanundan.

Fólkabókasøvn hava veitingarskyldu. Tað merkir, at fólkabókasøvn hava skyldu til at læna út bøkur til borgarar í aðrari kommunu uttan kostnað. Borgarar í einari kommunu gjalda tí fyri, at borgarar í aðrari kommunu fáa bókasavnstænastur. Hetta reisir spurningin, um bókasavnstænastan sum heild ella hesin parturin at veita tænastur kring alt landið ikki av røttum er uppgáva hjá Landsbókasavninum heldur enn teimum kommunalu bókasøvnunum.

Hinvegin er eisini greitt, at bókasøvn hava stóran mentanarligan týdning. Tey skulu vera atgeingilig hjá øllum og hava eitt rímiligt útboð, og tað talar fyri kommunalum fólkabókasøvnum eisini í framtíðini. Helst skal eitt hóskandi fólkabókasavn vera í hvørjari kommunu.

**Tilmæli**

Í sambandi við útlegging av fólkaskúlanum er sjálvsagt, at skúlabókasøvnini fylgja við. Skúlabókasøvnini eru samskipaður partur av øllum virksemi skúlans.

Við tí í huga, at kommunalu fólka- og skúlabókasøvnini kunnu samskipast bæði rakstrarliga og bygnaðarliga, verður mælt til, at fólka- og skúlabókasavnsøkið samlað verður lagt út til kommunurnar sum partur av útleggingini av skúlaøkinum annars.

## 4.2. Musikkskúlaundirvísing

**Løgtingslóg nr. 69 frá 7. juni 1984 um stuðul til musikkskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996.**

**Endamál**

Eftir reglunum í musikkskúlalógini letur landið studning til musikkskúlar, ið hava til endamáls í samarbeiði við heim, skúla og aðrar musikkfelagsskapir at menna musikalsku evni og gávur næminganna og leggja grundarlag undir einum ríkum musikklívi á staðnum.

Til tess at røkka endamálinum skal musikkskúlin geva grundútbúgving, vokal- og/ella instrumentalundirvísing, undirvísing í samspæli og samansangi, kunning um

mentunararvin og um nýggjar og gamlar framburðarhættir innan musikkin og skipa fyri næmingaframførslum. Undirvísingin kann enda við roynd.

**Studningsskipan**

Áðrenn studningur verður latin, skal skúlin, sum skal vera knýttur at eini kommunu ella einum kommunalum felagsskapi, vera góðkendur av Landsstýrismanninum. Fyri at fáa studning skal skúlin harumframt lúka hesar treytir:

- undirvísingin skal standa øllum í boði
- undirvísingin skal vera skipað eftir reglum sambært § 2, 3. stk.,
- næmingagrundarlagið skal í minsta lagi vera 20
- skúlin skal hava minst ein fastan lærara
- næmingar skulu gjalda eitt árligt gjald, sum er góðkent av Landsstýrismanninum

Studningur til musikkskúlar verður latin soleiðis:
50% av útreiðslunum til læraralønir
ferðaútreiðslur til lærarar, sum undirvísa í fleiri musikkskúlum

**Bygnaður**

Leiðari er settur, ið hevur sum til uppgávu at samskipa alla musikkundirvísing í Føroyum. Leiðarin skal hava musikpedagogiskar kvalifikatiónir og landsstýrismaðurin ásetir reglur fyri virki hjá musikkskúlaleiðaranum.

At vera musikkskúlaleiðaranum til hjálpar at samskipa musikkundirvísingina setir landsstýrismaðurin eina nevnd við umboðum fyri musikkskúlarnar og Landsstýrismannin. Landsstýrismaðurin ger nærri reglur fyri virki nevndarinnar.

Lærarar við musikkskúlarnar skulu hava musikkpedagogiskt prógv frá musikk-konservatorium ella aðra hægri musikkútbúgving. Lærararnir verða settir av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá avvarðandi kommunu ella kommunufelagsskapi ella nevndini fyri musikkskúlan.

**Ógreið viðurskifti**

Lógin um musikkskúlar regulerar ikki skúlar ella undirvísingina sum so, tí at lógin er ein studningslóg og hevur formliga sum sítt fremsta endamál at stýra tí studningi, sum ætlandi skuldi latast frá landinum til musikkskúlarnar.

Í praksis verður skipanin fyrisitin øðrvísi, enn lógin fyriskrivar, tí at landið rindar ikki beinleiðis studning til einstøku musikkskúlarnar, men umframt at landið setir leiðaran fyri musikkundirvísingina í Føroyum, so verða lærararnir á teimum einstøku musikkskúlunum bæði settir og løntir av landsstýrinum. Kommunurnar endurrinda síðani landinum lutfalsligan part av teimum útreiðslum, sum landið rindar í læraralønum.

Skipanin er sostatt hon, at skúlarnir sum so eru kommunalir við egnum leiðara, men lærararnir eru settir av Mentamálaráðnum, og tað er Mentamálaráðið, sum rindar lønirnar.

Lógin um musikkskúlan regulerar ikki leiðsluviðurskiftini ella leiðslubygnaðin á einstøku musikkskúlunum uttan at samskipa musikkundirvísing í Føroyum.

Musikkskúlaøkið er tískil ikki skipað serliga greitt við hesi lóg, hvørki í mun til endamálið við undirvísingini ella í mun til býtið millum land og kommunur. Samanhangur er ikki millum eftirspurning av fakum og setan av lærarum. Fíggjarliga er heldur ikki samanhangur millum stuðulin hjá landinum og rakstrarstigið hjá kommununi.

**Tilmæli**

Nevndin mælir til, at nýggj lóg verður fingin til vegar, har bygnaðurin og ábyrgdin í musikkskúlunum verður greidd. Tá kommunueindirnar eru skipaðar og fólkaskúlaøkið og frítíðarundirvísing er lagt út til kommunurnar, verður støða tikin til, um og hvussu musikkskúlin kann verða lagdur til kommunurnar.

## 4.3. Frítíðarundirvísing

**Løgtingslóg um frítíðarundirvísing frá 30.06.1983, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 124 frá 10.12.2003.**
**Kunngerð nr. 6 frá 18. juni 1988 um frítíðarvirksemi.**

### Endamál

Endamálið er í høvuðsheitum at virka fyri at veita borgarum í øllum aldri tilboð um læring og fjølbroytt virksemi í frítíðini, so fólk bæði fáa møguleika at skapa sær eitt innihaldsríkt lív og fáa møguleika at styrkja sín kunnleika og førleika á ymsum økjum. Frítíðarundirvísingin skal eisini leggja áherðslu á at tryggja og menna demokratisku fatanina og í øllum virksemi og læring, sum fer fram, eggja til samavgerð og samábyrgd og menna luttakararnar til virknar at taka lut í samfelagsorðaskiftinum. Undirvísingin skal vera í samsvari við sjónarmiðið um lívlanga læring, sum er ein fortreyt fyri persónligari menning, og at fólk alsamt kunnu menna sín førleika í arbeiðslívi og luttøku í samfelagslívi sum heild.

Grundhugsjónin byggir á frælsi og menning. Undirvísingin er sjálvboðin, skal standa øllum í boði, kostnaðurin skal ikki vera ein forðing og málið er at stimbra fólk at læra, menna tann einstaka at taka avgerðir og skapa samanhald og stimbra felagsskapin.

### Skipan

Tað eru kommunurnar, ið hava ábyrgd av, at borgararnir í einstøku kommununum fáa møguleika at luttaka í frítíðarundirvísing. Kommunur seta antin sjálvar á stovn frítíðarundirvísing ella skipa frítíðarundirvísingina í samstarvi við aðra kommunu. Kommunurnar hava ábyrgd av fíggingini og kunnu søkja landið um stuðul.

### Innihald

Frítíðarundirvísingin fevnir rættiliga breitt, tí møguleikar skulu vera fyri tilboðum til allar borgarar, fólk í øllum aldri og við ymsum førleikum og áhuga. Fyri at kunna nøkta hetta, eru tilboðini býtt í tríggjar partar:

- Almenn frítíðarundirvísing
- Serstøk frítíðarundirvísing
- Frítíðarvirksemi

**Almenn frítíðarundirvísing**

Undirvísingin skal standa øllum borgarum, ið eru 14 ár og eldri, í boði. Undirvísingin skal vera løgd til rættis eftir eini ætlan og skal fata um í minsta lagi 20 tímar. Kommunan/leiðarin skal tryggja, at undirvísingin fer fram í egnaðum hølum og at neyðugur útbúnaður er tøkur. Luttakarnir rinda luttøkugjald, sum er ætlað fyri ljós og hita og í onkrum lærugreinum kann talan vera um hølisleigu.

**Serstøk frítíðarundirvísing**

Henda undirvísing verður býtt í tríggjar bólkar, sum fata um

- Royndarfyrireikandi undirvísing, t.d. Fráfaringarroyndir fólkaskúlans
  Hægri fyrireikingarprógv
- Yrkiskenda undirvísing, t.d. dugnaskaparroyndir, maritim fyrireiking, grundskeið í landbúnaði og aðrar royndir
- Serundirvísing, t.d. skeið fyri vaksin í lesing, skriving og rokning og skeið í føroyskum fyri útlendingar

Treytir til serstaka frítíðarundirvísing eru nøkulunda tær somu sum til almenna frítíðarundirvísing, men hon skal vera ókeypis. Her verður serliga hugsað um serundirvísing. Eisini skulu lærararnir hava víðari útbúgving innan ávísa lærugrein.

**Frítíðarvirksemi**

Frítiðarvirksemi kann verða skipað á ymsan hátt sum undirvísing, venjingar og frítíðarítriv við læring sum endamáli. Talan er um fjølbroytt tilboð til børn og ung undir 25 ár og skal virksemi hjá hvørjum bólki í minsta lagi vera 20 tímar og í mesta lagi 60 tímar. Luttakararnir rinda ávíst luttøkugjald. Frítíðarvirksemið skal lúka hesar treytir:

- skal verða skipað eftir ásettum reglum
- skal standa øllum í boði
- eingin kann vegna tilknýti til ávísa hugmyndafrøði, ávíst yrki, feløg o. a. verða forðaður at luttaka

Luttakaragjald: luttakararnir rinda sjálvir ein part, sum landsstýrismaðurin ásetur.

**Býtið millum land og kommunur**

**Mentamálaráðið**

Uppgávurnar hjá Mentamálaráðnum eru í høvuðsheitum, at

1. áseta tímalønirnar fyri ávísu undirvísingarøkini, almenna frítíðarundirvísing, serstaka frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi sambært rundskrivi og galdandi sáttmála
2. góðkenna virksemis- og ársætlan og luttøkugjaldið
3. veita kommunum stuðul sambært virksemisætlanini eftirlit við stuðulsveitingini og eftirkannar um stuðulin er nýttur sambært innsendu ætlan
4. samskipar hagtalstilfarið fyri alt virksemið
5. skipa fyri undirvísingarligum skeiðum
6. seta í verk landsumfatandi undirvísingartiltøk
7. loyva frávikum frá reglunum, t.d. viðvíkjandi aldri hjá næmingum at luttaka, tímatali og útbúgving læraranna
8. gera reglur um m.a. almenna frítíðarundirvísing, serstaka frítíðarundirvísing, frítíðarvirksemi, avmarking í undirvísingarevnum, bólkastøddir, arbeiðsbýti millum leiðara og hjálparfólk, setanarkor og lønir hjá leiðarum, hjálparfólki og lærarum

**Kommunur**

Ábyrgdarøkið hjá kommununum er m.a. at

1. seta á stovn frítíðarundirvísing í einum vavi, sum er hóskandi í einstøku kommununi
2. senda Mentamálaráðnum umsókn um stuðul saman við ársætlan, sum lýsir ætlaða virksemið og kostnaðin
3. søkja um, at luttakaragjaldið til almenna frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi verður góðkent
4. rindar læraralønir
5. lata Mentamálaráðnum roknskap fyri stuðulsveitingina
6. útvega hagtalstilfar fyri virksemi á staðnum
7. útvega høli, uttandura pláss og amboð
8. tryggja, at ásetingarnar í lógini verða hildnar
9. seta leiðaranum hjálparfólk

**Leiðsluviðurskifti**

Skúlaleiðarin í fólkaskúlanum á staðnum er vanliga leiðari í frítíðarundirvísingini, men sambært lógarbroytingini í 2003 er heimild veitt fyri, at onnur kunnu verða sett sum leiðari. Nýggju ásetingarnar eru, at skúlaleiðarin ella annað fólk, ið hevur samsvarandi útbúgving, leiðir ta frítíðarundirvísing o.a., sum verður sett á stovn í kommununi. Leiðarin hevur um hendi dagligu leiðsluna í frítíðarundirvísingini á staðnum, ger uppskot um innihaldið, ráðleggur virksemisætlanina fyri skúlaárið í samráð við kommununa. Hann lýsir við skeiðstilboðunum, setur lærarar, góðkennir arbeiðsætlan og -gongd hjá lærarunum og hevur eftirlit við, at undirvísingin verður framd sambært lóg, reglum og ætlan.

Lærarin ger arbeiðsætlan og -gongd fyri skeiðið, sum leiðslan góðkennir. Eisini førir lærarin dagbók fyri undirvísingina og uppmøting.

**Landskassastudningur**

Stuðulsveitingin er ávíst prosentgjald, sum er ymiskt, alt eftir hvørja frítíðarundirvísing talan er um.

Studningurin er 50% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda almenna frítíðarundirvísing og 100% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda serstaka frítíðarundirvísing. Til frítíðarvirksemi kann landskassin veita kommunum í mesta lagi 50% í studningi av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum. Studningur kann í mesta lagi vera nettoútreiðslur kommunanna til ávikavist almenna og serstaka frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi, tá ið byggiútreiðslur ikki eru tiknar við.

**Ógreitt ábyrgdarbýti**

Løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um Frítíðarundirvísing v.m., sum seinast broytt við Ll. nr. 124 frá 10. desember 2003, er ein stuðulsjáttan og ásetur harumfamt bygnað og hvussu frítíðarundirvísingin verður skipað. Hóast hetta hevur játtanin til frítíðarundirvísing øll árini fram til 1. august 2008 verið fyrisitin sum ein rakstararjáttan. Mentamálaráðið hevur goldið allar lønir og fingið endurgjald frá kommununum fyri teirra part av lønarútreiðslunum. Eisini hevur Mentamálaráðið góðkent allar lærarar í

skipanini og hvørt einstakt skeið. Tí hevur so at siga øll fyrisiting ligið í Mentamálaráðnum.

Í desember 2007 varð endalig avgerð tikin um, at kommunurnar í framtíðini fyrisita frítíðarundirvísingina sambært galdandi lóggávu, og vórðu fyrisitingarligu mannagongdirnar samsvarandi broyttar frá 1. august 2008.

**Niðurstøða**

Enn er so stutt fráliðið, síðani kommunurnar yvirtóku fyrisitingina, at illa ber til at gera eina eintýdda niðurstøðu. Tað hava verið ymsir byrjanartrupulleikar á vegnum, sum m.a. kunnu stava frá, at kunningin til einstøku kommununa ikki var nóg neyv, men sum heild er fatan Mentamálaráðsins, at hetta er ein betri skipan fyri at styrkja ávirkan og ábyrgd hjá fólkinum í kommununum.

Sum er, eru eindirnar smáar, og tilboðini tí ikki nóg fjølbroytt í nógvum kommunum. Hetta ger, at nógv fólk ikki fáa tað frítíðarundirvísingartilboð á staðnum, sum tey hava tørv á, og tey fara tí til frítíðarundirvísing í aðrari kommunu. Hetta er eisini ein skipan, sum hevur verið galdandi øll árini.

Tá kommunurnar verða lagdar saman í størri eindir, fer hetta at styrkja frítíðarundirvísingina í kommununi, bæði við atliti at fjølbroyttum undirvísingartilboðum/virksemi, fólkagrundarlagi og fígging.

**Tilmæli**

Frítíðarundirvísingin er ein stuðulsskipan, men við einum broyttum kommunalum bygnaði verður mælt til, at lóggávan verður broytt, so frítíðarundirvísingin ikki verður ein studningsskipan, men verður løgd til kommunurnar sum sjálvstøðugt málsøki.

### 4.4. Dagstovnar og dagrøkt

**Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006.**

Dagstovnalógin frá 2000 er gjørd í sambandi við at dagstovnaøkið varð flutt kommununum 1. juli í 2000. At veita ansing er ikki ein lógarbundin uppgáva hjá kommununum, men eitt tilboð sum kommunan kann veita.

Kommunan kann geva børnum, ið búgva í kommununum, tilboð um pláss á dagstovni ella í dagrøkt, og kommunan hevur ábyrgd og eftirlit við virkseminum. Landsstýrismaðurin hevur yvirskipað eftirlit við virkseminum.

Kommunan skal reka ansingina sambært endamálsorðingini í dagstovnalógini. Kunngerð nr. 32 frá 4. mai 2006 lýsir dagstovnar og dagrøkt og áleggur dagstovni og dagrøkt at orða námsfrøðilig mál fyri hvønn aldursbólk sær.

Kommunan kann krevja foreldragjald, sum tó mesta lagi kann verða 30% av rakstrarútreiðslunum.

Kommunurnar seta á stovn dagstovnar og dagrøkt, men kunnu loyva øðrum at stovnsseta dagstovnar og dagrøkt, tó treytað av, at allar ásetingar í lógini eru fylgdar.

Um starvsfólk er ásett í lógini, at leiðari við námsfrøðiligari útbúgving skal setast fyri dagstovnin og dagrøktina, eins og ásett er, at í minsta lagi 2/3 av starvsfólkunum skulu hava námsfrøðiliga útbúgving. Bert í serligum førum kann landsstýrismaðurin víkja frá hesum ásetingum.

Málsøkið varð 1. juni 2008 flutt frá Almannamálaráðnum til Mentamálaráðið. Tó er § 5 um børn við serligum tørvi og § 6a um fíggjarligt fríplássmálsøki hjá Almannamálaráðnum.

*§ 5 í dagstovnalógini*

Viðvíkjandi ansingartilboði til børn við serligum tørvi sambært § 5 í dagstovnalógini hevur Almannamálaráðið ábyrgd fyri tilboðum til børn við serligum tørvi sambært § 32 c í forsorgarlógini og fakligu nevndini sambært § 32 d í forsorgarlógini, ið ger tilmæli í málum, har ivi er um, hvørt tilboð skal veitast barni eftir § 5 í dagstovnalógini ella § 32 c í forsorgarlógini.

Sambært kunngerð nr. 31 frá 1. mai 2006 um fakliga nevnd til børn við serligum tørvi kann landsstýrismaðurin seta eina óhefta nevnd at gera tilmæli í teimum førum, tá ið ivamál er, um barn er fevnt av dagstovnalógini ella av forsorgarlógini. Um ein kommuna ikki metir seg vera føra fyri at játta ansingarpláss til eitt barn, tí barnið hevur ein heilt serligan tørv, skal kommunan, áðrenn avgerð er tikin, sambært dagstovnalógini beina málið víðari til Almannastovuna. Um Almannastovan í tílíkum førum ikki metir, at barnið skal hava tilboð sambært forsorgarlógini, skal Almannastovan leggja málið fyri nevndina. Øll ivamál skulu leggjast fyri fakligu nevndina.

Fakliga nevndin er samansett av trimum serfrøðingum, sum ikki skulu starvast hjá Almannastovuni ella kommununum. Í sambandi við virksemið hjá nevndini hava Almannastovan og kommunan skyldu til at lýsa málið fyri nevndini, og nevndin hevur somuleiðis heimild til at ráðføra seg aðrar serfrøðingar. Nevndin miðar eftir at verða samd um eitt tilmæli um hvørt barnið er fevnt av forsorgarlógini ella dagstovnalógini. Um nevndin er ósamd, er vanligur atkvøðumeiriluti galdandi. Tað er Almannastovan, sum tekur avgerð eftir tilmæli frá nevndini, og avgerðin kann kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

*§ 6 a í dagstovnalógini*

Reglur um fíggjarligt fríplássi eru ásettar í kunngerð nr. 88 frá 17.06.2009 um fíggjarligt frípláss.

Kunngerðin heimilar kommunum at taka avgerð um at játta foreldrum at børnum á dagstovni ella í dagrøkt heilt ella partvíst fíggjarligt frípláss, t.e. at foreldragjaldið antin verður lækkað ella fellur burtur. Fíggjarligt frípláss verður játtað eitt ár í senn.

Avgerðin hjá kommununum verður grundað á eina ávísa útrokningarupphædd – skattskylduga inntøkan og aðrar inntøkur farna skattaár, tillagað talinum á heimabúgvandi børnum undir 18 ár.

Útrokningarupphæddin, ið gevur rætt til fíggjarligt fríplása, verður javnað hvørt ár og ásett av landsstýrismanninum í rundskrivi.

*§ 9, stk. 4 í forsorgarlógini*
Kommunurnar afturrinda landskassanum tær útreiðslur, ið standast av, at Almannastovan veitir fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing. Almannastovan krevur umvegis TAKS peningin innaftur frá kommununum.

Um foreldur ikki fáa børn ansað, so kann annað av foreldrunum søkja um forsorgarhjálp vegna vantandi barnaansing. Almannastovan málsviðger umsóknirnar og játtar eina upphædd, sum hon síðani krevur innaftur frá kommununum.

Hóast tænastan barnaansing ikki er áløgd kommununum við lóg, so fær tað fíggjarligar avleiðingar, um kommunan ikki kann veita hesa tænastu.

**Trupulleikar**
Kommunurnar hava havt trupulleikar við at liva upp til ávísar ásetingar í dagstovnalógini. Serliga krøvini um, at leiðarin skal vera útbúgvin námsfrøðingur og at í minsta lagi 2/3 av starvsfólkunum skulu verða námsfrøðingar. Hetta kemst fyrst og fremst av, at tørvur er á útbúnum námsfrøðingum. Skipanin er óliðilig, tá ið víkjast skal frá hesum ásetingum, og avmarkar hetta í stóran mun møguleikarnar, ið kommunan hevur at skipa økið mest skynsamt bygnaðarliga og rakstrarliga.

Viðvíkjandi § 5 í dagstovnalógini eru ávísir markamótstrupulleikar. Eru kommuna og Almannastovan ósamd um, hvørt eitt barn skal verða fevnt av dagstovnalógini ella forsorgarlógini, skal ósemjan leggjast fyri eina óhefta nevnd, sum síðani ger tilmæli og leggur tað fyri Almannastovuna til endaliga støðutakan. Tað er óheppið, at annar myndugleikin í einari ósemju kann taka avgerð í ósemjuni.

Avgerðirnar kunnu tykjast at verða treytaðar av, hvar í landinum børnini búgva, og hvørjar tænastur eru til børn við serligum tørvi í hesum øki. Børn við sama tørvi kunnu í einum parti av landinum verða mett egnað at verða ansað á einum vanligum dagstovni, tí eingin valmøguleiki er. Í øðrum parti av landinum, har fleiri tilboð eru til børn við serligum tørvi, verður barnið flutt úr kommunalu skipanini og yvir í tilboð, sum landið varðar av og fíggjar. Hetta ger, at kommunurnar ikki eru eins stillaðar.

Skipanin viðvíkjandi fíggjarligum fríplássum rakar eisini kommunurnar skeivt. Hetta kemst av, at inntøkugrundarlagið í kommununum er so ymiskt, og í ávísum kommunum, har lønargrundarlagið er lágt, fær ein rættliga stórur partur av brúkarunum frípláss.

Skipanin viðvíkjandi forsorg vegna vantandi barnaansing er óheppin. Ein myndugleiki málsviðger og játtar upphæddina, meðan annar myndugleiki skal gjalda.

**Tilmæli**
Nevndin mælir til, at barnaansingarøkið verður eftirhugt og at lógargrundarlagið verður gjøgnumgingið.

Land og kommunur eiga í felag at fáa loyst trupulleikarnar viðvíkjandi markamótinum ímillum forsorg og barnaansing.

## 4.5. Yrkisskúlar

**Løgtingslóg nr. 106 frá 29.12.1998 um yrkisskúlar**

**Yrkisútbúgvingar**
Sambært § 13, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 106 frá 29.12.1998 um yrkisskúlar er ásett, at kommunur kunnu lata stuðul til løguútreiðslur, tá yrkisskúli verður stovnaður, um- ella útbygdur. Hesin stuðul kann ikki verða latin um lán. Rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing verður rindaður við 80% frá landskassanum og 20% frá kommununum. Parturin hjá kommununum av útreiðslunum til lærlingalæruna verður í fyrsta umfari at leggja út úr landskassanum og síðan at býta millum kommunurnar eftir heimstaðnum, ið lærlingarnir høvdu, tá ið teir byrjaðu skúlan.

Veitingarøkið fyri skúlaútbúgving eftir fólkaskúlan, t.d. studentaskúla, hægri handilsskúla, læraraskúla, lærlingaútbúgvingar, tekniska skúla o.s.fr., er størri enn kommunueindin. Veitingarøkið er alt landið, og tí eiga hesar uppgávur at vera landsuppgávur. Tað eru tær eisini í nógvum førum, men kommunurnar eru tó við til at fíggja lærlingalæruna. Hetta er ikki rætt, tá tað snýr seg um eina landsuppgávu.

**Tilmæli**

Nevndin mælir til, at landið einsamalt eigur at fíggja hesa uppgávu.

## 4.6. Samanumtikið um barnaansingar-, skúla- og mentanarøkið

Umskipanin av kommunala bygnaðinum í færri og sterkari eindir letur upp fyri møguleikanum veruliga at skipa kommunal heildartilboð til børn og ung bæði viðvíkjandi ansing, skúla, frítíðarskúla og musikkskúla. Harumframt kemur tað mentanarliga virksemið annars, bæði fyri ung og vaksin.

Meðan landið hevur yvirskipaðu myndugleikauppgávurnar er tað einstaka kommunan, sum veitir tilboð til øll børn og ung millum 0 og 18 ár. Hetta kann hóskandi skipast í skúla- og mentanardeplum í einstøku kommununum, har atdráttarmegin er stór og tilboðini fjølbroytt. Metast má, at tað fyrst og fremst er einstaka kommunan og ikki landið, sum við fyrimuni hevur áhuga og tørv á at skipa slík staðbundin heildartilboð.

Í hesum sambandi skal støða takast til, hvussu ábyrgdarbýtið viðvíkjandi tilboðum til børn við serligum tørvi verður skipað.

## 4.7. Kirkjugarðar

Í verki hava kommunurnar so at siga alla ábyrgdina av økinum.

Sambært upplýsingum frá Mentamálaráðnum tykjast allir kirkjuligir myndugleikar at taka fult undir við verandi ábyrgdarbýti millum kommunur og fólkakirkju á kirkjugarðsøkinum: kommunan hevur kirkjugarðin, meðan sóknarprestur er jarðarferðarmyndugleikin. Yvirhøvur riggar hetta væl, tí nógvar kirkjusóknir eru so smáar.

**Tilmæli**

Eisini er tað ein stórur fyrimunur við verandi skipan, at tað ikki er eitt ávíst trúarsamfelag, men ein verðsligur myndugleiki, ið eigur kirkjugarðin – so alt talar fyri at formalisera galdandi skipan soleiðis, at greidleiki verður bæði formliga og í roynd og veru á økinum.

## 4.8. Fólkayvirlit

**Løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2008 um fólkayvirlit**

1. oktober 2008 kom ein nýggj lóg í gildi um fólkayvirlit. Nýggja lógin um fólkayvirlit kom í staðin fyri løgtingslóg nr. 86 frá 1. juni 1982 um fólkayvirlit, ið hevði verið í gildi óbroytt øll árini.

Høvuðsmunurin á gomlu og nýggju lógini um fólkayvirlit er, at í nýggju lógini eru fleiri og nágreiniligari reglur í mun til tágaldandi lóg. Hetta er, tí at umframt nýggjar og nágreiniligari ásetingar eru eisini tær ásetingar, sum áður vóru í kunngerð, nú settar beinleiðis í lógina.

Við nýggju lógini um fólkayvirlit fær lógin á fyrsta sinni eina endamálsorðing, har staðfest verður, at endamálið við lógini er at tryggja, at øll hava eitt persónstal, at Landsfólkayvirlitið goymir grundliggjandi persónsupplýsingar um hvønn einstakan, ið hevur eitt p-tal, at hvør einstakur verður skrásettur eftir tí bústaði, har hann veruliga býr ella heldur til, og at upplýsingarnar í Landsfólkayvirlitinum á ein hóskandi hátt kunnu latast almennum myndugleikum ella privatum, ið hava heimilaðan áhuga í hesum.

Broyttar og nágreiniligari reglur eru ásettar um, nær ein persónur kann vera skrásettur í fólkayvirlitinum. Somuleiðis eru komnar nýggjar reglur um at lata upplýsingar úr skránni hjá Landsfólkayvirlitinum, og eru hesar nágreiniligari enn í undanfarnu lógini, umframt at lógin skilir millum at lata einkultupplýsingar og hópupplýsingar. Fleiri og nágreiniligari reglur eru komnar fyri privat, sum biðja um upplýsingar úr fólkayvirlitinum, soleiðis at tað ber til at lata fleiri upplýsingar til ávís privat, eitt nú vinnulig feløg, peningastovnar, tryggingarfeløg o.o., eins og tað eftir lógini ber til at lata upplýsingarnar elektroniskt.

Av serligum áhuga fyri kommunurnar eru ásetingarnar í nýggju lógini um, at kommunurnar nú hava heimild til at kanna og taka avgerðir í málum um bústaðarskráseting.

Hóast lógin kom í gildi 1. oktober 2007, komu kortini ikki allir partar av lógini í gildi tá. Sostatt eru greinarnar 5, stk. 3 og 7, § 21, stk.3, § 23, stk. 3-4, § 26, § 27, stk. 1-2, § 33 og § 36 ikki komnar í gildi til fulnar enn.

Frágeiðingin viðvíkjandi serligu gildiskomureglunum er, at omanfyri nevndu greinar snúgva seg um serliga tøkniligu skipanina til landsfólkayvirlitið, hvussu nøvn o.a. kunnu verða skrásett, møguleikan at boða frá til fólkayvirlitið um ikki at fáa áheitanir í sambandi við hagtalsligar ella vísindaligar kanningar, møguleikan fyri elektroniskari atgongd til at leita eftir upplýsingum í fólkayvirlitinum í sambandi við hagtalsgerð ella vísindalig endamál og møguleikan hjá feløgum o.ø. til at fáa loyvi til at fáa elektroniska atgongd til at spyrja eftir stakupplýsingum úr Landsfólkayvirlitinum. Hesar reglur eru ikki komnar í gildi enn, tí at núverandi tøkniliga fólkayvirlitsskipan ikki er før fyri at veita tær tænastur ella hevur teir hentleikar, ið krevjast fyri at kunna skráseta og lata upplýsingarnar soleiðis, sum greinarnar regulera.

Samanumtikið kann sigast, at við nýggju lógini er fingið til vegar eitt haldgott lógargrundarlag fyri framtíðar fólkayvirlitið. Landsfólkayvirlitsskráin verður við nýggju lógini ein samlað skrá, sum verður førd av hvørjari einstakari kommunu fyri sínar borgarar, uttan ta dupultskráseting, sum var eftir gomlu lógini. Hetta hevur við sær, at vit fáa eina greiðari og rationella skipan, har størri vissa samstundis er fyri, at upplýsingarnar eru rættar og altíð dagførdar. Somuleiðis hevur hetta við sær, at einstaka kommunan hevur betri møguleikar fyri at veita tær tænastur, sum lógin leggur upp til, at privat og almennir myndugleikar skulu fáa frá fólkayvirlitinum.

**Tilmæli**

Í mun til eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti metir nevndin ikki, at orsøk er til at gera nakra broyting á fólkayvirlitsøkinum, við tað at ábyrgdarbýtið má metast at vera formliga greitt við nýggju fólkayvirlitslógini.

Hinvegin skal verða víst á, at so leingi nýggja tøkniliga skipanin ikki er fingin til vegar, so fáa hvørki kommunur ella landsfólkayvirlit røkt sínar skyldur sambært lógini, og fyrr enn nýggja skipanin er fingin til vegar, ber heldur ikki til at fremja tað greiða uppgávu- og ábyrgdarbýtið, ið skal vera millum land og kommunur, tá um fólkayvirlit ræður. Tí hevur tað átrokandi skund at fáa nýggju skipanina menta og setta í verk, soleiðis at lógin og allar ásetingarnar har kunnu verða settar í gildi og fáast at virka.

## 4.9. Brunaviðurskifti

**Løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a. og kunngerð nr. 45 frá 9. mai 1992 um brunaverju og brunatrygd**

Sambært brunalógini § 25 kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um m.a. krøv til byggingar o.a. fyri at fyribyrgja eldvanda og slíkt, sum verður mett at vera neyðugt fyri m.a. at tryggja, at rýmingar-, bjargingar- og sløkkingarmøguleikar eru fullgóðir.

Í kunngerð nr. 45 frá 9. mai 1992 um brunaverju og brunatrygd er síðani ásett í 1. kap., at í sambandi við at kommunalur myndugleiki veitir byggiloyvi, hevur byggimyndugleikin skyldu til at gera eina meting av øllum byggimálum og seta tey krøv, sum eru neyðug fyri at tryggja, at ásetingarnar um brunatrygd verða fylgdar. Er talan um eldhættislig virkir o.a., skal loyvi vera fingið frá Brunaumsjónini, áðrenn byggiloyvi kann vera givið.

Sambært brunalóggávuni er býtið millum land og kommunur av brunamyndugleikanum sostatt, at eldhættislig virkir o.a. verða viðgjørd av Brunaumsjón Landsins, meðan aðrar vanligar byggingar verða viðgjørdar av kommununum.

Meginreglan er hon, at kommunurnar viðgera byggimál, eisini í mun til brunaviðurskifti, fyri at tryggja, at almennar ásetingar um brunatrygd verða fylgdar. Serligu ásetingarnar um hættislig virkir o.a. tekur Brunaumsjón Landsins sær av. Royndirnar hava víst, at her er eitt markamót, sum til tíðir kann elva til iva. Tað er, tí at í brunakunngerðini kap. 1, pkt. 1.2.4 er ásett, at bygningar, sum ikki koma undir greinarnar í 3. kap. og ikki beinleiðis kunnu javnsetast við hesar, skulu viðv. brunatrygdarligum krøvum verða viðgjørdir eftir ásetingum frá Brunaumsjónini. Hetta markamót kann vera ógreitt, soleiðis at annaðhvørt

bæði Brunaumsjónin og avvarðandi kommuna meta seg hava málsførleikan, ella at støðan kann vera, at ávís kommuna ikki neyðturviliga metir seg hava ábyrgdina.

**Tilmæli**

Nevndin mælir tí til, at brunalógin/brunakunngerðin verður eftirhugd, har hetta markamót millum málsræðið hjá kommununum og málsræðið hjá Brunaumsjón Landsins verður nágreinað, soleiðis at sum minst ivi er um, hvør av myndugleikunum eigur ábyrgdina í teimum ymisku førunum. Í tí sambandinum kann metast um, hvørt neyðugt er at broyta sjálva lógina, ella um nøktandi greiða kann fáast á hetta við at nágreina brunakunngerðina.

## 4.10. Hýruvognslóggáva

**Løgtingslóg nr. 104 frá 19. oktober 1982 um hýruvognskoyring**

Sambært hýruvognslógini § 1 kann landsstýrið gera eina standard hýruvognsreglugerð, sum eftir ynski frá einari ella fleiri kommunum kann verða sett í gildi har við ella uttan broytingar.

Ein standard hýruvognsreglugerð er gjørd, tað er kunngerð nr. 33 frá 30. mars 1983. Henda standard hýruvognsreglugerðin er sett í gildi fyri Tórshavnar kommunu við kunngerð nr. 90 frá 10. oktober 1987, samstundis sum tann tillagingin varð gjørd, at tað ikki var kommunan, men ein serlig hýruvognsnevnd, sum hevur uppgávurnar sambært hýruvognsreglugerðini um hendi í Tórshavnar kommunu.

Í standard hýruvognsreglugerðini § 1 verður sett sum krav, at fyri at koyra hýruvognskoyring krevst loyvi, og sambært § 2 verður hetta loyvi givið av kommununi.

Umsitingin av hýruvognsloyvum er sostatt fullkomiliga latin til einstøku kommununa at taka sær av. Innan karmarnar á lógini er tað kommunan/hýruvognsnevndin, ið er avgerandi myndugleiki.

Metast má, at tað at umsitingin av hýruvognsloyvum verður løgd út lokalt til kommunurnar/hýruvognsnevnd at taka sær av, er ein skilagóð loysn, við tað at lokali

myndugleikin má metast at hava betri innlit í viðurskiftini, sum skulu leggjast til grund og vera avgerandi fyri, hvussu loyvi verða givin ella ikki, og í mun til eitt greitt ábyrgdarbýti verður ikki mett, at orsøk er til at gera broytingar.

**Tilmæli**

Hóast lógarbroyting ikki er neyðug fyri at umsitingin av hýruvognsøkinum framhaldandi skal verða hjá kommununum, so verður mælt til, at hýruvognslógin við tilhoyrandi kunngerð verður dagførd.

Hetta er m.a. tí, at havandi í huga tey fyrisitingarligu krøv, ið verða sett til umsitingina av t.d. hýruvognsloyvum, so er einki at finna í galdandi hýruvognslóg ella kunngerðini um hýruvognsloyvi, ið kann stuðla kommunalu umsitingini, tá ið hon skal meta um og taka avgerð, hvør av fleiri umsøkjarum skal fáa eitt ávíst hýruvognsloyvi. So hóast ábyrgdin greitt liggur hjá kommununi, kann sigast, at lóggávan er so mikið ógreið, at kommunan illa á forsvarligan hátt fær fyrisitið hetta økið.

Tá avgerðirnar, ið kommunurnar taka sambært hýruvognskunngerðini ella hýruvognslógini, kunnu kærast til landsstýrið, hava sostatt bæði land og kommunur áhuga í, at reglurnar verða dagførdar.

## 4.11. Býarskipanarviðurskifti

**Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009, skal landsstýrið góðkenna øll uppskot til býarskipanir og byggisamtyktir, ið einstøku kommunurnar taka stig til at fáa í gildi í kommununi. Eisini kann landsstýrið taka stig til, at kommuna, ið ikki hevur býarskipan ella byggisamtykt, fær eina slíka skipan. Á sama hátt kann landsstýrið um neyðugt áleggja einari kommunu at broyta góðkenda býarskipan ella byggisamtykt.

Býarskipanarlógin er upp á nógvar mátar ótíðarhóskandi og átti at verið endurskoðað í síni heild, so at m.a. tilvitanin um at skipa lendisráðlegging og tað at seta krøv til

byggingar sást aftur í lóggávuni. Serliga er tørvur á fáa regulera eina samskipan av býarráðlegging, sum kommunurnar standa fyri í dag, landsráðlegging, sum verður fyrisitin av Landsverki, tá um vegir o.tíl. ræður, og náttúruvernd, ið lokalu friðingarnevndirnar saman við yvirfriðingarnevndini fyrisita.

Tørvurin á samskipan sæst serliga, við at fleiri ymiskir myndugleikar við ymiskum heimildum og skyldum sambært ymiskum lógum fyrisita sama lendi, men uttan at nøkur formlig samskipan er fyriskrivað. Hetta er mangan ørkymlandi fyri borgaran og í mun til ráðlegging verður eingin heild í, eins og eingin myndugleiki er, ið yvirskipað hevur ábyrgd av ráðleggingini ella sum heild hevur neyðuga yvirlitið og førleikan.

Nevndin metir ikki, at galdandi lóg elvir til ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti sum so, heldur ikki hóast landsmyndugleikar skulu góðkenna kommunal uppskot til byggisamtyktir o.a. Hinvegin er lóggávan á økinum so mikið ófullfíggjað, at lítil ivi er um, at úrslitið verður, at ráðleggingin ongantíð verður nøktandi, við tað at øll viðkomandi viðurskifti ikki verða tikin við frá byrjan. Úrslitið verður, at hóast lógin ikki letur iva vera um heimildir og skyldur hjá ymisku pørtunum, so verður úrslitið, at lendisráðleggingin ikki verður nóg væl samskipað við onnur viðkomandi fyrisitingarøki. Hetta er sera óheppið, tá ið hugsað verður um, at (óheppin) lendisráðlegging er trupul at koma afturumaftur við, við tað at bygningar og broytingar í náttúruni aloftast eru varandi.

**Tilmæli**

Nevndin mælir til, at nýggj lóg verður samtykt at koma í staðin fyri býarskipanarlógina.

Nýggja lógin, ið annaðhvørt eigur at vera í tveimum pørtum – einum planlógarparti og einum byggilógarparti – ella framd sum tvær ymiskar lógir – ein planlóg og ein byggilóg, eigur yvirskipað at leggja dent á, at samlaða lendisnýtslan og ætlanirnar fyri lendið verða samskipað millum allar viðkomandi myndugleikar. Nýggja lógin eigur eisini at skipa soleiðis fyri, at vitan og førleiki um lóggávuna, ráðlegging o.a. støðugt er savnað og dagført á einum stað, og at vitan og upplýsingar um lendi annars verða atkomuligar fyri allar viðkomandi partar.

## 4.12. Barnavernd

**Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007.**

**Barnaverndarnevndir**

Kommununurnar skulu seta barnaverndarnevndir. Fyri hvørja barnaverndarnevnd skulu vera minst 1.500 íbúgvar. Smáar kommunur skulu soleiðis samstarva við aðrar kommunur um val av barnaverndarnevndum. Landsstýrismaðurin skal góðkenna slík samstørv.

Hvør barnaverndarnevnd skal hava í minsta lagi 3 limir og samsvarandi varalimir. Formaðurin og meirilutin í nevndini, skulu hava viðkomandi førleika ella útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- ella bygdaráð, vera samvitskusamir og álítandi borgarar, ið hava reina revsiváttan og góðan kunnleika til børn. Barnaverndarnevndin, ið verður vald av kommunustýrinum fyri eitt valskeið, velur sjálv formann og næstformann.

**Barnaverndarumsitingin**

Kommunustýrið skal syrgja fyri, at fakfólk, við í minsta lagi miðal langari útbúgving, verða sett at umsita barnaverndarmál. Harumframt skulu hesi vera samvitskusamir og álítandi borgarar, ið hava reina revsiváttan og góðan kunnleika til børn.

Kommununurnar sum samstarva um barnaverndarnevnd, samstarva eisini um eina felags barnaverndarumsiting.

**Barnaverndartænastan**

Felagsheiti fyri kommunalu myndugleikarnar á økinum: Barnaverndarnevndir og barnaverndarumsitingar, verður í barnaverndarlógini: Barnaverndartænastan.

Kommununurnar, ið samstarva um felags barnaverndartænastu (barnaverndarnevnd og barnaverndarumsiting), samstarva eisini um fíggingina av útreiðslunum, sum kommununurnar skulu halda sambært lógini. Kommununurnar býta útreiðslurnar sínámillum, svarandi til fólkatalið í kommunala samstarvinum.

**Barnaverndarstova Føroya**

Barnaverndarstovan er ein felags kommunalur stovnur, ið arbeiðir fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkið, og vegleiðir og ráðgevur landsstýrismanninum, barnaverndartænastunum og samdøgursstovnunum. Harafturat skipar og umsitur Barnaverndarstovan fosturforeldraskipanina, og savnar saman og umsitur hagtøl á barnaverndarøkinum.

**Fosturforeldraskipanin**

Kommunurnar stovnseta eina fosturforeldraskipan, sum er ein partur av virkseminum hjá Barnaverndarstovuni. Fosturforeldraskipanin góðkennir og ger avtalu við fosturforeldur.

Kommunurnar bera útreiðslurnar av fosturforeldraskipanini, herundir av samsýningini v.m. til fosturforeldrini. Samsýning til fosturforeldur er ásett í kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 um samsýning til fosturforeldur.

**Samdøgurs- og dagstovnar**

Landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur samdøgursstovnar og aðrar samdøgursfyriskipanir, og dagstovnar fyri børn fevnd av lógini, sum ikki kunna integrerast á kommunalum dagstovni.

Harafturat kann landsstýrismaðurin loyva øðrum at stovnseta og reka samdøgurs- og dagstovnar.

**Høvuðsbarnaverndarnevndin**

Landsstýrismaðurin setur eina Høvuðsbarnaverndarnevnd, sum skal hava 3. limir og 3. varalimir, ið landsstýrismaðurin velur fyri 4 ár í senn. Formaðurin skal vera løgfrøðingur, harafturat ein sálarfrøðingur og ein barnasakkønur.

Nevndarlimirnir fáa løn/samsýning, sum landsstýrismaðurin ásetur.

**Ábyrgdin hjá barnaverndartænastuni**

Barnaverndartænastan hevur ábyrgd av, eftir fráboðan ella av sínum eintingum, at gáa eftir børnum í kommununi, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, og av at seta fyriskipanir í verk, sum á bestan hátt kunnu loysa trupulleikan.

Um rímilig orsøk er til at halda at eitt barn hevur tørv á, at ein fyriskipan verður sett í verk, skal barnaverndarumsitingin kanna málið. Tá kanningin er liðug, ger barnaverndarumsitingin eitt tilmæli, sum verður lagt fyri barnaverndarnevndina.

Barnaverndarnevndin skal hava eftirlit við, hvussu barnið og foreldrini hava tað, eftir at ein fyriskipan er sett í verk, og skal við jøvnum millumbilum taka málið upp til nýggja viðgerð.

Barnaverndarnevndin kann seta ein eftirlitisverja í heimið, m.a. at hava eftirlit við støðuni í heiminum og hjálpa við ráðum og vegleiðing v.m.. Reglur fyri eftirlitsiverjan eru ásettar í kunngerð nr. 87 frá 4. september 2006 um heimildir og skyldur hjá eftirlitisverjum.

**Fyriskipanir**

*Fyribyrgjandi fyriskipanir*

Fyribyrgjandi fyriskipanir verða settar í verk, um kanningin hjá barnaverndarumsitingini vísir, at tørvur er á tí.

Fyribyrgjandi fyriskipanir eru eitt nú at ráðgeva, veita hjálp, viðgerð og ymiskan stuðul til barnið og/ella familjuna, í heiminum ella á dagtilboðnum.

**Yvirtøka av umsorganini fyri barnið**

Verður mett, at fyribyrgjandi fyriskipanir ikki skapa nøktandi úrslit fyri barnið, og at umsorganaryvirtøka er neyðug og best fyri barnið, kann umsorganaryvirtøka nýtast, um treytirnar annars eru uppfyltar.

**Heimildir hjá barnaverndarnevndini**

Barnaverndarnevndin tekur avgerð um at seta eina fyriskipan í verk eftir tilmæli frá barnaverndarumsitingini í kommununi. Í málum um umsorganaryvirtøku, tekur barnaverndarnevndin tó bert avgerð um, hvørt málið skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndar-nevndina til avgerðar.

**Heimildir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini**

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð í málum viðvíkjandi familjuviðgerð á stovnum hjá landinum, viðvíkjandi tilboði á dagstovni fyri børn, viðvíkjandi rætti til ókeypis umboðan og í øllum málum um umsorganaryvirtøku og samverurætti. Harafturat í onkrum málum har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og einum barni, ið hevur fylt 15 ár. Eisini kann Høvuðsbarnaverndarnevndin avgera, at foreldur og/ella eitt barn, ið hevur fylt 15 ár, skal gjalda eitt uppalingarískoyti, í tíðini barnið er sett heiman. Reglur er ásettar um hetta í kunngerð nr. 85 frá 7. september 2007 um uppalingarískoyti.

**Fígging**

*Landið*

Landið ber útreiðslurnar:

1. fyri stovnsetan og rakstur av Høvuðsbarnaverndarnevndini,
2. fyri stovnsetan og rakstur av samdøgursstovnum og dagstovnum fyri børn,
3. fyri stovnspláss uttanlands,
4. í sambandi við ókeypis umboðan.

*Kommunurnar*

Kommunurnar halda útreiðslurnar, ið standast av barnaverndarlógini, sum landið ikki ber. Harafturat gjalda kommunurnar brúkaragjald fyri at seta barn á samdøgurs- ella dagstovn, sambært kunngerð nr. 4 frá 30. januar 2007 um brúkaragjald fyri børn á stovni hjá landinum.

*Uppalingarískoyti*

Um Høvuðsbarnaverndarnevndin ger av,, at foreldur og/ella barn, ið hevur fylt 15 ár, skal gjalda eitt uppalingarískoyti, er tað tann myndugleiki, ið ber útreiðslurnar av barninum,

meðan tað er sett heiman, ið hevur rættin til uppalingarískoytið. Er barnið sett á stovn hjá landinum, er tað landið, ið hevur rættin til uppalingarískoytið.

**Trupulleikar við verandi uppgávubýti**
Tað eru tó ymisk markamót, sum gera, at tørvur er á at endurskoða skipanina.

Trupulleikar vísa seg serliga at vera við grásonu millum barnavernd og brek (forsorgarlógina) og fólkaskúla, og tá og um børn eru fevnd av bæði barnaverndarlógini og forsorgarlógini.

Eisini eru trupulleikar ímillum landsstovnarnar og lokalu barnaverndartænasturnar. Hesar trupulleikar hevur landsstýriskvinnan í almannamálum sett ein arbeiðsbólk at greina.

**Tilmæli**
Tá arbeiði hjá áðurnevnda arbeiðsbólki er liðugt eigur støða at verða tikin til um núverandi býti millum land og kommunur skal broytast á barnaverndarøkinum.

Í sambandi við, at barnaverndarlógin skal endurskoðast, eigur ásetingin um tvungin kommunal samstørv um barnaverndartænastur at verða tillagað nýggja kommunala bygnaðinum.

## *5. Vegir*

Í 3. pkt. í arbeiðssetninginum verða vegir umrøddir sum ábyrgdarøki, ið kann verða flutt til kommunurnar at umsita.

Landsvegirnir eru reguleraðir í lógini um landsvegir, Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008.

Sambært landsvegalógini ger og heldur landið (Landsverk) landsvegir. Landsvegir eru bygdavegirnir og vegir frá bygd til bryggju ella brúgv, ið mest hevur týdning fyri samferðsluna oyggjanna millum. Er ivamál, um vegur ella vegastrekki skal skrásetast sum landsvegur, ger landsstýrið hetta av.

Í kunngerðini undir landsvegalógini eru allir landsvegir lýstir. Hetta merkir samstundis, at vegir, ið ikki eru nevndir í kunngerðini, eru ikki landsvegir.

Allir aðrir vegir eru tí annaðhvørt kommunalir ella privatir. Einasta regulering, ið er av hesum vegum, er tann regulering, ið kommunurnar hava samtykt við kommunalu byggisamtyktunum, har ásetingar aloftast eru um vegir og krøv til vegir.

**Tilmæli**
Í mun til at flyta teir vegir, sum í dag eru landsvegir, til kommunurnar at umsita metir nevndin avgjørt ikki, at grundarlag er fyri hesum.

Grundgevingin er, at landsvegir binda bygdir og oyggjar saman, og nevndin hevur ilt við at ímynda sær, at kommunur hvør í sínum lag og í felag skulu vera betur førar fyri at umsita slíkar vegir enn ein almennur stovnur, sum ikki hevur nakran ítøkiligan, lokalan áhuga í vegaumsitingini sum so. Hetta eigur tí framhaldandi at vera ein landsuppgáva.

Aftrat hesum kemur, at Landsverk, sum í dag umsitur landsvegakervið, við árunum hevur uppbygt ein stóran fakligan og tøkniligan førleika til at gera og halda vegir o.a. Skulu kommunurnar yvirtaka henda leiklut er ivasamt, um kommunurnar høvdu havt førleika, orsøk og vilja til at funnið felags loysnir, ið høvdu verið eins góðar og tær, ið landsstovnurin megnar at greiða sum er. Eisini av hesi orsøk verður mælt frá at leggja landsvegakervið til kommunurnar at umsita.

Hóast nevndin ikki mælir til broytingar í málsøkjabýtinum millum land og kommunur, tá um vegir ræður, so vil nevndin tó gera vart við, at verandi lóggáva greitt hevur tørv á dagføring.

Hetta er m.a., tí at kommunurnar sambært býarskipanarlógini hava heimild at ráða yvir lendinum og hvussu hetta í ráðleggingarhøpi skal skipast. Samstundis hevur landsvegamyndugleikin í landsvegalógini heimild til at definera og umdefinera landsvegir og kommunalar vegir, at seta krøv til bygging fram við landsvegi og, tá landsvegamyndugleikin metir seg hava tørv á tí, eisini at ognartaka bygt sum óbygt lendi

ella tilfar í sambandi við landsvegagerð og landsvegahald. Hetta hevur í praksis víst seg at kunna elva til trupulleikar.

Støðan er sostatt tann, at á einum og sama øki ella lendi eru tveir myndugleikar, sum hava konkurrerandi heimildir sambært ymiskari lóg, og uttan at nevndu myndugleikar hava skyldu til at samskifta hvør við annan og finna eina hóskandi loysn fyri allar partar og fyri lendið. Slíkt er ikki nøktandi og eigur at verða samskipað jú fyrr jú betri, soleiðis at hvørki kommuna ella landsmyndugleiki kemur í ta støðu, at annar myndugleikin ikki kann góðtaka ætlanina hjá hinum við sama øki. Hetta eigur tá at verða gjørt við virðing fyri báðum pørtum og sakligu orsøkunum hjá báðum myndugleikum at kunna taka avgerð og seta krøv í sambandi við umsiting teirra av økinum.

Tørvur er tí á einari dagføring og samskipan av lóggávuni, har m.a. omanfyri nevndu átrokandi viðurskifti verða tikin við.

# 4. kapittul. Kommunur og eindir

## *1. Lýsing av kommunubygnaðinum*

### 1.1. Kommunueindirnar

Kommunala umskipanarnevndin hevur í arbeiðssetningi sínum fingið álagt, við støði í "Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur", at koma við tilmæli um, hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu verða og hvussu hesar eindir skulu skipast.

Skulu kommunalu eindirnar umskipast, metir nevndin tað vera viðkomandi fyrst at hyggja eftir verandi eindum, hvussu hesar eru vorðnar til og at meta um tær, áðrenn farið verður víðari við at mæla til, hvørjar og hvussu kommunalu eindirnar skulu verða í framtíðini.

### 1.2. Bakstøði fyri verandi eindum

Grundarlagið undir kommunalu skipanini varð lagt, tá ið løgtingið í 1852 varð endurreist sum amtsráð.

Løgtingið hevði frá byrjan víðkaðar heimildir samanborið við donsku amtsráðini. Lógin, sum endurreisti løgtingið, var gjørd við fyrimynd í donsku kommunulógini frá 1841, tó so at lógin bert endurreisti løgtingið sum amtsráð, men stovnsetti ikki primerkommunur í Føroyum.

Fyrsta primerkommuna í Føroyum var Tórshavnar kommuna, sum varð stovnsett við lóg í 1866 "om byen Torshavns økonomiske styrelse". Hugskotið at stovnseta sjálvstøðugt kommunustýri fyri Tórshavn spratt av, at Akureyri í Íslandi gjørdist keypstaður og sjálvstøðug kommuna í 1862. Tað serliga í hesum sambandi var, at Tórshavn ikki var keypstaður tá (Tórshavn gjørdist keypstaður í 1908). Býurin Tórshavn var heldur ikki sjálvstøðug sókn, men Tórshavnar sókn varð býtt í tvey, tá ið kommunan varð stovnsett.

Við lóg frá 1872 “om de færøske landkommuners styrelse” vóru stovnsettar 7 landkommunur við 39 sóknum. Lógin var gjørd við donsku lógini um landkommunur frá 1867 sum fyrimynd.

Størsta ósemjan í sambandi við viðgerðina av lógaruppskotinum, bæði í Løgtinginum, Ríkisdegnum og Fólkatinginum, var, hvør tann kommunala eindin skuldi vera. Amtmaðurin mælti til at nýta sóknirnar sum kommunala eind. Danski løgmálaráðharrin var ósamdur í hesum, tí hann metti, at við at nýta sóknina sum kommunala eind, gjørdist talið á kommunum ov høgt, nevniliga uml. 40 sóknarkommunur við einum samlaðum fólkagrundarlagi upp á uml. 9.000.

Løgmálaráðharrin mælti til at nýta prestagjaldið sum kommunala eind. Hann vísti á, at viðurskiftini í Føroyum líktust nógv viðurskiftunum summa staðni í Noreg, og tá prestagjaldið varð nýtt sum kommunal eind í Norðurnoreg, átti tað eisini at borið til í Føroyum.

Løgtingið var ikki ósamt við danska ráðharranum og tók undir við at nýta prestagjaldið sum eind, tó so at løgtingið sum frá líður ivaleyst sá sóknina sum ta kommunalu eindina, tí løgtingið mælti til “at der med bibeholdelse af præstegjældsinddelingen allerede nu burde gøres skridt hen til udsondring af de stedlige interesser, derved at præstegjældets økonomiske anliggender styres særskilt for hvert sogn”.

Løgtingið fekk sín vilja, og modellið hjá løgtinginum var í veruleikanum ein tríbýtt skipan. Løgtingið sum amtsráð, prestagjaldskommuna og so sóknirnar sum sjálvstøðugar búskaparligar eindir í kommununi.

### 1.2.1. Kommunulógin frá 1872

Kommunurnar vóru nú 8 í tali, Tórshavnar kommuna og 7 landkommunur við 39 sóknum.

Landkommunurnar vóru:

A. Norðoyar prestagjaldskommuna
    a. Sóknir: Vágs (Klaksvík), Húsa, Mikladals, Kunoyar, Viðareiðis, Svínoyar og Fugloyar
B. Eysturoyar prestagjaldskommuna
    a. Sóknir: Nes, Sjóvar, Gøtu, Fuglafjarðar, Oyndarfjarðar, Funnings og Eiðis
C. Norðstreymoyar prestagjaldskommuna
    a. Sóknir: Vestmanna, Kvívíkar, Kollafjarðar, Hvalvíkar, Haldórsvíkar og Saksunar
D. Sameindu sóknir í Suðurstreymoyar prestagjaldi
    a. Sóknir: Kirkjubø, Kaldbaks, Nólsoyar og Tórshavnar uttanbíggjar
E. Vága prestagjaldskommuna
    a. Miðvágs, Sandavágs, Sørvágs, Bíggjar og Mykinesar
F. Sandoyar prestagjaldskommuna
    a. Sóknir: Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar
G. Suðuroyar Prestagjaldskommuna
    a. Sóknir: Hvalbiar, Froðbiar, Fámjins, Porkeris, Vágs og Sumbiar.

Fyri hvørja kommunu skuldi veljast eitt forstandarskap. Hvør sókn í kommununi hevði minst eitt umboð í forstandarskapinum. Forstandarskapið tilnevndi eitt sóknarstýri fyri hvørja sókn í kommununi, og sóknarstýrisformaðurin skuldi vera limur í forstandarskapinum. Hvør sókn skuldi fyrisitast sjálvstøðugt við sjálvstøðugari fíggjarætlan og sjálvstøðugum roknskapi.

Tá umstøðurnar talaðu fyri, og meirilutin av veljarunum í sóknini ella sóknunum ynsktu tað, kundi ráðharrin, eftir at hava spurt seg fyri hjá forstandarskapinum og løgtinginum, stovnseta sjálvstøðuga kommunu fyri hesa sókn ella hesar sóknir.

Møguleikin at gerast sjálvstøðug kommuna varð troytt til fulnar fram til 1972. Tað vóru 51 kommunur, tá ið kommunulógin í 1972 avtók heimildina at skilja kommunur sundur.

Fyrsta sjálvstøðuga sóknarkommunan var Nólsoyar sóknarkommuna, sum varð stovnsett í 1876. Tey fyrstu 20 árini, lógin var galdandi, gjørdust 4 sóknir sjálvstøðugar kommunur.

Umframt Nólsoy vóru tær Hvalbiar kommuna í 1878, Froðbiar kommuna í 1879 og Vestmanna kommuna í 1892. Hetta vóru allar sóknir, sum vóru í stórari framgongd samanborið við hinar sóknirnar í prestagjaldskommununum. Av hesum eru allar framvegis óbroyttar, sjálvstøðugar kommunur uttan Nólsoyar kommuna, sum er løgd saman við Tórshavnar kommunu.

Ár 1900 var talið á kommunum komið upp á 15. Fram til 1910 vóru bert sóknir stovnsettar sum sjálvstøðugar kommunur. Í 1910 verður Skopun útskild sum sjálvstøðug sókn frá Sands sókn og gjørdist sjálvstøðug kommuna í 1930. Í 1918 varð Leirvík skild úr Fuglafjarðar sókn sum sjálvstøðug sókn og kommuna. Tað vórðu framdar 11 sóknarsundurbýtingar; tær flestu vórðu framdar, samstundis sum nýggju sóknirnar gjørdust sjálvstøðugar kommunur. Meir enn helvtin av hesum vórðu framdar í Eysturoy.

Tað eru trý dømi um broyting av kommunu- ella sóknarmarki. Í 1923 flutti Stóra Dímun frá Sands sókn til Skúvoyar sókn, í 1928 flutti Nes (Vágur) frá Porkeris sóknarkommunu til Vágs sóknarkommunu. Tað seinasta dømi er frá 1978, tá ið Hoyvík og Hvítanes vórðu fluttar frá Tórshavnar uttanbíggjar kommunu til Tórshavnar kommunu. Hetta var, eftir at nýggja kommunulógin kom í gildi í 1972.

Av teimum 8 upprunaligu kommununum vóru tríggjar kommunur fult sundurbýttar, áðrenn heimastýrislógin varð sett í gildi. Í Vága prestagjaldskommunu var fyrsta sjálvstøðuga sóknin Mykines (1911), meðan tær eftirverandi 4 sóknirnar vórðu skildar sundur í 1915. Í Suðuroy vóru tær upprunaligu 6 sóknirnar allar sjálvstøðugar kommunur longu í 1908, og tann seinasta sundurbýtingin varð framd í 1920, tá ið Hov varð skild úr Porkeris sóknarkommunu sum sjálvstøðug kommuna. Í Sandoy vórðu tær táverandi 5 sóknirnar skildar sundur í sjálvstøðugar kommunur í 1930.

Tá annar veraldarbardagi brast á, vóru kommunurnar 42 í tali, og tá heimastýrislógin varð sett í gildi í 1948 var talið 47. Fram til nýggju kommunulógina í 1972 øktist tali við 4 upp í 51 kommunur.

Eftir 5 sundurskiljingar vóru Norðuroyggjar býttar í 8 kommunur í 1950, meðan Norðurstreymoy í 1954 eftir 4 sundurskiljingar varð býtt í 7 kommunur. Seinasta kommunusundurbýtingin var í 1967, tá ið Runavíkar kommuna varð útskild frá Nes

kommunu. Tá varð upprunaliga Eysturoyar prestagjaldskommuna býtt sundur í 13 kommunur. Í Suðurstreymoy vórðu tær upprunaligu 4 sóknirnar býttar í 5 kommunur endaliga í 1930.

### 1.2.2. Ávegis kommunureformurin í 1972

Í 1966 samtykkir løgtingið at seta nevnd at kanna kommunalu lóggávuna í Føroyum. Í viðmerkingum til lógaruppskotið stendur m.a.: *"Viðurskiftini hjá kommununum eru stórliga broytt síðani tær fyrstu kommunurnar vóru skipaðar, tí tá vóru bert fáar kommunur, og krøvini til tær vóru smá, mett við tey, sum nú eru.*

*So við og við eru kommunurnar býttar sundur, og eru tær nú helst ov smáar og harav ov nógvar í tali. Hetta sama hevur verið í hinum Norðurlondum, men tey seinru árini hava tey lagt kommunur saman aftur í størri eindir. Í Svøríki varð hetta gjørt í 1952 og í Noreg1956/57. Í Danmark eru teir við at leggja saman, fyribils gera kommunurnar tað sjálvbodnar sínámillum, men aftaná 1970 verður samanleggingin tvungin.*

*Landsstýrið heldur, at vert hevði verið at kannað møguleikarnar fyri líknandi samanlegging í Føroyum".*

Nevndin varð sett í 1969, og hon skuldi kanna kommunalu lóggávuna, herundir møguleikarnar at leggja kommunur saman. Á heysti í 1971 legði nevndin fram frágreiðing.

Nevndin sigur í innganginum m.a.: "Tað er nevndini greitt beinan vegin, at høvuðsmeinbogin í føroyskari kommunalari umsiting var tann sundurbýting, sum er farin fram, og at tá skipast skuldi fyri einari kommunalari lóggávu, var neyðugt samstundis at hava størri kommunalar eindir fyri eyga. Eitt uppskot til samanlegging av kommunum hevur nevndin ikki hildið verið neyðugt at leggja fram vegna tess, at seinasta kommunusundurbýtið í Føroyum fór fram 1. apríl 1967.".

"Grundarlagið undir kommunuumsitingini hevur fleiri mansaldrar á baki og hevur ikki fylgt teimum broytingum, sum eru farnar fram í samfelagsskipanini, og nevndin hevur hildið, at sjálvt um eitt uppskot um broyting í kommunutalinum ikki kann gerast í løtuni,

so var neyðugt at uppfylla 1. partin av setninginum, sum varð fyrisettur í heimildarlógini frá 1966, sum er at skilja so, at øll tann verandi kommunulógávan skuldi broytast. Tá tað frammanundan er ásannað, at kommunalu eindirnar eru ov smáar, og at gingið eigur at verða fram ímóti størri eindum, sum seinni er frágreitt, bar ikki til annað enn at lógaruppskotini vóru skipað við hesum størri kommunalu eindum fyri eyga, men samstundis er greitt, at í eina tíð, aftaná at ein tílík nýggj lóg er komin í gildi, verður neyðugt, at tær smáu kommunurnar hava eina serskipan"

Nevndin gjørdi eitt uppskot til eina samlaða nýggja kommunulóg, sum varð sett í gildi í 1972. Nevndin mælti til, at arbeitt varð víðari við spurninginum um at leggja kommunur saman í størri eindir, kommunulógin var ætlað til størri kommunur og undantøkini fyri smærri kommunur skuldi bert vera fyribils.

Tað kom einki uppskot um leggja kommunurnar saman í størri eindir. Tær einastu samanleggingarnar, sum vórðu framdar, meðan 1972-lógin var í gildi, vóru samanleggingarnar í Suðurstreymoy. Millum Tórshavn og Kaldbak í 1976, millum Tórshavn og Argir, sum varð góðkend í 1994 og framd 1. januar 1997, og Tórshavn og Kollafjørð, sum varð góðkend í 1998 og framd 1. januar 2001.

### 1.2.3. Ávegis at umskipa kommunalu viðurskiftini

Í 1992 samtykti landsstýrið at seta arbeiðsbólk "at viðgera og gera tilmæli í spurninginum um býti av virksemi og ábyrgd millum land og kommunur".

Í uppritinum, sum var grundarlagið fyri avgerð landsstýrisins, verður m.a. sagt, at tvær høvuðstreytir eru fyri, at vit fáa eina betri skipan:

1. At skipað verður fyri einum náttúruligum uppgávubýti millum landið og kommunurnar, og at allar kommunur kunnu luttaka í hesum.
2. At kommunurnar av somu orsøk hava eina slíka stødd og geografiska samanseting, at tær makta eina fyrisiting til at taka sær av hesum.

Kommunubólkurin legði fram eitt fyribils álit á sumri 1992. Í álitinum vísti bólkurin á 4 møguligar kommunubygnaðir:

- Óbroyttur kommunubygnaður
- Fast samstarv millum verandi kommunur
- Bygdarráð (ráðgevandi kommunur)
- Samanlegging av kommunum í størri kommunalar eindir

Við møguleika A var gjørligt í ávísan mun at gera viðurskiftini millum land og kommunur einfaldari, við at landið yvirtók fleiri málsøkir frá kommununum.

Við møguleika B skuldi skipast fast samstarv millum kommunurnar í einum ávísum øki um ávís mál. Samstarvið skuldi so fáa fult ræði á hesum málsøkjum.

Við møguleika C varð skipa eitt ráð fyri hvørja bygd, sum skuldi verða ráðgevandi mótvegis landsmyndugleikunum, umframt at umsita smærri ásett økir.

Møguleiki D merkti, at kommunurnar skuldu leggjast saman í hóskandi økir, sum vóru før fyri at bera tey verkevni, sum borgarin hevði brúk fyri.

Arbeiðsbólkurin bað landsstýrið taka støðu til, hvørjum bygnaði arbeiðast skuldi víðari við. Ein stórur meiriluti í bólkinum mælti landsstýrinum til at velja møguleika D, meðan ein minniluti mælti til møguleika B.

Í februar 1993 fekk arbeiðsbólkurin boð um at arbeiða víðari við møguleika D, sum var samanlegging í størri kommunalar eindir. Bólkurin fekk freist til á heysti 1993, men bólkurin hevði bara ein fund, áðrenn nýggj landsstýrissamgonga varð skipað á vári 1993.

Støðan hjá landsstýrinum, sum tók við á vári 1993, var, at kommunurnar eiga sjálvar at avgera, um samanlegging skal fara fram, men áskoðan landsstýrisins var, at tað kundi vera ein fyrimunur við at leggja kommunurnar saman. Landsstýrismaðurin í kommunumálum heitti tí á vári 1994 á kommunurnar um at viðgera spurningin um samanlegging við kommunur, sum landsstýrismaðurin vísti á, og taka avgerð um, at setast skuldi ein felagsnevnd at kanna, um grundarlag var fyri samanlegging av kommununum og skjótast til bar at koma við tilráðing til bygdaráðini um hetta.

Eftir uppskotinum mælti landsstýrismaðurin til, at lagt varð saman í 18 kommunur. Útoyggjarnar skulu framvegis verða fyri seg sjálvar. Tilmæltu eindirnar vóru hesar:

1. Fugloyar
2. Svínoyar
3. Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar og Kunoyar
4. Mikladals og Húsa
5. Elduvíkar, Oyndarfjarðar, Fuglafjarðar, Leirvíkar og Gøtu
6. Runavíkar, Nes, Skála og Sjóar
7. Sunda, Eiðis, Gjáar, Funnings, Haldarsvíkar, Saksunar, Hvalvíkar og Hósvíkar
8. Kollafjarðar, Kvívíkar og Vestmanna
9. Tórshavnar
10. Kirkjubøar
11. Hests
12. Nólsoyar
13. Sandavágs, Miðvágs, Sørvágs og Bíggjar
14. Mykines
15. Sands, Skopunar, Skálavíkar og Húsavíkar
16. Skúvoyar
17. Hvalbiar, Froðbiar, Fámjins
18. Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar

Flestu kommunurnar vóru ikki jaligar til hesa áheitan og ongar samanleggingarnevndir vórðu settar áðrenn løgtingsvalið í juli 1994.

### 1.2.4. Kommunustýrislógin frá 2000

Longu í oktober 1994, ein mánað eftir at nýggj samgonga var skipað, setti landsstýrismaðurin í kommunumálum arbeiðsbólk at orða arbeiðssetning til nýggja kommunala skipan.

Uppskotið til arbeiðssetning varð latið landsstýrismanninum í februar 1995, og í september sama ár samtykti landsstýrið at seta nevnd at gera uppskot um nýggja kommunala skipan. Arbeiðssetningurin hjá nevndini varð lagdur fyri løgtingið og samtyktur við ávísum broytingum í desember 1995.

Kommununevndin skuldi gera uppskot um nýggja kommunuskipan og skuldu koma við tilmæli um:

1. Hvørjar uppgávur hóskandi kunnu umsitast av kommunalu eindunum við støði í einum greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.
2. Hóskandi tal og stødd á kommunum við støði í B 1.
3. Møguligar serskipanir viðvíkjandi útoyggjunum verða at grunda á serstøku viðurskiftini, sum har eru galdandi.
4. Møguligar serskipanir fyri tey smáu bygdarsamfeløgini verða gjørdar soleiðis, at tey í mest møguligan mun varðveita síni eyðkenni.

Høvuðssjónarmiðini og meginreglurnar í arbeiðinum skulu vera:

1. Broytingarnar í kommunuskipanini skulu byggja á sjálvbodna samanlegging.
2. Fíggjarlig ábyrgd fylgir avgerðarrættinum.
3. Uppgávurnar verða loystar, so tær eru fullgóðar samfelagsbúskaparliga, men so nær borgarunum, sum til ber.
4. Borgararnir fáa gjølla at vita um kostnaðin av kommunuvirkseminum.

Í september 1996 kom kommununevndin við eini frágreiðing um verkætlanina: “Ein nýggj kommunal skipan í Føroyum”. Í november 1997 kom táttur 1 partur I: “Uppgávu- og ábyrgdarbýtið”. Í juni 1998 kom táttur 1 partur II: “Frágreiðing um kommunurnar í Føroyum” og at enda í september 1998 kom táttur II: “Niðurstøður og tilmæli”.

Kommununevndin legði fram eitt uppskot til nýggja kommunustýrislóg, sum gjørdist støði undir Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin).

Kommununevndin legði eisini fram uppskot um lóg um samanlegging og sundurbýti í kommunur. Uppskotið var í tveimum pørtum. Fyrri partur um sjálvbodnar

kommunusamanleggingar, har mælt var til at, avtalur um sjálvbodnar kommunusamanleggingar skulu leggjast fyri landsstýrismannin í kommunumálum til góðkenningar í seinasta lagi 1. januar ár 2002. Seinni partur av uppskotinum var um fyriskipaðar kommunusamanleggingar, sum mælti til, at vóru kommunusamanleggingarnar ikki fullførdar 1. januar ár 2002, skuldi landsstýrismaðurin í kommunumálum skipa fyri samanlegging og sundurbýti í 7 kommunur.

Landsstýrismaðurin í kommunumálum valdi bert at leggja tann fyrra partin av uppskotinum fyri løgtingið, og hetta uppskot varð samtykt sum løgtingslóg nr. 77 frá 8. mai 2001 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar. Henda lóg hevur síðani verið grundarlagið undir teimum framdu kommunusamanleggingunum, sum hevur minkað talið á kommunum úr 50 niður í 30.

Grundað á arbeiðssetning nevndarinnar hevur nevndin havt sum heildaratlit í øllum metingum í sambandi við eindir, at tað er eitt ávíst mál at fáa talið á kommunum niður úr teimum verandi 30, tí vit tá samstundis fáa størri og sterkari eindir. Hetta sjálvstøðuga atlit um færri kommunur hevur tí havt ávirkan á metingarnar hjá nevndini, hvørjar eindirnar kunnu vera í framtíðar kommunubygnaðinum.

## 1.3. Komandi kommunalar eindir

Í Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunalt samstarv í sambandi við lógarbundnar uppgávur eru í § 2 nevndar 7 eindir:

1) Norðuroyggjar, t.e. Fugloyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar og Húsa kommunur.
2) Eysturoy, t.e. Fuglafjarðar, Eystur, Nes, Runavíkar og Sjóvar kommunur.
3) Sundalagið, t.e. Eiðis og Sunda kommunur.
4) Streymoy, t.e. Tórshavnar kommuna.
5) Vágar, t.e. Sandavágs og Vága kommunur.
6) Sandoy, t.e. Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar kommunur.
7) Suðuroy, t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur

Harumframt er í stk. 2 í somu grein ásett, at “Vestmanna og Kvívíkar kommunur hava saman valfrælsi, hvørt tær saman skulu verða partur av eindini 3, 4 ella 5.”

Lógin ásetur eisini, hvørji fyrilit skulu havast í huga, tá ið avtalur um kommunusamanleggingar verða gjørdar. Hesi fyrilit eru:

1) at stovnseta kommunueindir, sum eru samfeldar landafrøðiliga og samferðsluliga,

2) møguleiki at menna fólka-, vinnu- og búskaparviðurskifti,

3) at røkja kommunuuppgávur

4) at fólkatalið helst skal vera í minsta lagi 2000 borgarar

Nevndin hevur viðgjørt hesi og onnur atlit í sambandi við spurningin um, hvørjar kommunueindir nevndin skal mæla til.

Her er serliga vert at nevna atlitið til fólkaræði og rættartrygd, sum kanska kunnu tulkast inn í fyrilitini omanfyri, men nevndin metir hesi fyrilit vera so grundliggjandi og týðandi, at tey eiga at verða nevnd serskilt.

Semja er um, at eindin ella eindirnar, hvørjar tær so enn verða, ikki eru endamál í sjálvum sær, men ein miðil til at fremja eitt endamál.

Hvat og hvussu eindirnar skulu ásetast, er ein spurningur, sum hevur verið viðgjørdur ymiskt í teimum ymsu tilgongdum, sum hava verið áður.

Í sambandi við nevndarviðgerðina í løgtinginum av uppskotinum til 1872-lógina, sigur nevndin í sínum áliti:” Det første og vigtigste Spørgsmaal som frembyder  sig er, om Inddelingen bør ske præstegjeldsvis eller sognevis. Allerede de Udtalelelser som ere faaldne blandt Tingets medlemmer tyde paa at stemingen er for at en udsondring af de enkelte Sogne saavidt muligt bliver gennemført og det tør antages at den almindelige stemning blandt Befolkningen er i Overeenstemme hermed.

Imidlertid forekommer det udvalget i flere Retninger betænkeligt allerede nu at iverksætte en sognevis Ordning af Kommunalvæsenet her paa Landet. Udvalget maa

nemlig gaa udfra, at ikke blot den aandelige Dygtinhed, der betinges af et bedre ordnet Undervisningsvæsen, end man hidtil har havt her paa Øerne, menogsaa den hele om man saa maa sige politiske Modenhed, der medfører et friere Blik paa Forholdene, endnu ikke har naaet den udvikling blandt den herværende befolkning, at de enkelte Sogne i Almindelighed , naar det alene skulde være henvist til deres egne personlige Kræfter vilde kunne yde Betingelserne for en gavnlig komunal Virksomhed"

Í 1972 er vend komin í. Sum áður víst á, er nevnt í forarbeiðinum, at sundurbýtingin er farin ov vítt. Ró verður fram undir, at ynskiligt er, at vit fáa størri eindir eins og grannalond okkara hava fingið. Hesi sjónarmið verða endurtikin bæði í 1992 og 2000.

### 1.3.1. Fyrilit – serliga í mun til kommunalar eindir

Fyrilitini sum skulu takast, tá ið avgerð skal takast um kommunalu eindirnar, eru fleiri. Vit hava áður viðgjørt spurningar um greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti, greiðan og effektivan almennan geira og møguleikar fyri størri staðbundnari ávirkan og rættartrygd.

Nevnast kunnu eisini eyðkenni, ið hava týdning, tá ið hugsað verður um møguligar størri kommunueindir. Í tilmælinum viðvíkjandi eindum verður umframt omanfyrinevndu atlit eisini lagdur dentur á hesi eyðkenni: landafrøðilig og samferðslulig viðurskifti og fólkagrundarlag.

Kommunueindin eigur at vera ein natúrlig landafrøðilig og samferðslulig eind, so at kommunuráðleggingin og tænastuveitingin til borgaran fylgjast væl. Tað er til dømis óhugsandi, at Sandoyggin og Norðuroyggjar verða lagdar saman í eina kommunu, tí henda eindin hóskar ikki saman landafrøðiliga. Víddin á kommunueindini eigur heldur ikki at verða størri, enn at íbúgvarnir í kommununi hava rímiliga atgongd til kommunumiðdepilin og tær almennu tænasturnar. At kommunueindin er ein natúrlig landafrøðilig eind, átti eisini at borið við sær, at íbúgvarnir lættari kunnu venja seg við ta nýggju eindina, sum teir nú eru vorðnir partur av.

Eitt oyggjasamfelag sum Føroyar er frá náttúrunnar hond býtt sundur í landafrøðiligar eindir. Dømi um eintýddar, landafrøðiligar eindir eru: Vágar, Norðoyggjar, Suðuroy og Sandoy.

Í sambandi við at nevndin mælir til nýggjar kommunueindir, skal eisini viðmerkjast, at fyrilit eru tikin fyri staðbundna samleikanum. Nevndin hevur í arbeiði sínum – á jøvnum føti við onnur fyrilit – tikið fyrilit fyri staðbundna samleikanum, soleiðis at hann hevur verið viðvirkandi til endaliga tilmæli nevndarinnar viðvíkjandi nýggjum kommunueindum.

Landsstýrið setti á vári í 1969 5-mannanevnd at kanna kommunalu lóggávuna í Føroyum. Sambært hesi nevnd hevur kommunusundurbýtingin í so nógvar og smáar kommunur fram til 1972 havt við sær veikar kommunur, sum í roynd og veru lítið og einki vald hava. 5-mannanevndin helt, at størri kommunalar eindir høvdu borið við sær, at borgarin hevði greiðari fatan av, at tað var kommunustýrið, ið hevði ábyrgdina av teimum kommunalu uppgávunum, og at borgarin tí fekk størri ávirkan.

Hvussu stór kommunueindin eigur at vera, er eisini treytað av, hvørjar uppgávur kommunurnar skulu loysa. 5-mannanevndin metti tó, at einir 1.500 íbúgvar áttu í øllum føri at veitt kommunueindini eina sømiliga fyrisiting. 5-mannanevndin helt tó, at hesin málsetningurin var ov lítil. Umframt eina sømiliga kommunufyrisiting skal kommunan eisini kunna bjóða sínum borgarum tær tænastur, sum ein borgari í einum nútíðar samfelag krevur, og krøvini verða størri og størri. Um so er, at kommunan ikki megnar hetta, so leitar borgarin sær aðrar leiðir eftir hesum tænastum. Kommunan eigur m.a. at bjóða sínum íbúgvum: skúlagongd, eina sosiala skipan, ellis- og røktarheim, ítróttar- og samkomuhús o.s.fr. Til tess at røkka hesum málum muna 1.500 íbúgvar ov lítið.

„Kommune- og fylkesinndelingsudvalget“, sum varð sett í Noregi í 1989, hevði ta áskoðan, at íbúgvatalið í eini kommunu átti í minsta lagi at vera 5.000. Hetta helt nevndin vera neyðugt, um m.a. kostnaðarvirkni skuldi vera í umsitingini og teirri kommunalu tænastuframleiðsluni og til tess at fáa neyðugan førleika at røkja fjølbroyttar, kommunalar uppgávur.

Í sambandi við kommunubroytingina í Danmark í 1970 var miðað eftir, at kommunurnar skuldu ikki hava eitt fólkatal, sum var minni enn 3.000–4.000; men hildið varð, at fyrimunirnir vóru fleiri, um fólkatalið var uppaftur størri, t.e. einar 5-6.000 íbúgvar.

Kommununevndin, sum kom við sínum tilmæli í 1998, helt tað vera skilabest, at fólkatalið í kommunueindini ikki skuldi vera minni enn 2.000 og at best hevði verið, um tað var uppaftur størri. Nevndin helt tað tó vera óveruligt at seta markið hægri enn 2.000, av tí at tær landafrøðiligu umstøðurnar í Føroyum eru so háttaðar, sum tær eru. Markið við 2.000 íbúgvar var eisini grundað á, at tað var tað, ið nevndin metti kravdist, fyri at kommunan kundi átaka sær fólkaskúlan sum eina kommunala uppgávu burturav. Við einum fólkagrundarlag upp á um leið 2000 íbúgvar metti nevndin, at ein kommuna hevði næmingagrundarlag fyri einum 2-sporaðum fólkaskúla. Hetta kundi bera við sær ein virknari rakstur, bæði hølisliga og undirvísingarliga, eins og at tey fakligu tilboðini til næmingarnar kundi verða størri.

## 1.3.2. Tilmæli nevndarinnar viðvíkjandi eindum

Í dag eru 30 kommunur í Føroyum. Gongdin í fólkatalinum í hesum kommunum seinastu 25 árini hevur verið henda:

| **Fólkatal 1. jan./ár** | **1985** | **1990** | **1995** | **2000** | **2005** | **2009** | **%-Broyting** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skúvoyar** | 90 | 92 | 93 | 85 | 62 | 55 | -38,9 |
| **Fugloyar** | 62 | 61 | 54 | 40 | 45 | 40 | -35,5 |
| **Húsavíkar** | 192 | 189 | 172 | 152 | 142 | 125 | -34,9 |
| **Sumbiar** | 542 | 515 | 453 | 403 | 390 | 379 | -30,1 |
| **Skálavíkar** | 225 | 229 | 178 | 162 | 183 | 169 | -24,9 |
| **Hovs** | 153 | 165 | 143 | 119 | 131 | 115 | -24,8 |
| **Vágs** | 1.759 | 1.688 | 1.429 | 1.404 | 1.430 | 1.405 | -20,1 |
| **Skopunar** | 608 | 600 | 541 | 489 | 480 | 504 | -17,1 |
| **Tvøroyrar** | 2.118 | 2.111 | 1.858 | 1.783 | 1.835 | 1.768 | -16,5 |
| **Fámjins** | 127 | 126 | 125 | 116 | 114 | 110 | -13,4 |
| **Hvalbiar** | 828 | 836 | 786 | 776 | 777 | 733 | -11,5 |
| **Sands** | 657 | 647 | 557 | 557 | 600 | 585 | -11,0 |
| **Porkeris** | 355 | 395 | 401 | 357 | 359 | 334 | -5,9 |
| **Fuglafjarðar** | 1.636 | 1.662 | 1.452 | 1.497 | 1.565 | 1.553 | -5,1 |
| **Hvannasunds** | 459 | 492 | 457 | 441 | 449 | 438 | -4,6 |
| **Vestmanna** | 1.304 | 1.284 | 1.152 | 1.210 | 1.241 | 1.256 | -3,7 |
| **Klaksvíkar** | 4.959 | 5.122 | 4.729 | 4.815 | 4.961 | 4.927 | -0,6 |
| **Sørvágs** | 1.078 | 1.106 | 1.006 | 973 | 1.081 | 1.134 | 5,2 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Vága** | 1.853 | 1.841 | 1.639 | 1.641 | 1.828 | 1.950 | 5,2 |
| **Sjóvar** | 935 | 1.005 | 960 | 1.007 | 1.042 | 1.009 | 7,9 |
| **Runavíkar** | 3.509 | 3.627 | 3.269 | 3.399 | 3.725 | 3.796 | 8,2 |
| **Eiðis** | 621 | 717 | 631 | 688 | 720 | 695 | 11,9 |
| **Sunda** | 1.458 | 1.512 | 1.332 | 1.387 | 1.558 | 1.650 | 13,2 |
| **Eystur** | 1.724 | 1.833 | 1.638 | 1.774 | 1.922 | 1.961 | 13,7 |
| **Húsa** | 50 | 50 | 54 | 60 | 57 | 58 | 16,0 |
| **Kvívíkar** | 513 | 594 | 561 | 554 | 606 | 606 | 18,1 |
| **Tórshavnar** | 16.096 | 17.700 | 16.497 | 17.892 | 19.336 | 19.649 | 22,1 |
| **Nes** | 1.030 | 1.148 | 1.047 | 1.118 | 1.215 | 1.263 | 22,6 |
| **Viðareiðis** | 276 | 307 | 303 | 318 | 341 | 351 | 27,2 |
| **Kunoyar** | 101 | 116 | 127 | 136 | 142 | 160 | 58,4 |
| | | | | | | | |
| **Alt landið** | 45.318 | 47.770 | 43.644 | 45.353 | 48.337 | 48.778 | 7,6 |

Av teimum 30 kommununum hava 17 havt fallandi fólkatal seinastu 25 árini. Saman við Fugloyar kommunu er talan um, at alla kommunurnar í Sandoy og Suðuroy undantikið Porkeris kommuna hava havt eina afturgongd við tvísiffraðum prosenttali.

Í dag eru 3 kommunur sum hava færri enn 100 íbúgvar, 9 hava millum 100 og 500 íbúgvar. Sostatt eru 11 kommunur í dag undantiknar nevndarstýri sbrt. kommunustýrislógini.

Meðalstøddin á eini kommunu í dag er uml. 1.600 íbúgvar. Verður Tórshavnar kommuna hildin uttanfyri er meðalstøddin uml. 1.000 íbúgvar. Skal talið á kommunum skerjast niður í t.d. 7, sum eru ásett í lógini um sjálvbodna kommunusamanlegging, verður meðalstøddin næstan 7.000 íbúgvar, og verður Tórshavnar kommuna hildin uttanfyri, uml. 4.850 íbúgvar.

Tórshavnar kommuna er nógv tann størsta kommunan og verður verandi tað, sjálvt við rættiliga umfatandi samanleggingum av hinum kommununum. Við uml. 40 % av íbúgvunum metir nevndin, at Tórshavnar kommuna er ríkiliga stór eftir føroyskum viðurskiftum, og nevndin mælir tí til, at Tórshavnar kommuna ikki verður partur í fleiri samanleggingum, tí tað er ikki ynskiligt at økja enn meira um støddarmunin sum longu er.

Møguleikin at minka um Tórshavnar kommunu við at taka Kollafjørð burturúr hevur verið umrøddur, saman við møguleikanum at býta kommunur sundur fyri at fáa fleiri hóskandi eindir.

Nevndin metir tó, at tað er sera trupult og torført at broyta markið millum verandi kommunueindir fyri flyta partar av eini verandi kommunu í aðra komandi kommunueind. Tí verður hetta sum meginregla frámælt og tílíkir møguleikar bert nevndir, men eru ikki viðgjørdir í sambandi við tilmælið um komandi kommunueindir. Grundgevingin fyri hesum er, at tilgongdin til samanlegging er skipað og góðkend eftir galdandi lóggávu og partarnir hava lagað seg til broyttu viðurskiftini

Her skal eisini verða gjørt vart við, at tey atlit, ið nevndin hevur lagt dent á, ikki hava havt somu vekt allastaðni, men veldst hetta um, hvat nevndin metir vera mest viðkomandi fyri ta ítøkiligu eindina.

### 1.3.3. Tær einstøku eindirnar

Nevndin hevur lagt seg eftir hesum eindum:

1. *Suðuroy*
2. *Sandoy*
3. *Tórshavn*
4. *Vágar-Streymoy ella*
    - *b) Vágar*
    - *c) Vestmanna-Kvívík*
5. *Eysturoy ella*
    - *a) Eystur*
    - *b) Skálafjørður*
6. *Sundalagið*
7. *Norðuroyggjar*

*Suðuroy*

Suðuroy, t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur. Eindin hevði 4.844 íbúgvar 1. januar 2009 og er tað meir enn 1.000 færri enn talið var áðrenn kreppuna í 90'unum. Tað hevði verið gjørligt at gjørt tvær minni eindir við

omanfyri 2.000 íbúgvum, men hetta er ikki ein ráðilig loysn, tá ið hugt verður at fortreytunum hjá Suðuroy: víkjandi fólkatal og fíggjarlig útlit, sum ikki er eins góð og í miðstaðarøkinum. Samlaða skattskylduga inntøkan í eindini er uml. 742 mió. kr. ella 151 tús. kr. pr. borgara, sum er hægri enn í Sandoy, men 20.000 kr. undir landsmeðal, tá ið Tórshavn er íroknað, og 8 tús. undir, tá ið Tórshavn ikki er íroknað.

Suðuroy hevði kunnað verið býtt í tvær eindir, sum báðar hvør í sínum lag høvdu lokið tey atlit, ið nevndin nýtir, men talan er um eina oyggj, sum við síni frástøðu frá meginøkinum er útjaðari í landinum og hevur verið fyri stórari afturgongd. Fyri at stuðla sum mest undir eina tilgongd, sum kann virka ímóti gongdini, sum hevur verið, er neyðugt, at Suðuroy verður skipað sum ein staðbundin eind. Tí mælir nevndin til, at Suðuroy, t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur, verður løgd saman í eina kommunu.

*Sandoy*

Sandoy, t.e. Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar kommunur. Hetta er upprunaliga prestagjaldskommunan. Sandoyggin verður tann minsta eindin í hesum tilmælinum. Eins og longu víst á omanfyri mælir nevndin frá at leggja Sandoy saman við Suðurstreymoy, tí tá verður tann eindin størri enn ynskiligt er. Samstundis er tað ikki hugsandi at leggja Sandoy saman við Suðuroy, tí hendan eindin á ongan hátt er ein samfeld eind.

Fólkatalið í Sandoy var 1. januar 2009 1.438 íbúgvar. Tað vísir støddina á einari møguliga samanlagdari kommunu í Sandoy. Hetta tal hevur verið støðugt minkandi í nógv ár. Samlaða skattskylduga inntøkan í eindini var í 2007 um 206 mió. kr. ella uml. 142 tús. kr. pr. borgara. Hetta verður tann veikasta eindin fíggjarliga sæð, og neyðugt verður at taka fyrilit fyri hesum í sambandi við at funnið verður fram til, hvussu fíggingin av kommununum verður fingin til vegar. Skattskylduga inntøkan pr. borgara í Sandoy er 47 tús. kr. undir Tórshavn, 29 tús. kr. undir landsmeðal, tá ið Tórshavn er íroknað, og meir enn 17 tús. kr., tá ið Tórshavn ikki er íroknað

Hóast Sandoy sum sjálvstøðug eind er ov lítil at lúka fleiri av teimum fyrilitum, sum nevndin nýtir, er avmarkað, hvørjir aðrir møguleikar eru.

Nevndin metir ikki, at tað ber til at gera eina samfelda eind við Suðuroy, ið liggur væl burturfrá, og havandi í huga, at oyggjarnar sum so ikki kunnu sigast at hava havt nógv í felag, hvørki viðvíkjandi mentan, samstarvi ella á annan hátt.

At skipa Sandoy sum part av Suðurstreymoy hevði verið ein møguleiki, men trupulleikin við hesum møguleika er, at ein eind sum eftir føroyskum viðurskiftum er ríkiliga stór, gerst enn størri í mun til restina.

Tí mælir nevndin til, at Sandoy, t.e. Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar kommunur, verður løgd saman í eina kommunu. Hetta tilmælið er treytað av, at serlig atlit verða tikin at eini serskipan sum stuðlar og styrkir eindina, soleiðis at Sandoy, hóast fólkatalið ikki er so stórt, verður ein burðardygg eind, sum verður eitt frávik, heldur enn at gerast tann minsta eindin, ið treytar, hvat verður gjørligt at leggja til kommunurnar umsita.

*Tórshavn*

Tórshavnar kommunan er nógv tann størsta kommunan og verður framhaldandi tann størsta, tó at umfatandi samanleggingar verða framdar aðrastaðni í landinum. Samstundis er hon eisini fíggjarliga tann sterkasta.

1. januar 2009 var íbúgvatalið 19.649, sum er meir enn 40% av samlaða fólkatalinum í landinum. Fyri 25 árum síðani var hesin parturin 35%. Íbúgvatalið hevur verið vaksandi væl omanfyri landsmiðal í nógv ár. Skattskylduga inntøkan er 3,7 mia. kr., sum er 44 % av samlaðu skattskyldugu inntøkuni. Skattskylduga inntøkan pr. íbúgva er uml. 189 tús. kr., sum er væl omanfyri meðal. Samanborið við restina av landinum er miðal inntøkan uml. 30 tús. kr. hægri.

Røddir hava verið frammi um, at loysnin fyri Sandoy er at verið løgd saman við Suðurstreymoy, samstundis sum lógin um sjálvbodna kommunusamanlegging gevur Kvívíkar og Vestmanna kommunum saman valfrælsi, t.e. um tær skulu verða partur av Suðurstreymoy, Sundalagnum ella Vágum. Við tílíkum samanleggingum hevði Tórshavnar kommuna nærkast helmingin av øllum íbúgvunum í landinum. Nevndin metir, at tað er óheppið miðvíst og tilvitað at vaksa um eina kommunu, sum frammanundan er nógvar ferðir størri enn allar hinar. Hetta hevði gingið ímóti ætlanini at

skapa meiri javnt stórar kommunur. Nevndin tekur ikki undir við at leggja forðingar fyri vøkstri, men mælir frá, at Tórshavnar kommuna verður samanløgd við aðra kommunu.

*Vágar-Streymoy*

Vágar, t.e. Sørvágs og Vága kommunur, eru ein natúrlig eind og eru samstundis upprunaliga prestagjaldskommuna. 1. januar vóru 3.084 íbúgvar í eindini og eindin er støðugt vaksin seinnu árini. Skattskylduga inntøkan í eindini liggur um leið 480 mió. kr. og pr. borgara uml. 158 tús. kr., sum er beint undir landsmiðal, tá ið Tórshavn ikki er íroknað.

Gjørligt hevði verið at økt um eindina við at leggja Vestmanna og Kvívík afturat. Tá hevði eindin hevði 4.945 íbúgvar, t.e. um leið sum í Norðuroyggjum. Skattskylduga inntøkan hevði verið uml. 780 mió. kr. og pr. íbúgva uml. 10 tús. undir landsmiðal, tá ið Tórshavn verður tikin við, og eitt lítið sindur omanfyri, tá ið Tórshavn ikki verður roknað við. Eindin kann tykjast natúrlig, serliga úr Vágum, men hugsast kann ikki, at knútapunktið verður flutt úr Vágum. Vágar eru ein natúrlig og sjálvstøðug eind uttan partar av Streymoy, men kann verða víðkað við Vesturstreymoy (Vestmanna og Kvívík). Nevndin mælir til, at Vágar verða ein kommunal eind, sum Vestmanna og Kvívík møguliga kunnu verða lagdar saman við.

Vestmanna og Kvívíkar kommunur hava í Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunalt samstarv í sambandi við lógarbundnar uppgávur valfrælsi, hvørt tær saman skulu verða partur av samstarvs- ella samanleggingareindini Sundalagið, Tórshavn ella Vágar.

Saman hava hesar báðar kommunurnar eitt íbúgvatal upp á 1.861 og hevur hetta talið ligið støðugt millum 1800 og 1900 seinastu árini. Skattskylduga inntøkan er um 300 mió. kr. og pr. íbúgva uml. 166 tús. kr., sum er beint oman fyri Sundalagið og Eysturoy. Sjálvstøðug hevði eindin verið av minstu kommununum, men størri enn Sandoy. Eindin liggur væl fyri í miðstaðarøkinum og hevur góðar vakstrarmøguleikar. Eindin er partur av tí upprunaligu kommununi í Norðurstreymoy. Hendan eindin kann ikki endurskapast í dag, tí viðurskiftini eru øðrvísi í dag. Landsnyrðingsparturin av hesi eind er í dag partur av Sunda kommunu og røkkur um stóran part av norðara parti av Eysturoy, meðan suðurendin er lagdur saman við Tórshavn.

Í sambandi við umrøðuna av Tórshavn omanfyri var komið inn á, hví nevndin mælir frá, at hesar kommunur verða lagdar saman við Tórshavnar kommunu. Viðvíkjandi Sundalagnum er at siga, at sjálvt um økið landafrøðiliga er samfelt, er eindin ikki samferðsluliga samfeld og kann bert gerast tað, um Kollafjørður verður skildur frá Tórshavnar kommunu. Saman við Kollafirði hevði verið gjørligt at savnað alla Norðurstreymoy saman við Eysturoyarpartinum av Sundalagnum. Hendan eindin hevði tó rættiliga týðuliga gingið í tveimum, Sundalagið fyri seg og so Vestmanna, Kvívík og Kollafjørður.

Vísandi til omanfyristandandi eru tveir møguleikar. Ein møguleiki er, at Vestmanna og Kvívíkar kommunur verða lagdar saman við Vágum. Hetta kann styrkja eindina Vágar, so at hon verður hetta størri, men eindin er kanska ikki so samfeld, serliga sæð frá Streymoy. Hin møguleikin er, at Vestmanna og Kvívíkar kommunur verða lagdar í eina kommunu. Hetta er ein lítil kommuna, sum tó hevur fyrimun av at liggja væl fyri bæði landafrøðiliga og fíggjarliga, og tí hevur góðar vakstrarmøguleikar.

*Sundalagið*

Eindin Sundalagið, t.e. Eiðis og Sunda kommunur, hevur, síðani brúgvin varð gjørd um Streymin og felagsskúli varð bygdur á Oyrarbakka, verið ein nýskipað eind við brúnni sum knútapunkti. Áður hava Funningur og Kollafjørður eisini verið partur av hesum øki, men eftir at Kollafjørður gjørdist partur av Tórshavnar kommunu, gjørdist núverandi knútapunkt meiri upplagt. Seinni valdi fyrrverandi Funnings kommuna at leggja saman við Runavíkar kommunu. Upprunaliga eindin Norðurstreymoy er ikki til longur og er heldur ikki gjørlig at endurskapa. Tað hevði heldur ikki tænt nøkrum endamáli.

Sundalagið hevur 2.345 íbúgvar og talið hevur verið støðugt vaksandi seinastu árini. Skattskylduga inntøkan í Sundalagnum er uml. 370 mió. kr. og pr. íbúgva er hon 164 tús. kr., um leið tann sama sum í Eysturoy, sum er oman fyri landsmiðal, tá ið Tórshavn ikki er roknað við. Sundalagið hevði verið ein av teimum minnu kommunalu eindunum, men eindin liggur væl fyri mitt í landinum.

Tí mælir nevndin til, at Sundalagið, t.e. Eiðis og Sunda kommunur, verður lagt saman í eina kommunu.

*Eysturoy*

Næsta eindin er Eysturoy, t.e. Fuglafjarðar, Eystur, Nes, Runavíkar og Sjóvar kommunur. Henda eindin hevði 9.582 íbúgvar við ársbyrjan 2009 og hevur verið støðugt vaksandi seinastu árini. Miðjan í eindini liggur úti á eystara armi á Skálafjørðinum. Hetta fer at styrkjast uppaftur meira, um fast samband kemur millum vestara og eystara arm í sambandi við ein komandi undirsjóvartunnil til Suðurstreymoy.

Skattskylduga inntøkan í Eysturoy er 1,5 mia. kr. og pr. íbúgva er hon 164 tús. kr., sum er omanfyri landsmiðal, tá ið Tórshavn ikki er íroknað. Eysturoy hevði, sum tann næststørsta kommunan, verið ein sterk kommunal eind.

Eindin kann tykjast eitt sindur tvíbýtt við eini størri eind, sum er Skálafjørður, Funningsfjørður og Oyndarfjørður, ið hevur 6.125 íbúgvar, og ein minni eind, sum er Fuglafjørður og Eysturkommuna, ið hevur 3.457 íbúgvar. Vísandi til hetta er væl gjørligt at hava tvær eindir, sum lúka tey atlit, sum nevndin hevur sett. Eindin er ikki samfeld samferðsluliga, men hetta metir nevndin ikki vera ein trupulleika í hesum føri.

Sostatt eru tvinnir møguleikar í hesum økinum. Annaðhvørt kann Eysturoy, t.e. Fuglafjarðar, Eystur, Nes, Runavíkar og Sjóvar kommunur, verða løgd saman í eina kommunu, ella kunnu Fuglafjarðar og Eysturkommuna gerast ein eind, og Nes, Runavíkar og Sjóvar kommunur gerast ein eind.

Av tí at báðir møguleikar lúka tær treytir, ið nevndin hevur arbeitt eftir, verður ikki mælt til ávísa eind heldur enn aðra.

*Norðuroyggjar*

Norðasta eindin er Norðuroyggjar, t.e. Fugloyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar og Húsa kommunur. Hetta er tann upprunaliga Norðoya prestagjaldskommuna. Eindin hevði 1. januar 2009 5.974.íbúgvar. Áðrenn kreppuna í nítiárunum var fólkatalið komið upp um 6.000 íbúgvar, men seinastu árini hevur tað verið beint undir 6.000 íbúgvar. Eindin hevur, síðani Klaksvík gjørdist størsta plássið í Norðuroyggjum, verið ein rættiliga væl definerað eind við Klaksvík sum knútapunkti. Skattskylduga inntøkan

var í 2007 948 mió. kr. og skattskylduga meðalinntøkan var uml. 159 tús. kr., t.e. um leið sum meðal fyri Føroyar, tá ið Tórshavn er undantikin.

Norðuroyggjar høvdu verið ein meðalstór kommunueind, sum er samfeld bæði landafrøðiliga og samferðsluliga. Viðoy, Borðoy og Kunoy eru samanbundnar, meðan Kalsoy hevur gott ferðasamband til Klaksvíkar. Fugloy og Svínoy hinvegin eru at rokna sum útoyggjar, sum ikki hava sama samband. Norðuroyggjar høvdu verið væl fyri at átikið sær fleiri kommunalar uppgávur, bæði hvat viðvíkur fólkagrundarlagi og fíggjarligum førleika.

Skuldi talan verið um at økt hesa eindina, hevði verið neyðugt at farið yvir um Leirvíksfjørð, t.e. at lagt bæði Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu aftur at Norðuroyggjum. Eindin kann tykjast nærliggjandi, tá ið hugsað verður um undirsjóvartunnilin. Hetta hevði økt um íbúgvaratalið við uml. 3.500 og skattskylduga inntøkan hevði verið uml. 1,5 mia. kr. og meðal skattskylduga inntøkan hevði vaksið við uml. 5 tús. kr. Nevndin metir tó, at eindin Norðuroyggjar hevur hóskandi stødd og førleika, og at tørvur tí ikki er á at økja um eindina.

Nevndin mælir tí til, at Norðuroyggjar, t.e. Fugloyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar og Húsa kommunur, verða lagdar saman í eina kommunu.

**Kommunukort við 7 eindum**



## Kommunukort við 9 eindum




umhvørvisstovan

### 1.3.4. Verður neyðugt at broyta kommunustýrislógina ella kommunuvallógina?

**Kommunustýrislógin**

Hóast kommunur verða lagdar saman, javningarskipan v.m. verður sett í verk og nýggjar og størri uppgávur verða lagdar til kommunurnar, so metir nevndin ikki, at hetta beinleiðis elvir til nakra broyting í sjálvari kommunustýrislógini.

Hetta er tí, at kommunustýrislógin kann virka óheft av, hvørjar uppgávur ella ábyrgdarøki kommunurnar umsita, og óheft av, um kommunur eru ella verða lagdar saman.

Nevndin skal tó vísa á tað, sum er viðgjørt í kap. 2, pkt. 2 omanfyri um kommunur, eindir og fólkaræði, nevniliga fólkaræðisliga týdningin av at hava ikki ov smá kommunustýri.

Tá kommunurnar verða færri og størri í tali eigur § 5, stk. 2 í kommunstýrislógini[22], har ásett er, at talið á kommunustýrislimum í minsta lagi skal vera 7 og í mesta lagi 17, hóskandi at verði endurskoðað við atliti at at hækka minsta talið 7 upp í 11. Hetta er tí, at hetta hevði bøtt nakað um umboðanina, hóast kommunan veksur, umframt at øll kommunustýri tá høvdu havt møguleikan at havt 5-manna nevndir.

Verður kommunustýrislógin tillagað, er somuleiðis viðkomandi at endurskoða ella umhugsa ásetingarnar í § 37 um staðbundnar nevndir.

**Kommunuvallógin**

Skulu kommunurnar leggjast saman er sum áður nevnt neyðugt at gera hetta yvir eitt kommunuval.

Skal samanleggingin verða framd áðrenn byrjanina í næsta vanliga valskeiði sambært kommunuvallógini, t.e. 1. januar 2013, verður neyðugt at gera nakrar tillagingar í

[22] Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003.

kommunuvallógini[23], so at val kann fyriskipast fyrr enn 2. týsdag í november 2012, og verandi valskeið styttast samsvarandi.

Hetta kann verða gjørt við at broyta serliga § 2 í kommunuvallógini, har ásett er, at kommunustýrislimir verða valdir fyri 4 ár í senn. Eisini ber til at orða eina serliga § 2a, ið regulerar serligu støðuna, um kommunuval skal verða áðrenn 4-ára skeiðið er runnið, fyri at bygnaðarbroytingarnar skulu kunnu verða framdar.

## 1.4 Skipan av nýggju kommunalu eindunum

Skulu kommunurnar leggjast saman, og fleiri kommunustýri verða til eitt, gerst hetta einans yvir eitt kommunuval, har kommunustýrislimir til samanløgdu kommununa verða vald at taka við til ein 1. januar.

Hugsast kunnu fleri hættir at fyrireika og fremja samanleggingina av fleiri kommunum í eina.

Í Danmark hevur t.d. verið nýtt tann skipanin, at verandi kommunustýri hava sitið eitt ár longur enn valskeiðið, t.e. í 5 ár íalt. Samstundis varð ein sonevnd samanleggingarnevnd vald fyri kommununa á seinasta kommunuvalinum, og fekk henda nevndin til uppgávu at fyrireika og fremja sjálva samanleggingina. Nevndin virkaði í eitt ár í byrjanini av valskeiðnum, til samanleggingin var veruleiki, og eftir hetta tók samanleggingarnevndin yvir sum vanligt kommunustýri fyri írestandi 3 árini av valskeiðnum. Sostatt sótu 2 "kommunustýri" í eitt ár í skiftistíðini.

Í Føroyum hava vit havt ta skipan, at samanleggingar eru fyrireikaðar undan endanum á einum valskeiði, fyri at verða settar í verk við byrjanina av einum valskeiði, tá nýtt kommunustýri tekur við. Hetta er einføld skipan, og við ávísum men týðandi ábótum, sí kap. 5, pkt. 2.3, metir nevndin, at henda skipan væl kann nýtast í sambandi við framtíðar samanleggingar, heldur enn at hava eitt kommunustýri og eina samanleggingarnevnd at virka í somu kommunu um somu tíð.

[23] Løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006.

Verður hildið fast um verandi skipan at leggja kommunur saman, metir nevndin, at 3 ymiskir hættir eru at seta í verk samanleggingarnar, alt eftir hvørji politisku ynskini eru, og hvør tíðarætlanin fyri at enda umskipanina er:

1. Samanleggingarnar verða fyrireikaðar og framdar eftir vanligu reglunum í kommunuvallógini í sambandi við fyrstkomandi vanliga kommunuval, sum verður 13. november í 2012.

   Tá eru samanleggingarnar framdar, og nýggju kommunustýrini kunnu taka við 1. januar 2013.

2. Kommunuvallógin verður broytt, fyri at val kann verða til allar kommunur, tá 2 ár eru liðin av valskeiðnum, t.e. 9. november 2010.

   Tá kunnu nýggju kommunurnar formliga vera lagdar saman, og nýggju kommunustýrini hava tikið við 1. januar 2011, so at tað er samanlagda kommunan, sum tekur ímóti tí fyrsta stóra málsøkinum, sum verður lagt til kommunurnar í 2011.

3. Kommunuvallógin verður broytt, so at val skal verða til tær kommunur, sum skulu leggja saman, 9. november 2010.

   Við slíkari skipan eru kommunurnar formliga lagdar saman, og nýggju kommunustýrini hava tikið við 1. januar 2011, so at tað er samanlagda kommunan, sum tekur ímóti tí fyrsta stóra málsøkinum, sum verður lagt til kommunurnar í 2011.

   Hetta hevði havt við sær, at val ikki varð í Tórshavnar kommunu í ótíð í november 2010, men ikki fyrr enn í 2012, tá vanliga valskeiðið endar.

   Tá hevði samstundis verið neyðugt at sett í lógina, at valskeiðið fyri samanløgdu kommunurnar einans varð 2 ár, soleiðis at val verður samstundis í ymisku kommununum framyvir.

Fyrimunir og vansar eru við øllum 3 loysnum.

*Um loysn 1*
Í mun til loysn 1 eru fyrimunirnir serliga, at tá slepst undan at gera seg inn á tað demokratiska val, sum hevur verið, og har kommunustýrislimir eru valdir fyri eitt 4-ára skeið.

Vansarnir eru hinvegin, at tá kann eingin kommunusamanlegging verða sett í verk fyrr enn 1. januar 2013. Hetta er meira enn 3 ár frá í dag, og tað samsvarar ikki serliga væl við politisku útmeldingarnar frá landsmyndugleikunum og arbeiðssetningin, ið krevur, at fyrsta stóra málsøki, sum partur av einum samlaðum pakka, verður lagt til kommunurnar 1. januar 2011.

*Um loysn 2*
Í mun til loysn 2 er ein fyrimunur, at tá er val í øllum kommunum um eina leið, og valskeiðini eru øll líka. Afturat hesum fer hetta at gera tað møguligt at fremja broytingarnar í kommunubygnaðinum væl fyrr, samsvarandi ætlanunum í arbeiðssetninginum.

Vansin við loysn 2 er serliga, at hóast Tórshavnar kommuna ikki verður partur av nakrari samanlegging, so verður valskeiðið hjá hesi kommununi kortini stytt við eini helvt. Hetta kann tykjast serliga óheppið, tí orsøkin til at gera slíkt inntriv í valskeiðið sambært kommunuvallógini og forða valdu kommunustýrislimunum at virka ta tíð, veljarin hevur valt teir fyri, er tá meira grundað á atlitið til hinar kommunurnar og landsmyndugleikarnar, enn atlitið til Tórshavnar kommunu.

*Um loysn 3*
Í mun til loysn 3 er fyrimunurin serliga, at Tórshavn, ið ikki verður partur av nakrari samanlegging, ikki skal undir eitt kommunuval, tá vanliga valskeiðið er hálvrunnið. Broytingarnar raka tá bara tær kommunur, sum hava tørv á hesum.

Vansin við loysn 3 er hinvegin, at valskeiðið hjá ymisku kommunustýrunum ikki verður líka langt fyrr enn eftir, at val hevur verið aftur í 2012, umframt at nývaldu kommunustýrini til allar kommunur uttan Tórshavnar kommunu einans koma at sita í 2 ár fyrsta valskeiðið.

Sum lýsingin omanfyri vísir, eru fyrimunir og vansar við øllum loysnunum. Nevndin mælir tó til, at loysn 2 verður vald.

Vansin við loysn 2 er sum nevnt, at stórt inntriv verður gjørt í eina kommunu og rættin hjá valdu kommunustýrislimunum har, ið noyðast undir val eftir hálvt skeið, hóast bygnaðarbroytingarnar ikki krevja hetta fyri ta kommununa.

Grundgevingin fyri tilmælinum er tó, at hetta er ein einfaldur háttur at koma víðari, umframt at tá ber til at seta í verk samanleggingarnar og útleggingina av málsøkjum innan ta tíðarætlan, ið landsstýrið higartil hevur meldað út um í arbeiðssetninginum, har fólkaskúlin sum tað fyrsta málsøkið skal leggjast til kommunurnar í 2011. Afturat hesum kemur, at tá verða allar kommunur javnsettar og fáa sett somu krøv, og valskeiðið verður verandi líka í øllum kommunum, hóast stytt.

Ein onnur grundgeving fyri loysn 2 er, at sambært tilmæli nevndarinnar skal hitt stóra málsøkið, eldrarøktarøkið, leggjast til kommunurnar 1. januar 2013. Um so verður, metir nevndin, at tað er óheppið at hava kommunuval stutt undan eini so stórari broyting. Hetta er galdandi bæði um loysn 1 verður vald, og val er í øllum kommunum í november 2012, ella um valið bara snýr seg um Tórshavnar kommunu, sí loysn 3.

### 1.4.1. Lóg um kommunusamanleggingar

**Samanleggingarlóg**

Skal kommunuval haldast 9. november 2010 til kommunustýri í sjey til nýggju kommunum at taka við 1. januar 2011, er neyðugt at áseta við lóg, hvørjar kommunur skulu verða. Tí er neyðugt at gera uppskot til lóg um kommunusamanlegging, sum tekur av: "Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur"

So skjótt sum semja er um, hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu verða, verður uppskot til lóg um kommunusamanlegging lagt fram. Uppskotið skal áseta kommunueindirnar, dagfesting fyri kommunusamanleggingunum, treytir fyri samanlegging og heimildir til landsstýrið at áseta nærri reglur um tilgongd og samanleggingarleist, umframt líknandi

heimildir at umskipa kommunumark, sum lógin um sjálvbodna kommunusamanlegging ásetir.

## 1.5. Kommunusamstarv

Ein viðkomandi spurningur er, um vit heldur skuldu havt kommunalt samstarv enn kommunusamanleggingar í stórar eindir við størri orku.

Felagskommunalt samstarv kann verða lutað sundur í:

- felagskommunalt samstarv við einum fyriskipanarligum bygnaði
- felagskommunalt samstarv uttan fyriskipanarligan bygnað, t.e.
    - keyp og søla av tænastum
    - samskipan, upplýsing- og hugskotsskifti

### 1.5.1. Felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði

Við slíkum samstarvi verður ein sjálvstøðug fyriskipan sett á stovn, ið so fær tillagt myndugleikan frá teimum kommunum, ið samstarva. Fyriskipanini verður sostatt heimilað at taka avgerðir vegna hesar samstarvandi kommunur og at binda tær rættarliga.

Ein meginspurningur viðvíkjandi felagskommunalum samstarvi av hesum slagi er: atlitið at virkisførinum, teirri fólkaræðisligu stýringini og eftirlitsmøguleika kommunanna. Verður dentur lagdur á ta fólkaræðisligu stýringina, kann tað bera við sær, at samstarvið verður óvirkisført og at bygnaðurin verður viðtøkutungur. Vandi er eisini fyri, at tær samstarvandi kommunurnar fara at raðfesta sínar egnu fyrimunir fram um teir fyrimunir, ið samstarvið annars kann bera við sær.

Verður dentur harafturímóti lagdur á eitt virkisført samstarv, ið hevur viðtøkulættan bygnað, er vandi fyri, at raðfestingin í samstarvinum verður ikki í samsvar við áhugamálini hjá kommununum, og møguleikin fyri eftirliti er avmarkaður. Kommunurnar kunnu tí lættliga fáa ta fatan, at tær hava onga ávirkan á samstarvið, men bert rinda rokningina.

Felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði skerjir virðini í tí staðbundna sjálvstýrinum, tí bæði tilfeingi og myndugleiki verða latin samstarvinum, og av teirri orsøk minka møguleikarnir hjá sjálvum kommununum at raðfesta sínar egnu uppgávur. Hetta minkar tí um tað kommunala sjálvstýrið og tessvegna eisini um møguleikan at veita trygd fyri tí munabesta tilfeingisbýtinum til tær uppgávur, ið eru lagaðar til ynskini á staðnum.

Felagskommunalt samstarv er eisini í andsøgn við sjálvt fólkastýrið. Tær miðfirraðu eindirnar hava til endamáls at geva borgaranum ávirkan á síni staðbundnu viðurskifti. Hetta kemur fyrst og fremst til sjóndar á tann hátt, at borgarin fer á val. Hann fer vanliga á val og velur tann politikara, hann heldur hava somu áskoðan, sum hann sjálvur hevur. Til næsta val stendur politikarin so til svars fyri sínar avgerðir. Leiðslan í tí kommunala samstarvinum verður vald óbeinleiðis av kommunustýrunum. Tískil verður tað truplari hjá tí einstaka borgaranum at gera sína ávirkan galdandi, tí hann hevur bert óbeinleiðis ávirkan, og at tey, sum taka avgerðirnar, standa bert lutvíst til svars mótvegis borgaranum. Ábyrgdarviðurskiftini verða ógreið í huga borgaranna, og vegurin millum borgara og teirra, sum taka avgerðirnar, verður longri.

Meginreglan um, at uppgávu- og ábyrgdarbyrðan fylgjast, verður eisini brotin. Uppgávubyrðuna fær tað felagskommunala samstarvið; men ta endaligu fíggjarligu ábyrgdina hevur tann einstaka kommunan.

Lagt kann verða afturat, at meginregluliga er heldur ikki rætt at miðfirra uppgávurnar til kommunurnar, og at tær síðan miðfirra uppgávurnar aftur til eitt kommunalt samstarv.

### 1.5.2. Felagskommunalt samstarv uttan fyriskipanarligan bygnað

Hetta samstarvið fevnir um avtalur millum kommunurnar, og rættarliga gera avtalureglurnar seg galdandi. Tað er í sjálvum sær skilagott, at kommunur samskipa arbeiði sítt og veita hvørjum øðrum upplýsingar og hugskot. Á henda hátt kunnu tær læra av royndum hvør hjá øðrum. Á henda hátt kunnu kommunur eisini gera gerðabýti sínámillum og soleiðis gerast betri á einum øki, samstundis sum annað øki ella onnur tænasta verður keypt frá aðrari kommunu, sum hevur lagt seg eftir tí tænastuni.

Niðurstøðan er tí, at felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði ikki eigur at vera ein fastur táttur í eini kommunalari skipan, men kann vera eitt ískoyti. Miðað eigur at verða eftir, at kommunurnar bert fáa tær uppgávur at røkja, sum tær sjálvar eru mentar at loysa sjálvstøðugt.

Harumframt er tað skilagott, at kommunurnar samstarva, uttan at teimum tó nýtist at hava ein fyriskipanarligan bygnað.

# 5. kapittul. Umskipanartilgongdin

Tá ið politisk avgerð er tikin um, at uppgávubýtið skal broytast og ávís uppgáva ella uppgávur skulu leggjast frá landi til kommunur, umframt at kommunur skulu leggjast saman, er greitt, at bæði land og kommunur hava nógvar og stórar avbjóðingar fyri framman.

Hetta eru avbjóðingar, sum hava fíggjarligan, fyrisitingarligan og fólkaræðisligan týdning. Teir partar, sum umskipanin ávirkar, serlig borgarar, vinnulív, starvsfólk og politikarar, hava tí felags tørv á at verða væl kunnað fyri at kunna gera sína ávirkan galdandi og fyri at hava vissu fyri, hvønn týdning broytingarnar fara at fáa fyri egna støðu.

Hetta eru ymiskir partar og bæði tørvur og avleiðingar vilja vera ymisk, alt eftir hvønn partur talan er um. Somuleiðis er væl hugsandi, at ymisku partarnir ikki altíð hava somu áhugamál í teimum broytingum, ið standa fyri framman. Hinvegin má ásannast, at allir hava týdning fyri, hvussu broytingarnar kunnu fremjast, hvørjar avleiðingarnar verða av broytingunum og hvussu hetta fer at eydnast. Tí er umráðandi, at ymisku áhugamálini verða vigað hvørt móti øðrum og at arbeitt verður fram ímóti at tryggja, at so nógv sum gjørligt kunnu siga seg eiga lut í broytingunum. Hetta kann bara røkkast við støðugt at tryggja gott samskifti millum partarnar.

Í sambandi við so stórar broytingar í kommunubygnaðinum er eisini umráðandi at tryggja, at kommunurnar framhaldandi kunnu menna seg, og at tryggja skilagóðan og støðugan rakstur undir sjálvari tilgongdini.

Omanfyri nevndu viðurskifti eru grundleggjandi atlit, ið mugu havast í huga, skulu broytingarnar eydnast. Endamálið við broytingunum er m.a. at økja um ta tænastu, sum borgarin fær ella kann vænta sær frá almennu umsitingini, og tí er av heilt avgerandi týdningi, at ein framhaldandi tryggur rakstur verður raðfestur í sambandi við broytingarnar.

Altavgerandi er, at tilgongdin at umskipa kommunuøkið verður væl fyrireikað og at einstøku stigini, ið skulu takast, eru gjøgnumhugsað og nágreiniliga løgd til rættis.

Royndirnar frá kommunusamanleggingunum, ið higartil hava verið[24], vísa okkum greitt, at tørvur er á einari skipaðari mannagongd og útgreinaðari ætlan fyri ymisku stigini í samanleggingartilgongdini.

Kommunala umskipanarnevndin fer tí at vísa á nøkur grundleggjandi viðurskifti, sum mugu verða fyrireikað og skipað, tá ið broytingar verða gjørdar í uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur, og tá ið nýggjar ella fleiri uppgávur verða latnar kommununum at umsita.

Talan er ikki um eina fullfíggjaða ætlan fyri einstøku samanleggingina ella fyri einstøku broytingina av uppgávu- og ábyrgdarbýti, men heldur ein roynd at vísa á grundleggjandi viðurskifti, sum lagt eigur at verða upp fyri, tá ið farið verður undir at leggja kommunur saman ella broyta uppgávubýtið.

Nevndin heldur, at neyðugt er sum tað fyrsta ítøkiliga politiskt at viðgera og avtala, í hvønn mun broytingar skulu gerast. Síðan eigur í somu politisku avtalu støða at verða tikin til, hvørjar broytingar skulu fremjast, eftir hvørjum leisti og innan hvønn tíðarkarm. Slík avtala er neyðug fyri at hava eitt felags grundarlag fyri umskipanini, sum allir partar eru samdir um.

Í framhaldi av hesum hevði verið natúrligt, at ein politisk avtala tekur støði í frágreiðingini frá Kommunalu umskipanarnevndini og teimum tilráðingum, ið her eru. Fremjingin av kommunalu umskipanini kann síðani býtast upp í trý stig:

*Fyrsta stig* – avkláringarstigið – gongur frá tí, at politisk semja er funnin/politisk avgerð er tikin um samanlegging og uppgávuumskipan og til formlig avgerð er tikin/lóg er samtykt um samanleggingarnar og uppgávubroytingar. Henda viðgerð/stig eigur at byrja, so skjótt frágreiðingin frá nevndini er latin landsstýrismanninum.

[24] Hetta er grundað á tær royndir, ið Innlendismálaráðið, sum góðkennandi myndugleiki sambært lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar hevur gjørt sær, umframt tær upplýsingar, sum Innlendismálaráðið og Kommunala umskipanarnevndin hava útvegað frá kommunum, ið hava verið gjøgnum eina samanlegginartilgongd seinastu árini.

*Annað stig* – ráðleggingar- og avgerðarstigið - gongur frá tíðini, eftir at avgerð formliga er tikin um, hvørjar kommunur skulu leggjast saman, til samanleggingin er vorðin veruleiki og val hevur verið til nýggju kommunurnar.

*Triðja stig* – íverksetanarstigið – gongur frá tí degi, at nývaldu kommunustýrini í samanløgdu kommununum hava tikið við 1. januar árið eftir, at valið hevur verið.

Niðanfyri verður eitt sindur nágreiniligari lýst, hvørji viðurskifti, ið skulu umhugsast og viðgerast í ymsu stigunum.

## *1. Um avkláringarstigið*

Í hesum stigi verður fyrst fingið greiði á, hvørjar kommunur skulu leggjast saman. Samstundis eigur ætlan at verða løgd fyri ítøkiligu tilgongdina, herundir hvussu og hvør skipar hana. Tíðar- og íverksetanarætlan verður gjørd, eins og avtala verður gjørd um samskifti og mannagongdir.

Mál og mið fyri samanløgdu kommununa eigur somuleiðis at verða viðgjørd í hesum stigi, eins og samskifti við starvsfólk, borgarar, vinnulív og onnur verður fyrireikað.

### 1.1. Neyðugt er við politiskari avtalu í landsstýrinum um eina kommunala umskipan

Sum nevnt er neyðugt, at politisk semja er í landsstýrinum um, hvussu kommunala umskipanin skal fremjast. Landspolitiska semjan eigur ikki at verða avmarkað bara til landsstýrið. Landsstýrið eigur at miða ímóti breiðari politiskari semju, tí tað snýr seg um stóra og varandi umskipan.

Hetta merkir m.a., at semja má vera um, hvussu kommunala landkortið ítøkiliga skal broytast, hvørjar broytingar skulu gerast í uppgávubýtinum millum land og kommunur og *hvussu* hetta skal fremjast í verki. Tað merkir m.a., at øll viðkomandi løgfrøðilig viðurskifti mugu greinast, t.d. at lóggávan innan ymsu økini verður tillagað ella broytt, soleiðis at nýggj myndugleikabýti verða greið.

Somuleiðis er neyðugt við greiðari politiskari avtalu um fíggjarviðurskiftini hjá nýggju kommununum, m.a. í hvønn mun nýggj lóggáva skal fáast til vegar um javning, afturbering og blokkskipan, um serskipanir skulu gerast fyri nakrar kommunur og um møguligar skiftisskipanir skulu vera, inntil nýggi kommunubygnaðurin er komin upp á pláss.

### 1.2. Javnbjóðis viðgerð og samskifti er neyðugt

Tað er av stórum týdningi, at kommunurnar eru partur í hesum stiginum. At tær ætlanir, sum landsstýrið hevur, verða sendar kommununum/kommunufeløgunum til ummælis, og at hesi eru virkin í fyrireikingunum av politisku avtaluni hjá landstýrinum. Hetta er galdandi fyri alla tilgongdina í sambandi við broytingarnar í uppgávu- og ábyrgdarbýtinum, hvussu nýggja kommunukortið verður formað og í sambandi við fíggjarviðurskiftini.

Í sambandi við broytingarnar í kommunueindunum skal viðmerkjast, at galdandi lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging sjálvsagt má eftirkannast ella onnur lóg má koma í staðin. Hetta er í fyrsta lagi, tí at onnur og fleiri atlit eru orðað sum fyritreytir fyri samanlegging av kommunum í framtíðini. Somuleiðis er hetta grundað á, at gerast má upp, um kommunur framhaldandi kunnu leggja saman sjálvbodnar, um ávís freist verður sett fyri, nær ein samanleggingartilgongd endaliga skal vera gjøgnumførd. Somuleiðis eigur mannagongd fyri góðkenning av sáttmálum um samanlegging at verða endurskoðað, so at hon í neyðugan mun tekur atlit at teimum viðurskiftum, sum eru viðgjørd í hesum parti av nevndarfrágreiðingini.

## *2. Ráðlegging og avgerðir*

Tá ið yvirskipaði karmurin, herundir politiska avtalan í landsstýrinum, er fingin upp á pláss viðv. broytingum í uppgávu- og ábyrgdarbýtinum, kommunusamanleggingum og fíggjarviðurskiftum, er tørvur á meira útgreinaðari ráðlegging, soleiðis at ítøkiligu avgerðirnar kunnu takast. Niðanfyri er í stuttum lýst, hvørjum viðurskiftum í øllum førum má leggjast upp fyri, áðrenn farið verður víðari.

## 2.1. Fyrisitingarlig og fíggjarlig orka má setast av

Ein tilgongd at leggja kommunur saman og gera stórar broytingar í uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur fer at krevja nógva orku, bæði frá kommunalu umsitingunum og frá landsumsitingini. Tí er umráðandi at gera sær greitt frá fyrsta degi, hvørjar fíggjarligu og fyrisitingarligu avleiðingarnar eru av at fara undir hesa tilgongd.

Sum nevnt er omanfyri, er eisini umráðandi at tryggja framhaldandi rakstur í umskipanartíðarskeiðinum, so hesi viðurskifti ikki verða darvað ov nógv av, at land og kommunur eru í einari umleggingartilgongd. Hetta merkir við øðrum orðum, at tað at fara undir eina samanleggingartilgongd hevur við sær eyka útreiðslur fyri bæði land og kommunur, umframt at fyrisitingarliga og starvsfólkaliga orkan má setast av til at standa fyri hesum meirarbeiði, sum kemur aftrat tí vanliga rakstrinum.

Tað er ikki gjørligt hjá Kommunalu umskipanarnevndini at seta orð ella tal á, hvørjar hesar útreiðslur ella avleiðingar verða, men við at vísa á, hvørji viðurskifti í øllum førum mugu fyrireikast og avgreiðast, so hvørt sum vit koma fram á leið í tilgongdini, átti at borið til hjá viðkomandi myndugleikum til ta tíð at mett um og lagt upp fyri hesum. Men umskipanarnevndin heldur tað verða neyðugt at vísa á hesi viðurskifti og staðiliga mæla til ikki at fara undir so grundleggjandi broytingar, sum tær, ið standa fyri framman, uttan at neyðuga fyrisitingarliga og fíggjarliga orkan verður sett av til endamálið. Hetta eiga bæði landsmyndugleikar og kommunalu myndugleikarnir at gera sær greitt, áðrenn avgerð verður tikin.

## 2.2. Skipan av umskipanini

At seta í verk og fremja eina kommunala umskipan, ið ikki bara snýr seg um at leggja kommunur saman, men eisini at fleiri uppgávur verða lagdar frá landi til kommunur at umsita, samstundis sum ein nýggjur fíggingarháttur verður settur í verk, er ein sera víðfevnandi og avbjóðandi uppgáva, sum fer at seta stór krøv til allar partar.

Arbeiðið fer ikki bara at ávirka verandi fyrisitingar hjá kommunum og landsmyndugleikum, men fer eisini at seta stór krøv til eina røð av øðrum, kanska meira tvørgangandi viðurskifti sum fíggjarstýring, starvsfólkaviðurskifti, KT viðurskifti o.a.

Spurnartekin kann tí verða sett við, um verandi fyrisitingar hjá landi og kommunum verða førar fyri at handfara so stórar og tungar uppgávur, umframt vanligu uppgávurnar, og um ikki umskipanartilgongdin eigur at verða skipað sum serligar verkætlanir uttan fyri vanligu umsitingarnar hjá bæði kommunum og landi.

Kommunusamanleggingarnar, sum higartil hava verið, hava í flestum kommunum verið stýrdar av einum politiskum stýribólki við borgarstjórunum á odda, sum hevur sett yvirskipaðu leiðreglurnar fyri tilgongdini. Arbeiðið hevur tó ikki verið skipað sum beinleiðis verkætlan, soleiðis at skilja, at fastir karmar og leiðreglur hava verið fyri ymsu viðurskiftini viðv. fyrireiking, kunning, at taka avgerðir og ráðlegging annars. Heldur ikki hevur stórvegis fyrisitingarlig orka verið sett av til arbeiðið.

Umráðandi er, at bæði land og kommunur taka virknan lut í fyrireikandi arbeiðinum, bæði fyri at fáa øll viðurskifti lýst og fyrireikað, men eisini fyri at tryggja, at báðir partar taka ábyrgd av tilgongdini og taka broytingarnar til sín til ta tíð.

Kommunala umskipanarnevndin mælir tí til, at allar broytingarnar verða skipaðar sum felags verkætlanir við luttøku frá landi og kommunum. Land og kommunur mugu harumframt eisini hvør í sínum lagi fyrireika broytingarnar, har øll individuell viðurskifti sum t.d. tilrættislegging og fremjingin av politisku og praktisku tilgongdini, handfaringin av teimum avbjóðingum, ið leypandi fara at vera, herundir at tryggja at ráðgeving, vegleiðing og upplýsing eru nøktandi undir allari tilgongdini.

Ymiskir hættir eru at skipa tær verkætlanir, ið nevndin mælir til, og nevndin hevur tí ikki nakað tilmæli um, júst hvussu verkætlanirnar kunnu skipast. Hetta eigur hóskandi at verða avgjørt í sambandi við innleiðandi fyrireikingarnar viðvíkjandi einstøku broytingunum.

## 2.3. Fyriskipan og leiðsla í nýggju kommununi

Áðrenn nýggja samanlagda kommunan verður veruleiki, er neyðugt, at samanleggjandi kommunurnar gera sær greiðar ætlanir og taka avgerð um, hvussu nýggja kommunan skal skipast.

Hetta merkir m.a., at støða má takast til

- fíggjarætlan fyri nýggju kommununa
- hvussu leiðslan og leiðslubygnaðurin hjá nýggju kommununi skal vera
- hvat starv verandi starvsfólk skulu røkja og hvar einstøku starvsfólkini í verandi kommunum skulu arbeiða í nýggju kommununi
- at fáa starvsfólkaviðurskiftini í rættlag við m.ø. samráðingum um setanartreytir o.a. og at tryggja, at neyðugar avgerðir verða tiknar rættstundis
- hvar og undir hvørjum fysiskum karmum nýggja kommunan skal halda til
- taka støðu til ymsu umsitingarskipanirnar, herundir KT-skipanir, ið nýggja samanlagda kommunan skal nýta
- at samankoyra upplýsingar úr ymsum skipanum og skráum, soleiðis at tað kann virka í einari samanlagdari kommunu
- hvørjir privatrættarligir sáttmálar skulu halda fram, skulu broytast ella fara úr gildi
- at støða verður tikin til, hvussu ymisk tænastustøði innan ymisku veitingarnar frá kommununum verða samskipað til eina samanlagda veiting við sama tænastustøði.

## 2.4. At taka avgerðir og seta í verk

Í góðari tíð, áðrenn kommunustýrini í nýggju, samanløgdu kommununum taka við, eiga landsmyndugleikarnir í samráð við kommunufeløgini at stuðla kommununum í at gera eina ítøkiliga ætlan, herundir eina útgreinaða tíðarætlan fyri, nær ymisku avgerðirnar hjá kommunum í seinasta lagi skulu verða tiknar. Hetta er alneyðugt fyri at hava eina væl skipaða tilgongd og fyri at tryggja, at tær avgerðir, ið skulu takast, verða tiknar rættstundis.

Umskipanarnevndin mælir til, at ein útgreinað mannagongd verður gjørd til kommunurnar og til landsmyndugleikarnar, har báðir partar kunnu fylgja við og tryggja, at viðkomandi avgerðirnar verða tiknar av røttum myndugleika til rætta tíð. Í einari tílíkari samskipaðari mannagongd eigur eisini at vera ein tíðarætlan ella kalendari, har evstamark er sett fyri, nær ymisku avgerðirnar ella tiltøkini skulu vera framd.

## 2.5. Mannagongd tá kommunur verða niðurlagdar

Hóast dentur eigur at verða lagdur á, at byrjanin hjá nýggju samanløgdu kommununi skal vera so væl fyrireikað og skipað sum møguligt, so má ikki gloymast, at ein avleiðing av at leggja kommunur saman er, at gomlu kommunurnar verða. Í tí sambandinum er tørvur á at hava eina mannagongd fyri, hvussu gomlu kommunurnar verða niðurlagdar.

Umráðandi er at tryggja, at tann vitan og teir førleikar, ið vóru í gomlu kommununum, á skipaðan hátt verða førdar yvir í nýggju kommununa. Tí er neyðugt at skipa avtøkuna av gomlu kommununi á ein tryggan hátt, um hetta skal eydnast. Í fyrsta lagi merkir hetta, at samanleggjandi kommunurnar verða noyddar at seta eitt punkt á dagsskrá, sum eitur avtøka av gomlu kommununum. Ein ítøkilig ætlan eigur at verða gjørd fyri, hvussu farast skal fram og nær ymsu avgerðirnar skulu takast. Hetta minnir um tær mannagongdir, ið vit mæla til, tá ið ein nýggj samanløgd kommuna byrjar, hóast viðurskiftini, ið støða skal takast til, eru ymisk.

*Starvsfólk*

Í sambandi við at verandi kommunur verða niðurlagdar, eiga samanleggjandi kommunurnar at fáa sær til vegar eitt yvirlit yvir øll starvsfólk, teirra arbeiðsuppgávur og arbeiðsøki, umframt hvørjar førleikar hesi starvsfólkini hava. Hetta er av týdningi, tá ið vitan og starvsfólk skulu flytast yvir í nýggju samanløgdu kommununa og tá ið starvsøki skulu skipast av nýggjum.

*Mannagongdir*

Somuleiðis er umráðandi at greiða verður fingin á, hvørjar galdandi mannagongdir eru í teimum kommunum, sum verða lagdar saman, soleiðis at hetta kann verða skipað á felags hátt í nýggju samanløgdu kommununi.

*Roknskapur*

Hóast kommunur verða lagdar saman og gomlu kommunurnar verða burtur, so skal roknskapur gerast fyri gomlu kommunurnar. Í tí sambandinum er skilagott at samanleggjandi kommunurnar velja sær ein ábyrgdara til at enda roknskapin fyri gomlu eindirnar. Hesin ábyrgdari fer at kunna tryggja, at neyðuga skjalfesting verður fingin til vegar, at roknskapirnir verða gjørdir á sama støði, og at tær upplýsingar, sum ein

samanløgd kommuna í hvussu so er hevur áhuga í at vita, verða fingnar til vegar, umframt yvirhøvur at tryggja, at yvirlit er yvir tær týðandi avgerðirnar av fíggjarligum slag, sum eru tiknar í árinum framman undan samanleggingini, soleiðis at rokningar ikki koma seinni, sum samanlagda kommunan ikki er – men átti at verið – kunnað um.

*Skjalagoymsla*

Skjalagoymslan er sera umráðandi at fáa upp á pláss í góðari tíð og á rættan og tryggan hátt.

Í tí sambandinum eigur í góðari tíð ein ætlan at verða gjørd fyri, hvussu ymisku skjalagoymslurnar verða endaðar og hvussu tey skjøl, ið skulu flytast í skjalagoymsluna hjá nýggju samanløgdu kommununi, verða flutt yvirum á ein skipaðan hátt. Hetta eigur at verða gjørt í samráð við Landsskjalasavnið, sum kann ráðgeva um, hvussu skjalagoymslur o.a. verða lokaðar, avhendaðar ella latnar nýggju kommununi, og Dátueftirlitið viðvíkjandi viðkvomum persónsupplýsingum.

*KT*

KT hevur víst seg at vera eitt øki, har stórar broytingar og samanleggingar krevja, at kommunurnar so tíðliga sum møguligt taka støðu til, hvussu framtíðar KT-viðurskifti skulu skipast, m.a. fyri sleppa undan óneyðugum KT-avtalum hjá einstøku kommununum, ið nú verða avtiknar. Sostatt er neyðugt at gera sær yvirlit yvir avtalur, ið einstøku kommunurnar hava og at taka støðu til, hvørjar skulu halda fram, broytast ella endast.

*Útbúnaður*

Í mun til útbúna, sum ikki skal nýtast longur, er umráðandi at hava lóggávuna um viðgerð av persónsupplýsingum í huga, soleiðis at ongar óneyðugar upplýsingar eru á teldum og øðrum, ið ikki longur skulu brúkast.

*Fysisk flyting*

Í sambandi við flyting er somuleiðis neyðugt, at samanleggjandi kommunurnar gera sær tíðarætlan og arbeiðsætlan fyri, hvussu flytast skal. Hetta hevur víst seg at vera sera umráðandi fyri at fáa starvsfólkaviðurskifti og møguleika fyri at virka á skrivstovum frá

fyrsta degi á ein tryggan og skilagóðan hátt. Tí eiga kommunurnar frammanundan at gera sær greitt, nær flytast skal og hvør skal flyta hvagar.

*Ognir*

At enda skal verða víst á, at tá ið fleiri ymiskar kommunur verða lagdar saman í eina, er tørvur á at gera yvirlit yvir allar fastar ognir og motorakfør. Eigaraskifti av akførum o.ø. eigur at verða fráboðað til tryggingarfeløg og akstovu fyri at skapa greiði yvir, hvør ið eigur og hevur ábyrgdina av viðkomandi akfari.

Í sambandi við fasta ogn verður mælt til, at samanlagda kommunan setur seg fyri tær ognir, ið samanleggjandi kommunurnar áttu. Hetta kann gerast undir einum og fráboðast Tinglýsingini, sum síðani kann broyta skrásetingina fyri samanløgdu kommununa.

# 6. kapittul. Fígging

## *1. Lýsing av fíggjarliga partinum*

### 1.1. Um ymisku fíggjarligu støðurnar hjá verandi kommunum

Høvuðsinntøkugrundarlagið hjá kommununum er kommunuskatturin, t.e. kommunuskattur frá persónum og partur av skattinum frá partafeløgum. Harafturat koma ymiskar aðrar inntøkur, sum avgjald av eftirlønartryggingum, ið verða uppsagdar/útgoldnar, havnargjøld, søla frá grótbrotum, søla av grundstykkjum, brúkaragjøld so sum foreldragjald til barnaansing o.a.

Skattskylduga inntøkan hjá kommununum fyri 2007 var hendan:

| 2007 | Skattskyldug inntøka | Íbúgvatal | Skattskyldug inntøka/íbúgva | Index |
|---|---|---|---|---|
| **Fugloyar** | 8.601.128 | 42 | 204.789 | 120 |
| **Viðareiðis** | 46.899.099 | 352 | 133.236 | 78 |
| **Hvannasunds** | 66.573.022 | 433 | 153.748 | 90 |
| **Klaksvíkar** | 792.933.211 | 4.930 | 160.838 | 94 |
| **Kunoyar** | 24.641.724 | 161 | 153.054 | 89 |
| **Húsa** | 8.986.547 | 60 | 149.776 | 87 |
| **Fuglafjarðar** | 254.019.088 | 1.542 | 164.734 | 96 |
| **Eysturkomm.** | 345.107.315 | 1.959 | 176.165 | 103 |
| **Nes** | 202.688.898 | 1.247 | 162.541 | 95 |
| **Runavíkar** | 616.084.145 | 3.757 | 163.983 | 96 |
| **Sjóvar** | 147.125.370 | 1.014 | 145.094 | 85 |
| **Eiðis** | 112.353.039 | 696 | 161.427 | 94 |
| **Sunda** | 262.015.949 | 1.585 | 165.310 | 97 |
| **Kvívíkar** | 104.196.367 | 604 | 172.511 | 101 |
| **Vestmanna** | 199.736.673 | 1.227 | 162.785 | 95 |
| **Vága komm.** | 300.849.149 | 1.911 | 157.430 | 92 |
| **Sørvágs** | 175.899.922 | 1.097 | 160.346 | 94 |
| **Sands** | 76.187.553 | 579 | 131.585 | 77 |
| **Skopunar** | 72.621.093 | 506 | 143.520 | 84 |
| **Skálavíkar** | 26.650.273 | 176 | 151.422 | 88 |
| **Húsavíkar** | 22.416.094 | 129 | 173.768 | 101 |
| **Skúvoyar** | 7.978.731 | 60 | 132.979 | 78 |
| **Hvalbiar** | 118.127.699 | 758 | 155.841 | 91 |
| **Tvøroyrar** | 280.378.879 | 1.788 | 156.811 | 92 |
| **Fámjins** | 15.982.966 | 109 | 146.633 | 86 |
| **Hovs** | 19.173.780 | 119 | 161.124 | 94 |
| **Porkeris** | 49.373.408 | 338 | 146.075 | 85 |
| **Vágs** | 204.650.768 | 1.417 | 144.425 | 84 |
| **Sumbiar** | 54.223.971 | 378 | 143.450 | 84 |
| **Tórshavnar** | 3.666.858.437 | 19.405 | 188.965 | 110 |
| | | | | |
| **Alt landið** | **8.283.334.298** | **48.379** | **171.218** | **100** |

Býtt upp á øki síggja tølini soleiðis út:

| 2007 | Skattskyldug inntøka | Íbúgvatal | Skattskyldug inntøka/íbúgva | Index |
|---|---|---|---|---|
| **Norurðoyggjar** | 948.634.731 | 5.978 | 158.688 | 93 |
| **Eystur** | 599.126.403 | 3.501 | 171.130 | 100 |
| **Skálafjørður** | 965.898.413 | 6.018 | 160.502 | 94 |
| **Sundalagið** | 374.368.988 | 2.281 | 164.125 | 96 |
| **Vestm. og Kvívík** | 303.933.040 | 1.831 | 165.993 | 97 |
| **Vágar** | 476.749.071 | 3.008 | 158.494 | 93 |
| **Tórshavnar** | 3.666.858.437 | 19.405 | 188.965 | 110 |
| **Sandoy** | 205.853.744 | 1.450 | 141.968 | 83 |
| **Suðuroy** | 741.911.471 | 4.907 | 151.195 | 88 |
| | | | | |
| **Alt landið** | 8.283.334.298 | 48.379 | 171.218 | 100 |

Umframt persónskattin, fáa kommunurnar eisini 38% av goldna partafelagsskattinum, meðan landskassin fær hini 62%.

PF-skatturin er fyri ein part javnaður millum kommunurnar, tí sambært skattalógini skal skatturin hjá peningastovnum, tryggingarfyritøkum, telesamskiftisfyritøkum, oljusølufyritøkum, vinnurekandi grunnum, Framtaksgrunninum og Fíggingargrunninum býtast millum allar kommunurnar. Hetta verður gjørt eftir fólkatalinum.

Kommununnar partur av skattinum frá feløgum fyri 2008 (inntøkuárið 2007) var hesin:

| 2008 | PF-skattur | PF-skattur/íbúgva | Index |
|---|---|---|---|
| **Fugloyar** | 14.776 | 352 | 29 |
| **Viðareiðis** | 136.672 | 388 | 31 |
| **Hvannasunds** | 167.267 | 386 | 31 |
| **Klaksvíkar** | 4.522.147 | 926 | 75 |
| **Kunoyar** | 59.217 | 368 | 30 |
| **Húsa** | 21.445 | 357 | 29 |
| **Fuglafjarðar** | 5.942.243 | 3.854 | 312 |
| **Eysturkomm.** | 1.797.487 | 918 | 74 |
| **Nes** | 2.172.855 | 1.742 | 141 |
| **Runavíkar** | 3.698.856 | 985 | 80 |
| **Sjóvar** | 1.025.758 | 1.012 | 82 |
| **Eiðis** | 436.780 | 628 | 51 |
| **Sunda** | 1.345.359 | 849 | 69 |
| **Kvívíkar** | 298.313 | 494 | 40 |
| **Vestmanna** | 1.103.801 | 900 | 73 |
| **Vága komm.** | 3.100.272 | 1.622 | 131 |
| **Sørvágs** | 815.697 | 744 | 60 |
| **Sands** | 398.199 | 688 | 56 |
| **Skopunar** | 200.921 | 397 | 32 |
| **Skálavíkar** | 144.003 | 818 | 66 |
| **Húsavíkar** | 92.330 | 716 | 58 |
| **Skúvoyar** | 20.329 | 339 | 27 |
| **Hvalbiar** | 482.695 | 637 | 52 |
| **Tvøroyrar** | 1.455.028 | 814 | 66 |
| **Fámjins** | 40.884 | 375 | 30 |
| **Hovs** | 45.540 | 383 | 31 |
| **Porkeris** | 129.079 | 382 | 31 |
| **Vágs** | 1.240.222 | 875 | 71 |
| **Sumbiar** | 153.637 | 406 | 33 |
| **Tórshavnar** | 28.636.686 | 1.476 | 120 |
| | | | |
| **Allar kommunur** | **59.698.498** | **1.234** | **100** |

Býtt upp á øki síggja tølini soleiðis út:

| 2008 | PF-skattur | PF-skattur/íbúgva | Index |
|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | 4.921.524 | 823 | 67 |
| **Eystur** | 7.739.730 | 2.211 | 179 |
| **Skálafjørður** | 6.897.469 | 1.146 | 93 |
| **Sundalagið** | 1.782.139 | 781 | 63 |
| **Vestm. og Kvívík** | 1.402.114 | 766 | 62 |
| **Vágar** | 3.915.969 | 1.302 | 106 |
| **Tórshavnar** | 28.636.686 | 1.476 | 120 |
| **Sandoy** | 855.782 | 590 | 48 |
| **Suðuroy** | 3.547.085 | 723 | 59 |
| | | | |
| **Alt landið** | 59.698.498 | 1.234 | 100 |

## 1.2. Kommunala skuldarbyrðan

Eftir roknskapunum hjá kommununum fyri 2008 var brutto- og nettoskuldin hendan, sæð í mun til eina álíkning við 23% í kommunuskatti (fyri 2007):

| 2008 | Bruttoskuld | Nettoskuld | 23% skattur | Nettoskuld í mun til 23% skatt |
|---|---|---|---|---|
| **Fugloyar** | 16.000 | -3.517.000 | 1.756.700 | 0,00 |
| **Viðareiðis** | 2.542.000 | -1.373.000 | 9.342.301 | 0,00 |
| **Hvannasunds** | 2.174.000 | -6.680.000 | 13.251.271 | 0,00 |
| **Klaksvíkar** | 193.946.000 | 168.182.000 | 159.162.993 | 105,67 |
| **Kunoyar** | 261.000 | -1.560.000 | 4.904.296 | 0,00 |
| **Húsa** | 30.000 | -933.000 | 1.802.682 | 0,00 |
| **Fuglafjarðar** | 58.733.000 | 43.451.000 | 50.999.231 | 85,20 |
| **Eysturkomm.** | 43.246.000 | 22.230.000 | 70.270.431 | 31,63 |
| **Nes** | 46.368.000 | 38.537.000 | 40.843.561 | 94,35 |
| **Runavíkar** | 141.018.000 | 113.074.000 | 124.154.401 | 91,08 |
| **Sjóvar** | 18.132.000 | 7.168.000 | 29.021.462 | 24,70 |
| **Eiðis** | 21.003.000 | 23.443.000 | 22.565.930 | 103,89 |
| **Sunda** | 178.235.000 | 58.111.000 | 52.966.159 | 109,71 |
| **Kvívíkar** | 1.771.000 | -3.280.000 | 21.042.094 | 0,00 |
| **Vestmanna** | 39.310.000 | 34.329.000 | 39.970.981 | 85,88 |
| **Vága komm.** | 17.351.000 | 499.000 | 60.403.209 | 0,83 |
| **Sørvágs** | 11.191.000 | -1.892.000 | 35.247.160 | 0,00 |
| **Sands** | 27.987.000 | 23.508.000 | 14.783.814 | 159,01 |
| **Skopunar** | 22.727.000 | 21.792.000 | 14.412.465 | 151,20 |
| **Skálavíkar** | 4.888.000 | 1.516.000 | 5.240.912 | 28,93 |
| **Húsavíkar** | 2.130.000 | -5.025.000 | 4.443.070 | 0,00 |
| **Skúvoyar** | 0 | -3.647.000 | 1.528.656 | 0,00 |
| **Hvalbiar** | 2.866.000 | -7.294.000 | 23.509.404 | 0,00 |
| **Tvøroyrar** | 71.976.000 | 55.205.000 | 55.848.342 | 98,85 |
| **Fámjins** | 1.374.000 | -1.090.000 | 3.138.319 | 0,00 |
| **Hovs** | 2.712.000 | 1.640.000 | 3.738.254 | 43,87 |
| **Porkeris** | 5.112.000 | 2.047.000 | 9.783.167 | 20,92 |
| **Vágs** | 44.491.000 | 35.431.000 | 40.713.788 | 87,02 |
| **Sumbiar** | 1.577.000 | -1.826.000 | 10.458.553 | 0,00 |
| **Tórshavnar** | 105.036.000 | -171.188.000 | 754.526.716 | 0,00 |
| | | | | |
| **Alt landið** | **1.068.203.000** | **440.858.000** | **1.679.830.323** | **26,24** |
| **Nettoskuld** | | 650.163.000 | | |
| **Nettoogn** | | -209.305.000 | | |

Býtt upp á øki síggja tølini soleiðis út:

| 2008 | Bruttoskuld | Nettoskuld | 23% skattur | Nettoskuld í mun til 23% skatt |
|---|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | 198.969.000 | 154.119.000 | 190.220.242 | 81,02 |
| **Eystur** | 101.979.000 | 65.681.000 | 121.269.663 | 54,16 |
| **Skálafjørður** | 205.518.000 | 158.779.000 | 194.019.424 | 81,84 |
| **Sundalagið** | 199.238.000 | 81.554.000 | 75.532.089 | 107,97 |
| **Vestm. og Kvívík** | 41.081.000 | 31.049.000 | 61.013.075 | 50,89 |
| **Vágar** | 28.542.000 | -1.393.000 | 95.650.369 | 0,00 |
| **Tórshavnar** | 105.036.000 | -171.188.000 | 754.526.716 | 0,00 |
| **Sandoy** | 57.732.000 | 38.144.000 | 40.408.917 | 94,40 |
| **Suðuroy** | 130.108.000 | 84.113.000 | 147.189.827 | 57,15 |
| | | | | |
| **Alt landið** | **1.068.203.000** | **440.858.000** | **1.679.830.323** | **26,24** |

Viðmerkjast skal, at komin er í gildi fyri kommunurnar nýggj roknskaparkunngerð, sum krevur allar skyldur hjá kommununi lýstar í roknskapinum, og tað fer at hava við sær, at skyldur hjá sjálvsognarstovnum, sum kommunurnar hefta fyri, felagskommunalum stovnum o.ø. hereftir skulu verða lýstar í roknskapinum.

Eftir upplýsingum frá Fíggjarmálaráðnum er mett skuld hjá Klaksvíkar kommunu til Norðhavnina, eins og skyldurnar hjá Eiðis- og Sunda kommunu til Felagsskúlan á Oyrarbakka tiknar við. Ivasamt er, um allar hesar skyldur eru lýstar fyri allar kommunurnar í omanfyri nevndu tølum.

Kommunala skuldarbyrðan er sum heild ikki stór. Samanlagt skylda kommunurnar umleið eina fjórðings álíkning. Í mun til økini er tað bert Sundalagið, sum er omanfyri eina álíkning.

## 1.3. Um skattaskipanina og týdningin fyri lands- og kommunuskattin

Lands- og kommunuskatturin verður roknaður av skattskyldugu inntøkuni hjá persónum.

Tá skattskylduga inntøkan verður gjørd upp, verður tikin við inntøka og frádráttir hjá skattgjaldaranum. Seinnu árini hevur talið á frádráttum, ið løntakarar kunnu draga frá í skattskyldugu inntøkuni, ikki verið so stórt, men hinvegin hava nakrir teirra verið sera týðandi í mun til skattin.

Fyri skattauppgerðina 2007 vóru teir størstu frádráttirnir í skattskyldugu inntøkuni hesir:

| 2007 | Persónar | Frádráttur | Ávirkan á kommunuskattin |
|---|---|---|---|
| **Frádráttur í sjóinntøku** | 3.923 | 132.429.028 | -24.153.000 |
| **Frádráttur í farmavinnu** | 222 | 16.125.864 | -3.064.000 |
| **Uttanlandsfrádráttur** | 406 | 17.477.224 | -3.321.000 |

Viðmerkjast skal, at sami persónur kann hava fleiri av hesum frádráttum í sama ári, so hann kann verða taldur við fleiri ferðir, tá ið talan er um tal á persónum.

Teir ymisku frádráttirnir eru soleiðis býttir upp á økir:

| | Sjóinntøka | | | Farmainntøka | | | Uttanlands | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **2007** | **Pers.** | **Frádráttur** | **Í mun til íb.tal** | **Pers.** | **Frádráttur** | **Í mun til íb.tal** | **Pers.** | **Frádráttur** | **Í mun til íb.tal.** |
| **Norðuroyggjar** | 753 | 25.932.138 | 12,60 | 40 | 2.859.345 | 0,669 | 52 | 2.086.245 | 0,870 |
| **Eystur** | 287 | 10.254.592 | 8,20 | 12 | 1.020.740 | 0,343 | 10 | 472.253 | 0,286 |
| **Skálafjørður** | 530 | 18.777.942 | 8,81 | 16 | 910.207 | 0,266 | 28 | 1.050.518 | 0,465 |
| **Sundalagið** | 223 | 7.633.664 | 9,78 | 5 | 360.185 | 0,219 | 23 | 1.017.453 | 1,008 |
| **Vestm. og Kvívík** | 152 | 5.359.220 | 8,30 | 10 | 673.676 | 0,546 | 19 | 862.280 | 1,038 |
| **Vágar** | 255 | 9.623.620 | 8,48 | 25 | 2.001.289 | 0,831 | 33 | 1.595.910 | 1,097 |
| **Tórshavnar** | 888 | 26.767.673 | 4,58 | 79 | 5.713.583 | 0,407 | 138 | 6.174.117 | 0,711 |
| **Sandoy** | 205 | 6.669.612 | 14,14 | 12 | 715.620 | 0,828 | 23 | 906.193 | 1,586 |
| **Suðuroy** | 559 | 20.223.002 | 11,39 | 25 | 1.871.219 | 0,509 | 88 | 3.538.018 | 1,793 |
| | | | | | | | | | |
| **Alt landið** | **3.852** | **131.241.463** | **7,96** | **224** | **16.125.864** | **0,463** | **414** | **17.702.987** | **0,856** |

Harumframt eru tað onkrar inntøkur, ið ikki verða skattaðar. Talan er fyrst og fremst um inntøku hjá sjómonnum, ið sigla við skipum, ið eru skrásett í donsku altjóða skipaskránni DIS.

Sjómenn undir føroysku FAS-skipanini verða í grundini heldur ikki skattaðir frá 1. januar 2009 at rokna. Tekniskt er skipanin tann, at teir gjalda 35% skatt í ein grunn, sum so endurrindar hendan peningin til reiðaríini, so netto frá hvørki land, kommunur ella kirkja nakran nettoskatt frá teimum.

Í hesum yvirliti er inntøkan hjá hjá teimum í 2007 tikin við, hóast hendan inntøkan í 2007 varð skattað, men tá var skipanin so tann, at kommunurnar í felag rindaðu sín part av

endurgjaldinum til reiðaríini. Frá 2009 er skipanin so tann, at inntøkan í grundini ikki verður skattað, og kommunurnar sleppa undan endurgjaldinum til reiðaríini.

| 2007 | Persónar | Inntøka | Inntøka/pers. |
|---|---|---|---|
| DIS | 510 | 126.090.555 | 247.236 |
| FAS | 547 | 161.457.052 | 295.168 |

Skattafría DIS-inntøkan er býtt soleiðis upp á økir:

| 2007 | Persónar | Inntøka | Inntøka/pers. | Pers. við DIS-inntøku í mun til íbúgvatalið |
|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 55 | 14.850.533 | 270.010 | 0,920 |
| Eystur. | 33 | 7.611.722 | 230.658 | 0,943 |
| Eysturoy | 54 | 11.937.120 | 221.058 | 0,897 |
| Sundalagið | 20 | 4.068.007 | 203.400 | 0,877 |
| Vestm. og Kvívík | 25 | 6.171.573 | 246.863 | 1,365 |
| Vágar | 39 | 10.017.962 | 256.871 | 1,297 |
| Tórshavnar | 191 | 48.278.434 | 252.767 | 0,984 |
| Sandoy | 15 | 3.257.770 | 217.185 | 1,034 |
| Suðuroy | 78 | 19.897.434 | 255.095 | 1,590 |
| | | | | |
| **Alt landið** | **510** | **126.090.555** | **247.236** | **1,054** |

FAS-inntøkan, sum nú ikki verður skattað, er býtt soleiðis upp á økir:

| 2007 | Persónar | Inntøka | Inntøka/pers. | Pers. við FAS-inntøku í mun til fólkatalið |
|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 64 | 18.436.083 | 288.064 | 1,071 |
| Eystur. | 53 | 16.424.930 | 309.904 | 1,514 |
| Eysturoy | 96 | 30.643.360 | 319.202 | 1,595 |
| Sundalagið | 38 | 12.185.587 | 320.673 | 1,666 |
| Vestm. og Kvívík | 16 | 5.459.113 | 341.195 | 0,874 |
| Vágar | 34 | 10.971.892 | 322.703 | 1,130 |
| Tórshavnar | 168 | 45.292.045 | 269.596 | 0,866 |
| Sandoy | 28 | 8.188.008 | 292.429 | 1,931 |
| Suðuroy | 50 | 13.856.034 | 277.121 | 1,019 |
| | | | | |
| **Alt landið** | **547** | **161.457.052** | **295.168** | **1,131** |

Í 2007 var persónsskatturin býttur soleiðis millum land og kommunur:

Samlaður landsskattur 1.360.560.000 kr.

Samlaður kommunuskattur 1.327.067.000 kr.

### 1.4. Fígging um landsskatt ella kommunuskatt

Í samband við at økir verða flutt frá landinum til kommunurnar at umsita, skal fígging fylgja við. Hetta gerst antin við at lækka landsskattin og hækka kommunuskattin tilsvarandi, við afturbering av mistum kommunuskattainntøkum vegna frádráttarskipanir, við blokkstuðli ella einum blandi av øllum.

Tá tosað verður um at flyta skatt frá landi til kommunur, verður tað gjørt við at lækka øll skattastigini í landsskattatalvuni við sama prosentsatsi, sum kommunuskatturin hækkar við.

Landsskattaprosentið á lægstu inntøkunum er í dag 7 (av inntøku millum 30.000 og 70.000 kr.), t.e. at tað ber til at flyta 7% frá landi til kommunur. Tá verða øll skattastigini í landsskattatalvuni lækkað við 7% og kommunuskatturin hækkaður við 7%. Við hesari flyting rindar skattgjaldarin júst somu upphædd í samlaðum lands- og kommunuskatti sum nú, og umleið 455 mió. kr. verða fluttar frá landinum til kommunurnar.

Skulu meir enn 455 mió. kr. flytast frá landi til kommunur, uttan at hetta skal ávirka einstaka skattgjaldaran, gerst tað ikki uttan so at skattaskipanin verður broytt soleiðis, at kommunuskatturin eisini verður progressivur, og tað liggur ikki í arbeiðssetningi nevndarinnar.

Tí um kommunuskatturin t.d. verður hækkaður við 8%, so ber til at lækka landsskattaprosentið, ið verður roknað av inntøku hægri enn 70.000 kr. við 8%, meðan skatturin av inntøkuni millum 30.000 kr. og 70.000 kr. ikki kann lækka meira enn tey 7%, sum í dag verða goldin av hesari inntøku.

Tað hevur so við sær, at um hetta verður gjørt, fara øll at gjalda 1% meira í skatti av inntøkuni millum 30.000 og 70.000 kr., og tá er ikki samsvar millum hækkingina av kommunuskattinum og lækkingina av landsskattinum.

Dømi:

Verður roknað við einari inntøku upp á 200.000 kr. við skattastiganum fyri 2009 og kommunuskatti upp á 20%:

| Inntøka 200.000 kr. | 2009 við verandi stiga | Flutt 7% frá landi til kommunu | Flutt 8% frá landi til kommunu |
|---|---|---|---|
| **Landsskattur** | 28.000 | 16.100 | 14.800 |
| **Kommunuskattur** | 34.000 | 45.900 | 47.600 |
| **Til samans** | 62.000 | 62.000 | 62.400 |

## 1.5. Um javningarskipanir, millumkommunala javning og landsjavning

### 1.5.1. Meginregla

Um kommunur skulu verða javnsettar ella javnari settar, tá ræður um at røkja lógarásettar uppgávur, er neyðugt at leggja upp fyri ójavna, sum er millum kommunurnar í fíggingarligu fortreytunum. Kommunur hava ikki sama inntøkugrundarlag og ymiskan útreiðslutørv, alt eftir hvussu tær eru fyri viðvíkjandi teimum viðurskiftum, ið eru grundarlag undir útreiðslunum.

### 1.5.2. Javning

Javning er samansett av tveimum síðum:

- Javning av muni í inntøkugrundarlag pr. íbúgva hjá kommununum
- Javning av muni í útreiðslutørvi pr. íbúgva hjá kommununum

### *1.5.2.1. Javning eftir inntøkugrundarlagi*

Dømi um fylgjurnar av muni í inntøkugrundarlagi

| **Kommuna I** | **Kommuna II** |
|---|---|
| • 2 skattgjaldarar<br>• Inntøkugrundarlag 100.000 pr. skattgj.<br>• 2 børn kostnaður 10.000 pr. barn<br><br>Útreiðslurnar eru 10 % av inntøkugrundarlagnum | • 2 skattgjaldarar<br>• Inntøkugrundarlag 50.000 pr. skattgj.<br>• 2 børn kostnaður 10.000 pr. barn<br><br>• Útreiðslurnar eru 20 % av inntøkugrundarlagnum |

| | |
|---|---|
| Alt eftir hvussu stóran part av muninum ásett verður at javna, skal kommuna I flyta pengar til kommunu II samsvarandi.<br><br>Fyri kommunurnar í døminum er meðal inntøkugrundarlagið 75.000 kr. og standard skattagrundarlagið 150.000 kr. og kommunali meðalskatturin 13⅓% | |
| **Kommuna I** | **Kommuna II** |
| *Inntøkujavningargrundarlagið*<br>Við javningarstigi á 30% -15.000<br>Við javningarstigi á 90% -45.000<br><br>*Inntøkujavning til kommunu I*<br>Fyri 30 % javning -2.000<br>Fyri 90 % javning -6.000 | *Inntøkujavningargrundarlagið*<br>Við javningarstigi á 30% 15.000<br>Við javningarstigi á 90% 45.000<br><br>*Inntøkujavning til kommunu II*<br>Fyri 30 % javning 2.000<br>Fyri 90 % javning 6.000 |

### *1.5.2.2. Javning eftir útreiðslutørvi*

Viðurskifti, ið elva til mun á útreiðslustøði, eru:

1) Virkisførismunur
2) Munur á tænastustøði
3) Munur á útreiðslutørvi

Munurin í virkisføri er avleiddur av hvussu væl kommunurnar duga at skipa egin viðurskifti, meðan munurin á tænastustøði er úrslit av teirri politisku raðfesting, sum kommunurnar hava framt. Tí verður bert javnað við atliti at muninum á útreiðslutørvi og tá eisini bert útreiðslutørvur í sambandi við lógarkravdar uppgávur.

Dømi um fylgjurnar av muni í útreiðslutørvi

| **Kommuna I** | **Kommuna II** |
|---|---|
| 2 skattgjaldarar<br>Inntøkugrundarlag 100.000 pr. skattgj.<br>2 børn, sum hvørt kostar 10.000 kr. í skúlaútreiðslum<br>Skúlaútr. eru tilsamans 20.000 kr.<br><br>Útr. eru 20% av inntøkugrundarlagnum | 2 skattgjaldarar<br>Inntøkugrundarlag 100.000 pr. skattgj.<br>4 børn, sum hvørt kostar 10.000 kr. í skúlaútreiðslum<br>Skúlaútr. eru tilsamans 40.000 kr.<br><br>Útr. eru 40% av inntøkugrundarlagnum |

Alt eftir, hvussu stóran part av muninum ásett verður at javna, skal kommuna I flyta pengar til kommunu II samsvarandi.

| Fyri kommunurnar í døminum er samlaði útreiðslutørvurin 60.000 kr., meðal útreiðslutørvurin er 15.000 kr. Standard útreiðslutørvurin er 30.000 kr. | |
|---|---|
| **Kommuna I** | **Kommuna II** |
| *Útreiðslujavningargrundarlag-10.000 kr.*<br><br>*Útreiðslujavning til kommunu I*<br>Við javningarstigi á 30% -3.000<br>Við javningarstigi á 90%  -9.000 | *Útreiðslujavningargrundarlag 10.000 kr.*<br><br>*Inntøkujavning til kommunu II*<br>Við javningarstigi á 30% 3.000<br>Við javningarstigi á 90% 9.000 |

| | |
|---|---|

## 1.5.3. Millumkommunal javning

Í eini millumkommunalari javningarskipan verða sum kunnigt munir í inntøkugrundarlagi og útreiðslutørvi í sambandi við lógarbundnar uppgávur javnaðir við kommunuskatti. Tað merkir, at skattgjaldarar í einari kommunu rinda ein part av skattinum til aðra kommunu, sum er verri fyri.

Tá um javning av útreiðslutørvi ræður, kann ein kommuna verða noydd at rinda á ávísum uppgávuøki, men fáa á einum øðrum øki.

Netto verður úrslitið, at allar kommunur nærkast miðalinntøkugrundarlagnum og miðalútreiðslutørvinum fyri alt landið. Tær vælbjargaðu kommunurnar koma niður ímóti landsmiðal, tær minni vælbjargaðu koma upp ímóti einum ásettum stigi undir landsmiðal. Tað er javningarstigið, sum avger, hvussu nógv javnað verður.

Øll okkara grannalond hava landsjavningarskipan, t.e., at javningin millum kommunur fyri tað allarmesta er fíggjað beinleiðis av statinum umvegis eina størri blokkstuðulsskipan. Her verða sostatt munirnir í inntøkugrundarlagi og útreiðslutørvi millum kommunur nýttir sum útgangsstøði fyri útrokningini av javningini, sum staturin so rindar.

Nevndin metir, at kommunala virksemi framhaldandi skal verða fíggjað við kommunuskatti, og tí eigur javningarskipanin at verða millumkommunalt fíggjað (sí eisini um blokkstuðulsskipanina seinni).

## 1.5.4. Afturbering

Tá ið skattskylduga inntøkan hjá borgarunum verður uppgjørd, verða ymiskir frádráttir drignir frá, áðrenn skatturin verður roknaður.

Fyrst og fremst er talan um sokallaða botnfrádráttin, t.e. at tær fyrstu 30.000 kr. av inntøkuni ikki verða roknaðar upp í skattskyldugu inntøkuna, tá ið m.a.

kommunuskatturin verður roknaður. Harumframt er talan eitt nú um frádrátt fyri eftirlønartryggingar, frádrátt til fiskimenn, frádrátt til sjómenn, ið sigla við útlendskum farmaskipum og frádrátt til fólk, ið arbeiða uttanlands.

Burtursæð frá frádráttinum fyri eftirlønartryggingar, so er tað felags, at hesir frádráttir kosta kommununum stóran skattainntøkumiss. Spurningurin kann tí setast, hvussu rímiligt tað er, at landið ásetur frádráttir í skattaskipanini, uttan at bera fulla kostnaðin av teimum, men flytur ein part av kostnaðinum til kommunurnar.

Nevndu frádráttir, eftirlønartryggingar undantiknar, kosta kommununum uml. 250 mió. kr. í mistum skattainntøkum. Til ber eisini at staðfesta, at frádráttirnir raka kommunurnar ójavnt og gera skattainntøkugrundarlagið, ið javningin annars verður roknað út frá, ójavnari.

Niðanfyri er talva, ið lýsir skattainntøkumissin hjá kommununum orsakað av frádráttarskipanunum. Roknað er við miðal kommunuskattaprosentinum 2009.

| 2007 | Botnfrádráttur | Fiskimannafr. | Farmask.fr. | Uttanl.fr. | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | 25.682.922 | 5.388.698 | 594.172 | 433.522 | 32.099.314 |
| **Eystur** | 15.635.509 | 2.130.904 | 212.110 | 98.134 | 18.076.657 |
| **Eysturoy** | 27.113.820 | 3.902.056 | 189.141 | 218.298 | 31.423.315 |
| **Sundalagið** | 10.460.714 | 1.586.275 | 74.846 | 211.427 | 12.333.262 |
| **Vestm. og Kvívík** | 8.319.091 | 1.113.646 | 139.990 | 179.182 | 9.751.909 |
| **Vágar** | 13.522.805 | 1.999.788 | 415.868 | 331.630 | 16.270.091 |
| **Tórshavnar** | 87.448.017 | 5.562.322 | 1.187.283 | 1.282.982 | 95.480.603 |
| **Sandoy** | 6.320.224 | 1.385.945 | 148.706 | 188.307 | 8.043.182 |
| **Suðuroy** | 21.696.586 | 4.202.340 | 388.839 | 735.200 | 27.022.966 |
| | | | | | |
| **Alt landið** | **216.199.688** | **27.271.976** | **3.350.955** | **3.678.681** | **250.501.299** |

Nevndin heldur, at kommunurnar eiga at fáa skattavirðið av hesum frádráttunum endurgoldið frá landskassanum, tí talan er um frádráttir, sum løgtingið hevur samtykt, har talan er um umfordeiling, og tí eigur landið at bera kostnaðin av hesum. Kostnaðurin av hesum frádráttum fellur eisini ymiskt og er við til at økja um ójavnan millum kommunurnar.

### 1.5.5. Blokkstuðulsskipan

Endamálið við blokkstuðulsskipan sambært arbeiðssetninginum er at fíggja lógarbundnar uppgávur, sum kommunurnar røkja. Meginreglan um, at tann, ið hevur ábyrgdina av uppgávuni, eisini skal fíggja hana, er við hesum brotin, tí játtanin kemur úr landskassanum, hóast kommunurnar sjálvar hava ræðið yvir játtanunum.

Í grundini kann blokkstuðulin fevna um fleiri lógarbundin uppgávuøki og kann eisini vera samskipaður partur av eini landsjavningarskipan, sum lýst er omanfyri.

Við blokkstuðli verður sostatt ein partur av kommunala virkseminum fíggjaður av landskassanum. Eins og við javningini, skal blokkstuðulsskipanin helst verða einføld, t.e., at býtið av stuðlinum út á kommunurnar skal gerast eftir einføldum, men objektivum lyklum.

Lykil kundi verið íbúgvatalið ella brúkaratalið á ávisum uppgávuøki. Tað kann eisini vera íbúgvatalið bólkað og vektað í mun til lógarbundnu uppgávurnar og útreiðslurnar, ið standast av tí.

Fyri at tryggja, at blokkstuðulin frá landskassanum til kommunurnar røkkur til tær uppgávur, sum kommunurnar hava fingið álagt at røkja á t.d. eldrarøktarøkinum, skal ásetast eitthvørt útrokningargrundarlag, sum skilmarkar, hvussu stórur blokkurin skal vera. Hetta má gerast árliga ella so ofta, at krøvini til uppgávurøktina broytast, møguliga við árligum samráðingum millum land og kommunur.

Júst hesin spurningur er atvold til, at blokkstuðulsskipanin eigur at vera so avmarkað sum til ber. Er blokkurin stórur, er uppgávurøktin í kommununum sera bundin at fíggjarstøðuni hjá landskassanum alment, og sum kommunurnar onga ávirkan hava á, tí blokkurin er fult og heilt ein játtan á fíggjarlógini saman við so nógvum øðrum.

**Íverksetan av javningarskipan**

Neyðugt er at skipa lóggávu um millumkommunalu javningarskipanina. Lóggávan skal áseta yvirskipað javningarkrøv og javningarstig viðvíkjandi inntøku- og útreiðslujavning.

Javningarskipanin eigur at verða dagførd við jøvnum millumbilum. Fortreytir kunnu broytast, eitt nú við støði í nýggjari lóggávu. Javningarskipanin er eitt mál millum kommunur og millum kommunur og land, og tí eiga báðir partar at hava yvirskipaðu ábyrgdina av henni. Hetta kann gerast við at skipa samstarvsforum ella eina felags javningarnevnd, hvørs uppgáva serliga er at fylgja við skipanini, greina javningarkrøv, meta um ávirkanir o.a., hava og varðveita vitan um skipanina eins og at gera ítøkilig uppskot til betringar.

## 1.6. Skipanir til serlig endamál (útoyggjar, serliga smáar/illa stillaðar kommunur)

Tað er í arbeiðssetninginum ikki álagt nevndini at koma við serligum skipanum til útoyggjar ella smærri øki, ið hava serligar trupulleikar.

Nevndin hevur hóast hetta valt at viðgera spurningin. Orsøkin er fyrst og fremst, at nevndin metir, at ein broyttur kommunalur bygnaður í sjálvum sær ikki kann loysa trupulleikarnar hjá útoyggjum og í ávísum smáum økjum við fallandi íbúgvatali og truplum fíggjarførleika. Spurningur er eisini, í hvussu stóran mun økispolitiskir trupulleikar eiga at verða loystir við til dømis einari javningarskipan og/ella stuðulsskipan.

Havandi í huga, at fleiri av útoyggjunum hava skjótt fallandi íbúgvatal, metir nevndin, at tað í stóran mun er ein landspolitiskur spurningur, um og í hvussu stóran mun vit framhaldandi ynskja eitt spjatt búsetingarmynstur, har borgarar í øllum landinum hava rætt til ávíst støði av vælferðartænastum.

### 1.6.1. Útoyggjar

Spurningurin er, hvørjar oyggjar kunnu koma undir heitið útoyggj. Sambært Føroysku orðabókini merkir orðið útoyggj "(lítil) fjarskotin oyggj, oyggj, ið liggur uttarlaga (í oyggjalandi)". Henda allýsing er ikki serliga hóskandi í einari økispolitiskari umrøðu av hugtakinum. Meira hóskilig er allýsingin, ið millum annað verður brúkt í útoyggjaálitinum. Útoyggjar eru "oyggjar, ið ikki hava eitt nøktandi ferðasamband og ikki hava somu menningarmøguleikar sum meginøkið"

Sambært løgtingslóg nr. 137 frá 13. desember 2005  um at veita stuðul til íløgur í infrakervið á útoyggj, eru útoyggjarnar hesar: Fugloy, Svínoy, Mykines, Kalsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun. Í viðmerkingunum til lógina verða útoyggjar allýstar sum "oyggjar sum liggja avsíðis við avmarkaðum ferðasambandi og tænastum til borgaran."

Í mun til lógina ið var galdandi frammanundan, Løgtingslóg nr. 50  frá 10 apríl 2003 um at veita stuðul til íløgur í infrakervið, eru Nólsoy og bygdin Gásadalur tiknar burtur við tí grundgeving at tær ikki ganga undir omanfyri nevndu allýsing av útoyggj. Nólsoy, tí hon er vorðin partur av Tórshavnar kommunu, og Gásadalur, tí hon hevur fingið fast vegasamband . Tó er Hestur, Svínoy og Mykines framvegis allýstar sum útoyggjar, hóast tær eru samanlagdar við ávikavist Tórshavnar, Klaksvíkar og Sørvágs kommunu.

Sambært Løgtingslóg nr. 86 frá 14 desember 1998 um javningarstuðul til útjaðarøki eru útjaðarøkini hesi  Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Gásadalur, Nólsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun**.** Her sæst at Gásadalur og Nólsoy framvegis verða allýstar sum útoyggjar/útjaðarøki.

Útoyggjarnar hava umframt avmarkað ferðasamband og tænastur til borgaran, eisini aðrar trupulleikar til felags. Fólkatalið er minkandi, burðartalið er lítið og fráflytingin stór. Aldurs- og kynssamansetingin er skeiv. Hetta minkar samanlagt um trivnaðar- og menningarfyritreytirnar hjá hesum oyggjum.

Nevndin hevur í framhaldi av omanfyristandandi valt at allýsa Fugloy, Svínoy, Mykines, Hest, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun sum útoyggjar. Nólsoy og Kalsoy hava í mun til landafrøðiligu staðsetingina, samferðslumøguleikarnar og í mun til fólkagrundarlagið ikki somu forðingar fyri menning sum hinar oyggjarnar.

Fólkatalið í útoyggjum:

| | 1985 | 1994 | 2009 |
|---|---|---|---|
| **Fugloy** | 62 | 69 | 40 |
| **Svínoy** | 66 | 68 | 40 |
| **Hestoy** | 58 | 51 | 32 |
| **Koltur** | 6 | 1 | 2 |
| **Mykines** | 28 | 25 | 17 |
| **Skúvoy** | 87 | 84 | 47 |
| **Stóra Dímun** | 3 | 9 | 8 |
| **Tilsamans** | 310 | 307 | 186 |

Seinastu 25 árinini er fólkatalið í útoyggjum fallið við umleið 30 %. Í fleiri av oyggjunum er fólkatalið nú so mikið lítið, og aldurs- og kynssamanseting so mikið skeiv, at avtofting er við at verða veruleiki. Hetta er serliga galdandi fyri Fugloy, Svínoy, Hest, Mykines og Skúvoy.

Oyggjarnar Koltur og Stóru Dímun eru í einari serstøðu, tí bert ein familja er búsett í hvørjari. Oyggjarnar hava eitt livigrundarlag í náttúrutilfeinginum og talan er um eitt festi í hvørjari oyggj, ið føðir eina familju.

### 1.6.2. Stuðul til útoyggjar

Stuðul til útoyggjar verða játtaðar umvegis tríggjar kontur á fíggjarlógini

**1. Stuðul til íløgur í infrakervið á útoyggjum:** Endamálið er at skapa fyritreytir fyri at betra trivnaðin og vinnuligu møguleikarnar á útoyggjum. Landsstýrismaðurin kann av árligu játtanini veita kommununum stuðul til byggi- og løguarbeiði til vinnulig, mentanarlig, ítróttarlig og onnur endamál. Harafturat kann játtanin nýtast til at veita stuðul til vinnuátøk á útoyggjum.

**2. Stuðul til útoyggjar:** Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 14 desember 1998 er heimilað at javna ein part av meirkostnaðinum av at flyta olju og annan farm hjá fastbúgvandi í útjaðaraøkjum. Økini eru: Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Gásadalur, Nólsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

**3. Stuðul til Útoyggjamenning** er ætlað at stuðla tiltøkum, sum eru mennandi fyri útoyggjar. Einstaklingar, feløg, stovnar og kommunur kunna søkja um stuðul, sum verður latin sambært reglugerð. Tað er ikki ásett hvørjar oyggjar talan er um.

Samanlagt er stuðulin á hesum 3 konti 4,870 mió. kr.

Yvirlit yvir stuðul:

| Navn | 2008 (1.000 kr.) | 2009 (1.000 kr.) |
|---|---:|---:|
| **Stuðul til íløgur í infrakervið** | 3.100 | 3.100 |
| **Stuðul til útoyggjamenning** | 770 | 770 |
| **Stuðul til útoyggjar** | 1.000 | 1.000 |
| **Tilsamans** | 4.870 | 4.870 |

### 1.6.3. Onnur øki/kommunur

Sambært arbeiðssetninginum er álagt nevndini at koma við uppskoti um eina javningarskipan soleiðis at allar kommunur/samstarvseindir eru betri førar fyri at loysa somu uppgávur, hóast at fyritreytirnar eru ymiskar.

Tað eru umframt útoyggjarnar serliga tvey økið, sum í fyritreytum víkja frá hinum økjunum í Føroyum. Hesi øki eru Suðuroyggin og Sandoyggin.

Fólkatalið í Suðuroynni og Sandoynni er minkað við ávikavist 17 og 19 % síðani 1985, ímeðan fólkatalið í øllum øðrum økjum í landinum er vaksið ella í minsta lagi hevur staðið í stað.

Fólkatalið í sýslum

| | 1985 | 1994 | 2009 |
|---|---:|---:|---:|
| **Norðoya sýsla** | 5.907 | 5.918 | 5.974 |
| **Eysturoya sýsla** | 9.974 | 9.896 | 10.887 |
| **Streymoyar sýsla** | 18.852 | 19.721 | 22.551 |
| **Vága sýsla** | 2.931 | 2.694 | 3.084 |
| **Sandoyar sýsla** | 1.772 | 1.599 | 1.438 |
| **Suðuroyar sýsla** | 5.882 | 5.435 | 4.844 |
| **Alt landið** | 45.318 | 45.263 | 48.778 |

Orsøkin er fyrst og fremst stór fráflyting og minkandi/negativt burðaravlop. Hetta hevur við sær avlagað aldurs- og kynsbýti, sum kann hava við sær at økini koma í eina negativa ringrás, har lutfalsliga færri og færri fólk verða í arbeiðs- og burðardyggum aldri.

Felags fyri økini er harumframt, at tey bert hava sjóvegis samband til meginøkið.

Sandoyggin verður minsta sjálvstøðuga kommuna og kemur eisini av hesum at hava ein serligan útreiðslutørv. Eisini skal havast í huga, at tvær útoyggjar eru tengdar at Sandoyar økinum, nevniliga Skúvoy og Stóra Dímun. Hetta er ikki galdandi í sama mun fyri Suðuroy, sum hevur eitt munandi størri fólkagrundarlag. Tí metir nevndin, at við millumkommunalari javningarskipan er ikki tørvur á serskipan fyri Suðuroy.

### 1.6.4. Serskipanir

Niðanfyri eru nevndir 3 møguleikar fyri serskipanum til serlig endamál:

- Serligur stuðul til útoyggjar kann verða ein samskipaður partur av einari javningarskipan til kommunur við útoyggjum, tí at tænastur til útoyggjar geva ein størri útreiðslutørv enn vanligt. Stuðulin er ikki beinleiðis oyramerktur til útoyggjar, men skal geva kommununi betri fyritreytir at røkja tænasturnar í útoyggj.

- Annar møguleiki er, at stuðulin til útoyggjar og kommunur, ið hava serliga vánaligar fortreytir at røkja lógarbundnar tænastur, er oyramerktur stuðul, ið er partur av einari javningarskipan, ella verða hildin uttanfyri. Við hesum skal tryggjast, at stuðulin verður brúktur til endamálið.

- Triði møguleikin er, at serligur stuðul verður latin til serstakar verkætlanir og menningarætlanir, ið hava til endamáls at bøta um fyritreytirnar í útoyggj ella í økjum, sum hava serliga truplar fyritreytir.

## *2. Meting og tilmæli viðvíkjandi fígging*

Fíggingargrundarlagið hjá kommununum skal í mest møguligan mun tryggja, at øll øki í landinum hava javngóðar menningarmøguligar og fortreytir at røkja lógarbundnar tænastur til borgararnar, sama hvar teir búgva í landinum.

Høvuðsinntøkukeldan hjá kommunum er kommunuskattur, og tað eigur hon framhaldandi at vera. Kommunurnar eiga at hava ábyrgdina av teimum kommunalu uppgávunum, t.e. bæði at fremja tær og at fíggja tær. Hetta hevur stóran týdning fyri gjøgnumskygnið millum land og kommunur og millum kommunu og borgararnar. Tað er eisini við hesum í huga, at møguligar blokkstuðulsskipanir eiga at vera so avmarkaðar sum gjørligt.

Í sambandi við útlegging av uppgávum til kommunurnar ber til at hækka kommunuskattin og lækka landsskattin samsvarandi til at fíggja hesar uppgávur, eins og gjørt hevur verið fyrr, eitt nú í sambandi við barnaverndarlógina. Arbeiðssetningurin leggur eisini upp til at nýta henda leistin í framtíðini, so leingi tað ikki gongur út yvir skattaskipanina.

Sum áður lýst, ber til at hækka kommunuskattin 7%, t.e. 455 mió. kr. og lækka landsskattin samsvarandi, tá uppgávur verða lagdar út til kommunurnar. Til ber sostatt at hækka kommunuskattin til at fíggja annaðhvørt fólkaskúlaøkið ella eldrarøktarøkið, men ikki bæði. Skulu fleiri uppgávur fíggjast eftir hesum leisti uttan at broyta skattaskipanini, verður neyðugt at skipa annan fíggingarhátt. Arbeiðssetningurin leggur upp til blokkstuðulsskipan, men nevndin hevur uppskot um afturberingarskipan í staðin.

Tann ójavni, sum longu er í skattagrundarlagnum hjá kommununum, verður at vaksa og gerast enn sjónligari, um miðal kommunuskattaprosentið hækkar upp til 7%. Veruliga inntøkan, ið fæst við at hækka kommunuskattastigið t.d. eitt prosent, er ymisk alt eftir skattagrundarlagnum í einstøku kommununum.

Hesin størri ójavni skapar – við øllum øðrum óbroyttum – sama tørv á størri javning millum kommunur, t.e. eitt hægri javningarstig. Javningin kann somuleiðis hava við sær eitt líkari kommunuskattatrýst kring landið. Verður sæð burtur frá teimum heilt smáu

kommununum, liggur skattaprosentið millum 19,75% (Tórshavn) og 23,50%, og hesin munur kann minka.

Sambært arbeiðssetninginum skal skattaskipanin ikki broytast. Í grundini er einki til hindurs fyri eisini at gera kommunuskattastigan progressivan og á henda hátt javna skattabyrðuna sum lið í fígging av fleiri kommunalum uppgávum. Tað er ein politiskur spurningur, og politiskt er valt at síggja burtur frá hesum møguleika.

Tey skattastig, sum enn ber til at hækka og lækka, eru knýtt at verandi fíggjarligu fortreytum. Verða skerjingar gjørdar í fíggingargargrundarlagnum hjá kommununum, sum krevja, at kommunurnar verða noyddar at hækka síni skattastig til at fíggja verandi virksemi og uppgávum, so broytast eisini fortreytirnar fyri at hækka kommunuskattin sum lið í útlegging av uppgávum.

Í mun til endamálið við ætlaðu kommunalu umskipanini, hanga størri kommunalar eindir, útlegging av uppgávum og fígging saman.

## 2.1. Fíggjarliga burðardyggar kommunalar eindir

Við støði í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar er nevndin í arbeiðsetninginum biðin um at koma við uppskoti um, hvørjar kommunalu eindirnar skulu verða, og hvussu hesar eindir skulu skipast. Somuleiðis er nevndin biðin um at koma við uppskoti um eina javningarskipan og blokkskipan, soleiðis at kommunurnar eru javnsettar mótvegis lógini og fíggjarliga førar fyri at røkja tær uppgávur, ið verða lagdar til kommunurnar.

Hesi 4 punktini í arbeiðsetninginum hanga neyvt saman og treyta í stóran mun hvørt annað.

Áður er kommunan lýst, bæði sum politiskur felagskapur og umsitingarligur myndugleiki. Samstundis sum kommunustýrið er ímyndin av politiska viljanum á staðnum, virkar kommunan eisini sum fyrisitingarligur myndugleiki, ið hevur fingið tillutað meira og minni regulstýrdar uppgávur frá landinum at loysa.

Leikluturin hjá kommununum er at virka í hesum politiska felti ímillum reglustýring og kommunalt sjálvræði.

Lítil ivi man vera um, at tungar almennar uppgávur sum fólkaskúlin og eldrarøktarøkið neyvan kunna leggjast út til verandi 30 kommunur at røkja sjálvstøðugt. Hetta hevði fyri tað fyrsta ikki verið samfelags-búskaparliga skynsamt og hevði havt við sær ein ójavna í grundleggjandi vælferðartænastum, sum hvørki politiska skipanin ella almenningurin annars høvdu kunnað tikið undir við.

Men hóast kommununalu eindirnar verða 7-9, so verða hesar eindir ógvuliga ólíkar, bæði í stødd og fíggjarligum og fyrisitingarligum førleika og ímun til fólkasamanseting og landafrøði.

Skulu vit tryggja hesum kommunum veruligt virkisfrælsi, er ein umfordeiling neyðug.

Annars er stórur vandi fyri, at lógarbundnu uppgávurnar hjá hesum kommunum verða so mikið tyngjandi fyri samlaða raksturin í kommununum, at lítið og einki er eftir til aðrar kommunalpolitiskar uppgávur, ið kunnu menna nærumhvørvið, og so er kommunala sjálvræðið bert eitt eiti, eitt sjálvræði uttan frælsi.

Ein fíggjarliga burðardygg eind má pr. definitión vera ein eind, sum klárar seg uttan at fáa fíggjarliga innspræning uttanífrá. Við øðrum orðum má hon vera ein eind, ið kann klára seg uttan eina javningarskipan.

Nær ein kommuna er ein burðardygg eind, ið er fíggjarliga før fyri at taka á seg eina størri uppgávu, er hinvegin treytað av, í hvussu stóran mun vit ynskja at javna. Vit kunna velja skipanir sum í Noregi og Íslandi, sum í veruleikanum eru so umfatandi, at sjálvt tær minstu kommunurnar kunna taka á seg stórar uppgávur.

Annar møguleiki er, at kommunurnar verða lagdar saman eftir einum øðrum leisti, har aðalmálið er at gera tær javnt sterkar fíggjarliga. Eitt nú kann tað gerast við at leggja eitt veikt øki saman við einum sterkum øki. Hevði ein slíkur leistur verið valdur, hevði tørvurin á eini javningarskipan eisini minkað.

Nevndin hevur valt at mæla til nakrar kommunalar eindir, ið serliga eru grundaðar á landafrøðilig, samferðslulig og ikki minst søgulig atlit. Nevndin mælir somuleiðis frá, at verandi eindir verða sundurskildar.

Hóast eindirnar, ið nevndin hevur mælt til, gerast størri og í størri mun kunnu átaka sær uppgávur, so kann staðfestast, at kommunurnar eru sera ymiskar í mun til støðd og fíggjarligt grundarlag.

Fyri at viga upp ímóti hesum ójavnum, sum kommunurnar í stóran mun ikki ráða yvir, mælir nevndin til eina javningarskipan, sum tryggjar, at kommunurnar gerast burðardyggari og betur førar fyri at veita sínum borgarum nøktandi tænastur á eitt nú skúla- og eldrarøktarøkinum.

## 2.2. Javningarskipanir

### 2.2.1. Inntøkujavning

Við javning verða ójavnar í inntøkugrundarlag og útreiðslutørvi kommunanna millum javnaðir. Hetta er aloftast strukturellir ójavnar, sum mennast yvir langa tíð og hvørs fortreytir eru truplar at stýra ella broyta. Endamálið er, at allar kommunur eru betri førar fyri at røkja lógarbundnar uppgávur á nøktandi tænastustigi.

Javningarskipanin eigur at vera sett soleiðis saman, at hon eggjar øllum kommunum til at skapa mest møguligan framburð og samfelagsmenning. Hetta eigur at síggjast aftur í, hvussu ítøkiliga javningin verður skipað, tvs., hvat ítøkiliga grundarlagið fyri javningini er, hvussu stórt javningarstigið er osfr.

Og her eru fleiri atlit at taka. Javningarupphæddin eigur sjálvandi at muna serliga hjá teimum kommunum, sum út frá objektivum krøvum eru ringast settar, og tí hava truplast við at veita lógarbundnar tænastur á nøktandi tænastustigi. Men endamálið má heldur ikki vera at trekkja allan dynamikk og mátt úr teimum kommunum, sum standa í vøkstri, tí hesar spjaða eisini menning og stabilitet út um sítt egna økið.

Sum skattagrundarlagið í kommununum er í løtuni, verður tað bert høvuðsstaðarkommunan, ið skal gjalda inntøkujavningina. Tórshavnar kommuna er í allar mátar ein kraftdepil, ið hevur bæði savnandi og spjaðandi ávirkan kring landið. Tórshavnar kommuna hevur landafrøðiliga staðseting og eitt fjølmenni, sum gera, at mong tilboð og tænastur – privat og almenn – kunnu skipast. Tórshavnar kommuna er sum høvuðsstaður serligur partur í altjóða umboðan landsins bæði mentanarliga og vinnuliga, eitt nú sum drívmegi í altjóða kappingini um at tiltrekkja vinnu- og mentanarlív, vælútbúna arbeiðskraft v.m. til Føroya

At Tórshavnar kommunu skal gjalda lutfalsliga stórar upphæddir í inntøkujavning krevur, at kommunan tillagar sítt fíggingargrundarlag, skal hon halda sama støði á sínum tænastum og ikki missa ta týdningarmiklu drívmegi, hon hevur í dag bæði innlendis og útlendis. Hetta kann merkja eitt hægri skattastig.

Nevnast kann, at Búskaparráðið í frágreiðing síni frá apríl 2008 mælir til, at javningin eigur at vera stór, tí tess størri javning, tess javnari treytir. Ráðið mælir til eitt javningarstig áljóðandi umleið 90 prosent.[25] Hetta er, samanborið við grannalondini, eitt rættiliga høgt javningarstig í mun til generellu javningina.

Tað ber til at spyrja, hvussu stórur munurin skal vera millum kommunur, áðrenn rímiligt krav er um javning. Til ber at greina sundur javningina soleiðis, at tað bert eru tær kommunur, ið hava serliga lágt inntøkugrundarlag ella serliga høgan útreiðslutørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur, sum fáa javning. Hesa serskipan hava eitt nú Danmark og Noreg. Slíkar skipanir kunnu tó gera javningarskipanina trupla at gjøgnumskoða.

Spurningurin er eisini, hvussu nógv kann verða tikið frá teimum kommunum, sum eru lutfalsliga væl fyri, uttan at tarna teirra menningarmøguleikum. Her ræður tí um at finna eina hóskiliga og gagnliga javnvág fyri allar partar.

[25] Búskaparráðið, Kommunal útjavning, apríl 2008

Dømi um millumkommunala inntøkujavning, har ávikavist 70, 50 og 30% verða javnað:

| Skattsk. inntøka<br>Kommunusk.<br>Meðal kom.sk.% | 8.283.334.298<br>1.327.404.321<br>16,02 | | Meðal-<br>skatta- | Javn.%<br>70 | Javn.%<br>50 | Javn.%<br>30 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Skatta-<br>grundarlag | Íbúgvatal | grundarlag<br>øki | Javnað<br>upph. | Javnað<br>upph. | Javnað<br>upph. |
| **Norðuroyggjar** | 948.634.731 | 5.980 | 158.635 | 8,43 | 6,02 | 3,61 |
| **Eystur** | 599.126.403 | 3.501 | 171.130 | 0,03 | 0,02 | 0,01 |
| **Skálafjørður** | 965.898.413 | 6.018 | 160.502 | 7,22 | 5,16 | 3,10 |
| **Sundalagið** | 374.368.988 | 2.282 | 164.053 | 1,83 | 1,31 | 0,78 |
| **Vestm. og Kvívík** | 303.933.040 | 1.831 | 165.993 | 1,07 | 0,76 | 0,46 |
| **Vágar** | 476.749.071 | 3.008 | 158.494 | 4,29 | 3,06 | 1,84 |
| **Tórshavnar** | 3.666.858.437 | 19.405 | 188.965 | -38,66 | -27,62 | -16,57 |
| **Sandoy** | 205.853.744 | 1.450 | 141.968 | 4,76 | 3,40 | 2,04 |
| **Suðuroy** | 741.911.471 | 4.908 | 151.164 | 11,03 | 7,88 | 4,73 |
| | | | | | | |
| **Samanlagt** | **8.283.334.298** | **48.383** | **171.203** | **0,00** | **0,00** | **0,00** |

Vanliga er inntøkujavningin í upphæddum munandi størri enn útreiðslujavningin. Tað er eisini inntøkujavningin, ið er léttast at rokna – og umsita. Tað krevur tó, at skrásetingin av inntøkugrundarlagnum er í samsvari við veruligu viðurskiftini – at allar inntøkur eru skrásettar.

Øllum kunnugt vilja altíð vera nakrar inntøkur, sum av einhvørjari orsøk ikki eru skrásettar hjá TAKS og tí ikki eru skrásettar í skattagrundarlagnum, sum javningin verður roknað út frá. Hetta kann eisini verða orsøk til ójavnar í tí skrásetta inntøkugrundarlagnum millum kommunur. Tær óvissur, sum altíð eru í veruliga skattagrundarlagnum, er eisini orsøk til, at til ber ikki at javna munirnar 100%, tvs. allan tann skrásetta ójavnan.

Harumframt hevur landið út frá landspolitiskum áhugamálum skipað ymsar skattafrádráttarskipanir til ávísar samfelagsbólkar. Skattaskipanin sjálv elvir sostatt eisini til skeivleikar í inntøkugrundarlagnum millum kommunur, tí frádráttirnir raka kommunurnar ymiskt. Til ber at koma hesum til lívs við at endurrinda kommununum inntøkumissin.

### 2.2.2. Útreiðslujavning

Skal ein javningarskipan vera rímiliga rættvís við atliti at samlaða muninum millum kommunur, so er neyðugt at skipa útreiðslujavning eisini. Her er eisini tað galdandi, at jú meira rættvís, ið útreiðslujavningin skal vera, tess torgreiddari verður skipanin at skilja og umsita.

Royndirnar úr hinum Norðurlondum siga okkum, at hóast skipanir upprunaliga hava verið einfaldar, so hava tær yvir tíð lyndi til at gerast torskildar. Hetta kemst fyrst og fremst av, at serpolitisk áhugamál leggja trýst á skipanina fyri at fáa hana í samsvar við júst teirra áhugamál. Og fleiri atlit skipanin tekur, jú meira torskilt verður hon, og endin er ofta, at skipanin tykist órættvís hjá øllum áhugabólkum.

Tí metir nevndin tað vera alneyðugt, at skipanin verður so einføld sum møguligt.

Ein einføld útreiðslujavning, sum endurspeglar ein objektivan útreiðslutørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur, kann skipast við at býta aldurssamansetingina í kommununum upp eftir ávísum lyklum og krøvum, og sum er knýtt at ítøkiligu uppgávuni.

Sum dømi kann tørvsásetingin á eldrarøktarøkinum verða skipað eftir íbúgvatalinum í kommununi yvir 67 ár, har tey yvir 80 ár møguliga eru vektað hægri, tí hesin aldursbólkur hagtalsliga er meira røktarkrevjandi. Jú fleiri eldri borgarar yvir 80 ár, jú størri er útreiðslutørvurin.

Vit kunnu taka eitt dømi við eldrarøktarøkinum, har samlaðu útreiðslurnar verða býttar á tveir hættir við hvør sínum lykli. Fyrst eftir fólkatalinum í økinum og síðani eftir tali á pensjónistum í økinum. Pensjónistarnir eru vektaðir soleiðis, at fólk yvir 80 ár eru vektað 3 ferðir meira enn tey millum 67 og 79 ár. Dømið vísir, hvussu býtislykilin hevur ávirkan á býtið millum økini.

| | Íbúgvatal | Eldri<br>67 - 79 ár | Eldri<br>80 ár + | Játtan eftir íbúgvatali | Játtan eftir tali av pensjónistum |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | 5.980 | 520 | 251 | 39.551.082 | 42.235.355 |
| **Eystur** | 3.501 | 279 | 125 | 23.155.240 | 21.698.289 |
| **Skálafjørður** | 6.018 | 497 | 248 | 39.802.410 | 41.173.665 |
| **Sundalagið** | 2.282 | 178 | 81 | 15.092.905 | 13.967.859 |
| **Vestm. og Kvívík** | 1.831 | 176 | 86 | 12.110.039 | 14.399.171 |
| **Vágar** | 3.008 | 261 | 160 | 19.894.591 | 24.584.759 |
| **Tórshavnar** | 19.405 | 1.415 | 630 | 128.342.600 | 109.652.670 |
| **Sandoy** | 1.450 | 148 | 88 | 9.590.145 | 13.669.259 |
| **Suðuroy** | 4.908 | 480 | 228 | 32.460.988 | 38.618.974 |
| | | | | | |
| **Alt landið** | **48.383** | **3.954** | **1.897** | **320.000.000** | **320.000.000** |

Á sama hátt kunnu vit fyri fólkaskúlanum vísa, hvussu veruliga játtanin fyri 2008 var samanborið við, hvussu býtið hevði sæð út, um játtanin hevði verið býtt eftir næmingatali:

| | Íbúgvatal | Børn<br>7 - 16 ár | Játtan 2008 | Játtan eftir næmingatali | Munur |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | 5.980 | 882 | 31.399.256 | 32.956.062 | 1.556.806 |
| **Eystur** | 3.501 | 536 | 21.236.834 | 20.027.720 | -1.209.114 |
| **Skálafjørður** | 6.018 | 951 | 38.103.964 | 35.534.257 | -2.569.707 |
| **Sundalagið** | 2.282 | 354 | 16.725.887 | 13.227.263 | -3.498.624 |
| **Vestm. og Kvívík** | 1.831 | 269 | 10.846.096 | 10.051.225 | -794.871 |
| **Vágar** | 3.008 | 398 | 16.390.720 | 14.871.329 | -1.519.391 |
| **Tórshavnar** | 19.405 | 3.098 | 102.757.408 | 115.757.233 | 12.999.825 |
| **Sandoy** | 1.450 | 204 | 9.298.078 | 7.622.490 | -1.675.588 |
| **Suðuroy** | 4.908 | 675 | 28.510.812 | 25.221.476 | -3.289.336 |
| | | | | | |
| **Alt landið** | **48.383** | **7.367** | **275.269.055** | **275.269.055** | **0** |

Talvurnar omanfyri vísa, at tað er avgerandi fyri javningina, hvørjir javningarlyklar verða valdir. Samstundis sæst eisini, at verandi játtan á skúlaøkinum hevði verið býtt øðrvísi, um næmingatalið hevði verið nýtt sum lykil til útrokningargrundarlag.

Tá ið útreiðslutørvurin, sum javnast skal millum kommunurnar, skal finnast, er neyðugt at taka atlit til, hvussu útreiðslurnar eru íkomnar. Tær útreiðslur, sum stava frá tilvaldum tænastustøði, ella muninum, sum er íkomin vegna virkisføri hjá kommununum, skulu ikki roknast við, tá útreiðslutørvurin verður javnaður.

Kommunur hava longu sum er lógarbundnar uppgávur, sum ikki verða útreiðslujavnaðar, t.d. barnavernd, børn við serligum tørvi sbrt. § 5 í dagstovnalógini, teknisk mál o.a. Spurningurin er tí eisini, um útreiðslujavning skal fevna um allar lógarbundnar uppgávur, ella um tað bert skal vera fyri tær lógarbundnar uppgávur og útreiðslur, sum nú verða

lagdar út til kommunurnar at umsita. Nevndin er samd um, at í útgangsstøðinum eiga allar lógarbundnar uppgávur at verða útreiðslujavnaðar, men neyðugt er at greina ítøkiligu uppgávurnar nærri.

**Endurgjaldsskipanir**

Til tess at skipa so einfalda umsiting av tænastuveitingum sum møguligt, kann í ávísum førum verða skilagott at skipa endurgjaldsskipanir millum land og kommunur.

Verður eitt nú ábyrgdin av røkt til borgarar yvir 67, t.e. eldrarøktin, løgd út til kommunurnar, verður framvegis nakrir brúkarar undir 67 ár, sum Nærverki framvegis fer at hava ábyrgd av. Í staðin fyri at skipa tvær røktareindir – eina kommunala og eina lands, kann hetta skipast soleiðis, at tað kommunala loysir uppgávuna vegna landið, sum so endurrindar kostnaðin.

Líknandi skipan kann gerast á øðrum økjum, har serligur tørvur er, eitt nú viðvíkjandi børnum og ungum.

## 2.2.3. Hvørjar inntøkur skulu javnast?

Inntøkugrundarlagið frá persónsskattinum er høvuðskelda til inntøkujavning, men aðrar inntøkur kunnu møguliga eisini javnast. Sum omanfyri nevnt er inntøkugrundarlagið tað mest objektiva grundarlagið, sum er til taks.

Umframt persónsskattin hava kommunur inntøku av partafelagsskatti. Stórur partur av partafelagsskattinum verður longu javnaður millum kommunur. Hetta eru inntøkurnar, sum stava frá fíggingarstovnum, almennum fyritøkum o.ø., og sum verða javnt býttar út á kommunurnar eftir fólkatalinum. Tað, sum kommunurnar fáa aftrat í partafelagsskatti, er frá fyritøkum, sum eruskrásettar í kommununi.

Spurningurin er, hvussu rætt tað er at javna eisini hesar inntøkurnar, t.e. inntøkur frá teimum lokalu fyritøkunum. Aloftast hevur kommunan gjørt íløgur í vinnukarmar o.tíl. til tess at draga fyritøkur til kommununa, tí tað bæði kann skapa skattainntøkur frá persónum og fyritøkum til kommununa. Tað eru innsatsurin og íløgurnar hjá einstøku kommununi, sum eru fortreyt fyri partafelagsskattinum frá lokalu fyritøkunum. Hesar

inntøkur hevur hon sjálv skapt, og tí er ikki meira enn rímiligt, at hon varðveitir inntøkurnar hjá sær.

Og øvugt: verður allur partafelagsskatturin javnaður, kann tað hava við sær, at kommunur missa hugin at stimbra lokalan framburð, tí kommunan sær einki aftur av íløguni kortini. Ansast eigur væl eftir, at hugurin til staðbundnan framburð – at kommunan verður tann staðbundna drívmegin fyri menning – ikki verður køvdur við javningini.

Heldur enn at javna tann partin av partafelagsskattinum, sum í dag ikki verður javnaður, átti at verið broytt í býtinum millum land og kommunur, so at kommunurnar fingu lutfalsliga meira í sín part. Landskassin fær í dag 62% av partafelagsskattinum.

Hetta býtið er ásett í eini tíð, tá ið landsskatturin var lutfalsliga væl hægri enn kommunuskatturin – í dag er lutfallið umleið helvt um helvt. Býtið er eisini ásett í eini tíð, tá ið fleiri landskassastuðulsskipanir vóru, eitt nú til bygging av havnum, vegum og skúlum. Allar slíkar stuðulsskipanir eru í dag strikaðar.

At broytt hetta býtið hevði bæði verið ein staðfesting av broyttu fíggjarligu fortreytunum hjá kommununum skattliga og stuðulsliga og eisini ein staðfesting av, at tað í stóran mun eru kommunurnar, sum gjøgnum íløgur skapa karmarnar fyri nýggjum vinnuvirksemi eins og øðrum almennum virksemi á staðnum. Býtið av partafelagsskattinum og kapitalvinningsskattinum, sum nú fer 100% í landskassan, átti eisini at fylt lutfallinum í býtinum millum millum lands- og kommunuskatt.

Kommunur hava eisini aðrar serinntøkur frá ymsum virksemið, eitt nú grótbrotum og havnum.

Serliga í mun til havnavirksemið hevur nógv verið talað um javning millum kommunur (ella havnir). Hetta er ikki minst galdandi í sambandi við mongu útbyggingarnar í samferðslukervinum (vegir, tunlar, brýr), har fleiri flutningsfyritøkur hava valt at miðsavna sítt virksemi til eina og somu havn.

Skulu inntøkurnar av havnarvirkseminum sum heild javnast, má talan vera um nettoinntøkurnar, har útreiðslurnar av havnavirkseminum, herundir íløgunum og kapitalkostnaðinum, eru tiknar við. Hesar síggjast ikki serskilt í kommunalu roknskapunum, og tí gevur roknskapurin ikki nakað objektivt grundarlag fyri javning av havnarinntøkum sum heild.

Tað er eisini rættiliga ymiskt, hvussu ítøkiliga havnarvirksemið er skipað kring landið. Neyðugt er, at hetta fyrst verður gjørt sambæriligt, um ein møgulig javning av havnarinntøkum skal skipast. Her má havast í huga, at havnir ikki hava loyvi at avtala at hava eins prísir, t.e. at fremja kartelvirksemi. Sum heild er eisini tørvur á lóggávu, sum skipar neyðugar karmar fyri vinnuligan rakstur av havnum.

Fleiri føroyskar kommunur hava ávís tíðarskeið vinning av havnavirksemi, men treytin er sambært kommunustýrislógini, at virksemið yvir tíð skal hvíla í sær sjálvum. Galdandi rættastøða veitir harumframt sera vítt rásarúm, hvussu langt hetta tíðarskeiðið við vinningi kann vera. Tær størru havnirnar verða riknar eftir handilsligum treytum mótvegis brúkarunum, har havnarinntøkurnar fíggja rakstur, viðlíkahald og íløgur í nýggj havnaanlegg.

Við støði í kommunustýrislógini og rættarstøðuni annars er sera trupult at tala fyri javning av havnarinntøkum, tá ið tað yvir tíð ongar havnainntøkur eru.

### 2.2.4 Uppskot um afturbering frá landinum saman við millumkommunalari javning

Um vit rokna kommunuskattin fyri tær ymisku kommunalu eindirnar við einum miðalskattaprosenti (16,02%) fyri at kunna samanbera tær og leggja afturberingina frá landinum vegna frádráttir í skattalógini (sum umrøtt er omanfyri), verða samlaðu inntøkurnar fyri hvørja kommunu hesar:

| | Skattur | Afturbering | Skattur + afturbering | Fyri hvønn íbúgvak | Index |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | 152.018.716 | 32.976.573 | 184.995.289 | 30.946 | 95 |
| **Eystur** | 96.010.006 | 18.460.050 | 114.470.056 | 32.696 | 100 |
| **Skálafjørður** | 154.785.221 | 32.663.627 | 187.448.848 | 31.148 | 95 |
| **Sundalagið** | 59.992.630 | 12.120.613 | 72.113.243 | 31.615 | 97 |
| **Vestm. og Kvívík** | 48.705.270 | 10.162.387 | 58.867.657 | 32.151 | 99 |
| **Vágar** | 76.399.039 | 16.195.022 | 92.594.061 | 30.783 | 94 |
| **Tórshavnar** | 587.614.065 | 90.747.927 | 678.361.992 | 34.958 | 107 |
| **Sandoy** | 32.988.062 | 8.589.657 | 41.577.719 | 28.674 | 88 |
| **Suðuroy** | 118.891.313 | 28.893.826 | 147.785.139 | 30.117 | 92 |
| | | | | | |
| **Alt landið** | **1.327.404.321** | **250.809.682** | **1.578.214.003** | **32.622** | **100** |

Her síggja vit, at kommunan við lægsta inntøkugrundarlagnum liggur niðri á index 88, meðan kommunan við hægsta inntøkugrundarlagnum liggur uppi á index 107.

Taka vit so eina millumkommunala javning upp á 30% við, gerast inntøkutølini eitt sindur javnari, nevniliga millum index 92 og 105:

| 30% javning | Millum-kommunal javning | Skattur, afturbering + javning | Fyri hvønn íbúgva | Index |
|---|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | 3.613.395 | 188.608.684 | 31.550 | 97 |
| **Eystur** | 12.342 | 114.482.398 | 32.700 | 100 |
| **Skálafjørður** | 3.096.207 | 190.545.054 | 31.663 | 97 |
| **Sundalagið** | 784.448 | 72.897.692 | 31.959 | 98 |
| **Vestm. og Kvívík** | 458.654 | 59.326.311 | 32.401 | 99 |
| **Vágar** | 1.837.944 | 94.432.005 | 31.394 | 96 |
| **Tórshavnar** | -16.569.356 | 661.792.636 | 34.104 | 105 |
| **Sandoy** | 2.037.957 | 43.615.676 | 30.080 | 92 |
| **Suðuroy** | 4.728.409 | 152.513.548 | 31.081 | 95 |
| | | | | |
| **Alt landið** | **0** | **1.578.214.003** | **32.622** | **100** |

Royna vit so at økja millumkommunalu javningina upp á 50%, koma inntøkutølini at liggja millum index 95 og 103:

| 50% javning | Millum-kommunal javning | Skattur, afturbering + javning | Fyri hvønn íbúgva | Index |
|---|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | 6.022.325 | 191.017.614 | 31.953 | 98 |
| **Eystur** | 20.569 | 114.490.625 | 32.702 | 100 |
| **Skálafjørður** | 5.160.344 | 192.609.192 | 32.006 | 98 |
| **Sundalagið** | 1.307.414 | 73.420.657 | 32.188 | 99 |
| **Vestm. og Kvívík** | 764.424 | 59.632.081 | 32.568 | 100 |
| **Vágar** | 3.063.240 | 95.657.301 | 31.801 | 97 |
| **Tórshavnar** | -27.615.593 | 650.746.399 | 33.535 | 103 |
| **Sandoy** | 3.396.594 | 44.974.314 | 31.017 | 95 |
| **Suðuroy** | 7.880.681 | 155.665.820 | 31.723 | 97 |
| | | | | |
| **Alt landið** | **0** | **1.578.214.003** | **32.622** | **100** |

Og at enda kunnu vit økja millumkommunalu javningina upp á 70%, og nú koma inntøkutølini at verða rættiliga jøvn, nevniliga millum index 98 og 101.

| 70% javning | Millum-kommunal javning | Skattur, afturbering + javning | Fyri hvønn íbúgva | Index |
|---|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | 8.431.255 | 193.426.544 | 32.356 | 99 |
| **Eystur** | 28.797 | 114.498.853 | 32.705 | 100 |
| **Skálafjørður** | 7.224.482 | 194.673.330 | 32.349 | 99 |
| **Sundalagið** | 1.830.380 | 73.943.623 | 32.417 | 99 |
| **Vestm. og Kvívík** | 1.070.194 | 59.937.850 | 32.735 | 100 |
| **Vágar** | 4.288.536 | 96.882.597 | 32.208 | 99 |
| **Tórshavnar** | -38.661.830 | 639.700.162 | 32.966 | 101 |
| **Sandoy** | 4.755.232 | 46.332.951 | 31.954 | 98 |
| **Suðuroy** | 11.032.954 | 158.818.093 | 32.366 | 99 |
| | | | | |
| **Alt landið** | **0** | **1.578.214.003** | **32.622** | **100** |

Stórur partur av ójavnanum í inntøkugrundarlagnum hjá kommununum stavar í veruleikanum frá ymsu frádráttunum í skattaskipanini, sum landið hevur skipað. Við at bera inntøkumissin aftur til kommunurnar, verður inntøkugrundarlagið munandi javnari, og tørvurin á millumkommunalari javning samsvarandi minni. Indeksmunurin fer, við afturbering, frá at vera 83 – 110 til at verða 88 – 107.

## 2.4. Tilmæli viðvíkjandi fígging

Nevndin metir, at kommunala virksemi framhaldandi skal verða fíggjað við kommunuskatti, og tí mælir nevndin til at javningarskipanin verður millumkommunalt fíggjað.

Í fylgiskjali 7 er talva, ið lýsir avleiðingarnar av ymsu fíggingarskipanunum fyri kommunala sjálvræðið, stýringina í kommununum eins og ítøkiligu uppgávurøktina og umsitingina.

**Skattur og afturbering:**
Mælt verður til at hækka kommunuskattin og lækka landsskattin samsvarandi, tá ið málsøki verða løgd til kommunurnar.

Hvørt skattastig, ið verður flutt frá landi til kommunur, hevur eitt virði upp á umleið 65 mió. kr., og tá lægsta skattastigið í landsskattinum í dag er 7%, ber til á hendan hátt at flyta um leið 455 mió. kr. frá landi til kommunurnar, uttan at avlaga skattaskipanina, sum er tann avmarking, ið arbeiðssetningurin ásetur.

Mælt verður til seta í verk afturberingarskipan, har landið endurrindar kommununum fyri tann inntøkumiss, sum er avleiðingin av ymsum skattafrádráttarskipanum. Hetta gevur uml. 250 mió. kr.

Hesi bæði tilmælini til samans, tillaging av skattastiga og afturbering, hava við sær, at tørvur er ikki fyribils á at seta í verk blokkstuðulsskipan.

Mælt verður til, at býtið millum land og kommunur av partafelagsskattinum og kapitalvinningsskattinum verður broytt til fyrimunar fyri kommunurnar, og at tað í framtíðini fylgir tí býti, sum er millum land og kommunur, tá ið tað kemur til persónsskattin. Hetta hevði givið 90 mió. kr. í 2008.

**Javning:**
Mælt verður til at skipa eina einfalda millumkommunala javningarskipan, sum fevnir bæði um inntøkujavning og útreiðslujavning.

Javningarskipanin eigur at vera sett soleiðis saman, at hon eggjar øllum kommunum til at skapa mest møguligan framburð og samfelagsmenning.

Javningarupphæddin eigur at muna serliga hjá teimum kommunum, sum út frá objektivum krøvum eru ringast fyri, og tí hava truplast við at veita lógarbundnar tænastur á nøktandi tænastustigi.

Mælt verður til at skipa javningarskipanina við lóg. Mælt verður til, at javningarstigið og javningarkrøvini – og harvið útrokningargrundarlagið – verða ásett beinleiðis í lógini.

Javningarskipanin má vera farin at virka í seinasta lagi samstundis sum útleggingin av uppgávu ella uppgávum verður framd.

Nevndin hevur ikki nakað tilmæli um, hvussu høgt javningarstigið skal vera. Javningartørvurin er tætt knýttur at uppgávunum, ið verða lagdar til kommunurnar, og hvussu javningarskipanin ítøkiliga verður skrúvað saman í mun til, hvørjar inntøkur og útreiðslur skulu javnast og hvussu nógv. Tí ber illa til at koma við einum ítøkiligum tilmæli um javningarstig fyrr enn í sambandi við ítøkiliga lógararbeiðið. Tað er ein politiskur spurningur, hvussu høgt javningarprosentið skal verða, harumframt hevur ein afturberingarskipan stóra ávirkan á ójavnan millum kommunurnar.

Mælt verður til, at inntøkujavningin fevnir um skattskylduga inntøkugrundarlagið, t.e. persónsskattin. Tá ið útreiðslutørvurin, sum javnast skal millum kommunurnar, skal finnast, er neyðugt at taka atlit til, hvussu útreiðslurnar eru íkomnar.  Tær útreiðslur, sum stava frá tilvaldum tænastustøði, ella muninum, sum er íkomin vegna virkisføri hjá kommununum, skulu ikki roknast við, tá útreiðslutørvurin verður javnaður.

Mælt verður til at varðveita verandi javningarskipan av partafelagsskattinum, tó so at kommunali parturin av partafelagsskattinum fylgir býtinum í persónsskattinum.[26]

---

[26] Umboðið hjá Føroya Kommunufelag mælir til at allur partafelagsskatturin verður javnaður samsvarandi persónsskattinum. Grundgevingin er at, partafelagskatturin fellur ógvuliga ójavnt ímillum kommunurnar, og at lítil samanhangur er ímillum tær íløgur kommunurnar hava gjørt í karmar og veruligu inntøkurnar av partafelagsskatti. Heldur ikki er altíð samsvar ímillum virksemið hjá einum partafelag og hvar partafelagið

Mælt verður til, at tá ið nýtt býti millum land og kommunur er ásett viðvíkjandi kapitalvinningsskatti, verður parturin hjá kommununum javnaður millum kommunurnar eftir íbúgvatalinum.

**Blokkstuðul:**
Mælt verður til, at blokkstuðul bert verður skipaður, tá tørvur er á tí. Nevndin er komin við alternativum uppskoti til fígging, ið ger, at blokkstuðulsskipan er ikki neyðug at skipa fyribils.

**Endurgjaldsskipanir:**
Mælt verður til at skipa endurgjaldsskipanir fyri ymsar tænastuveitingar, sum annaðhvørt landið ella kommunan loysir vegna hin partin.

## 2.5. Tilmæli um serskipanir

Nevndin mælir til, at serskipanir verða gjørdar fyri útoyggjar og Sandoyar kommunu.

**Útoyggjar**
Nevndin hevur valt at skilmarka Fugloy, Svínoy, Mykines, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun sum útoyggjar

Útoyggjarnar eru partar av hesum eindum:
Norðoyggjar: Fugloy og Svínoy
Vágar: Mykines
Tórshavnar: Hestur og Koltur
Sandoy: Skúvoy og Stóru Dímun

Seinastu 25 árini er fólkatalið í útoyggjum fallið við umleið 30 %. Í fleiri av oyggjunum er fólkatalið nú so mikið lítið og aldurs- og kynssamanseting so mikið skeiv, at avtofting

---

er skrásett. Gongdin í samfelagnum er at skip, flakavinna, alivinna og onnur vinna yvirhøvur savnast í færri og størri virkiseindir. Sannlíkt er tí at ójanvin í inntøkum frá partafelagsskatti í framtíðini fer at økjast

er um at verða veruleiki. Hetta er galdandi fyri Fugloy, Svínoy, Hest, Mykines og Skúvoy.

Um serlig átøk skulu tryggja hesum oyggjum framhaldandi búseting, vælferðartænastur og menningarmøguleikar er í stóran mun ein landspolitiskur spurningur.

Skulu hesar oyggjar hava vælferðartænastur á eitt nú skúlaøkinum og eldraøkinum kunnu útreiðslurnar hjá kommununum gerast órímiliga stórar.

Tí mælir nevndin til, at serligar útreiðslur, sum kommunurnar hava av útoyggjum, verða partvíst endurgoldnar eftir serligari stuðulsskipan, ið landið játtar.

Eisini mælir nevndin til, at tað eins og í dag verða serligar stuðulsjáttanir á fíggjarlógini, ið kunnu nýtast til serligar og oyramerktar verkætlanir ella átøk í útoyggjum.

Nevndin mælir tó til, at tað verða kommunur sum myndugleiki, ið hava møguleika at søkja og umsita serliga stuðulin, ið latin kann verða útoyggjum.

Landið eigur hinvegin sum eftirlitsmyndugleiki at tryggja sær, at játtanir av slíkum slag verða nýttar í útoyggjum.

Nevndin mælir eisini til, at útoyggjar verða havdar í huga, tá ið lógararbeiðið viðvíkjandi útleggingum verða framt. Serliga verður hugsað um rættindi borgaranna í mun til tænastur frá tí almenna, um hesar tænastur skulu verða óavmarkaðar ella um rættindi í ávísan mun skulu verða treytað av búseting.

### 2.5.1. Serskipanir fyri Sandoynna

Nevndin mælir til, at Sandoyarøkið kemur undir eina serskipan.

Orsøkin er, at Sandoyggin umframt at vera eitt veikt øki við lutfalsliga lítlum inntøkugrundarlag og stórari minking í fólkatalinum seinast 25 árini, serliga víkur frá hinum eindunum ímun til stødd.

Í Sandoyarøkinum verða bert góð 1400 fólk. Nevndin metir, at hetta grundarlag ikki gevur økinum somu møguleikar fyri stórrakstrarfyrimunum, ið hini økini fáa í samband við samanleggingina.

Nevndin metir, at ein eind við bert 1400 íbúgvum fer at hava lutfalsliga stórar fyrisitingarligar kostnaðir og at eindarkostnaðir í mun til bæði eldraøkið og serliga fólkaskúlaøkið fara at verða stórir.

Tí mælir nevndin til, at Sandoyarøkið eftir serligum lykili fær eitt ískoyti, ið skal javnstilla økið við eina kommunu upp á umleið 2000 fólk.

# 7. kapittul. Starvsfólkaviðurskifti

## *1. Starvsfólkaviðurskifti í sambandi við at øki verða flutt frá landinum til kommunurnar*

Kommunala umskipanarnevndin hevur vent sær til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum í sambandi við viðgerð av, hvørjar avleiðingar tað hevur á starvsfólkaøkinum, um ávís málsøki verða flutt frá landinum til kommunurnar at umsita.

Viðvíkjandi avleiðingum fyri starvsfólk verður sum heild víst til niðanfyrinevnda skriv frá Lønardeildini.

Lønardeildin varð biðin um at svara hesum spurningum:

*A. Viðv. tænastumonnum*

1. Skulu tænastumenn tola at verða fluttir við, um málsøki verða flutt til kommunurnar (t.d. fólkaskúlin) ella er flytingin at meta sum ein uppsøgn?
2. Um ja til nr. 1, hvørjar eru treytirnar, skyldurnar og rættindini hjá viðkomandi tænastumonnum tá?
3. Hvørjar treytir og skyldur o.a. flyta við frá landinum til kommunurnar?
4. Í hvønn mun eigur Tænastamannafelagið at verða tikið við, tá ið talan er um flyting av starvsfólkum frá landi til kommunur og nær í tilgongdini?
5. Hvussu við eftirlønarviðurskiftunum um tænastumenn flyta frá landi til kommunur at starvast?
6. Skulu tænastumannasettir lærarar, ið eru settir við ávísan navnnevndan skúla, tola at verða fluttir til annan skúla í somu kommunu ella aðrari kommunu?

*B. Viðv. sáttmálasettum*

1. Skulu sáttmálasett starvsfólk tola at verða flutt við, um málsøki verða flutt til kommunurnar (t.d. fólkaskúlin) ella er flytingin at meta sum ein uppsøgn?

2. Um ja til nr. 1, hvørjar eru tá treytirnar, skyldurnar og rættindini hjá viðkomandi starvssettu?
3. Hvørjar treytir og skyldur o.a. flyta við frá landinum til kommunurnar?
4. Í hvønn mun eiga avvarðandi fakfeløg at verða tikin við, tá ið talan er um flyting av starvsfólkum frá landi til kommunur og nær í tilgongdini?
5. Hvussu við eftirlønarviðurskiftunum, tá ið starvsfólk verða flutt?
6. Skulu t.d. sáttmálasettir lærarar, ið eru settir við ávísan navnnevndan skúla, tola at verða fluttir til annan skúla í somu kommunueind?

*C. Onnur starvsfólk*
Víst verður til spurningarnar undir pkt. B.

Lønardeildin hevur viðgjørt fyrispurningin við støði í teimum ítøkiligu spurningunum, sum nevndin hevur sett. Lønardeildin metir, at spurningarnir nema við tey mest viðkomandi viðurskiftini á starvsfólkaøkinum, ið eiga at verða havd í huga, um øki verða flutt.

Viðmerkjast skal, at verður endalig avgerð tikin um at flyta t.d. fólkaskúlaøkið til kommunurnar at umsita, krevur hetta eitt størri løgfrøðiligt útgreiningararbeiði, enn Lønardeildin hevur havt møguleika at gera í hesum sambandi.

## 1.2. Um at flyta tænastumenn

### Ad. A 1 til 3 og 6)

Tænastumenn hjá landinum eru settir eftir reglunum í tænastumannalógini og tænastumannaeftirlønarlógini[27]. Harumframt er ein røð av avtalum gjørd við tey feløg, ið hava samráðingarrætt fyri tænastmenn. Hesar avtalur snúgva seg um løn, arbeiðstíð, fráfaringaraldur o.a.[28] Tað starvast í dag eini 700-800 tænastumenn hjá landinum. Teir flestu av hesum eru lærarar í fólkaskúlanum, pedagogar á bústovnaøkinum, tollarar hjá

[27] Løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 28 frá 19. mai 2008 og løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastmannaeftirlønir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 14. mars 1997.
[28] Hesi eru Tænastumannafelag Landsins, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið.

TAKS, navigatørar og maskinmeistarar hjá fiskiveiðieftirlitinum umframt leiðarar og stjórar á ymsum stovnum og í aðalráðum.

Í sambandi við viðgerð av skyldum og rættindum hjá starvsfólki verður skilt ímillum lógarásettar skyldur og sáttmálaásettar skyldur. Lógarásettar skyldur kunnu bara broytast við lóg ella við avtalu við tann einstaka. Tær sáttmálaásettu skyldurnar kunnu broytast í sáttmálasamráðingum.

Í tænastumannalógini eru ongar ásetingar um arbeiðsgevaraskifti. Har eru einans ásetingar um, hvussu stórar broytingar tænastumenn skulu tola, og hvørji rættindi tænastumenn hava, tá ið starvið verður niðurlagt.

Verða arbeiðsuppgávurnar hjá einum tænastumanni fluttar frá t.d. landinum til eina kommunu ella partafelag, kann hetta í prinsippinum metast at vera tað sama, sum at starvið hjá viðkomandi er niðurlagt[29]. Verður starv hjá tænastumanni niðurlagt, hevur hann rætt til bíðiløn í trý ár – og hareftir eftirløn.

Fyri at sleppa undan at skula gjalda tænastumonnum bíði- og eftirløn, tá ið umskipanir eru framdar, er í fleiri førum ásett í lóg, at umskipanin ikki gevur tænastumonnum rætt til at meta seg at vera sagdar úr starvi við rætti til bíði- og eftirløn. Hetta varð fyrstu ferð gjørt í Danmark í 1937, tá ið politiið varð flutt frá kommununum til statin. Tænastumenninir kundu velja ímillum at vera settir hjá statinum ella at varðveita sína starvssetan hjá kommununi. Eftir umskipanina rindaði staturin lønina umframt sín lutfalsliga part av eftirlønini. Seinni er hesin leisturin brúktur fleiri ferðir – bæði í Danmark og Føroyum.

Í Føroyum eru dømi um, at tænastumenn eru fluttir frá einum arbeiðsgevara til annan. Hetta hevur verið, tá ið landið hevur yvirtikið øki frá statinum, og tá ið øki hjá landinum eru løgd í partafelag (Føroya Tele, Postverkið og Vága Floghavn).

Tá ið t.d. serforsorgin varð yvirtikin í 1988, fingu statstænastumenninir tilboð um at gerast føroyskir tænastumenn eftir føroyskari lóg og við lønar- og eftirlønarviðurskiftum,

[29] Matiassen, J. (2000), s. 131

ið svaraðu til tey kor, sum vóru galdandi fyri viðkomandi statstænastumenn, tá ið teir vórðu settir hjá statinum. - Sí Lov nr. 719 af 18 november 1987 om udlægning af særforsorgen m.v. på Færøerne.

Teir tænastumenn, ið ikki vildu gerast føroyskir tænastumenn, hildu fram við at vera settir hjá statinum, men við skyldu til at arbeiða hjá landinum.

Í lógini er ásett í § 4, stk. 3, at tænastumenn, ið framhaldandi ynskja at vera tænastumenn hjá statinum “ikke har krav på ventepenge, rådighedsløn eller pension som følge af udlægningen”.

Í § 4, stk. 4 er ásett, at tænastumenn, ið varðveita sína starvssetan hjá statinum, hava skyldu til at góðtaka tær broytingar í sínum starvsviðurskiftum, bæði í vavi og innihaldi, ið eru ein avleiðing av yvirtøkuni.

Líknandi leistur hevur verið brúktur, tá ið landið hevur umskipað virksemi hjá almennum stovnum til partafeløg. Í lógini um at leggja virksemið hjá Vága Floghavn í P/F Vága Floghavn varð ásett, at partafelagið skuldi bjóðað tænastumonnunum at verða settir í starv hjá felagnum. Teir tænastumenn, ið valdu ikki at taka av tilboðnum, varðveittu sína starvssetan hjá landinum, tó við skyldu at gera tænastu hjá partafelagnum. Eisini í hesari lógini er ásett, at tænastumenninir ikki hava krav upp á bíðipengar ella eftirløn sum avleiðing av útláninum til partafelagið. Eisini er ásett, at tænastumenn, ið varðveita sína starvssetan hjá landinum, hava skyldu at góðtaka tær broytingar, ið umskipanin hevur við sær.

Danir hava í nøkrum førum flutt tænastumenn til aðrar myndugleikar við lóg, t.e. uttan tilboð.

Í sambandi við kommunalreformin í 2005 fingu tænastumenn skyldu til at gerast tænastumenn undir nýggja setanarmyndugleikanum við somu treytum, ið teir høvdu fyri umskipanina, jbr. § 7 í L 539 24/6 2005 om visse proceduremæssige spørgsmål i forbindelse med kommunalreformen (procedureloven). Sama skipan varð brúkt í sambandi við, at Hovedstadens Sygehusfællesskab varð sett á stovn (PAV, 32.2.8).

Í viðmerkingunum til "procedureloven" stendur:

> "De pågældende ansættes som tjenestemænd hos den nye ansættelsesmyndighed i henhold til dennes tjenestemandsregler og de kollektive aftaler, der er indgået i henhold til disse regler. Tjenestemænd, der efter reglerne i § 4 overføres til ansættelse i statslige myndigheder, vil således eksempelvis blive ansat som statstjenestemænd i henhold til tjenestemandslovgivningen, mens tjenestemænd, der overføres til ansættelse i kommunerne, vil blive ansat som kommunale tjenestemænd i henhold til de kommunale tjenestemandsregulativer eller vedtægter. Hvis den nye ansættelsesmyndighed ikke har tjenestemandsregler, forudsættes det med lovforslaget, at sådanne etableres. Det kan i den forbindelse blive nødvendigt med nye tjenestemandsregulativer og med overgangsregler, indtil de nødvendige aftaler er indgået.
>
> Det vil ved den pensionsmæssige indplacering hos den nye ansættelsesmyndighed blive sikret, at der ikke som følge af overgangen sker forringelse af den pensionsret, der er optjent i den hidtidige ansættelsesmyndigheds regi. Tilsvarende vil de pågældende ved indplacering i de lønsystemer, der gælder hos den nye ansættelsesmyndighed, blive sikret mod lønnedgang som følge af overgangen.
>
> Lovforslaget indebærer, at ansættelsesmyndigheden er vedkommende nye ansættelsesmyndighed, og at ansættelsesområdet er det samme som for andre tjenestemænd, der ansættes hos denne ansættelsesmyndighed."

Lógin tryggjar sostatt tænastumonnum, ið verða fluttir, at teir framhaldandi eru settir eftir reglum, ið tryggja teimum somu rættindi, sum teir høvdu undan flytingini. Tað sama má vera galdandi, um tænastumenn verða fluttir frá landinum til kommunurnar.

Føroysku kommunurnar hava í dag einki regluverk fyri tænastumenn. Verða tænastumenn í fólkaskúlanum fluttir til kommunurnar við lóg, mugu reglur skipast, ið tryggja tænastumonnunum somu rættindi viðvíkjandi løn, eftirløn og trygd í setanini (t.d. í sambandi við agamál), sum teir hava í dag.

Hesin seinni hátturin at flyta tænastumenn í sambandi við umskipanir er higartil ikki brúktur í Føroyum. Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum metir tað vera rætt at kanna hendan seinna møguleikan til lítar, um t.d. fólkaskúlin verður fluttur til kommunurnar. Verða tænastumenn útlæntir frá landinum til kommunurnar, fer landið framhaldandi at hava ein leiklut í setanarviðurskiftunum hjá hesum fólkum, t.d. í sambandi við at rinda løn, uppsøgn og agamál. Tað eru í dag millum 300 og 400 tænastumannasettir lærarar. Teir yngstu hava heilt nógv ár eftir á arbeiðsmarknaðinum. Hetta merkir, at verður talan um at læna tænastumenn út til kommunurnar, fer landið at hava ein leiklut í setanarviðurskiftunum hjá hesum tænastumonnum nógv ár fram í tíðina. Er møguleiki fyri tí, ynskir Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum at sleppa undan hesum.

*Nýtt arbeiðsstað*

Nevndin spyr, um tænastumannasettir lærarar, ið eru settir við ein ávísan navnnevndan skúla, skulu tola at verða fluttir til ein annan skúla í somu kommunu ella í aðrari kommunu.

Mørkini fyri, hvat ein tænastumaður hevur skyldu til at tola, verða sett av setanarøki og starvsheiti hjá viðkomandi.

Tænastumannasettir lærarar eru [í dag] settir á einum setanarøki, sum fatar um "Mentamálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini og løgmansskrivstovuna." Í fylgiskrivinum til setanarbrævið er ásett, í hvørjum skúla tænastustaðurin fyribils er.

Lærarar við slíkum setanarbrævi hava sostatt skyldu til at tola at verða fluttir til annan skúla í Føroyum.

Tað eru tó lærarar, ið hava eitt setanarøki, ið umfatar einstakar skúlar ella landsfrøðiligt øki. Hesir lærarar kunnu neyvan flytast út um teirra setanarøki uttan víðari.

Verður fólkaskúlin fluttur frá landinum til kommunurnar, mugu nýggju setanarviðurskiftini hjá tænastumonnunum ásetast við lóg. Í hesum sambandi ber til at sleppa burtur úr teimum trupulleikum, ið kundu standast av ov smølum setanarøkjum. Eitt dømi um hetta er, tá ið fyrrverandi kommunurnar á Bornholm vórðu lagdar saman í

Bornholms Regionskommune. Í § 29 í LOV nr. 144 af 25/03/2002 Lov om sammenlægning af de bornholmske kommuner stendur:

> **§ 29.** Den 1. januar 2003 overgår tjenestemænd, der er ansat under Allinge-Gudhjem, Hasle, Nexø, Rønne og Aakirkeby Kommuner samt Bornholms Amtskommune, til ansættelse under Bornholms Regionskommune på vilkår, der i øvrigt svarer til de hidtidige vilkår.

Í viðmerkingunum til greinina stendur:

> ”Bestemmelsen fastsætter, at de tjenestemænd, der er beskæftiget i de eksisterende kommuner og amtskommunen på Bornholm, overgår til ansættelse under Bornholms Regionskommune i forbindelse med sammenlægningen.
>
> Bestemmelsen indebærer, at ansættelsesmyndigheden er Bornholms Regionsråd, og at ansættelsesområdet er Bornholms Regionskommune.
>
> Overgangen til ansættelse under Bornholms Regionsråd vil ikke i sig selv være en forflyttelse. De pågældende tjenestemænd vil således ikke kunne kræve sig afskediget med rådighedsløn/ventepenge eller pension som følge af selve overgangen til ansættelse under Bornholms Regionskommune.
>
> Endvidere indebærer bestemmelsen, at de pågældende tjenestemænd fremover vil kunne være forpligtede til at overtage en anden passende stilling inden for det nye ansættelsesområde.
>
> Ved vurderingen af, om en anden stilling kan anses for passende, vil det blandt andet skulle indgå, at ændringen af ansættelsesområdet sker som led i den generelle kommunesammenlægning på Bornholm. Det betyder, at de pågældende tjenestemænd vil kunne være forpligtede til at overtage en anden passende stilling inden for det nye ansættelsesområde, som de ikke ville have været forpligtet til at overtage inden for rammerne af deres hidtidige ansættelsesområde.
>
> Dette gælder dog ikke, hvis forpligtelsen til inden for rammerne af det nye ansættelsesområde at overtage en anden stilling måtte være af særlig indgribende karakter over for den enkelte.”

Sostatt varð setanarøkið hjá tænastumonnunum víðkað í sambandi við kommunusamanleggingina. Helst ber tað eisini til at gera hetta, um føroyska skúlaverkið verður umskipað í sambandi við eina kommunala umskipan.

**Ad A 4)**
Sí viðgerðina av B 4 niðanfyri.

**Ad A 5) Eftirlønarviðurskiftini hjá tænastumonnum**
Tænastumenn hava eftirlønarrættindi sambært tænastumannaeftirlønarlógini. Tænastumannaeftirlønin er ein týðandi partur av rættindunum hjá tænastumonnum. Verða tænastumenn fluttir til at gera tænastu hjá einari kommunu, mugu teimum verða tryggjað somu eftirlønarrættindi, sum teir hava, áðrenn umskipanin fer fram.

Harumframt er tað av alstórum týdningi, at greiðar avtalur eru millum landið og kommunurnar um, hvussu eftirlønarskyldurnar verða býttar millum partarnar.

Tað eru í høvuðsheitum tveir møguleikar. Tann eini er, at kommunan, ið yvirtekur virksemið, rindar ein prosentpart av lønini til landið, ið so tekur sær av eftirlønarviðurskiftunum, tá ið tænastumaðurin fer frá við tænastumannaeftirløn. Hesin leisturin er brúktur í sambandi við, at Vága Floghavn varð umløgd til partafelag.

Ein annar møguleiki er, at tann eini myndugleikin rindar eftirlønina, meðan hin parturin afturrindar sín lutfalsliga part. Hesin leisturin er brúktur, tá ið øki eru flutt úr Danmark til Føroya.

Vanligt er, at myndugleikin, ið yvirtekur tænastumannin, rindar eftirlønina.

Tænastumannaeftirlønir eru eitt umfatandi og torskilt øki. Inntil fyri stuttum hava fleiri ymisk aðalráð havt ábyrgd av umsiting av tænastumannaeftirlønum. Skipanir hava vantað til at umsita økið, og regluverkið er ikki nóg fullfíggjað á fleiri økjum. Fyri at bøta um umsitingina og fáa betri yvirlit á økinum, savnar landið í løtuni umsitingina av tænastumannaeftirlønum, soleiðis at øll umsitingin verður á Lønardeplinum hjá Føroya Gjaldstovu.

Tað er vert at umhugsa, hvørt tað er skilagott, at kommunurnar skulu uppbyggja førleika og skipanir á hesum økinum, ella um tað er skilabetri at gera eina samstarvsavtalu við landið um umsiting av tænastumannaeftirlønum.

## 1.3. Um at flyta sáttmálasett

**Ad B 1 til 3)**

Í vanligum arbeiðsrætti er meginreglan, at ein løntakari má tola, at broytingar henda í eigaraviðurskiftum, t.d. um eitt virki verður selt ella um eitt persónligt virki verður umskipað til partafelag, um hesar broytingar ikki ávirka rættindini hjá viðkomandi løntakara – ella hava munandi broytingar av setanarviðurskiftunum við sær.

Knýtt at flestu sáttmálum, ið Fíggjarmálaráðið hevur við fakfeløg, er avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla einum virknum starvsfólkapolitikki á landsins stovnum. Í avtaluni er m.a. hendan ásetingin:

> "6. Umleggja alment virksemi
>
> Um so er, at virksemi hjá landinum verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, landið hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið."

Ásetingin tekur støði í donsku virksomhedsoverdragelsesloven. Hendan lógin er ikki galdandi í Føroyum, men vil natúrliga verða tulkingaríkast í sambandi við ásetingina omanfyri. Lógin um rættindi løntakaranna í sambandi við, at landsstýrið yvirtekur mál og málsøki frá ríkismyndugleikunum, tekur eisini støði í hesari lógini[30]. Tað er tí natúrligt, at prinsippini í lógini verða fylgd, um øki verða flutt frá landinum til kommunurnar.

Hetta merkir í høvðsheitum, at nýggi arbeiðsgevarin er bundin av tí sáttmála, sum er galdandi, tá ið hann yvirtekur. Sáttmálin er bindandi, til sáttmálaskeiðið er runnið. Ætlar nýggi arbeiðsgevarin, at lønar- og setanarviðurskiftini skulu broytast, tá ið sáttmálaskeiðið er runnið, skal hann boða tí setta frá tí við í øllum førum líka langari freist, sum uppsagnarfreistin hjá tí einstaka er.

---

[30] ´Sí "Løgtingslóg nr. 81 frá 14. mai 2005 um rættindi løntakaranna í sambandi við, at landsstýrið yvirtekur mál og málsøki frá rískisyndugleikunum".

Tann, ið yvirtekur virksemið, kann í sambandi við umskipanina boða fakfelagnum frá, at viðkomandi ikki ynskir at taka við sáttmálanum. Men uttan mun til hesa fráboðan varðveita starvsfólkini síni rættindi sambært sáttmála sum individuell rættindi, til sáttmálaskeiðið er lokið ella nýggjur sáttmáli er gjørdur.

**Ad B 4)**

Nevndin spyr, í hvønn mun avvarðandi fakfeløg eiga at verða tikin við í málið. Sum nevnt hava kommunurnar skyldu til at yvirtaka tær skyldur, ið landið hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram. Eftir yvirtøkuna avgera kommunurnar sjálvar, um tær ynskja at hava sáttmála við viðkomandi fakfelag. Tað er tí rættiliga nógv upp til myndugleikan, ið yvirtekur virksemið, at avgera, í hvønn mun og nær fakfeløgini skulu takast við.

Sambært almenna setanarpolitikkinum eiga starvsfólk at koma so mikið tíðliga inn í myndina í sambandi við bygnaðarbroytingar, at tey hava ein veruligan møguleika at ávirka tilgongdina. Fyri at fáa so góða undirtøku og úrslit, sum til ber, er helst rætt at halda seg til hetta.

Verða prinsippini í "virksomhedsoverdragelsesloven" brúkt, hevur landið, áðrenn umskipanin fer fram, skyldu til at kunna starvsfólkið um umskipanina, íroknað hvørjar løgfrøðiligar, fíggjarliga og sosialar fylgjur umskipanin hevur fyri starvsfólkið.

Viðurskiftini hjá starvsfólkunum í sambandi við umskipanina eiga, sum nevnt omanfyri, at verða skipað í lóg. Lógaruppskotið eigur at verða sent feløgunum til ummælis eftir vanligum mannagongdum.

**Ad B 5) Eftirlønarviðurskiftini hjá sáttmálasettum**

Eftirlønargjaldið hjá sáttmálasettum starvsfólki verður flutt til eina góðkenda eftirlønarskipan samstundis sum lønin. Tá ið starvsfólk fer úr starvi hjá landinum, eru eftirlønarviðurskiftini sostatt eitt mál millum viðkomandi starvsfólk og veitaran av eftirlønarskipanini. Landið hevur tá røkt sínar skyldur viðv. eftirlønunum, meðan kommununar frameftir gjalda eftirlønargjaldið saman við lønini – um tær ikki avtala annað við felagið.

**Ad B 6)**

Nevndin spyr, um t.d. sáttmálasettir lærarar, ið eru settir við ein navnnevndan skúla, skulu tola at verða fluttir til ein annan skúla í somu kommunueind.

Ein starvssetan er ein avtala, ið er galdandi yvir longri tíð. Tað er ein meginregla, at arbeiðsgevarin kann broyta starvið hjá starvsfólki. Tað eru tó avmarkingar, hvussu stórar broytingar starvsfólk hava skyldu til at tola. Eru broytingarnar størri enn tað, starvsfólkið hevur skyldu at tola, kann viðkomandi meta seg vera sagdan úr starvi.

At verða fluttur til eitt annað arbeiðsstað kann vera ein so stór broyting av setanarviðurskiftunum, at talan er um munandi broyting sambært sáttmála.

Nær tað at verða fluttur til eitt annað arbeiðsstað er at meta sum ein munandi broyting, er ein ítøkilig meting. Tað hevur í hesum føri týdning, við hvørjum fortreytum viðkomandi starvsfólk hevur átikið sær starvið og hvat stendur í setanarbrævinum og sáttmálanum.

Stendur tað í setanarbrævinum, at viðkomandi kann koma at hava skiftandi arbeiðsstøð ella at viðkomandi kann rokna við at verða fluttur, kann hetta gerast við eini styttri freist enn um einki stendur um hetta.

Tað hevur í hesum sambandi týdning, hvussu langt er ímillum nýggja og upprunaliga arbeiðsstaðið – og hvussu ferðamøguleikarnir eru. Í metingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun broytingin broytir møguleikarnar hjá viðkomandi at fáa sítt dagliga lív “at hanga saman”, t.d. í mun til frítíðarítriv og barnaansing (Oluf Emborg og Peer Schaumburg-Muller, Offentlig arbejdsret, 1998, s. 228).

Viðmerkjast skal, at starvsfólk helst hava skyldu til at tola størri broytingar enn vanligt, tá ið talan er um størri bygnaðarbroytingar (Personalestyrelsen, Vejledning om kommunalreformen og personalejura, 2004, s. 12).

# 8. kapittul. Eftirmetingar

## *1. Inngangur*

Kommunala umskipanarnevndin hevur heitt á Granskingardeplin fyri Samfelagsmenning um at gera ein generellan eftirmetingarleist og eina partvísa eftirmeting av, hvussu tað hevur eydnast at leggja dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita.

## *2. Ein generellur leistur fyri eftirmetingar*

### 2.1. Eftirmetingarleistur

Tá ein fastur eftirmetingarleistur skal gerast til tey øki, sum verða flutt frá landi til kommunurnar at umsita, mæla vit til, at sjálv eftirmetingin verður innbygd í tilgongdina, tá ið avgerð verður tikin um at leggja uppgávur til kommunurnar at umsita. Hetta merkir eisini, at um eftirmeting ynskist, so eigur eftirmetingin at byrja, samstundis sum tilgongdin at flyta eitt øki frá landi til kommunur at umsita byrjar.

Hesin leistur førir eisini við sær, at eftirmetingin verður gjørd leypandi, bæði meðan sjálv tilgongdin at leggja økið út er ígongd, og so eftir eitt avtalað áramál, eftir at økið er flutt til kommunurnar. Avtalast kann eisini, at eftirmeting skal gerast í fleiri umførum, eftir at økið er lagt til kommunurnar.

Ein slík metodisk tilgongd ger í fyrsta lagi, at partarnir fáar allar royndirnar frá tilgongdini við í eftirmetingina. Av tí at eftirmetingin verður gjørd leypandi, ber eisini til at gera smærri broytingar ella tillagingar í ætlaðu tilgongdini, um tørvur er á tí og/ella áhugi er fyri tí. Tað er tað, sum verður nevnt monitoring. Í triðja lagi gevur eftirmetingin eisini eina greiða mynd av, hvussu tað (út frá frammanundan ásettum treytum fyri, hvat er væleydnað) hevur eydnast at lagt økið til kommunurnar at umsita.

Í eini tílíkari tilgongd eru fleiri fasur, sum eru natúrligur partur av sjálvari eftirmetingini og tær verða lýstar niðanfyri.

## 2.2. Hvørjir eru partarnir?

Áðrenn farið verður undir eftirmetingartilgongdina, verður gjørt greitt, hvørjir partarnir eru, sum eru knýttir at tí ávísa økinum, sum verður flutt frá landi til kommununnar at umsita. – Og hesir partarnir luttaka í eftirmetingini.

Um vegakervið verður brúkt sum dømi, eru partarnir (í øllum førum) hesir:

- Myndugleikarnir: Landið (Innlendismálaráðið) og kommunur
- Landsverk
- Ráðið fyri Ferðslutrygd
- Brúkarar

### 2.2.1. Hvat skal mátast og nær?

Ein týðandi partur av eini eftirmeting er, at teir partar, sum eru knýttir at økinum, eru samdir um, hvørji viðurskifti eftirmetingin skal máta – við øðrum orðum, hvat tað er, sum skal mátast skal. Tað hevur eisini stóran týdning, at semja er um hetta, áðrenn farið verður undir eftirmetingina. Um semja ikki er um, hvat skal mátast, kann hetta eisini ávirka, í hvønn mun partarnir tulka niðurstøðurnar á sama hátt. Hetta kann, um ósemja er, sáa iva um trúvirðið av eftirmetingini.

Umframt at semja má vera um, hvat skal mátast, má semja eisini vera um, nær mátingarnar/eftirmetingin skulu gerast: um eftirmetingin skal gerast beinanvegin, tá ið økið er lagt til kommununnar at umsita, ella um eitt ávíst áramál skal vera fráliðið. Í summum førum er ikki neyðugt við meiri ein einari eftirmeting, meðan tað í øðrum førum kann verða neyðugt við fleiri eftirmetingum, soleiðis at ein eftirmeting verður gjørd beinanvegin, tá ið økið er lagt til kommununnar, og so aftur eftir eitt ávíst áramál.

### 2.2.2. Hagtalsgrundarlag

Tá ið farið verður undir eftirmetingina verður kannað, hvørji hagtøl eru neyðug fyri at gera eftirmetingina, út frá teimum viðurskiftum semja er um at máta. Síðani er at gera greitt,

1) hvørji hagtøl eru alment atkomulig
2) hvørji hagtøl kunnu “skapast” hjá ymiskum myndugleikum og stovnum
3) hvørji hagtøl afturat mugu gerast til endamálið, t.d. spurnablaðskanning ella samrøður við brúkarar, avvarðandi myndugleikar ella onnur.

### 2.2.3. Hvat er endamálið við at leggja økið til kommunurnar at umsita (successkriterier)

Fyri at kunna gera eftirmetingar er eisini neyðugt, at endamálið við at leggja uppgávuna til kommunurnar at umsita er lýst.

Skiljast kann (í øllum førum) ímillum:

- endamálið hjá ymisku pørtunum, t.d. teimum, sum ynskja at flyta økið til kommunurnar (politiski myndugleikin)
- endamálið hjá teimum, sum ynskja at yvirtaka økið (kommunurnar)
- ymisk sløg av endamálum, har talan t.d. kann vera um demokratiska partin (uppgávan loysast nærri brúkaranum), betri tænastu, bíligari tænastu/spara pengar, skapa virksemi kring landið o.s.fr.

### 2.2.4. Hvussu var støðan, áðrenn økið varð lagt til kommunurnar at umsita, t.e. støðiskanning (“base-line study”)

Fyri at kunna gera eina eftirmeting má eisini ein greið lýsing gerast av, hvussu støðan er á økinum, áðrenn økið verður lagt til kommunurnar at umsita. Á fakmáli verður tosað um eitt sokallað “base-line-study”, sum er ein lýsing av støðuni í dag. Her verður slík kanning nevnd støðiskanning.

Um vit aftur brúka vegakervið sum dømi, so hevði ein slík lýsing t.d. fevnt um (fyri at nevna nøkur):

- hvussu er støðan í vegakervinum kring landið?
- hvør er tørvurin á dagføringum og hvar?
- hvør er tørvurin á íløgum og hvar?
- hvat kostar tað at gera t.d. 100 metrar av vegi (áðrenn økið verður lagt til

kommununurnar)?

- nøgdsemi hjá starvsfólkum (áðrenn økið verður lagt til kommununurnar)
- nøgdsemi hjá brúkaranum (áðrenn økið verður lagt til kommununurnar)

### 2.2.5. Hvussu er støðan, eftir at økið er lagt til kommununurnar at umsita? Niðurstøður

Niðurstøðurnar ella endaliga eftirmetingin tekur støði í lýsingini av, hvussu støðan var, áðrenn økið varð lagt út ("base-line-study"), og so verða metingar gjørdar um, hvussu støðan er broytt, eftir at økið er lagt til kommununurnar at umsita. Tær frammanundan avtalaðu succeskriteriini verða brúkt sum útgangspunkt og hagtalsgrundarlagið, sum nú er atgeingiligt, er grundarlag undir eftirmetingini.

Tá hendan "endaliga" eftirmetingin verður gjørd, eru fleiri viðurskifti, sum eiga at takast við í metingina. Her verður serliga hugsað um, at onnur viðurskifti enn tað, at økið er flutt frá landi til kommununurnar at umsita, kunnu hava ført við sær broytingar á økinum. Talan kann vera um broytingar í samfelagnum sum heild, broytingar úti í heimi, broytingar í lógargrundarlagnum, sum økið verður skipað út frá o.s.fr.

Um vegakervið verður brúkt sum dømi, kunnu høgir prísir á brennievni (bensin og olju) á heimsmarknaðinum og tískil eisini í Føroyum føra við sær minni ferðslu og tískil eisini ein minni kostnað í viðlíkahaldinum av vegakervinum. Bíligari viðlíkahald av vegakervinum hevur í slíkum føri ikki nakað at gera við, at økið er lagt til kommununurnar at umsita.

### 2.2.6. Tilgongdin

Tá eftirmetingar verða brúktar í sambandi við broytingar ella umskipanir av almennum tænastum, herundir eisini at flyta uppgávur frá landi til kommunur at umsita, so er tað eisini av týdning, at læran frá sjálvari tilgongdini verður tikin við í eftirmetingina, soleiðis at lærast kann av hesum, tá ið onnur øki verða flutt frá landi til kommunur at umsita. Tí eigur eftirmetingin eisini at fevna um eina lýsing av sjálvari tilgongdini at flyta uppgávuna frá landi til kommunur at umsita.

## *3. Eftirmeting av økjum, sum kunnu flytast til kommunurnar*

Í arbeiðssetninginum hjá Kommunalu umskipanarnevndini verða nevnd trý øki, sum kunnu flytast til kommunurnar at umsita. Hesi øki eru fólkaskúlin, eldrarøktin og vegakervið. Um hesi øki verða flutt til kommunurnar at umsita og ein eftirmeting ynskist, hvussu hetta hevur eydnast, so eigur eftirmetingin at verða innbygd í tilgongdina, tá ið avgerð verður tikin um at leggja uppgávur til kommunurnar at umsita. Við øðrum orðum byrjar eftirmetingin, samstundis sum tilgongdin at flyta eitt øki frá landi til kommunur at umsita byrjar.

Niðanfyri er ein lýsing av, hvørji viðurskifti ein eftirmeting av nevndu økjum hevði fevnt um, um so var at hesi øki vórðu flutt til kommunurnar at umsita. Í yvirlitinum er víst á, hvørjir partar høvdu verið natúrligir at havt við í eini tílíkari tilgongd. Hini viðurskiftini í tilgongdini eru viðurskifti, sum partarnir, sum hava tilknýti til økið, skulu viðgera í sambandi við eftirmetingina.

### 3.1. Fólkaskúlin

**Partarnir**

Um fólkaskúlin verður fluttur til kommunurnar at umsita, eru í øllum førum hesir partar natúrligir partar, tá ið ein eftirmeting verður gjørd sum partur av tilgongdini, tá ið økið verður flutt til kommunurnar at umsita.

- Mentamálaráðið
- Innlendismálaráðið
- Kommunusamskipan Føroya
- Føroya Kommunufelag
- Føroya Lærarafelag
- Umboð fyri leiðslurnar
- Umboð fyri skúlastýrini
- Foreldraumboð

**Hvat skal mátast og nær?**

**Hagtalsgrundarlag**

**Endamál og successkriterier**

**Undanstøðiskanning**

**Meting av roknum úrslitum**

**Niðurstøður**

## 3.2. Eldrarøkt

**Partarnir**

Um eldrarøktin verður fluttur til kommunurnar at umsita, eru í øllum førum hesir partar natúrligir partar, tá ið ein eftirmeting verður gjørd sum partur av tilgongdini, tá ið økið verður flutt til kommunurnar at umsita.

- Almannamálaráðið
- Innlendismálaráðið
- Kommunusamskipan Føroya
- Føroya Kommunufelag
- Umboð fyri Nærverk
- Umboð fyri ymisku eldrastovnarnar
- Umboð fyri fakbólkar á eldraøkinum
- Umboð fyri brúkaran

**Hvat skal mátast og nær?**

**Hagtalsgrundarlag**

**Endamál og successkriterier**

**Undanstøðiskanning**

**Meting av roknum úrslitum**

**Niðurstøður**

## 3.4. Vegakervið

**Partarnir**

Um vegakervið verður fluttur til kommunurnar at umsita, eru í øllum førum hesir partar natúrligir partar, tá ið ein eftirmeting verður gjørd sum partur av tilgongdini, tá ið økið verður flutt til kommunurnar at umsita.

- Vinnumálaráðið

- Innlendismálaráðið
- Kommunusamskipan Føroya
- Føroya Kommunufelag
- Landsverk
- Ráðið fyri Ferðslutrygd
- umboð fyri brúkaran

**Hvat skal mátast og nær?**
**Hagtalsgrundarlag**
**Endamál og successkriterier**
**Undanstøðiskanning**
**Meting av roknum úrslitum**
**Niðurstøður**

## *4. Um eftirmeting av dagstovna- og barnaforsorgarøkjunum*

### 6.1. Hvussu hevur tað eydnast at leggja dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita?

Í mai mánaði í 2000 varð lóg um Dagstovnar og dagrøkt samtykt á Føroya løgtingi. Lógin hevði við sær, at skipanin av dagstovna- og dagrøktarøkinum (dagstovnaøkið) frá 1. juli 2000 varð flutt til kommunurnar at umsita. Frammanundan var dagstovnaøkið skipað í samstarvi millum land og kommunur.

### 4.1.1. Bakgrund fyri at leggja økið til kommunurnar

Í januar 1999 setti landsstýrismaðurin í almannamálum niður arbeiðsbólk at arbeiða við eini loysn á barnaansingarøkinum (sum tað verður nevnt í álitinum, í hesum notatinum verður hugtakið *dagstovnaøkið* brúkt) við tí endamáli at gera uppgávu-, heimildar- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur greiðari (Álit um Skipan av barnaansingarøkinum, 1999).

Dagstovnaøkið var tá (í 1999) skipað í felag millum land og kommunum, har land og kommunur eftir ávísum býtislykli býttu útreiðslurnar til rakstur og íløgur á dagstovnaøkinum. Umsitingarliga virkaði skipanin á tann hátt, at kommunurnar søktu landið um uppnormering av dagstovnaplássum og landið skuldi so geva loyvi til fleiri ansingarpláss, samstundis sum fígging varð fingin til vegar á fíggjarlógin.

Fleiri trupulleikar vóru við skipanini av dagstovnaøkinum. Av tí at skipanin varð skipað millum land og kommunur, var hon ofta stirvin og høvdu nógvar kommunur trupulleikar við at tryggja børnum mennandi dagstovnatilboð (Uppskot til løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, 2009). Hesi viðurskifti førdu eisini við sær, at ynski vóru um eina greiðari skipan við greiðum skilnaði millum uppgávu-, heilmildar- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Við skjótt vaksandi tørvi á dagstovnaøkinum, vóru eisini greið tekin um, at tað fór at verða ein munandi vøkstur í útreiðslunum til dagstovnaøkið í árunum, sum komu (eftir 1999), og hetta tykist eisini vera ein greiður motivatiónsfaktorur frá landsins síðu til at flyta økið til kommunurnar at umsita[31].

Í álitinum um skipan av dagstovnaøkinum varð mælt til, at dagstovnaøkið varð flutt til kommunurnar at umsita, soleiðis at kommunurnar frá ár 2000 at rokna komu at umsita dagstovnaøkið og bera allar útreiðslur av dagstovnaøkinum. Fyri at kommunurnar ikki skuldu fáa eina meirútreiðslu av hesum, varð í álitinum mælt til, at lógin um býtið av almannaútreiðslum – eisini við býtislykli millum land og kommunur – varð broytt, soleiðis at landið í framtíðini skuldi bera allar almannaútreiðslurnar (sum fevna um m.a. pensjónir, barna- og almannaforsorg, eldraøki og vard verkstøð). Fíggjarligu avleiðingarnar av hesum broytingum vóru fyri árið 1999, at kommunurnar við at yvirtaka dagstovnaøkið fingu eina meirútreiðslu upp á 56,6 mió. kr. (sum landið fyrr hevði rindað), meðan kommunurnar fingu eina minniútreiðslu upp á um leið 61 mió. kr. (parturin hjá kommununum av almannaútreiðslunum), sum vórðu fluttar til landið at halda (Álit um

[31] Landsstýrið álegði landsstýriskvinnuni í Almanna- og heilsumálum, at játtanin til barnaansing á fíggjarlógini ikki skuldi økjast meiri enn játtanin á fíggjarlógini í 1999. Harumframt varð eisini staðfest, at í lógina um barnaansing skuldi gevast heimild, soleiðis at kommunurnar kundu sett í gongd virksemi á barnansingarøkinum uttan um galdandi fíggjarbýti millum land og kommunur (Álit um Skipan av barnaansingarøkinum, 1999).

Skipan av barnaansingarøkinum, 1999). Í álitinum er eingin meting gjørd av, hvussu nógv dagstovnaøkið fór at kosta komandi árini.

Við útgangsstøði í tilmælinum í álitinum um skipan av dagstovnaøkinum varð í februar í 2000 lagt fram lógaruppskot á løgtingi um dagstovnar og dagrøkt. Lógaruppskotið varð samtykt í mai 2000, og varð dagstovnaøkið við virknaði frá 1. juli 2000 flutt til kommunurnar at umsita (Løgtingslóg nr. 67 frá 10 mai 2000 Um dagstovnar og dagrøkt).

Samanumtikið vóru frá landsins síðu tvinni endamál við at flyta dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita:

- at fáa greiðari skilnað millum uppgávu-, heilmildar- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur
- og at sleppa undan at útreiðslurnar til barnaansingarøkið á fíggjarlógini øktust.

## 4.2. Eftirmetingarleistur og eftirmeting

Við útgangsstøði í generella eftirmetingarleistinum, sum vit leggja upp til í notati x/2009, áttu fleiri partar at verið við í viðgerðini, tá ið farið varð undir at leggja dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita. Hesir partar áttu í felag at sett orð á, hvørji successkriteriini vóru í samband við at dagstovnaøkið varð flutt til kommunurnar at umsita. Til dømis hevði tað verið natúrligt, at umboð fyri kommunurnar, avvarðandi fakfeløg, stovnsleiðarar, foreldrabólkar og onnur vóru við í viðgerðini frá tí, at politisk avgerð varð tikin um at flyta økið til kommunurnar at umsita. Hetta var tó ikki støðan og av somu orsøk var og er ikki millum áhugabólkarnar nøkur felags fatan av hvørji succeskriteriini skuldu verða í samband við at dagstovnaøkið varð flutt til kommunurnar at umsita. Uttan felags áskoðan um hetta er heldur ikki veruligt grundarlag at gera eina eftirmeting út frá tí eftirmetingarleisti, sum vit mæla til.

### 4.2.1. Eydnast væl ella minni væl?

Gaman í hevur tað, at økið er lagt til kommunurnar at umsita, ført við sær greiðari skilnað millum uppgávu-, heimildar- og ábyrgdarbýti á dagstovnaøkinum. Í so máta er eitt av endamálunum (hjá landinum) við at leggja dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita rokkið.

Eftir at dagstovnaøkið er lagt til kommununnar at umsita, eru farnar fram stórar útbyggingar. Í 1999 vóru til samans 32 dagstovnar og 26 dagrøktarskipanir í landinum, meðan talið í 2009 var 76 dagstovnar og 13 dagrøktarskipanir. Sí eisini talvu 1 niðanfyri.

| **Talva 1. Dagstovnar og dagrøktarskipanir í 1999 og 2009** | | | |
|---|---|---|---|
| **Dagstovnar** | | | |
| **Ár** | Í Tórshavn | Uttan fyri Tórshavn | **Tilsamans** |
| 1999 | 23 | 9 | **32** |
| 2009 | 34 | 42 | **76** |
| **Dagrøktarskipanir** | | | |
| **Ár** | Í Tórshavn | Uttan fyri Tórshavn | **Tilsamans** |
| 1999 | 1 | 25 | **26** |
| 2009 | 1 | 12 | **13** |
| *Keldur: Álit um Skipan av barnaansingarøkinum 1999, Føroya Pedagogfelag, august 2009; Mentamálaráðið, september 2009.* | | | |

Stóri vøksturin í talinum á dagstovnum hevur eisini ført við sær stóra øking í útreiðslunum til dagstovnaøkið. Í 1999 kostaði raksturin av dagstovnaøkinum samanlagt smáar 151 mió. kr. – útreiðslur býttar millum land, kommunur og brúkaragjøld frá borgarum. Í 2007 kostaði raksturin av dagstovnaøkinum til samans góðar 341 mió. kr., har kommunurnar rindaðu tann stóra partin, meðan ein partur var brúkaragjøld frá borgarum. Landsins partur er minkaður niður í einki (sí talvu 2 niðanfyri).

| **Talva 2. Rakstrarútreiðslur til dagstovnaøkið 1999-2007** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Landsins** | **Brúkaragjøld frá** | | **Útreiðslur** |
| **Ár** | **partur** | **borgarum** | **Kommunurnar partur** | **til samans** |
| 1999 | 56.344.104 | 32.268.574 | 62.298.544 | **150.911.221** |
| 2000 | 36.058.678 | 37.916.814 | 100.807.419 | **174.782.911** |
| 2001 | 7.850.917 | 43.670.014 | 160.176.261 | **211.697.192** |
| 2002 | 1.944.470 | 49.004.548 | 175.267.938 | **226.216.956** |
| 2003 | 2.149.789 | 56.694.492 | 195.702.784 | **254.547.065** |
| 2004 | 4.211.228 | 62.105.548 | 215.729.752 | **282.046.528** |
| 2005 | 3.440.411 | 67.236.017 | 228.478.793 | **299.155.220** |
| 2006 | 5.885.897 | 70.075.498 | 241.546.657 | **317.508.053** |
| 2007 | 4.098.678 | 74.950.225 | 262.110.345 | **341.159.248** |

*Viðmerkingar:*

Tølini fyri partin hjá kommununum fevna um vøggustovur, barnagarðar, dagrøkt og ymiskt felags. Tølini fevna ikki um barnavernd.

*Kelda: Hagstova Føroya*

Sæð úr landsins sjónarhorni við útgangsstøði í endamálinum við at leggja dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita kann sigast, at hetta hevur eydnast væl, tí uppgávu-, heimildar- og ábyrgdarbýtið er vorðið greiðari, samstundis sum útreiðslurnar til dagstovnaøkið á fíggjarlógini er minkað niður í einki. Hinvegin er lítil meining í at gera eina slíka eftirmeting. Høvuðsorsøkin er, at av tí at allir partar ikki hava verið við í arbeiðinum at leggja lunnar undir tilgongdina og skapa felags fatan av, nær ið tað var væleydnað, so hava teir ymisku partarnir við tilknýti til dagstovnaøkið helst eisini rættiliga ymiskar fatanir av, hvussu tað hevur eydnast at leggja dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita[32].

## 4.3. Eftirmeting av tilgongdini

Av tí at ein partur av arbeiðssetninginum hjá Kommunalu umskipanarnevndini áleggur nevndini at gera eftirmeting av, hvussu tað hevur eydnast at leggja m.a. dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita, hava vit valt at leggja dent á eina eftirmeting av, hvussu sjálv

[32] Í kjakinum um at flyta uppgávur frá land til kommunur at umsita, hava fleiri borgarstjórar kring landið ført fram (í samband við dagstovnaøkið), at landi flutti eitt tómt hylki til kommunurnar, sum kommunurnar síðani máttu fylla í (sum ein borgarstjóri tók til).

tilgongdin var, tá ið dagstovnaøkið varð lagt til kommunurnar at umsita. Hetta verður gjørt, soleiðis at lærast kann av hvussu tilgongdin var, tá ið dagstovnaøkið varð lagt til kommunurnar at umsita.

**Tilgongdin**

Í januar 1999 varð ein arbeiðsbólkur settur at arbeiða við eini loysn á dagstovnaøkinum. Politiska kjakið, hvussu dagstovnaøkið skuldi skipast, byrjaði tó væl áðrenn tað. Við øðrum orðum eru tað í øllum førum 10-12 ár síðani, at málið um at flyta dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita byrjaði.

Politiska avgerðin, at dagstovnaøkið skuldi flytast til kommunurnar at umsita, verður tikin tíðliga í 2000, tá ið lógaruppskot um lóg um Dagstovnar og dagrøkt í februar 2000 verður lagt fyri Løgtingið.

Í lógaruppskotinum verður víst á, at uppskotið hevur verið til ummælis hjá Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Pedagogfelag, Foreldrafelagnum ”Felagið at smábørnum í Havn”, Arbeiðseftirlitinum, Landslæknanum, Brunaumsjón Landsins, Føroya Læraraskúla, Almannastovuni og hjá løgmanni (sum tá umsat kommunumál). Í so máta er ein roynd gjørd at taka partarnar, sum onkursvegna hava tilknýti til dagstovnaøkið, við í viðgerðina, tá ið økið varð flutt til kommunurnar at umsita[33].

Út frá tí samskiftinum, sum liggur í sambandi við lógaruppskotið, ber til at gera nakrar niðurstøður:

*Ov stutt tíð at viðgera málið*

Hóast lógaruppskotið er sent ymsu pørtunum til ummælis, vísa flestu teirra í viðmerkingum til lógaruppskotið á, at tey hava fingið órímiliga stutta tíð til at arbeiða við uppskotinum. Í einum skrivi verður víst á, at tey hava fingið 5 dagar at arbeiða við lógaruppskotinum[34]. Og ónøgdin við júst hetta verður eisini nevnd í fleiri viðmerkingum:

[33] Sum partur av viðgerðini í Trivnaðarnevndini hjá løgtinginum hava fleiri partar eisini verið á fundi við Trivnaðarnevndina.
[34] Út frá dagfesting í brævinum frá Almanna- og Heilsumálastýrinum, sum er dagfest 4. november, og ásettu freistini, eru umleið 2 vikur, frá tí at brævið er dagfest, til svar skal verða givið.

*Stovnsleiðarar:* (...) vit halda, tað er órímiliga stutt tíð at arbeiða við einari so umráðandi lóg.

*Føroya Lærarasкúli:* Tað er ógjørligt at gera eitt tílíkt ummæli vandaliga við so lítlum skotbrái.

*Føroya Pedagogfelag:* Pedagogfelagið er ónøgt um, at vit hava fingið so knappa tíð at viðgera hetta lógaruppskotið.

*Kommunurnar ikki nøgdar*

Viðmerkingarnar til lógaruppskotið benda eisini greitt á, at tað eru rættiliga ymiskar áskoðanir, um lógaruppskotið røkkur endamálinum at fáa greiðari uppgávu-, heimildar- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Hetta vísa kommunurnar eisini á í viðmerkingum.

Umboð fyri kommunurnar vísa á, at lógaruppskotið í ov lítlan mun gevur kommununum møguleika at ávirka, hvussu dagstovnaøkið verður skipað. Føroya Kommunufelag vísir á, at tey meta, at uppskotið bert førir við sær, at kommunurnar skulu gjalda størri part av rakstrinum, meðan avvarðandi landsstýrismaður og stovnsleiðarin koma at taka avgerðirnar.

Kommunusamskipan Føroya vísir á somu viðurskifti og sigur, at landsstýrið ikki vil loyva kommununum at hava fulla ábyrgd, samstundis sum at kommunali avgerðarrætturin verður fluttur til starvsfólk (stovnsleiðarar) í og uttan fyri kommunala tænastu.

Í aðrari viðmerking – frá einari kommunu - verður staðfest: “at tað greitt gongur fram í øllum lógartekstinum, at tað er landsstýrismaðurin, sum hevur so at siga allan myndugleikan á dagstovnaøkinum. Hetta er sera óheppið, tá havast skal í huga, at kommunurnar yvirtaka og rinda størsta partin av rakstrinum og allar húsaútreiðslur framyvir, men lata so at siga alt valdið frá sær til onnur, serliga landsumsitingina, at umsita.”

*Vantandi felags fatan*

Út frá viðmerkingunum frá kommunufeløgunum og kommunum (sum skuldu yvirtaka dagstovnaøkið), frá Føroya Pedagogfelag og Føroya Lærarasкúla (fakkunnleikanum á

økinum) og frá foreldrafelagnum í Havn (brúkarar), eru tað (sjálvsagt!) rættilig ymisk viðurskifti, sum hava týdning fyri ymisku partarnar.

Fyri kommunurnar eru tað umsitingarligu og fíggjarligu partarnir. Fyri fakkunnleikan á dagstovnaøkinum er tað kravið um tað fakliga á starvsfólkaøkinum og fakligt innihald í tilboðnum til børn, sum brúka dagstovnaøkið. Og fyri brúkaran var dentur lagdur á at fáa fleiri skipað ansingarpláss og á innihaldið í tilboðunum.

**Nakrar niðurstøður**

Tað at partarnir, sum varða av dagstovnaøkinum, ikki *í felag* hava verið partur av tilgongdini í sambandi við at dagstovnaøkið varð flutt til kommunurnar at umsita, ger, at eingin felags fatan er av, hvørji viðurskifti hava týdning, tá ið broytingar vórðu gjørdar á dagstovnaøkinum. Hetta ger eisini, at grundarlagið undir at gera eina greiða eftirmeting er tunt, tí sama hvørjar niðurstøðurnar eru, so eru tað ymiskar fatanir av, hvussu niðurstøðurnar skulu tulkast.

Um tann eftirmetingarleistur, sum vit hava mælt til, hevði verið brúktur, so hevði eftirmetingin verið partur av sjálvari tilgongdini, frá tí at politisk avgerð varð tikin um at leggja dagstovnaøkið til kommunurnar at umsita. Og hesin eftirmetingarleisturin hevði fevnt um hesar fasur:

- hvørjir eru partarnir, sum hava tilknýti til økið?
- hvat skal mátast og nær?
- hvat er hagtalsgrundarlagið og hvørji hagtøl skulu skapast?
- successkriteriir / felags fatan av, hvat endamálið er
- støðiskanning (”base-line study”)
- eftirmeting av, hvussu støðan er, eftir at økið er flutt til kommunurnar at umsita
- eftirmeting av tilgongdini

Út frá hesum leisti hevði eisini borið til at gjørt eina eftirmeting, har allir partar høvdu kent seg aftur.

## 4.4. Keldulisti

Álit um Skipan av barnansingarøkinum, 1999

Føroya Pedagogfelag, august 2009.

Hagstova Føroya

Mentamálaráðið, september 2009.

Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 Um dagstovnar og dagrøkt

Uppskot til løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, 2009

# Fylgiskjøl

## Fylgiskjal 1

Lógir og kunngerðir, sum skulu broytast, um eldrarøktin verður flutt til kommunurnar.

Lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 99 frá 1. novembur 2007

Lóg nr. 48 frá 11.mai 2009 um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli

Kunngerð nr. 67 frá 18.mai 2006 um eldrasambýli sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 30. mai 2006.

Løgtingslóg nr. 111 frá 20.desembur 2002 um eldrarøkt í Sandoynni.

Kunngerð nr. 7 frá 27. januar 2003 um eldrarøkt í Sandoynni, sum seinast broytt við kunngerð nr. 68 frá 18. mai 2006.

Kunngerð nr. 101 frá 24. juli 2000 um heimahjálp, sum seinast broytt við kunngerð nr. 17 frá 6. mars 2007.

Løgtingslóg nr. 88 frá 6. juni 1997 um Heimasjúkrasystratænastuna, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 17. mai 2000.

Kunngerð nr. 106 frá 11.juni 1997 um Heimasjúkrasystratænastuna

Løgtingslóg nr. 46 frá 9. mai 2005 um stuðul til umsorgararbeiði, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 107 frá 12. desembur 2008.

Kunngerð nr. 160 frá 21. desember 2005 um stuðul til umsorgarnararbeiði, sum seinast broytt við kunngerð nr. 110 frá 15. desember 2008.

Løgtingslóg nr. 108 frá 22. desember 1999 um uppihald á stovni o.l., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 35 frá 9. mai 2005.

Løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 21. mai 2008.

Løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 um kærunevnd í almanna- og heilsumálum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 150 frá 20. desember 2005.

Kunngerð nr. 2 frá 3.januar 2005 um skipan av sambýlum

Kunngerð nr. 3 frá 3.januar 2005 um skipan av bústovnum

Fylgiskjal 2

**Javningarskipanir í Norðurlondum**

Norðurlond hava øll skipan við javning millum kommunur, men ítøkiligu javningarskipanirnar eru ólíkar bæði bygnaðarliga og innihaldsliga. Talan er heldur ikki statiskar skipanir, men verða tær javnan tillagaðar við støði í broytiligu samfelagsligu fortreytunum.

Niðanfyri verða javningarskipanirnar í Danmark, Íslandi, Noregi, Svøríki og Finnlandi í stuttum og sera yvirskipað lýstar.

Felags fyri allar hesar skipanir er, at staturin fíggjar størsta partin av javningini antin sum javningarstuðul ella sum part av blokkstuðulsskipan.

Felags er eisini, at útrokningin og býtið bæði av javning og/ella blokkstuðli byggja á ítøkilig objektiv krøv – í størsta mun íbúgvatal og aldurstreytaðan útreiðslutørv, og á ávís samfelagsbúskaparlig (sosioøkonomisk) krøv, ið hava týdning bæði fyri skattainntøkugrundarlagið og útreiðslutørvsgrundarlagið hjá kommununum.

Tó er ymiskt, hvussu stór lutfalsliga javningin er í Norðurlondum, tvs. hvat vanliga javningarprosentið er. Javningarprosentið kann eisini verða ymiskt, soleiðis at serliga fíggjarveikar kommunur verða javnaðar lutfalsliga meira.

Sum part av statsfíggjaða javningar- og blokkstuðulin er eisini vanligt at leggja ymiskar politiskar raðfestingar inn – eitt nú økis- og útjaðaramenningarstuðul.

3.6.1. Danmark

Áður var javningin í Danmark ein millumkommunal skipan, men eftir seinasta kommunureformin hevur staturin nú høvuðsábyrgdina av javningini sum part av blokkstuðlinum til kommunurnar.

Staturin fíggjar tí eisini mestsum alla javningina, tvs. landsjavningina og javningarstuðulin til serliga fíggjarveikar kommunur uttan fyri høvuðsstaðarøkið, meðan einans høvuðsstaðarjavningin er enn ein millumkommunal skipan. Høvuðsreglan fyri býtið av blokkstuðlinum er íbúgvaratalið í kommununi.

Samlaða blokkustuðulsskipanin er partur av donska avtaluskipanini millum stjórnina og kommunurnar. Avtaluskipanin byggir á samráðingar um karmar fyri kommunala búskapin. Avtalurnar leggja støðið fyri samlaðu tænastuútreiðslunum og íløgunum fyri komandi árið. Avtalurnar áseta eisini karmarnar fyri samlaða kommunuskattatrýstið, ið er tengt at sonevnda skattastoppinum hjá sitandi stjórn. Onnur viðurskifti verða eisini tikin við.

Avtalurnar eru generellar og fevna tí um allar kommunur undir einum. Tað gevur einstøku kommununi møguleika at raðfesta útreiðslur og skatt í mun til staðbundna tørvin, men altíð við atliti at samlaða karminum, ið avtalaður er. Avtalurnar eru ikki juridiskt bindandi, men avtaluskipanin byggir tó á, at avtalurnar verða hildnar. Verða tær ikki hildnar, eru gjørdar fíggjarligar revsimekanismur.

**Javningarstuðulsskipanir**

Danska javningarskipanin fevnir um:

a) nettojavning av muni millum fíggjarligu fortreytirnar hjá kommunum orsakað av munum í skattagrundarlagi og útreiðslutørvi
b) blokkstuðul til kommunur
c) serstakar stuðuls- og javninarskipanir.

**Ad 1) nettojavning**

Nettojavningin fevnir um tríggjar javningarskipanir: landsjavning, høvuðsstaðarjavning og javning til serliga fíggjarveikar kommunur uttan fyri høvuðsstaðarøkið.

**Landsjavning**

Landsjavning fevnir um allar kommunur. Kommuna við útreiðslutørvi hægri enn skattainntøkurnar roknað út frá einum miðalkommunuskattaprosenti (strukturelt undirskot) fær javningarstuðul.

Landsjavningarstuðulin er 58% av muninum millum útreiðslutørvin og skattainntøkurnar hjá kommununi. Kommuna við útreiðslutørvi lægri enn skattainntøkurnar (strukturelt yvirskot) rindar javningarstuðul. Javningarstuðulin er 58% av muninum millum útreiðslutørvin og skattainntøkurnar hjá kommununi (tvs. bert av strukturella yvirskotinum). Skattainntøkurnar verða roknaðar sum skattagrundarlagið hjá kommununi gangað við miðal kommunala skattastigið.

Nettojavningarhátturin ger, at næstan allar kommunur fáa landsjavningarstuðul.

Landsjavningarstuðulin verður í prinsippinum fíggjaður lutvíst av kommununum og lutvíst av statinum. Av tí at parturin hjá kommununum bert verður tikin av strukturella yvirskotinum hjá einstøku kommununi, ið skal rinda til javningina, er fíggingin frá kommununum tí bert ein viðfáningur í mun til partin hjá statinum.

Útreiðslutørvurin hjá kommununi er:

- úrslitið av aldurstreytaða útreiðslutørvinum (vigar 70%)
- úrslitið av sosioøkonomiska útreiðslutørvinum (vigar 30%).

<u>Ad a)</u>

Aldurstreytaði útreiðslutørvurin verður roknaður eftir

1) íbúgvaratalinum í kommununi býtt í 10 ávísar aldursbólkar gangað við roknaðum miðalkostnaði
    i. 0-6 ár
    ii. 7-16 ár
    iii. 17-19 ár
    iv. 20-24 ár
    v. 25-34 ár
    vi. 35-39 ár
    vii. 40-64 ár
    viii. 65-74 ár
    ix. 75-84 ár
    x. 85 ár og eldri
2) miðal ferðatíð (rejsetid) fyri 2.000 íbúgvar ganga við íbúgvaratalið + eindarupphædd, sum er 2% av tí parti av samlaðu útreiðslunum hjá kommununi

til aldurstreytaðan nettorakstur og íløgur dividerað við íbúgvaratalinum í øllum landinum.

Ad b)

Sosioøkonomiski útreiðslutørvurin pr. íbúgva í kommununi verður roknaður eftir landsmiðalkostnaði pr. íbúgva gangað við eitt roknað sosioøkonomiskt indeks fyri ta einstøku kommununa. Sosioøkonomiska indeksið verður roknað sum lutfallið millum ávikavist úrslitið av metta (vektaða) partinum hjá kommununi av 12 ymiskum kriterium og íbúgvaratalinum í kommununi í mun til íbúgvaratalinum fyri alt landið.

Millum tey 12 kriteriini kunnu nevnast:

- Tal av persónum millum 20-59 ár uttan arbeiði meira enn 5% av samlaða íbúgvatalinum millum 20-59 ár í kommununi (vigar 18%)
- Tal av ófaklærdum persónum millum 25-49 (vigar 17,5%)
- Tal av diagnostiseraðum sálarsjúklingum, sum hava verið í sambandi við sálarsjúkrahússkipanina seinastu 10 árini (vigar 5%)
- Tal av børnum í familjum við lítlari útbúgving (vigar 15%)
- Tal av støkum persónum eldri enn 65 ár (vigar 2,5%)
- Tal av brekaðum uttanfyri arbeiðsstyrkina (vigar 5%)
- Árliga niðurgongdin í íbúgvatalinum í kommununi gjørt upp yvir eitt 5 ára tíðarskeið (vigar 2%)

**Høvuðsstaðarjavning**

Høvuðsstaðarjavningarskipanin er ein millumkommunal skipan fyri kommunurnar í høvuðsstaðarøkinum, tvs., at tann stuðul, ið onkrar høvuðsstaðarkommunur fáa, rinda aðrar høvuðsstaðarkommunur.

Eisini høvuðsstaðarjavningin er ein nettojavning sum omanfyri nevnt við landsjavningini. Høvuðsstaðarkommuna við útreiðslutørvi hægri enn skattainntøkurnar (strukturelt undirskot) fær javningarstuðul. Javningarstuðulin er 27% av muninum millum útreiðslutørvin og skattainntøkurnar hjá kommununi.

Skattainntøkurnar í sambandi við høvuðsstaðarjavningina verða roknaðar sum skattagrundarlagið hjá kommununi gangað við skattatrýstfaktor fyri høvuðsstaðarøkið. Skattatrýstfaktorurin verður roknaður sum lutfallið millum samlaðu nettorakstrar- og íløguútreiðslur fyri kommunurnar í høvuðsstaðarøkjum og tað samlaða skattagrundarlagið fyri kommunurnar í høvuðsstaðarøkinum.

Eisini høvuðsstaðarjavningarstuðulin verður roknaður eftir aldurstreytaðum útreiðslutørvi og sosioøkonomiskum útreiðslutørvi. Aldurstreytaði útreiðslutørvurin verður roknaður á sama hátt sum omanfyri nevnt, men sosioøkonomiski útreiðslutørvurin byggir bert á 8 ymisk kriterii, sum innihalsliga tó líkjast omanfyri nevndu.

**Javning til fíggjarveikar kommunur**

Fíggjarveikar kommunur uttanfyri høvuðsstaðarøkið fáa javningarstuðul um so er, at munurin millum útreiðslutørvin og skattinntøkuna er hægri enn 25% av miðal kommunalu nettorakstrarútreiðslunum og íløguútreiðslunum pr. íbúgva (tvs. serliga stórt strukturelt undirskot).

Stuðulin pr. íbúgva verður roknaður sum 32% av tí partinum av muninum millum útreiðslutørvin hjá kommununi pr. íbúgva og skattainntøkurnar hjá kommununi pr. íbúgva, sum er hægri enn 25% av miðal kommunalu nettorakstrar- og íløguútreiðslunumr pr. íbúgva. Samlaði stuðulin verður funnin við at ganga hetta úrslitið við íbúgvaratalið í kommununi. Staturin fíggjar allan henda javningarstuðulin.

Hesar serliga fíggjarveiku kommunurnar fáa sostatt fyrst vanligu javningina uppá 58 % pluss 32 % eykajavning, tvs. 90 % í alt.

**Ad 2) Blokkstuðul**

Staturin veitir blokkstuðul til kommunurnar. Hetta verður gjørt í samráðing millum stjórnina og danska kommunufelagið. Partur av blokkstuðulinum fer til at fíggja landsjavningina omanfyri (uml. 62,8%) og javningina til fíggjarveiku kommunurnar (uml. 5%).

Restin av blokkinum verður býttur eftir íbúgvatalinum í einstøku kommununi.

Blokkstuðulin verður ásettur sum samlaða úrslitið av

1) stuðlinum undanfarna ár við ískoyti ella frádrátti, sum standast av eingangsreguleringum ella upp- og niðurreguleringum
2) regulering av væntaða prístals- og lønarhækkingunum í kommunala sektorinum
3) kommunalu meir- ella minniútreiðslum sum standast av broytingum í útreiðslu- og uppgávubýtinum millum land og kommunur í stuðulsárinum
4) kommunalu meir- ella minniútreiðslunum sum standast av broyting í statsligu reguleringini av virkseminum í kommununum í stuðulsárinum, og
5) kommunalu meir- ella minniútreiðslunum, sum standast av gongdini í reellu útreiðslunum hjá kommununum eitt nú til ymsar forsorgarveitingar, arbeiðsloysistuðul, útreiðslur til frálæru í donskum til útlendingar, aktivering og integratión av útlendingum, fyritíðarpensjón v.m. í stuðulsárinum.

Samlaði blokkurin, íroknað javningina, til donsku kommunurnar fyri 2008 er góðar 53,6 mia kr.

**Ad 3) serligar stuðuls- og javningarskipanir**

Tað eru fleiri serstakar stuðuls- og javningarskipanir:

1) stuðulsskipan til kommunur, ið eru serliga illa fyri (tvs. uppaftur verri enn tær fíggjarveiku kommunurnar, sum nevndar eru omanfyri), ætlað til eitt nú vakstraravtalur
2) stuðulsskipan til høvuðsstaðarkommunur við serligum fíggjarligum trupulleikum fáa árligan stuðul
3) stuðul til at betra um eldrarøktarøkið generelt
4) stuðul til kommunur við smáum oyggjasamfeløgum
5) kommunur við meirútreiðslum, ið stava integratiónsarbeiði, málundirvísing v.m. í sambandi við innflytarar, flóttafólki og eftirkomarar fáa eitt ískoyti pr. innflytara, flóttafólk osfr. Júst hesa skipanina fíggja kommunurnar sjálvi soleiðis, at kommunur við fáum innflytarum v.m. rinda til skipanina, meðan kommunur við nógvum innflytarum v.m. fáa stuðul.

**Annað**

Partafelagsskatturin verður eisini javnaður við støði í íbúgvaratalinum. Stuðulin ella gjaldið verður roknað sum 50% av muninum millum vinningin av partafelagsskattinum og landsmiðaltalið pr. íbúgva ganga við fólkatalinum í kommununi.

Ein reguleringsmekanisma er sett inn soleiðis, at veksur budgetteraða inntøkugrundarlagið í høvuðsstaðarkommununum meira enn 1% meira enn í restina av landinum, so veksur javningargrundarlagið, sum er 58%, við í mesta lagi einum prosentið árliga. Javningargrundarlagið kann tó ikki verða hægri enn 68%. Mekanisman kann fyrstu ferð brúkast í 2010. Í 2007-08 var munurin millum høvuðsstaðarkommunurnar og restina av landinum 0,09%, tvs. væl niðanfyri kravið.

*Kelda: Kommunal udligning og generelle tilskud 2008, Indenrigs- og Sundhedsministeriet, juni 2008*

**Ísland**

Í Íslandi er javningin í inntøkum og útreiðslutørvi skipað gjøgnum ein javningargrunn. Grunnurin hevur 5-manna nevnd at ráðgeva stjórnina um javningarstuðul sambært ymsum reglugerðum, harav íslendska kommunufelagið tilnevnir teir fýra.

Inntøkur íslendska javningargrunsins eru:

1) ríkiskassastuðul 2,12% av innheintaðu skattainntøkum ríkiskassans
2) árligur stuðul úr ríkiskassanum 0,264% av kommunala skattaálíkningargrundarlagnum undanfarna inntøkuskattaár
3) 0,77% av kommunuskattainntøkunum
4) rentuinntøkur.

Lutur ríkiskassans av inntøkum javningargrunsins fyri 2007 var uml. 67%.

**Javningarstuðul**

Stuðulin er býttur í

a) bundna javning
b) serstaka javning
c) inntøku- og útreiðslujavning og
d) rakstur av fólkaskúlanum.

**Ad 1) bundin javning**

a. Íslendska kommunufelagið verður fíggjað av javningargrunninum við 1,7% av inntøkunum árliga.
b. Á sama hátt verða tey 8 landsluta kommunufeløgini fíggjað úr javningargrunninum við 2% av inntøkum grunsins.
c. Kommunali lánistovnurin fær 6,1% árliga.
d. Kommunurnar varða av serligari skipan við endurgjaldið til uppihaldspening (barnagjald til uppihaldarar), og sum tær fáa javningarstuðul til.
e. Javningarstuðul til serstaka eftirlønarskipan.
f. Bygningsfriðingargrunnur fær somuleiðis fígging úr javningargrunninum.

**Ad 2) serstøk javning**

a) Javningarstuðul verður latin til útreiðslur í standast av fyrireiking og fremjing av kommunusamanlegging, endurgjald fyri mistan javningarstuðul í hesum sambandi, og stuðul til umskipan av tænastu og fyrisiting, umframt 50% av stovningarútreiðslum til fólkaskúlabygningar og barnagarðsbygningar. Veiting kann fara fram í alt 5 ár eftir samanleggingarárið.
b) Til fíggjarliga veikar kommunur undir administratión av ríkisstjórarneftirlitsnevnd.
c) Til kostnaðarmiklar íløguverkætlanir hjá kommunum við færri enn 2.000 íbúgvum. Undir slíkar koma íløgur í vatnveiting (50% stuðul), stovnskostnaður av skúlabygningum (50% stuðul), kostnaði at byggja ella keyp av húsum til barnagarð (50% stuðul), byggiútreiðslur í sambandi við felagshús (mentanarhús) og ítróttaanleggum, sum ikki hoyra til skúlan (20% stuðuli).
d) Til vatnveiting til góðkendar bóndagarðar.
e) Javning av inntøkutapi í einstøku kommununum vegna lækking í fastognaskatti orsakað av broytingum í fastognarskattainntøkuni (bygningsálíkning)
f) Til kommunala endurrindan av húsaleigu (íbúðarstuðul).
g) Til serstakar verkætlanir, sum hava stóran týdning fyri kommunur. Undir slíkar koma menningarstuðul til kommunur at betra um raksturin og/ella tænastuna, og stuðul til kommunur, ið hava verið fyri tungum og óvæntaðum lógarásettum útreiðslum.

**Ad 3) inntøku- og útreiðslujavning**

**Inntøkujavning**
Inntøkujavningarstuðul verður ásettur árliga í samráðing millum stjórnina og kommunufelagið. Gjørt verður yvirlit yvir allar kommunuskattainntøkurnar í inniverandi ári og yvirlit yvir fullnýtsluna av øllum inntøkukeldunum (inntøkukommunuskatturin, fastognarskatturin og partafelagsskattur (framleiðslugjald)).

Við støði í yvirlitinum um fullnýtsluna av inntøkunum hjá kommununum verður eftirfylgjandi roknað miðaltal fyri

1. hvønn íbúgva í Reykjavík
2. hvønn íbúgva í øllum kommunum við 10.000 íbúgvum ella fleiri tó Reykjavík undantikin
3. hvønn íbúgva í øllum kommunum við 300-10.000 íbúgvum
4. hvønn íbúgva í øllum kommunum við færri enn 300 íbúgvum.

Er miðaltalið fyri hvønn íbúgva í kommunu mett lægri enn 97% av miðaltalinum fyri hvønn íbúgva í øllum kommununum í samsvarandi stødd, so fær kommunan inntøkujavningarstuðul, ið dekkar allan munin upp til 97%.

Kommunur, ið eru omanfyri 100%, skulu ikki gjalda inntøkujavning.

**Útreiðslujavning**
Fyrst í januar verður gjørd meting um útreiðslujavningarstuðulin, sum skal lutast út í árinum (fer fram loypandi). Metingin er bygd á upplýsingar um inntøkur javningargrunsins, íbúgvatalið í kommununum 1. desember árið fyri, umframt upplýsingunum í sambandi við inntøkujavningina.

Útreiðslujavningarstuðulin verður lækkaður hjá teimum kommunum, sum hava lutfalsliga høgar inntøkur pr. íbúgva mett við aðrar kommunur. Stuðulin verður lækkaðar lutfalsliga, tá miðalinntøkan pr. íbúgva mett við fullnýtsluna av samlaðu inntøkunum hjá kommununi er yvir 4% yvir miðaltalinum fyri kommunurnar í samsvarandi bólki (b, c ella d omanfyri). Stuðulin fellur heilt burtur, um miðalinntøkan pr. íbúgva er hægri enn 30% yvir miðaltalið.

Upphæddin, sum grunnurin hevur til taks, verður býttur soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 1) | tal av íbúgvum í aldrinum 0-5 ár | 24,4% |
| 2) | tal av íbúgvum í aldrinum 6-15 ár | 17,6% |
| 3) | tal av íbúgvum í aldrinum 16-66 ár | 5,9% |
| 4) | tal av íbúgvum í aldrinum 67-80 ár | 7,5% |
| 5) | tal av íbúgvum í aldrinum 81 ár og eldri | 4,9% |
| 6) | tal av tilflytarabørnum í aldrinum 0-5 ár | 2,0% |
| | *Íbúgvaratengdur stuðul* | *62,3%* |
| | | |
| 7) | Fjarstøða millum bygdir í kommununi | 8,8% |
| 8) | Tal av tættbygdum økið meira enn eitt | 2,9% |
| 9) | Skúlakoyring úr spjøddum bygdaløgum | 21,5% |
| 10) | Fólkatalsminking í kommununi | 2,0% |
| 11) | Kavarudding í tættbygdum øki | 2,5% |
| | *Í alt* | *100%* |

Viðvíkjandi íbúgvatengdum stuðli (1-6), so verður útrokningargrundarlagið av stuðlinum fyri hvørja einstøku kommunu at taka atlit til tal av íbúgvum í nevndu aldursbólkum samanborið við talið í øllum landinum fyri sama aldursbólk. Hetta skal so aftur setast í lutfall ella vektast í mun til samlaða fólkatalið í kommununi. Tað verður gjørt soleiðis:

Kommunur við færri enn 2.400 íbúgvum fáa stuðulin 1,0
Kommunur við 2.400-9.000 íbúgvum fáa stuðul millum 1,0-0,215.
Kommunur við 9.000-15.000 íbúgvum fáa stuðulin 0,215.
Kommunur við 15.000-22.000 íbúgvum fáa stuðul millum 0,215-0.
Kommunur við fleiri enn 22.000 íbúgvum fáa stuðulin 0.

Viðvíkjandi fjarstøðu innan kommunu (7), so skulu atlit takast til fjarstøðu innan kommununa og lutfall millum tættbygd øki og spjødd bygdaløg. Mát í hesum sambandi er fjarstøðan millum ytstu bygdir í norði, eysturi, suðri og vesturi, stytsta vegalongd til miðstaðin ella tættbygdakjarna (og um eingin slíkur er, so miðpunktið í sjálvari kommununi), og so eitt vektað lutfall í mun til tættleika av bygdum øki samanborið við alt landið.

Viðv. skúlakoyring (9), so er útgangsstøðið tal av fólkaskúlanæmingum í spjøddum bygdaløgum, sum hava longri enn 3 km til skúla, og so samanløgdu koyrilongdini hjá øllum børnunum. Koyrilongdin vigar í hesum sambandi 90% av stuðlinum, meðan talið av børnum 10%.

Viðv. fólkatalsminking (10), so skal samlaða fólkatalsminkingin seinastu trý árini hava verið minst 15 íbúgvar og minst 1% av samlaða miðalíbúgvaratalinum sama tíðarskeið fyri alla kommununa.

**Ad 4) rakstur av fólkaskúlanum**

Til tess at javna lønarkostnaðin av undirvísing í fólkaskúlanum og øðrum útreiðslum fluttar frá ríkisstjórnini til kommunurnar. Javningin verður tikin frá teirri upphædd, sum kommunurnar gjalda inn í Javningargrunnin (0,77% av kommunuskattainntøkunum).

Javningarstuðulin til fólkaskúlan er býttur í ymisk endamál, m.a. generellan stuðul til rakstur av skúlanum, stuðul til næmingar við serligum tørvi, stuðul til undirvísing av tilflytarum, stuðul til gjald fyri børn sett heiman á barnaverndarstovu og sum fáa undirvísing har v.m.

*Almenni stuðulin*

Sambært reglugerðini hevur Reykjavík ikki rætt til *almennan* javningarstuðul til rakstur av fólkaskúlanum (tó til fleiri av hinum javningarendamálunum í sambandi við skúlan).

Til tess at rokna javningarstuðulin skal heildarútreiðslutørvurin hjá hvørjari kommunu til undirvísing (læraralønir) og aðrar útreiðslur til rakstur av fólkaskúlanum ásetast eftir serligari líkning, ið skal lýsa best hóskandi fólkaskúla í mun til tal av næmingum í skúlanum. .

Treytir eru tó. Næmingatalið í líkningini skal ikki vera lægri enn 22 næmingar fyri hvønn skúla, og ikki hægri enn 550 fyri hvønn skúla. Viðvíkjandi skúlum við færri enn 22 næmingum verður roknað tímatal fyri hvønn næming eftir ávísari skipan. Har fleiri skúlar eru í kommununi, verður omanfyri nevnda líkning brúkt fyri hvønn skúla sær, og síðan verður komið fram til eitt miðaltal fyri kommununa. Um kommuna leggur niður

skúla og næmingarnar har verða fluttir í annan skúla, verður niðurlagdu skúlarnir roknaðir uppí útrokningina eins og fyri broytingina tó bert í fimm ár fram.

Úrslitið skal síðan haldast uppímóti miðalvikutímatalið fyri hvønn árgang í skúlanum í mun til miðalvikutímatalið fyri árgangin í landinum, um talan er um skúla við 1.-10. flokk v.m. Eisini skulu atlit takast til munir í miðalgrundlønini hjá skúlastjóra og lærarum fyri skúlan/kommununa og miðal fyri landið.

Við støði í øllum omanfyri nevnda skal síðan eitt heildartímatal fyri kommununa finnast. Hetta verður gjørt við støði í talinum av børnum í skúlaaldri í viðkomandi kommunu. Hetta skal so aftur setast upp í móti roknaðum heildartímatalið fyri alt landið. At enda skulu eisini mettu skattainntøkurnar hjá kommununi fyri komandi árið takast við í útrokningina sæð í mun til miðalkommunuskattainntøkurnar fyri landið.

*Stuðul til næmingar við serligum tørvi*
Treyt fyri kommunalari javning til undirvísing av næmingum við serligum tørvi er, at næmingurin er greinaður sum brekaður av góðkendum stovni. Harumframt, at brekið krevur veruliga og langtíðar serundirvísing og/ella serskipanir.

Stuðulin verður roknaður eftir tørvi við støði í umsókn og veruligu umstøðunum.

*Keldur: Lög um tekjustofna sveitarfélaga 1995 við seinni broytingum, Reglugerð um Jöfnunarsjóð sveitarfélaga, 12. februar 2003, Reglugerð um jöfnunarframlög Jöfnunarsjóðs sveitarfélaga til reksturs grunnskóla, 3. mai 2002 og aðrar reglugerðir í mun til ítøkilig javningarendamál.*

**Noreg**
Javningin í Noregi er stuðulsskipan frá statinum. Í uppskotinum til norsku fíggjarlógina fyri 2008 er samlaði karmurin fyri statsstuðuli til kommunurnar umleið 46,2 mia NOK. Saman við kommunalu skattainntøkunum er statsstuðulin fríar inntøkur, sum kommunurnar frítt kunnu ráða yvir.

**Inntøkuskipanin**

Yvirskipaða endamálið við inntøkuskipanini er at javna møguleikarnar hjá kommununum at veita at javnt tænastutilboð til borgarnar. Tá statsstuðulin verður býttur út, skulu atlit takast til strukturellar ójavnar í útreiðslunum hjá kommununum (útreiðslujavning) og ójavnar í skattainntøkunum (inntøkujavning). Ymsar reguleringar og økispolitiskttengdar skipanir eru eisini partar av inntøkuskipanini. Virkisskattur – ella partafelagsskattur – verður útlutaður sum partur av samlaða karminum.

Stuðulin verður veittur til fimm høvuðsendamál:

- Íbúgvarastuðul
- Norðurnoregsstuðul
- Økisstuðul
- Metingarstuðul (korrigeringar)
- Kommunalur virkisskattur

**Ad 1) íbúgvarastuðul – útreiðslu- og inntøkujavning**

**Íbúgvarastuðul**

Íbúgvarastuðulin pr. íbúgva er í útgangsstøðinum eins fyri allar kommunur, men atlit verða tikin til ymiskleika í demografiskum, geografiskum og sosialum viðurskiftum, sum geva strukturellar kostnaðarmunir, ið kommunan ikki sjálv kann ávirka. Dømi um útreiðsluójavnar er aldursbýtið ella ferðateinur í kommununi.

**Útreiðslujavning**

Málið fyri útreiðslujavningina er at fanga strukturellar ójavnar, sum ávirka eftirspurningin á kommunalum tænastum og tænastukostnaðin. Tikið verður frá teimum lutfalsliga "lættriknu" kommununum og givið verður til tær lutfalsliga "tungtriknu" kommunurnar út frá objektivum kriterium, sum skulu lýsast fyri at staðfesta, um kommuna hevur eitt dýrari kostnaðarstøði, sum er rímiligt, og sum kommunan ikki hevur ávirkan á.

Fyri at finna útav hesum eru gjørdar umfevnandi lýsingar av, hvørjir faktorar hava týdning fyri ymiskleikan í tænastuframleiðslukostnaðinum í kommunala sektorinum. Kostnaðarlykilin fyri kommunurnar fevnir um fýra lutkostnaðir: umsiting, grundskúli, heilsu- og sosialtænasta og landbúnaður/umhvørvisvernd.

Niðanfyri verður lýst kriteriini fyri kostnaðarlyklinum og hvussu nógv, hvørt einstakt kriterii vigar fyri 2008.

| | |
|---|---|
| Basisstuðul | 0,025 |
| Íbúgvarar 0-5 ár | 0,023 |
| Íbúgvarar 6-15 ár | 0,308 |
| Íbúgvarar 16-66 ár | 0,120 |
| Íbúgvarar 67-79 ár | 0,085 |
| Íbúgvarar 80-89 | 0,133 |
| Íbúgvarar 90 ár og eldri | 0,049 |
| Skild og sundurlisin 16-59 ár | 0,038 |
| Arbeiðsleys 16-59 ár | 0,011 |
| Rokna ferðatíð | 0,015 |
| Ferðateinur til nærmasta "sonuøki" | 0,010 |
| Ferðateinur til nærmasta "grannaøki" | 0,011 |
| Deyðstíttleiki | 0,025 |
| Støk 67 ár og eldri | 0,025 |
| Tilflytarar | 0,005 |
| Sálarliga menningartarnaði 16 ár og eldri | 0,066 |
| Sálarliga menningartarnaði yngri enn 16 ár | 0,004 |
| Urbanitetskriterium (býarbúseting v.m.) | 0,042 |
| Landbúnaðakriterium | 0,005 |
| **Í alt** | **1,000** |

Ítøkiligi útreiðslutørvurin hjá kommununum í 2008 verður so roknaður við støði í nettorakstrarútreiðslunum í 2006 við atliti at teimum tænastum, kommunan skal veita, og við prís- og inntøkuframskrivingum. Úrslitið er eitt indeks fyri hvørt einstakt kriterii.

Korrigerað verður fyri frískúlum, har statstuðul og nemingagjald ger, at kommunan ikki hevur útreiðslu av viðkomandi nemingi í kommunala grundskúlanum.

**Inntøkujavning**

Inntøkujavningin javnar ójavnar í skattainntøkunum og fevnir um inntøku- og ognarskatt frá vanligum skattgjaldarum, náttúrutilfeingisskatt frá orkuverkum og kommunalan virkisskat.

Í 2005 varð skipanin broytt til at vera ein symmetrisk inntøkujavning. Tað merkir, at kommunur við inntøkum

i. lægri enn landsmiðal verða kompenseraðar við 55% av muninum millum egna skattainntøku og landsmiðal
ii. hægri enn landsmiðal verða trektar 55% av muninum millum egna skattainntøku og landsmiðal
iii. lægri enn 90% av landsmiðal fáa – umframt 55% kompensatión – eisini 35% kompensatión av muninum millum egna skattainntøku og 90% av landsmiðal.

Kompensatiónin verður fíggjað við, at hvør kommuna verður trekt við líka upphædd pr. íbúgva.

Frá 2000 varð skipan sett í verk við loypandi inntøkujavning, tvs., at inntøkujavningin verður roknað 7 ferðir árliga. Statsstuðulin verður útgoldin yvir 10 terminir, og við sjey av teimum er so trekt/lagt afturat í sambandi við inntøkujavning.

Ein stuðulsskipan er eisini fyri kommunur, ið leggja saman – eitt sonevnt "inndelingstilskudd". Skipanin skal tryggja, at kommunusamanleggingin ikki hevur við sær lægri stuðul frá samlaða karminum í ávíst tíðarskeið.

**Ad 2) Norðurnoregsstuðul**

Norðurnoregsstuðulin er burturav økispolitiskt grundaður. Norðurnoregsstuðulin er íkast til at geva kommununum har møguleikar til at veita eitt betri tænastutilboð enn tað, ið aðrar kommunur í restini av landinum kunnu veita. Stuðulin skal eisini vera íkast til at geva møguleika fyri fleiri kommunalum størvum í økjum, sum hava eitt konjunkturbundið vinnulív. Stuðulin verður roknaður við støði í ávísum krónusatsi pr. íbúgva.

Í 2008 eru satsirnir hesir:

- kommunurnar í Nordland 1.457 NOK pr. íbúgva

- kommunurnar í Troms 2.795 NOK pr. íbúgva
- kommunurnar í Finnmark 6.828 NOK pr. íbúgva.

Norðurnoregsstuðulin í 2008 er í alt 1,22 mia. Fólkatalið í Norðurnoregi er 10 % av samlaða fólkatalinum í Noregi. Nýggjastu ætlanirnar hjá stjórnini er, at eisini Suðurnoreg skal hava líknandi skipan.

**Ad 3) Økisstuðul**

Eisini økisstuðulin er burturav økispolitiskt grundaður. Stuðulin verður latin til kommunur við færri enn 3.200 íbúgvarum og sum hava skattainntøkur, ið eru undir 110 % av landsmiðal. Kommunur, ið hava færri enn 3.000 íbúgvar, fáa fullan stuðul, meðan kommunur við millum 3.000-3.200 fáa lægri stuðul (lækkar 20 % fyri hvørjar 50 íbúgvar).

Partur av økisstuðlinum er barnaverndar/høvuðsstaðastuðul, sum bert Oslo kommuna fær. Hetta er grundað á, at Oslo sum høvuðsstaður hevur serstakar uppgávur, og at Oslo kommuna sum tann einasta hevur ábyrgdina av barnavernd. Oslo kommuna hevur eitt nú størri útreiðslutørv orsakað av rúsevnis- og sálarfrøðiligari heilsuvernd.

**Ad 4) Metingarstuðul**

Metingarstuðulin verður brúktur til at kompensera fyri serstøk viðurskifti í kommunu, og sum ikki kunnu falla inn undir vanligu inntøkuskipanina. Talan er millum annað um endurgjald fyri arbeiðsgevaraavgjald.

**Ad 5) Virkisskattur**

Virkisskatturin (partafelagsskatturin) er saman við kommunuskattainntøkunum og náttúrutilfeingisskattinum partur av inntøkuskipanini. Partur av virkisskattinum verður lutaður út til kommunurnar eftir ávísum lutfalli.

*Kelda: Inntektssystemet for kommuner og fylkeskommuner 2008, Kommunal- og regionaldepartementet, okt. 2007*

**Svøríki**

Javningarskipanin er seinast broytt í 2005 við tillagingum í 2008 fyri at kompensera fyri ójavnt lønarlag í ymsum pørtum av landinum.

Svenska javningarskipanin kann býtast upp í 5 partar, har inntøkujavning og útreiðslujavning tó er tað, ið fyllir meginpartin, inntøkujavningin nógv mest. Hitt eru í upphæddum marginalar (regulerings)skipanir.

Samlaða javningin netto í 2008 er 45,9 mia SEK. Nettoinntøkujavningin er 48,3 mia SEK, útreiðslujavningin er útreiðsluneutral fyri statin. Fyri tær kommunur, ið rindaðu útreiðslujavning til statin, kostaði skipanin 5,2 mia SEK.

Staturin rindar í høvuðsheitum inntøkujavningina. Inntøkujavningin verður roknað soleiðis:

iv. skattainntøkugrundarlagið í einstøku kommununi verður sammett við skattainntøkugrundarlagið pr. íbúgva í landinum gangað við 1,15.

Úrslitið er inntøkujavningargrundarlagið. Kommunur omanfyri skulu gjalda inntøkujavning til statin (85% av miðalskattatakstinum í landinum 2003), kommunur undir fáa inntøkujavningarstuðul (95% av miðalskattatakstinum í landinum 2003).

Útreiðslujavningin fevnir um strukturellar skeivleikar, sum raka rakstrarútreiðslurnar hjá kommunum. Talan er um standardkostnaðir eitt nú innan barnaansing og eldrarøkt, og sum byggir á eitt miðalkostnaðarstig.

Útreiðslujavnað verður við støði í aldurssamanseting, fólkasamanseting (etnicitet), sosioøkonomi, geografi og lønarlagsskeivleikar. Alt hevur so ymsar strukturellar faktorar í mun til ítøkiliga virksemisøkið, ið verður útreiðslujavnað. Útreiðslujavningin hevur tískil ikki støði í teimum faktisku útreiðslunum, ið kommunan hevur.

Útreiðslujavningin á eitt nú fólkaskulaøkinum verður roknað við at gangað tal av børnum í skúlaaldri við miðalkostnaðin pr. næming í landinum umframt talið av næmingum, sum ikki eru føddir í Svøríki, Danmark og Noregi, gangað við miðalkostnaðin fyri móðurmálsundirvísing.

*Kelda: Kommunalekonomisk utjämning 2008, Sveriges Kommuner og Landsting og Finansdepartementet, juni 2008.*

**Finnland**

Finnland hevur eisini rakstrarstuðulsskipan frá statinum til kommunur, ið fevnir um

- almennan stuðul
- almanna- og heilsurøkt
- undirvísing og mentan, og
- javning av skattainntøkum.

Skipanin fevnir ikki um Áland. Stuðulin í 2009 verður 8,2 mió. EUR.

**Ad 1) almenni stuðulin**

Almenni stuðulin er býttur upp í ein grundstuðul og fleiri ískoyti. Stuðulin byggir fyrst og fremst á íbúgvatalið.

Serlig ískoyti eru til

v. skergarðskommunur og útjaðarakommunur
vi. strukturískoyti fyri tættbygd øki yvir 40.000 íbúgvar
vii. ískoyti til tvímæltar kommunur (finskt og finnlandssvenskt)
viii. broytingar í íbúgvatali.

**Ad 2) almanna- og heilsurøkt**

Støðið fyri stuðlinum verður roknað eftir rakstrarútreiðslunum hjá kommununum bygt á ymisk krøv. Hesi krøv eru:

ix. íbúgvatal
x. aldursamanseting
xi. tal av røktarstarvsfólki
xii. arbeiðsloysisstig
xiii. sjúkratýttleiki (fólk undir 55 við fyritíðarpensjón)
xiv. tal av brekaðum
xv. barnaansing/barnavernd
xvi. útjaðarakommuna.

Kommunurnar fíggja uml. 2/3 av almanna- og heilsurøktini, restin er statsstuðul.

**Ad 3) undirvísing og mentan**

Stuðulin eins og roknaðu kommunalu raktrarútreiðslurnar byggja á ásettan eindarprís, eitt nú prís pr. næming, íbúgvar v.m. Útrokningin fevnir um fólkaskúla, miðnámsskúla, yrkisútbúgving, hægri yrkisútbúgving, listaútbúgving, bókasøvn og mentanarvirksemi. Statsstuðulin til útbúgvingar- og bókasavnsøkið er 41,89%, til mentan og listaútbúgving 29,7%.

Umframt omanfyri nevnda er statsstuðul til:

xvii. morgun- og seinnapartsvirksemi (frítíðarvirksemi) (57%)
xviii. ítrótt 29,7% av ásettari upphædd pr. íbúgva
xix. ungdómsvirksemi 29,7% av ásettari upphædd pr. íbúgva undir 29 ár
xx. “samborgarainstitut” 57% av ásettari upphædd pr. undirvísingartíma
xxi. listaskúli (einamest musikkskúli) 57% av ásettari upphædd pr. undirvísingartíma
xxii. søvn, leikhús og orkestur 37% av ásettari upphædd pr. ársverk (sersøvn 47%).

**Ad 4) inntøkujavning**

Stuðulin frá statinum verður javnaður við støði í skattaorkuni hjá kommununi, tvs. teimum roknaðu skattainntøkunum. Í hetta verður roknað við kommunuskattinum, samfelagsskattinum og ognarskatt.

Javnað verður upp til eitt javningarmark á 91,86% av roknaðu skattainntøkunum í øllum landinum. Kommuna, ið hevur lægri skattainntøku pr. íbúgva enn 91,86%, fær javningarstuðul upp til 91,86%. Kommunua, ið hevur hægri skattainntøku pr. íbúgva enn 91,86%, verður skerd við 37% av muninum millum roknaðu skattainntøkurnar pr. íbúgva hjá kommununi og javningarmarkið.

Útrokningin fyri 2008 verður gjørd við støði í skattauppgerðini fyri 2006 (tvs. útrokningarstøðið er altíð 2 ára gamalt).

Inntøkujavningarstuðulin verður ikki útgoldin sjálvstøðugt, men inngongur í rakstrarstuðulsskipanirnar omanfyri. Hetta verður gjørt á tann hátt, at 6% av

inntøkujavningini fer til almenna stuðulin, 57% til almanna- og heilsurøktina, og 37% til undirvísing og mentan.

*Kelda:*
*http://www.kommunerna.net/k_perussivu.asp?path=255;264;15293;93924;16308;80591*

Fylgiskjal 3

## Vikutímatalið og tímar um dagin í hvørjum árgangi

| Flokkur | Tímar um dagin |
|---|---|
| Forskúlaflokkur | 6 tímar |
| 1. fl. 24 tímar | 6 tímar |
| 2. fl. 26 tímar | 6 tímar |
| 3. fl. 28 tímar | 6 tímar |
| 4. fl. 30 tímar | 6 tímar |
| 5. fl. 31 tímar | 7 tímar |
| 6. fl. 31 tímar | 7 tímar |
| 7. fl. 31 tímar | 7 tímar |
| 8. fl. 28 tímar | 8 tímar |
| 9. fl. 28 tímar | 8 tímar |
| 10.fl. 28 tímar | 8 tímar |

Fylgiskjal 4

| **Kravdar lærugreinir 1. - 9. Skúlaár** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1. og 2. skúlaár** | **3. skúlaár** | **4. skúlaár** | **5. skúlaár** | **6. skúlaár** | **7. skúlaár** | **8. og 9. skúlaár** |
| Føroyskt | Føroyskt | Føroyskt | Føroyskt | Føroyskt | Føroyskt | Føroyskt |
| Kristni | Kristni | Kristni | Kristni | Kristni | Kristni | Kristni |
| Støddfrøði | Støddfrøði | Støddfrøði | Støddfrøði | Støddfrøði | Støddfrøði | Støddfrøði |
| Ítrótt | Ítrótt | Ítrótt | Ítrótt | Ítrótt | Ítrótt | Ítrótt |
| Heimstaðarlæra | Heimstaðarlæra | Náttúra/tøkni | Náttúra/tøkni | Náttúra/tøkni | Alis/evnafrøði landalæra Lívfrøði | Landalæra Lívfrøði |
| | Danskt | Danskt | Danskt | Danskt | Danskt | Danskt |
| | | Enskt | Enskt | Enskt | Enskt | Enskt |
| | | Søga/samtíð | Søga/samtíð | Søga/samtíð | Søga/samtíð | Søga/samtíð |
| Handaverk og list | Handaverk og list | Handaverk og list | Handaverk og list | Handaverk og list | Handaverk og list | |

Fylgiskjal 5

## Vallærugreinir í 8. – 10. flokki

| **Skúlin skal bjóða næm. í 8. og 9. ská.** | **Skúlin kann bjóða næm. í 8. og 9. og 10. ská.** | **Í 10. flokki skulu hesar lærugreinir standa næmingunum í boði** |
|---|---|---|
| Týskt | Sjóvinnu | Føroyskt |
| Alisfrøði-/evnafrøði | Landbúnað | Danskt |
| Annað fremmanda mál kann verða valt í staðin fyri týskt | Tekstviðgerð/rokniark | Støddfrøði |
| | Tøknifrøði | Kristnikunnleiki |
| | Miðlar | Ítrótturi |
| | Ljósmyndalæru | Samtíð |
| | Filmskunnleika | Enskt |
| | Drama | Næmingar, ið hava fingið undirvísing í alis-/evnafrøði og týskum, skulu framhaldandi standa í boði at fáa undirvísing í alisfrøði, evnafrøði og týskum í 10. flokki |
| | Tónleik | |
| | Heimkunnleika | |
| | Tilevning | |
| | Handarbeiði | |
| | Smíð | |
| | Motorlæru | |
| | Arbeiðskunnleika | |

Næmingar, ið hava fingið undirvísing í alis-/evnafrøði og týskum í 8. og 9. ská., skulu framhaldandi hava í boði at fáa undirvísing í alisfrøði, evnafrøði og týskum í 10. fl.

## Fylgiskjal 6

### Tíma- og lærugreinabýtið í 1. – 10. flokki

| | Lærugrein | 1. fl. | 2.fl. | 3.fl. | 4.fl. | 5.fl | 6.fl. | 7.fl. | 8.fl. | 9.fl. | tils. | 10. fl. | tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | | | 9. + 10. fl. |
| 1 | **Kristnikunnleiki** | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 2 | 2 | 16 | 2 | 18 |
| 2 | **Føroyskt** | 11* | 11* | 9* | 6 | 6 | 6 | 5 | 5 | 5 | 64 | 4 | 68 |
| 3 | **Danskt** | | | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 27 | 4 | 31 |
| 4 | **Enskt** | | | | 2 | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 21 | 4 | 25 |
| 5 | **Týskt/annað fr.m*)** | | | | | | | | 4 | 4 | 8 | 4 | 12 |
| 6 | **Latín** | | | | | | | | | | | 2 | 2 |
| 7 | **Støddfrøði** | 7 | 7 | 6 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 50 | 4 | 54 |
| 8 | **Alis-/evnafrøði** | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 | | 6 |
| 9 | **Alisfrøði *)** | | | | | | | | | | | 2 | 2 |
| 10 | **Evnafrøði *)** | | | | | | | | | | | 2 | 2 |
| 11 | **Heimstaðarlæra** | 2 | 2 | 2 | | | | | | | 6 | | 6 |
| 12 | **Søga/Samtíð** | | | | 1 | 2 | 1 | 2 | 2 | 2 | 10 | | 10 |
| 13 | **Samtíð** | | | | | | | | | | | 2 | 2 |
| 14 | **Náttúra/tøkni** | | | | 3 | 3 | 3 | | | | 9 | | 9 |
| 15 | **Landalæra** | | | | | | | 1 | 2 | 2 | 5 | | 5 |
| 16 | **Lívfrøði** | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 | | 6 |
| 17 | **Ítróttur** | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 17 | 2 | 19 |
| 18 | **Handaverk og list** | ** | ** | ** | ** | ** | ** | ** | ** | ** | 25 | | 25 |
| 19 | **Sjóvinna** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 20 | **Landbúnaður** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 21 | **Tekstviðgerð/roknia.** | | | | | | | | | | | | 0 |
| 22 | **Tøknifrøði** | | | | | | | | | | | | 0 |
| 23 | **Miðlar** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 24 | **Ljósmyndalæra** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 25 | **Filmskunnleiki** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 26 | **Drama** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 27 | **Tónleikur** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 28 | **Tilevning** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 29 | **Heimkunnleiki** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 30 | **Handarbeiði** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 31 | **Smíð** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 32 | **Motorlæra** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| 33 | **Arbeiðskunnleiki** | | | | | | | | 2 | 2 | 4 | 2 | 6 |
| | **Valtímar** | | | | | | | | | | | | |
| | **Minsta mark** | 24 | 26 | 28 | 30 | 31 | 31 | 31 | 28 | 28 | | 28 | |

*) ein av tímunum í føroyskum í ávikavist 1., 2. og 3. flokki kann nýtast til trivnaðarátøk í flokkinum. Víst verður í hesum sambandi til Kunngerð um flokslæraran frá 26. mars 2003.

Fylgiskjal 7

**Avleiðingarnar av ymsu fíggingarskipanunum fyri kommunala sjálvræði, stýringina við kommununum eins og ítøkiliguuppgávurøktina og umsiting**

| | | **Kommunala sjálvræði** | **Møguleikar fyri fíggjarpolitiskari stýring av uppgávunum og búskapinum** | **Møguleikar fyri einsháttaðum kommunalum uppgávuloysnum viðvíkjandi stýriligum uppgávum** | **Møguleikar fyri einsháttaðum kommunalum uppgávuloysnum viðvíkjandi ”óstýriligum” uppgávum** | **Einfaldni í fyrisitingini** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **Kommunal fígging av uppgávum um kommunuskatt** | Stórar | Lítlar | Stórar | Lítlar | Stórar |
| **2** | **Blokkstuðul til fígging av uppgávunum** | Miðal | Stórar | Miðal | Lítlar | Miðal |
| **3** | **Endurgjald til fígging av uppgávunum** | Miðal | Stórar | Miðal | Stórar | Miðal/Lítlar |
| **4** | **Millumkommunal útjavning** | Miðal | - | Lítlar | Miðal | Lítlar |
| **5** | **Landsjavning umvegis blokkstuðul** | Miðal | Stórar | Lítlar/Miðal | Miðal | Miðal |
| | **Samanseting av:** | | | | | |
| | **1 og 2** | Miðal | Stórar | Miðal | Lítlar | Miðal |
| | **1, 2 og 3** | Lægri | Stórar | Lægri | Miðal | Lægri |
| | **1, 2, 3 og 4** | Lægst | Stórar | Lægst | Miðal | Lægst |
| | **1, 3 og 5** | Miðal | Stórar | Miðal | Stórar | Miðal |

# Keldulisti


- Frágreiðing um kommunur - Nýggj kommunal skipan í Føroyum – Táttur I - Partur II, juni 1998

- Nýggj kommunuskipan - niðurstøður og tilmæli - Táttur II, september 1998

- Staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, desember 2001

- Eldraálitið 2002

- Jákupsstovu, Beinta í, red: Kommunupolitikkur, Fróðskaparsetur – Faroe University Press, 2008

- Strukturkommissionens betænkning, nr. 1434, Indenrigs- og Sundhedsministeriet januar 2004

- Granskingardepilin fyri Økismenning

- Beinta í Jákupsstovu, upprit til nevndina um eftirmeting

- Jákupsstovu og Kjersem, 2008

- Dahl, R.A. og Tufte, E.R., Size and Democracy, Stanford University Press, Stanford, Calif., 1973

- Keldutilvísingarnar í fylgiskjalinum um Norðurlendsku skipaninar

- Búskaparráðið, kommunal útjavning, apríl 2008

- Kommune- og fylkesinndelingen i et Norge i forandring, Norges offentlige utredninger 1992:5, Statens forvaltningstjeneste, Oslo 1992

- Samspill og tillit – Om staten og lokaldemokratiet, Norges offentlige utredninger 2005:6, Statens forvaltningstjeneste, Informasjonsforvaltning, Oslo 2005

- Kommunalreformen – kort fortalt, Indenrigs- og Sundhedsministeriet 2005

- Det kommunale selvstyre – på tærsklen til en ny struktur, Indenrigs- og Sundhedsministeriet 2006

- Fakligir fundir við Carsten V. Lund, Vejen kommune